BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

ÁRS-FRÁSØGN 2020

Partafelagsskrásetingarnr. 1724

Innihaldsyvirlit

Frágreiðing frá nevndarformanni 4
Frágreiðing frá stjórn og nevnd 6
Útlit 10
Bakkafrost í stuttum 14
Lyklatøl 17
Týðandi hendingar 18

STRATEGI 19
Vinnumál og strategi 20
Vinnumyndil 22
Brot úr søguni hjá Bakkafrost 23
Virðisketan 24

AVRIK 35
Frágreiðing um virksemið 36
Fíggjarlig frágreiðing 41
Aligeirin – Føroyar (FO) 44
Aligeirin – Skotland (SCT) 46
Góðskingargeirin 48
Geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður 50
Frágreiðing um marknaðin 53

VÁÐAR 66
Váðastýring 67

LEIÐSLA 72
Virkisleiðsla (Corporate Governance) 73
Virkisábyrgd og burðardygd 75
Kunning til partaeigarar 77
Nevnd og stjórn 78
Vangamynd av nevndarlimum 79
Vangamynd av samtaksleiðslu 81
Leiðsluátekning 82
Átekning frá óheftum grannskoðara 83

Innihaldsyvirlit

FRÁSAGNIR OG NOTUR – BAKKAFROST SAMTAKIÐ 86

Konsolideraður rakstrarroknskapur 90

Konsolideraðar heildarinntøkur 91

Konsoliderað fíggjarstøða 92

Konsoliderað gjaldførisfrásøgn 94

Konsolideraðar broytingar í eginognini 95

NOTUR TIL KONSOLIDERAÐA ÁRSROKNSKAPIN BAKKAFROST SAMTAKIÐ 96

NOTUR – 1. partur Grundarlag fyri tilrættislegging 97

NOTUR – 2. partur Ársúrslit 100

NOTUR – 3. partur Ogn og skuld 111

NOTUR – 4. partur Kapitalbygnaður og fígging 136

NOTUR – 5. partur Aðrar upplýsingar 143

ÁRSROKNSKAPUR – P/F BAKKAFROST 151

P/F BAKKAFROST – Rakstrarroknskapur 153

P/F BAKKAFROST – Fíggjarstøða 154

P/F BAKKAFROST – Gjaldførisfrásøgn 156

P/F BAKKAFROST – Broytingar í eginognini 157

P/F BAKKAFROST - NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN 158

FYLGISKJØL 166

Fíggjarlig tøl 2018 - 2020 166

Fráboðanir til marknaðin í 2020 169

Fíggjarligur álmanakki fyri 2021 170

Styttingar 171

Frágreiðing frá nevndarformanni

RÚNI M. HANSEN
Nevndarformaður

EITT ÓVANLIGT ÁR

2020 hevur á mangan hátt verið eitt óvanligt ár. Í byrjanini av 2020 hevði fáur ímyndað sær, at eitt lítið, ósjónligt virus skuldi skapa so nógv órógv í okkara gerandisdegi. Tíbetur eru øll okkara starvsfólk higartil komin væl ígjøgnum Covid-19 farsóttina, og virksemið hjá Bakkafrost hevur bara í minni mun verið ávirkað. Á alheims laksamarknaðinum er søgan tó ein heilt onnur.

Í 2020 broyttist laksamarknaðurin so hvørt, sum ymisku partarnir av heiminum upplivdu eina bylgju fyri og aðra eftir við vaksandi tilburðum av Covid-19. Stongsulin av matstovutænastuvinnuni (hotel, matstovur og vistaveiting) á okkara høvuðsmarknaðum hevur havt eina neiliga ávirkan á umsetningin og lønsemi hjá Bakkafrost, av tí at vit vanliga selja okkara stóra hágóðskulaks til matstovutænastuvinnuna um allan heimin. Fólk hava ferðast minni í 2020 og flutningsruturnar eru fækkaðar. Hetta hevur minkað um møguleikan fyri loftvegis flutningi, og útreiðslurnar til flogflutning til amerikanska marknaðin eru meir enn tvífaldaðar. Tað sama gjørdi seg galdandi við flutningi til Kina tíðliga í tíðarskeiðnum, eftir at farsóttin tók seg upp.

Úrslitið var ikki bert ávirkað av øktum flutningskostnaði í 2020. Í miðal minkaði dagsprísurin á laksi við 24,1% ígjøgnum árið. Hettar rákið gjørdi seg serliga galdandi frá seinast í 2. ársfjórðingi til árslok.

Undir farsóttini hevur týdningurin av smidligu virðisketuni hjá Bakkafrost verið eyðsýndur. So hvørt sum eftirspurningurin í matstovutænastuvinnuni eftir feskum laksi er minkaður, hevur Bakkafrost megnað at umlagt framleiðsluna, soleiðis at størri nøgdir verða framleiddar á liðugvørudeildini. Henda deildin framleiðir vørur, sum verða seldar av leiðandi handilsketum, har eftirspurningurin eftir laksi hevur verið sera stórur, meðan farsóttin hevur herjað. Alheims laksamarknaðurin er vaksin í 2020, og vøksturin hevur verið serliga stórur í USA og Evropa.

Í 4. ársfjórðingi 2019 keypti Bakkafrost The Scottish Salmon Company (SSC), og við tí hava vit víðkað okkara aling til nýggj øki uttanlands. Við keypinum økti Bakkafrost um rakstrarøkið, og tað hevur havt við sær nýggjar vakstrar- og menningarmøguleikar hjá samtakinum. Tá ið Bakkafrost keypti SSC, var hetta felagið lágt virðismett á partabrævamarknaðinum, í mun til aðrar alifyritøkur og í mun til teir menningarmøguleikar, ið Bakkafrost sær í keypinum. Vit rokna tó við, at tað fer at taka 5 ár at fremja ætlaðu broytingarnar, og vit hava í 2020 arbeitt tætt saman við nýggju starvsfólkum okkara í Skotlandi fyri at umleggja virksemið. Hetta fevnir millum annað um at gera miðvísar íløgur og endurskoða mannagongdir eftir fremstu standardum. Vit vænta, at hetta verður ein góð íløga við góðum menningarmøguleikum.

Ein av týdningarmestu broytingunum fyri at betra um útslitini av alingini í Skotlandi, er at økja um støddina og góðskuna á smoltinum, sum verður sjósett. Bakkafrost hevur ætlanir um at byggja tríggjar stórar og nýmótans smoltstøðir í Skotlandi, líknandi teimum smoltstøðum, sum Bakkafrost hevur í Føroyum. Sostatt verður strategiin hjá Bakkafrost um stór smolt, eisini sett í verk í Skotlandi. Við at betra um góðskuna og økja støddina á smoltinum til 500 gramm, verður tíðin í sjónum stytt niður í 10–12 mánaðir. Hervið minkar lívfrøðiligi váðin og gevur hetta eisini møguleika fyri at økja tøkunøgdina á burðardyggan hátt. Tann fyrsta av hesum trimum smoltstøðunum í Skotlandi er smoltstøðin í Applecross. Henda alistøðin verður nú útbygd og útgjørd við RAS-tøkni (endurnýtsla av vatni). Útbyggingin, sum við tíðini fer at økja um støddina á smoltinum og betra um góðskuna, verður væntandi liðug í 2023, og verða vit tá sjálvbjargin við 250 gramm smoltum í Skotlandi. Hetta fer at kollvelta alingina í Skotlandi, sum verður ment enn meira, tá tær báðar næstu smoltstøðirnar eru lidnar, og miðalstøddin á smoltinum er økt til 500 gramm.

Fyri at økja framleiðsluorkuna til 100.000 tons í kruvdari vekt á burðardyggan hátt, hevur Bakkafrost seinastu árini gjørt stórar íløgur í allari virðisketuni í Føroyum. Hesar íløgurnar á 3 milliardir kr. vórðu lýstar í okkara 5-ára íløguskrá fyri tíðarskeiðið 2018–2022. Partur av hesum íløgunum er gjørdur í mjøl-, lýsi-, og fóðurgeiran (FOF), sum nú letur fóður til øll okkara alibrúk í Føroyum og Skotlandi. Flestu íløgurnar í íløguskránni fyri 2018 eru nú lidnar ella væl ávegis. Eitt dømi um eina framda íløgu, er sera stóra smoltstøðin á Strond, sum nú framleiðir stór smolt við sera høgari góðsku. Árið 2021 verður árið, har vit veruliga fara at síggja úrslitini av íløgunum. Hetta sæst millum annað aftur í ætlaðu tøkunøgdini í Føroyum, á 66.000 tons í kruvdari vekt. Hetta er ein øking í mun til undanfarin ár. Komandi árini fer tøkunøgdin so við og við at økjast til 100.000 tons í kruvdari vekt, væntandi í 2025 ella 2026.

Til tess at økja tøkunøgdina í Føroyum upp um 100.000 tons í kruvdari vekt á burðardyggan hátt, meta vit, at aling á opnum havi er ein góður møguleiki fyri Bakkafrost. Umstøðurnar fyri aling á opnum havi eystan fyri Føroyar eru góðar og staðsetingin er góð fyri Bakkafrost. Vit hava søkt um eitt aliloyvi til aling á opnum havi, og vóna at fáa loyvið í 2021.

Tað er tó sera týdningarmikið fyri okkum, at okkara vakstrarmál eru í javnvág við náttúrunnar mørk. Vit eru sannførd um, at alilaksur er ein av loysnunum at tryggja burðardygga framleiðslu av mati til vaksandi íbúgvaratalið í heiminum. Vit eru førandi í vinnuni, tá tað kemur til fóður-til-mat umskiftisfaktorin og lágu kolevnisslóðina. Tí ynskja vit at vaksa, uttan at hetta er til ampa fyri náttúruna.

Vit arbeiða støðugt við at betra um tilfeingisnýtsluna í okkara virksemi. Harafturat stremba vit eftir at hava ringrásbúskap og nýhugsan í okkara virðisketu. Eitt dømi um hetta er biogassverkið FÖRKA, sum varð liðugt í 2020. Hetta virðislønta virkið, grundað á ringrásbúskap, loysir nú eina lívfrøðiliga avbjóðing við at taka ímóti lívrunnum burturkasti frá Bakkafrost og eins og frá landbúnaðinum. Samstundis framleiðir virkið grøna orku til elnetið hjá SEV og fjarhitaskipanina í Føroyum. Sjálvt hjáframleiðslan hjá FÖRKA hevur virði fyri landbúnaðin, sum fær góðskutað frá biogassverkinum. Tað er eisini umhvørvið, ið fær ágóðan, nú árliga CO_2 útlátið fer at minka við áleið 11.000 tonsum.

Útvegan av burðardyggum rávørum og at vit ala á burðardyggan hátt hevur alstóran týdning fyri okkum. Tá vit keypa rávørur til fóðurframleiðsluna til okkara laks, leggja vit stóran dent á at velja rávørur, ið hava góðkenning innan burðardygd. Vit fegnast um, at øll okkara aliøki í Føroyum nú eru ASC-góðkend, og at vit sostatt hava rokkið málinum, sum vit settu okkum fyri 2020.

Eitt sunt umhvørvi er fortreytin fyri einum sunnum virksemi. Tá ið vit virka í einum samfelagi, ið er so bundið at náttúruni, so er alneyðugt, at javnvágin við náttúruna er røtt og burðardygg. Vit eru algreið yvir nútíðar og framtíðar avbjóðingina, vit standa yvir fyri, sum er at kunna geva vaksandi fólkatalinum í heiminum góðan og sunnan mat, uttan ampa fyri umhvørvið.

AFTURBERING TIL PARTAEIGARAR

Nevndin fer at skjóta upp á ársaðalfundinum, sum verður hildin í 9. apríl 2021, at vinningsbýtið verður 3,65 kr. fyri hvørt partabræv. Hetta svarar til eitt samlað vinningsbýti á 215,9 mió kr.

TØKK TIL OKKARA STARVSFÓLK

Vegna nevndina fari eg at takka øllum starvsfólkum í Bakkafrost samtakinum fyri heilhuga, nærlagni og ágrýtni í arbeiðinum í 2020.

Frágreiðing frá stjórn og nevnd

ÓRÓGV Á MARKNAÐINUM OG NÝGGJ MET

Í byrjanini av 2020 vóru laksaprísirnir hægri enn nakrantíð. Hetta var framhald av stóra prísvøkstrinum í 4. ársfjórðingi 2019. Tó broyttist tann góða marknaðarstøðan brádliga, tá Covid-19 farsóttin fór at ganga, og hetta var orsøk til eitt munandi fall í laksaprísinum móti endanum av 1. ársfjórðingi.

Kinesiski marknaðurin var tann fyrsti, sum varð ávirkaður. Sølan hjá Bakkafrost úr Føroyum til Asia fall til 14% av tøkunøgdini í 1. ársfjórðingi í 2020, sammett við 24% í 2019. Kostnaðurin fyri loftvegis flutning til USA og Kina dýrkaði munandi og var eitt skifti meir enn trýfaldaður, í mun til vanligan kostnað.

Bakkafrost selur fyri tað mesta feskan laks til Kina. Við minkaðu søluni til Kina í 1. ársfjórðingi, valdu vit at lata størri part av tøkunøgdini í Føroyum fara til góðskingargeira okkara. Hesar vørur verða seldar til retailvinnuna. Seinast í 1. ársfjórðingi hevði Bakkafrost økt tann partin av føroysku tøkunøgdini, ið verður framleiddur í góðskingargeiranum, til 51%. Tað bar til, tí framleiðsluorkan á góðskingarvirkinum á Glyvrum er stór.

Seint í februar var ódn í Føroyar í fleiri dagar. Føroyar verða javnan raktar av ódnum og Bakkafrost er væl fyrireikað við góðari aliútgerð. Kortini var hendan ódnin óvanliga hørð og gjørdi stóran skaða á útgerð. Eisini viðførdi hon eitt felli á umleið 1,2 mill. laksar, sum eftir ætlan skuldu takast seinni í 2020. Tískil minkaðu vit væntaðu tøkunøgdina fyri 2020 frá 57.000 tonsum í kruvdari vekt til 50.000 tons.

Hóast avbjóðingarnar, hevði Bakkafrost í 1. ársfjórðingi 2020 góð úrslit, góða lívfrøðiliga menning í aligeiranum í Føroyum, og alingin í Skotlandi hevði yvirskot.

Í 2. ársfjórðingi 2020 lækkaði laksaprísurin enn meira, tó við undantaki av nøkrum fáum vikum við høgum prísi í seinnu helvt av ársfjórðinginum. Samstundis viknaði norska krónan munandi sammett við evruna og donsku krónuna, sum er roknskapargjaldoyra hjá Bakkafrost. Hetta hevði neiliga ávirkan á kappingarførið hjá Bakkafrost á marknaðinum.

Sølan til Kina vaks aftur tíðliga í 2. ársfjórðingi og kostnaðurin fyri loftvegis flutning fall aftur til vanliga legu. Tíðliga í juni setti Kina tó aftur í verk innflutningsavmarkingar fyri sjógæti, eftir at hava stongt ein fiskamarknað í Beijing. Hetta ávirkaði søluna hjá Bakkafrost til Kina neiliga restina av 2020.

Avrikið hjá alingini í Føroyum var gott í 2. ársfjórðingi og lívfrøðiliga gongdin var góð. Í Skotlandi gjørdist alingin eisini so við og við betri. Framleiðslan í góðskingargeiranum øktist enn meir í 2. ársfjórðingi og góðskingargeirin hevði avlop. Útveganin av rávøru til framleiðslu av fiskamjøli, lýsi og alifóðri vaks eisini eftir eina laka byrjan fyrst í árinum, tá ringt veður tarnaði fiskiskapinum kring Føroyar.

Tá farsóttin byrjaði, settu vit beinanvegin strong tiltøk í verk fyri at verja starvsfólk okkara. Hetta varð gjørt í tøttum samstarvi við heilsumyndugleikarnar. Tíðliga í 2. ársfjórðingi 2020 fór Bakkafrost eisini undir at bjóða Covid-19 kanningar til starvsfólkini aðru hvørja viku.

Grundað á óvissuna um, hvussu Covid-19 farsóttin fór at breiða seg, gjørdi nevndin av ikki at rinda vinningsbýti fyri 2019.

Laksaprísirnir lækkaðu støðugt í 3. og 4. ársfjórðingi, og vóru seinast í 4. ársfjórðingi lægri enn nakrantíð síðani 2015. Vanliga hækkar laksaprísurin mótvegis ársenda, men tað gjørdi hann ikki í 2020. Hóast stongsil og avmarkingar vórðu áløgd á flestu marknaðum, hevur eftirspurningurin eftir laksi verið stórur undir farsóttini og nøgdirnar til marknaðirnar eru øktar. Serliga hevur eftirspurningurin frá retailvinnuni í Evropa og USA verið vaksandi. Av samlaðu føroysku tøkunøgdini í 2020 nýtti Bakkafrost 47% í góðskingargeiranum til at

framleiða liðugvørur til matvøruhandlar. Til samanberingar vórðu 29% av tøkunøgdini í 2019 nýtt í góðskingargeiranum.

Í 2020 fór 70% av søluni hjá Bakkafrost til evropeiska marknaðin, sammett við 50% í 2019. Sølan til amerikanska marknaðin minkaði til 17% í 2020, sammett við 21% í 2019. Størsta broytingin var í søluni til Asia (fyrst og fremst Kina), sum fall til 7% í mun til 21% árið fyri. Sølan til Eysturevropa fall eisini til 5% í mun til 8% árið fyri. Størsta orsøkin til hetta er, at Bakkafrost varð noktað atgongd til russiska marknaðin frá februar 2020 til endan á september í 2020.

Í seinnu helvt av 2020 helt alingin í Skotlandi á við at betra um avrikini. Tó var fellið hækkandi, serliga orsakað av avbjóðingum við lívfrøðini og ógvusligum áarføri í august. Lívfrøðiligar avbjóðingar í seinnu helvt av árinum hava víst seg at verið afturvendandi ár um ár hjá The Scottish Salmon Company. Hetta mynstrið verður væntandi brotið við teimum átøkum, sum vit komandi árini fara at gera í alingini í Skotlandi.

Samanumtikið hevur gingist væl við alingini í Føroyum í ár. Vøksturin hevur verið góður og góðskan á laksinum serstakliga góð. Fóðringin setti nýtt met í heyst, og fór upp um 10.000 tons um mánaðin. Tøkunøgdin í Føroyum var í 2020 50.700 tons í kruvdari vekt, sammett við 57.184 tons í 2019. Lægra tøkunøgdin í Føroyum var ein avleiðing av fellinum í ódnarveðrinum í februar 2020. Í Skotlandi var tøkunøgdin í 2020 34.986 tons í kruvdari vekt, harav 9.305 tons vórðu tikin í 4. ársfjórðingi. Til samanberingar vórðu 7.925 tons í kruvdari vekt tikin í 4. ársfjórðingi 2019.

Í 2020 setti Bakkafrost 24,6 milliónir smolt á sjógv, samanborið við 18,3 milliónir í 2019. 14,3 milliónir (12,7 milliónir í 2019) vórðu sjósett í Føroyum, og 10,3 milliónir (5,3 milliónir í 2019) í Skotlandi. Útbyggingar av smoltstøðum í Føroyum hava gjørt sítt til at hækka miðalvektina á smoltinum, sum var methøg í 2020. Miðal smoltstøddin á sjósettum smolti í Føroyum var 343 gramm í 4. ársfjórðingi 2020, sammett við 195 gramm sama ársfjórðing 2019. Smoltið hevur klárað seg sera væl eftir sjóseting, og vøksturin fyrstu tíðina aftaná sjóseting hevur ongantíð verið so góður, sum í 2020.

Strategiin um stór smolt, sum Bakkafrost hevur sett í verk í Føroyum, krevur stórar íløgur í smoltstøðir. Stóra smoltstøðin við Strond framleiðir nú við fullari orku, og útbyggingarnar av smoltstøðunum á Glyvradali og á Norðtoftum eru í gongd. Við øktu framleiðsluorkuni á smoltstøðunum, sum kemur afturat í 2021 og 2022, fer miðalstøddin á sjósettum smoltum í Føroyum at økjast til 400 gramm í 2021 og 500 gramm í 2022. Við ársenda 2022, tá útbyggingarnar eru lidnar, verður samlaða árliga føroyska smoltframleiðsluorkan yvir 20 milliónir smolt á 500 gramm.

Rakstraravlopið (operationelt EBIT) hjá Bakkafrost samtakinum var 621 milliónir kr. í 2020, sammett við 1.325 milliónir kr. í 2019. Minkaða rakstraravlopið var serliga orsakað av lægri laksaprísum í 2020 enn árið fyri. Úrslitið var sera nógv ávirkað av órógvinum, sum Covid-19 farsóttin hevði á laksamarknaðin. Samanlagt høvdu ali- og góðskingargeirin í Føroyum eitt rakstraravlop (operationelt EBIT) á 587,5 milliónir krónur, sammett við 1.166,7 milliónir kr. í 2019. Hetta svarar til eitt EBIT/kg á 11,59 kr., sammett við 20,40 kr. í 2019.

Aligeirin í Skotlandi hevði eitt rakstrarúrslit (operationelt EBIT) á -24,0 milliónir kr., sammett við 18,1 million kr. í 2019. Hetta svarar til eitt EBIT/kg á -0,69 kr., sammett við 2,29 í 4. ársfjórðingi í 2019, sum var fyrsti ársfjórðingur aftaná keypið.

Góðskingargeirin hevði eitt rakstraravlop (operationelt EBIT) á 139,7 milliónir kr., sammett við 63,7 millónir kr. í 2019. Hetta svarar til eitt EBIT/kg á 5,84 kr., sammett við 3,82 kr. í 2019. Framleiðslan av góðskaðum liðugvørum var 23.931 tons í kruvdari vekt, sammett við 16.690 tons í 2019. í 4. ársfjórðingi framleiddi góðskingargeirin 6.790 tons í kruvdari vekt. Hetta er nýtt framleiðslumet fyri ein ársfjórðing.

Mjøl-, lýsi- og fóðurgeirin (FOF) hevði eitt EBITDA á 207,7 milliónir kr. í 2020, sammett við 275,8 milliónir kr. í 2019. Havsbrún tók í 2020 ímóti 283.307 tonsum av rávøru, sammett við 278.664 tons í 2019. Í 2020 byrjaði Havsbrún at veita fóður til alingina í Skotlandi. Verandi kontraktir við veitarar av fóðri ganga út í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Eftir hetta fer øll alingin í Skotlandi at nýta fóður frá Havsbrún.

Íløguætlanin hjá Bakkafrost er 3 milliardir krónur fyri tíðarskeiðið 2018–2022. Hesar íløgur eru allar til virksemið í Føroyum. Vit eru væl ávegis at røkka málunum, vit settu okkum fyri hesa ætlan. Tað snýr seg millum annað um at minka um lívfrøðiliga váðan, økja framleidnið og árligu framleiðsluna í Føroyum til 100.000 tons. Eitt týdningarmikið

stig í íløguætlanini er útbyggingin av okkara smoltstøðum. Samstundis sum smoltstøðirnar á Glyvradali og á Norðtoftum í løtuni verða útbygdar, framleiðir smoltstøðin á Strond við fullari orku. Í oktober 2020 tóku vit fullvaksnan laks frá fyrstu smoltunum, sum vórðu sjósett frá smoltstøðini við Strond í august 2019. Tá smoltið varð sjósett, vigaði tað bert 230 gramm og við tøku bert 14 mánaðir seinni var vektin 6,1 kg. Miðalvektin á smoltinum er síðani økt støðugt. Vit fegnast um, at úrslitið á smoltstøðini og góðskan á smoltinum mennist betur enn væntað.

Strategiin um stór smolt er eisini kjarnin í íløgunum, sum ætlanin er at gera í Skotlandi. Tá vit keyptu felagið í Skotlandi, vóru har ellivu smáar og ótíðarhóskandi smoltstøðir. Vit ætla

at niðurleggja hesar og byggja tríggjar nýmótans smoltstøðir í staðin. Hesar verða útgjørdar við RAS-tøkni (endurnýtslu av vatni), líkt tøknini vit nýta á smoltstøðunum í Føroyum. Við hesum íløgum gerast vit um nøkur ár sjálvbjargin við 500 gramm smolti í Skotlandi. Hetta verður ein kollvelting fyri alingina og fer at minka munandi um lívfrøðiliga váðan. Vit vænta komandi 5 árini at gera íløgur á umleið 400 milliónir kr. árliga í virksemið í Skotlandi.

Í 2019 keypti Bakkafrost ein nýggjan bygning til virksemið í New Jersey, USA. Í 2020 er virkið umbygt til eitt framkomið framleiðsluvirki. Hetta betrar okkara tænastuveiting til okkara kundar á eysturstrondini í USA, sum vit kunnu veita úrvaldar vørur úr feskum laksi. Hetta virkið avgreiðir eisini bíleggingar, ið vit fáa umvegis okkara nethandil, sum lat upp fyri amerikanskum brúkarum á heysti 2020.

Í øðrum ársfjórðingi 2020 gjørdi Bakkafrost avtalu um at byggja nýggjan 7.000 m^3 brunnbát. Hesin verður millum annað útgjørdur við hybridtøkni fyri at minka um koltvísúrnisútlátið. Brunnbáturin verður væntandi liðugur í fyrru helvt av 2022. Brunnbáturin fer at økja munandi um okkara førleika at viðgera laksin við feskvatni, umframt flutning av fiski. Brúk verður eisini fyri bátinum í samband við okkara ætlanir um at fara at ala á opnum havi. Hetta fer at gera tað møguligt hjá okkum at hækka árligu framleiðsluna av laksi til meir enn 100.000 tons í Føroyum. Bakkafrost vónar at fáa loyvi til aling á opnum havi í 2021.

Á íleggjaradegnum, sum verður 14. og 15. september 2021, fara vit at lýsa ætlaðu íløgurnar í Skotlandi nærri. Vit fara eisini at kunna um, hvussu vit ætla at broyta alingina í Skotlandi, og hvussu vit ætla at økja árligu framleiðsluna í Føroyum til meir enn 100.000 tons.

Í 2019 endurfíggjaði Bakkafrost bankalánini fyri alt samtakið, íroknað SSC. 5 ára lániramman var áljóðandi 352 milliónir evrur (umframt møguleikan at økja rammuna við 150 milliónum evrum) og eitt lán á 100 milliónir pund til SSC. Í 2020 vórðu hesar lánirammur lagdar saman til eina avtalu áljóðandi 463 milliónir evrur (umframt møguleikan at økja rammuna við 150 milliónum evrum). Netto rentuberandi skuldin hjá Bakkafrost samtakinum var áljóðandi 1.753 milliónir krónur við árslok 2020, samanborið við 1.019 milliónir krónur við árslok 2019. Tøka kredit ramman hjá samtakinum var 1.677 milliónir við árslok 2020.

Úrslitið hjá Bakkafrost samtakinum var 463 milliónir kr. í 2020 samanborið við 802 milliónir kr. í 2019. Solvensurin var við árslok 2020 66%, í mun til 65% við árslok 2019.

Stjórnin, nevndin og heilhugaðu og evnaríku starvsfólkini á Bakkafrost gleða seg til eitt spennandi ár fyri framman.

Útlit

MARKNAÐUR

Alheims tøkan av atlantslaksi var 10,8% hægri í 4. ársfjórðingi 2020, sammett við 4. ársfjórðing 2019, sambært seinastu metingini frá Kontali Analyse. Marknaðurin var neiliga ávirkaður av marknaðarórógvini, sum stóðst av Covid-19 farsóttini.

Hyggja vit frameftir fara marknaðarkreftirnar framvegis at vera ávirkaðar av Covid-19 støðuni. Tað hevur við sær størri óvissu enn vanligt á metingarnar fyri marknaðarútlitini. Tó kann marknaðarstøðan batna sum árið líður, so hvørt sum framstig verða gjørd við hópkoppseting á okkara høvuðsmarknaðum. Í 1. ársfjórðingi 2021 er alheims tøkan av atlantslaksi mett at økjast umleið 4%, sammett við 1. ársfjórðing 2020. Í 2021 verður mett, at alheims tøkan av laksi økist 2–3%, sammett við 2020. Orsakað av goymslubroytingum verður væntað, at útboðið av laksi í 2021 fer at økjast 5–6%, sammett við 2020.

Økingin í útboðnum av laksi í 2021 verður væntandi størst fyrra hálvár. Í seinna hálvári 2021 verður alheims útboðið væntandi tepurt, orsakað av vøkstrinum í alheims tøkunøgdunum, sum sambært forsagnum frá Kontali Analyse eru undir 1%.

Bakkafrost selur meginpartin av laksinum til Evropa, USA, Fjareystur og Russland. Covid-19 farsóttin hevur órógvað heimsmarknaðin og minkað um tørvin á laksi í matstovutænastuvinnuni, meðan eftirspurningurin í retailvinnuni er øktur. Hendan broytta støðan heldur sær væntandi í eina tíð. Tó væntast at marknaðarstøðan í ávísan mun kemur í rættlag í 2021. Tað er tó óvist, til hvørja legu, marknaðurin fer at fóta sær aftur á, tá ið Covid-19 farsóttin er farin framvið. Undir farsóttini hevur matstovutænastuvinnan í vissan mun tillagað seg og funnið sær nýggjar øðrvísi hættir at reka sítt virksemi. Tað er væl møguligt, at nakrir av hesum hættum eru komnir fyri at vera. Orsakað av okkara smidligu virðisketu hevur tað eydnast okkum væl, at tillaga okkum til tær broytingar, vit hava sæð undir farsóttini. Bakkafrost leggur eisini stóran dent á at spjaða søluna til ymsu marknaðirnar og hervið minka um marknaðarváðan.

ALING

Samanumtikið hevur lívfrøðiliga gongdin hjá tøkufiskinum í Føroyum verið sera góð í 4. ársfjórðingi 2020. Vøksturin hevur verið góður og fóðurfaktorurin sera lágur. Góðskan á tøkufiskinum er vorðin serstakliga góð. Fellið, serliga í samband við avlúsing, hevur verið nakað hægri enn vanligt. Betring av hesum er eitt raðfest átaksøki í 2021.

Bakkafrost er væl ávegis við strategiini um stór smolt, ið sæst aftur í alsamt hækkandi miðalvektini á sjósettum smolti í Føroyum. Í 4. ársfjórðingi 2020 var miðalvektin 343 gramm. Í 2021 verður miðalvektin væntandi umleið 400 gramm og 500 gramm í 2022. Størsta drívmegin aftanfyri hesa menning er sera nógv økta framleiðsluorkan á smoltstøðini á Strond. Hendan smoltstøð framleiðir nú við fullari orku stór smolt, ið hava avbera høga góðsku. Fyri at økja enn meir um framleiðsluorkuna, er farið undir útbyggingar av verandi smoltstøðum á Norðtoftum og í Glyvradali. Økta framleiðsluorkan verður tøk í 2022 og fer at gera tað møguligt hjá Bakkafrost at framleiða 20 milliónir smolt á 500 gramm í Føroyum.

Alingin í Skotlandi gerst so við og við betri. Tó plagar seinna hálvár sum heild at vera eitt meira avbjóðandi tíðarskeið í skotsku alingini. Í 4. ársfjórðingi 2020 hevur fellið á nøkrum alibrúkum verið óvanliga høgt. Komandi 2–3 árini væntast triðji og fjórði ársfjórðingur framhaldandi at verða avbjóðandi. So hvørt sum strategiin um stór smolt verður framd í skotsku alingini, fer hetta at kollvelta alingina og venda gongdini til tað betra. Fyri at røkka hesum, ætlar Bakkafrost komandi árini at gera íløgur í tríggjar stórar smoltstøðir. Hesar fara eisini at gera okkum sjálvbjargin í Skotlandi við stórum smolti.

Bakkafrost leggur seg eftir áhaldandi at minka um lívfrøðiliga váðan. Seinastu árini hava vit gjørt munandi íløgur fyri at minka um hendan váðan, men eisini fyri at økja um virksførið og tryggja burðardyggan vøkstur. Í hesum sambandi hevur strategiin um stór smolt ein týðandi leiklut í Føroyum eins væl og í Skotlandi.

Bakkafrost væntar at sjóseta umleið 14,5 milliónir smolt í Føroyum í 2021, sammett við 14,3 milliónir smolt í 2020, 12,7 milliónir smolt í 2019 og 12,6 milliónir smolt í 2018. Sjósetingin av smolti í Skotlandi verður væntandi 11,0 milliónir smolt í 2021, sammett við 10,4 milliónir í 2020, 12,4 milliónir í 2019 og 8,6 milliónir í 2018. Mongdin og miðalvektin á sjósettu smoltunum er ein týðandi partur, tá ið metast skal um framtíðar framleiðslu hjá Bakkafrost.

Tøkunøgdin hjá Bakkafrost í 2021 í Føroyum verður væntandi 66.000 tons í kruvdari vekt og 40.000 tons í Skotlandi. Sostatt verður samlaða tøkunøgdin væntandi 106.000 tons í kruvdari vekt, sammett við 85.686 tons í 2020.

Metingarnar um tøkunøgd og smoltútseting í báðum londunum eru treytaðar av lívfrøðiligu gongdini.

VIRÐISØKTAR VØRUR

Bakkafrost hevur gjørt stórar íløgur í at byggja eina sera smidliga virðisketu, sum umfatar eitt nýmótans góðskingarvirki við stórari framleiðsluorku. Hetta ger Bakkafrost fört fyri at tillaga seg til skiftandi marknaðarstøður. Hettar er ein stórur fyrimunur, tá órógv er á marknaðinum, sum nú undir

Covid-19 farsóttini. Orsakað av smidleikanum og stóru framleiðsluorkuni á góðskingarvirkinum, hevur Bakkafrost kunnað økt um framleiðsluna á góðskingarvirkinum og sostatt nøktað tann økta eftirspurningin frá retailvinnuni.

Bakkafrost hevur undirskrivað sølusáttmálar, sum fevna um eini 28% av væntaðu tøkuni í 2021 í Føroyum og Skotlandi samanlagt. Bakkafrost miðar vanliga eftir at selja umleið 40% av tiknu nøgdunum av laksi sum sáttmálabundnar virðisøktar vørur. Hesir sáttmálar hava fastar prísir og eru tíðarbundnir í 6 til 12 mánaðir.

FISKAMJØL, LÝSI OG ALIFÓÐUR

Útlitini fyri framleiðsluna av fiskamjøli og lýsi eru treytað av tøkari rávøru.

Tilmælið hjá ICES fyri 2021 fyri svartkjaft er 929 túsund tons, sum svarar til eina minking á 20%, sammet við tilmælið fyri 2020. 30. desember 2020 hevur Marine Stewardship Council (MSC) sett úr gildi góðkenningina av øllum svartkjafti. Í 2020 hevur Bakkafrost uppbygt eina goymslu við góðkendum fiskamjøli fyri at tryggja framhaldandi ASC-góðkenning av føroysku alibrúkunum í 2021.

Bakkafrost væntar eina minking í framleiðslu av fiskamjøli og lýsi í 2021, sammett við 2020.

Fóðursølan hjá Havsbrún í 2021 verður væntandi 120.000 tons. Hetta velst kortini um, hvussu nógv verður selt øðrum alarum.

Føroyski marknaðurin er høvuðsmarknaðurin fyri alifóður frá Havsbrún, íroknað innanhýsis nýtsluna av alifóðri hjá Bakkafrost í Føroyum og alifóður til alingina í Skotlandi.

ÍLØGUR

Íløguætlanin hjá Bakkafrost fyri tíðarskeiðið 2020 til 2022 í Føroyum verður umleið 1,8 milliardir krónur, íroknað viðlíkahaldsíløgur. Hettar fer at styrkja samfelda vinnumyndilin hjá Bakkafrost og tryggja framleiðsluorkuna í øllum liðum í virðisketuni, so vit kunnu framleiða 100.000 tons av laksi í kruvdari vekt í Føroyum. Endamálið við íløguætlanini er at minka um lívfrøðiliga váðan, økja virkisførið og skapa

Fig. 1

ÍLØGUÆTLAN (MIÓ KR.)



burðardyggan organiskan vøkstur. Denturin, Bakkafrost leggur á at ala størri smolt, hevur ein týðandi leiklut í at náa hesum máli.

Samanumtikið fylgir Bakkafrost íløguætlanini. Smoltstøðin við Strond er liðug, og farið er undir útbyggingarnar av smoltstøðunum á Norðtoftum og í Glyvradali. Av tí at hesar útbyggingar verða gjørdar á verandi smoltstøðum, fer tann økti framleiðsluførleikin skjótari at síggjast aftur í øktari framleiðslu, enn um talan var um nýbyggingar. Tí fer økta framleiðslan frá hesum smoltstøðum at síggjast longu tíðliga í 2022.

Í øðrum ársfjórðingi 2020 gjørdi Bakkafrost avtalu um bygging av nýggjum 7.000 m^3 stórum brunnbáti, útgjørdur við hybridtøkni fyri at minka um koltvísúrnisútlátið. Brunnbáturin, ið verður liðugur fyrra hálvár 2022, er ein týðandi liður í strategiini um stór smolt hjá Bakkafrost og ætlanunum um at vaksa framleiðsluna í Føroyum til meir enn 100.000 tons við aling á opnum havi. Báturin fer eisini at økja orkuna til feskvatnsviðgerð.

Biogassverkið hjá Bakkafrost, sum nýliga er liðugt, er ein týdningarmikil hornasteinur á burðardyggu leiðini hjá Bakkafrost. Við biogassverkinum er fingin til vega ein burðardygg loysn til handfaring av lívrunnum burturkasti. Vaksandi mongdin av lívrunnum burturkasti, ið stendst av økta virkseminum hjá Bakkafrost, verður gjørt um til grøna orku. Væntandi fer biogassverkið einsamalt at minka um útlátið av CO2 við 11.000 tonsum um árið. Biogassverkið er nú tikið í nýtslu og veitir el inn á netið hjá SEV og somuleiðis hita inn á fjarhitaskipanina í Tórshavn.

Umframt ætlaðu íløgunum í virðisketuna í Føroyum, væntar Bakkafrost at gera íløgur fyri umleið 350–400 milliónir um árið í 2020–2024 í skotsku alingina. Ein týðandi partur av hesum eru íløgur í tríggjar stórar smoltstøðir fyri at økja um smoltmongdina og gerast sjálvbjargin við stórum smolti. Tann fyrsta av hesum smoltstøðum er smoltstøðin í Applecross, sum verður útbygd og útgjørd við RAS tøkni. Í løtuni verður kannað, hvar best er at byggja tær báðar næstu stóru smoltstøðirnar.

FÍGGJARLIGA STØÐAN

Hóast óvissurnar, sum stóðust av Covid-19 farsóttini, vil gongdin á alheims marknaðinum fyri laksavørur sum frá líður mest sannlíkt verða til vildar fyri Bakkafrost. Bakkafrost hevur eina langa virðisketu, lutfalsliga lágan framleiðslukostnað av hágóðsku laksavørum og vil mest sannlíkt varðveita fíggjarliga smidleikan framyvir.

Í 4. ársfjórðingi 2019 endurfíggjaði Bakkafrost síni bankalán við eini lánirammu áljóðandi 352 milliónir evrur. Harafturat er avtalaður møguleiki fyri at økja rammuna við 150 milliónum evrum. Umframt hetta tók felagið eitt bankalán áljóðandi 100 milliónir pund fyri at endurfíggja The Scottish Salmon Company, í samband við at felagið varð keypt. Í 2020 vóru hesar tvær lánirammur lagdar saman í nýggja fíggingaravtalu við lánirammu á 463 milliónir evrur (umframt møguleikan at økja rammuna við 150 milliónum evrum).

Bakkafrost hevur høgan solvens, góða bankafígging og samanumtikið er fíggjarliga støðan sterk. Fíggjarliga styrkin ger, at Bakkafrost er fört fyri at fremja íløguætlanirnar bæði í Føroyum og Skotlandi og harvið styrkja samtakið enn meir. Eisini gevur hettar aðrar vakstrarmøguleikar, so sum við samanleggingum og yvirtøkum, og møguligt er at varðveita politikkin um vinningsbýti.

COVID-19 FARSÓTTIN

Bakkafrost hevur ein týdningarmiklan leiklut í at tryggja heilsugóðan mat til vaksandi íbúgvaratalið í heiminum. Hesin leiklutur er serliga týdningarmikil í truplu tíðunum, sum heimurin í løtuni er í.

Undir Covid-19 farsóttini hevur virksemið hjá Bakkafrost í Føroyum so at siga ikki verið ávirkað av farsóttini, og bert í minni mun í Skotlandi. Ein rað av fyribyrgjandi tiltøkum eru sett í verk fyri at verja okkara starvsfólk og tryggja áhaldandi framleiðslu. Nýggjar mannagongdir, krøv um frástøðu og møguleikar fyri heimaarbeiði eru sett í verk kring samtakið. Framleiðsla og fyrisiting eru tillagað til tess at fyribyrgja smittuspreiðing. Í Føroyum hava øll okkara starvsfólk eisini fingið bjóðað regluligar ókeypis Covid-19 kanningar.

So leingi marknaðarstøðan er ávirkað av Covid-19 farsóttini, tekur Bakkafrost øll neyðug stig fyri at verja fyritøkuna og lagar seg støðugt til broyttu marknaðarumstøðurnar og skiftandi krøv frá kundum.

Bakkafrost í stuttum

BAKKAFROST
Laksaaling og framleiðsla av laksavørum, styroporkassum, fiskamjøli, lýsi og alifóðri.

Heimstaður: Føroyar

Høvuðssæti: Glyvrar, Eysturoy

Framleiðsla og beinleiðis søla til fyritøkur: Laksur, fiskamjøl, lýsi og alifóður

Longsta samfelda virðisketa í vinnuni

Skrásett: á Oslo Børs við eyðmerkingini BAKKA

Okkara virksemi

LEGEND TO MAP SYMBOLS

- ▲ FISKAMJØL/OLJA OG FÓÐUR VIRKI
- ○ SMOLTSTØÐ
- ● ALI ØKI
- ⬟ LÍVFISKASTØÐ
- ■ KRYVJIVIRKI
- ◆ GÓÐSKINGARVIRKI
- □ KASSAVIRKI
- ◇ HØVUÐSSKRIVSTOVA
- ⬠ SØLUSKRIVSTOVA

Lyklatøl

Fig. 2

(KR. 1.000) **Rakstur**	**2020**	**2019**	**2018**	**2017**	**2016**
Nettosøla	4.651.892	4.511.107	3.177.422	3.770.049	3.202.686
Primerur rakstur (Operationelt EBIT *)	621.158	1.325.100	1.074.912	1.377.647	1.164.953
Avlop áðrenn rentur, avskrivingar og skatt (Operationelt EBITDA *)	1.067.923	1.635.215	1.273.810	1.561.237	1.298.214
Avlop áðrenn rentur og skatt (EBIT)	691.123	1.019.217	1.184.233	649.104	1.673.587
Avlop áðrenn skatt (EBT)	625.984	981.916	1.172.066	623.884	1.632.614
Ársúrslit	**462.845**	**801.885**	**960.292**	**511.402**	**1.338.887**
Avlop fyri hvørt partabræv, áðrenn virðisjavnan					
av biomassa og avseting til tapsgevandi sáttmálar (kr.)	6,20	19,04	16,44	21,08	17,57
Avlop fyri hvørt partabræv, eftir virðisjavnan					
av biomassa og avseting til tapsgevandi sáttmálar (kr.)	7,83	15,53	19,74	10,52	27,56
Fíggjarstøða					
Støðisogn tilsamans	9.224.680	8.670.109	3.396.036	3.023.807	2.567.212
Ogn í umfer tilsamans	3.983.644	4.431.296	2.406.487	2.131.709	2.850.904
OGN TILSAMANS	**13.208.324**	**13.101.405**	**5.802.523**	**5.155.516**	**5.418.116**
Eginogn tilsamans	8.729.487	8.496.875	4.077.029	3.626.429	3.549.035
Skuld tilsamans	4.478.837	4.604.530	1.725.494	1.529.087	1.869.081
EGINPENINGUR OG SKULD TILSAMANS	**13.208.324**	**13.101.405**	**5.802.523**	**5.155.516**	**5.418.116**
Netto rentuberandi skuld	1.752.751	1.018.685	495.479	258.070	635.266
Soliditetur	66%	65%	70%	70%	66%

*Tølini eru javnað við atliti til virðisjavnan á biomassanum, avseting móti tapsgevandi sølusáttmálum, inntøkum frá atknýttum feløgum, umsetningsskattur FO og fyri annað, ið ikki beinleiðis er tengt at rakstrinum

Týðandi hendingar

Januar
- Framleiðsla av laksamjøli og -lýsi úr laksaavskurði byrjar

Februar
- Sáttmálar undirskrivaðir um at byggja tveir nýggjar alibátar
- Ógvuslig ódn rakar Føroyar. Bakkafrost missir 1,2 milliónir av fiski

Mars
- Triðja ársfrágreiðing um burðardygd verður kunngjørd
- Sáttmáli undirskrivaður um bygging av nýggjari smoltstøð á Norðtoftum við framleiðsluorku á 3,5 millónir smolt á 500g
- Seinastu 4,5% av partabrøvunum í SSC verða keypt og felagið strikað á Oslo Børs
- Nýggja biogassverkið byrjar at taka ímóti lívrunnum burturkasti

Apríl
- Sáttmáli gjørdur við Sefine skipasmiðjuna í Turkalandi um bygging av 7.000 m³ brunnbáti, ið skal latast Bakkafrost fyrra hálvár 2022
- Øll starvsfólk í Føroyum verða boðin Covid-19 kanningar aðru hvørja viku
- SSC verður fyrsti laksaframleiðarin í Evropa, sum hevur fingið 4-stjørnaða BAP góðkenning

Mai
- Avtala undirskrivað um útbygging av smoltstøðini á Glyvradali við framleiðsluorku á 3,5 milliónir smolt á 500 gramm
- Fyrsti arbeiðsbáturin frá Arran í Skotlandi bílagdur til alingina í Føroyum

Juni
- Avtala undirskrivað við Umhvørvisstovuna um menning og bygging av umhvørvisvinarligari tvíkilju
- Nýggjur fóðurflaki latin til A72 Haraldssund

Juli
- Bókin um Bakkafrost søguna verður givin út
- Bygging av nýggjari landstøð til A12 Kunoyarnes er liðug

August
- Fyrsta biogassið verður framleitt á nýggja biogassverkinum
- Ógvusligt áarføri í økinum kring Loch Striven hevur við sær høgt felli í alibrúkunum í Loch Striven

September
- Lendisarbeiðið til nýggja lívfiskastøð í Skálavík verður boðið út
- 100 tær fyrstu bíleggingarnar móttiknar í nýggja B2C nethandlinum hjá Bakkafrost í USA
- Nýggja roykivirkið fær fyrstu bíleggingarnar
- Biogassverkið selur fyrstu KWt av burðardyggari elorku

Oktober
- Í starvsfólka trivnaðarkanning 2021 liggur Bakkafrost omanfyri miðal fyri vinnuna

November
- Bakkafrost fær ASC góðkenning fyri tað síðsta alibrúkið og er nú 100% ASC góðkent í Føroyum
- Bakkafrost nummar 3 í Coller Fair Protein Producer Index og er mett sum "lágur váði" hjá íleggjarum
- Bakkafrost innstillað sum finalistur í flokkunum "Ársins leiðari í vinnuni" og "Ársins nýskapan í ringrásbúskapi" hjá "edie Sustainability Leaders Awards 2021"

Desember
- Framleiðsla byrjar á nýggja framleiðsluvirkinum hjá Bakkafrost í New Jersey, USA
- Kjølurin til nýggja brunnbátin er strektur

STRATEGI

Vinnumál og strategi

VISIÓN

At vera ein fyritøka í heimsflokki í laksavinnuni

MISSIÓN

At framleiða heilsugóðan laks í heimsflokki

VIRÐIR

At vera ábyrgdarfull, vísa virðing, vera íðin, effektiv og framsøkin

Visiónin hjá Bakkafrost er at vera ein fyritøka í heimsflokki í laksavinnuni. Missiónin er at framleiða heilsugóðan laks í heimsflokki fyri at nøkta vaksandi tørvin í heiminum eftir proteinum og neyðugum feittsýrum, ið eru framleiddar burðardygt og ábyrgdarfult.

Royndirnar hjá Bakkafrost í sjógætisvinnuni røkka aftur til 1968, og síðan tá hevur fremsta málið hjá samtakinum verið at reka eitt sunt, spennandi og kappingarført kostnaðartilvitað samtak innan laksaaling.

Strategiin hjá Bakkafrost leggur høvuðsdentin á at skapa burðardygg virðir. Hetta røkkur út um sunt fíggjarligt avkast til styrkina, førleikan og ummælið hjá vinnuni, til dygdina á okkara arbeiðsmegi og felags sosiala og umhvørvisliga trivnaðin. Vit ásanna, at við at gera íløgur í at hava eina sunna vinnu, sunt fólk, sunnan laks, sunt umhvørvi og sunn samfeløg, har vit virka, verða vit í einari betri støðu at náa hesum máli.

Strategisku sjey málini hjá Bakkafrost í dag – fíggjarlig og ikki fíggjarlig – eru:

- **Menning og vøkstur**
  Vit stremba eftir framhaldandi marknaðarriknari øking og menning av alifóðri, aling, framleiðslu og sølu, umframt øðrum møguligum útlitum fyri vøkstri.

- **Effektivitetur & virðisskapan**
  Vit leggja alla orku í at gera samlaðu virðisketuna enn betri – frá alifóðri til liðugvørur – og at gagnnýta ágóðarnar av kappingarfyrimunum í øllum liðum í virðisketuni.

- **Matartrygd & hágóðska**
  Vit miða ímóti at veita vørur, sum uppfylla ella eru betri enn krøvini hjá okkara kundum.

- **Burðardygd**
  Vit leggja alla orku í at tryggja langtíðar burðardyggan vøkstur í framleiðsluni, meðan vit javnviga djóravælferð og kostnaðartilvitaða framleiðslu. Sí frásøgnina um burðardygd á www.bakkafrost.com/sustainability til nærri kunning um framstigini í 2020.

- **Lívfrøðilig trygd**
  Fiskaheilsa, fiskavælferð og fyribyrging av sjúkum eru øki, ið hava alstóran týdning fyri Bakkafrost. Vit miða ímóti at ala laks í einum burðardyggum umhvørvi, har vælferðin og trivnaðurin hjá laksinum eru tryggjað. Sí frásøgnina um burðardygd á www.bakkafrost.com/sustainability til nærri kunning um framstigini í 2020.

- **Spennandi fyritøkumentan**
  Vit leggja alla orku í at skapa eitt áhugavert arbeiðspláss, har eggjað verður til at lurta eftir hvør øðrum, og rúm verður givið fyri ymsum áskoðanum fyri at at finna bestu loysnirnar.

- **Søla & Marknaðarføring**

Vit leggja dent á at viðlíkahalda og styrkja støðu okkara á marknaðinum sum ein álítandi samstarvsfelagi og veitari av heilsugóðum og føðsluríkum laksavørum. Hendan raðfestingin stýrir okkara atferð við tí endamáli at skapa okkara kundum og partaeigarum virðir. Harumframt miða vit ímóti at geva samfelagnum íkast og at halda á at fylgja vakstrarstrategiini hjá felagnum.

Kjarnuvirðini, sum stuðla okkara avrikum og stýra okkara atferð, endurspegla orkuna, sum vit leggja í at skapa langtíðar virðir til okkara kundar, partaeigarar og samfelagið við at vera ábyrgdarfull, vísa virðing, vera íðin, effektiv og framsøkin.

Í 2020 endurskoðaðu vit samtaksstrategiina. Hon er nú í samsvari við strategisku stevnumiðini í Sunt Lív ætlanini, sum eru lýst í frásøgnini um burðardygd.

Vinnumyndil

Bakkafrost er kanska mest vertikalt sameinda fyritøkan innan laksaaling í heiminum. Hetta ger, at Bakkafrost hevur fult tamarhald og fulla ábyrgd av øllum liðum í framleiðsluni. Hetta ger tað møguligt hjá Bakkafrost at hava besta eftirlitið við góðskuni á laksinum og við framleiðslukostnaðinum.

Fig. 3

TILFEINGI

Innskot frá partaeigarum

Serkøn arbeiðsmegi

Aliloyvir

Náttúrutilfeingi

Reinur sjógvur

Landafrøðilig spjaðing

VIRKISSTRATEGI

VIRÐISKETA

- FISKAMJØL
- LÝSI
- ALIFÓÐUR
- LÍVFISKUR
- SMOLTSTØÐIR
- BIOGASS
- ALING
- FSV
- KRYVJING
- VIRÐISØKING
- PAKKING
- SØLA

OKKARA SERSTØÐA

Søga

Uppruni

Longsta virðisketan í laksavinnuni

Bestu umstøður at ala

Høgt innihald av Omega 3

Heilsugott Omega 3-6 Lutfall

Høg góðska

Burðardygt fiskamjøl, lýsi og alifóður

Fóðurfaktor lægri enn miðal

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

SUPERIOR QUALITY SALMON

SKAPT VIRÐIR

Nøgdir kundar

Avkast til partaeigarar

Skattaíkast

Samfelagsíløgur

Nøgd starvsfólk

Brot úr søguni hjá Bakkafrost

Sí www.bakkafrost.com/about/history
til nærri kunning um søguna hjá Bakkafrost.

1968
Brøðurnir Hans og Róland Jacobsen stovna fyritøkuna Bakkafrost. Fyrsta framleiðsluvirkið verður bygt sama ár. Triði bróðirin, Martin Jakobsen, kemur við í felagið í 1971.

1979
Bakkafrost fer – sum ein av fyrstu føroysku fyritøkunum – undir alivinnu.

1995
Bakkafrost byggir eitt góðskingarvirki til laks á Glyvrum. Hóast íløgan er avmarkað og framleiðsluorkan lítil, er hetta byrjanin á framleiðsluni hjá Bakkafrost at virðisøkja laks.

2006
Bakkafrost samtakið veksur við samanleggingum og yvirtøkum av fleiri alifyritøkum. Alivirksemið hjá Bakkafrost økist í stórum, bæði á landi og sjógvi.

2010
Partaeigararnir hjá Bakkafrost og Vestlax semjast um at leggja feløgini saman. Partaeigararnir hjá Vestlax samtakinum játta at fáa umskipað síni partabrøv til P/F Bakkafrost partabrøv. Vestlax samtakið er eitt alifelag við kryvjivirki í Kollafirði. Bakkafrost samtakið er eitt samfelt alifelag, ið spennir frá smoltframleiðslu til aling av fiski, framleiðslu av styroporkøssum til framleiðslu av góðskaðum liðugvørum og sølu.

Bakkafrost verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Oslo og víðkar um skaran av partaeigarum. Umframt føroyskar íleggjarar eiga altjóða íleggjarar úr øllum Evropa og USA nú felagið.

2011
Bakkafrost keypir P/F Havsbrún, ið er nýmótans og altjóða viðurkendur framleiðari av fiskamjøli, lýsi og alifóðri við heimstaði í Føroyum.

2013
Bakkafrost fráboðar eina 5 ára íløguætlan við tí endamáli at gera virksemið á landi effektivari, at økja lívrunna vøksturin og minka um lívfrøðiliga váðan.

2016
Bakkafrost dagførir eina nýggja 5-ára íløguætlan við sama endamáli sum í 2013. Bakkafrost økir virksemið á landi og miðar ímóti at framleiða 500 gramm smolt í 2020.

2017
Nýggja kryvji-/góðskingarvirki og høvuðssæti hjá Bakkafrost er liðugt. Almenningurin verður boðin at vitja hølini í september.

Tænastuskipini (FSV) Martin og Róland fara undir virksemi.

2018
Bakkafrost fer undir sameiningina av føroysku lívfiskaskránni. Nýggja smoltstøðin á Strond fer undir virksemi. Yvirtøkan hjá Bakkafrost av fyritøkuni og ognunum hjá amerikanska laksainnflytaranum North Landing er lokin.

Bakkafrost dagførir íløguskránna fyri 2018–2022, við denti á vøkstur til 100.000 tons í kruvdari vekt í Føroyum.

2019
Bakkafrost keypir The Scottish Salmon Company PLC. Ein sameind alifyritøka í Skotlandi við denti á sporføri og fullfíggjaða virðisketu.

Fyri at fíggja keypið útgevur Bakkafrost nýggj partabrøv fyri fyrstu ferð síðani skrásetingina á Oslo Børs.

Virðisketan

Bakkafrost hevur tamarhald á allari virðisketuni, frá egnari virking av fiskamjøli, lýsi og alifóðri til sølu og marknaðarføring av lidnum virðisøktum vørum. At stýra allari virðisketuni verður mett týdningarmikið fyri at tryggja tøka vøru, sporføri og at kunna skipa dagligu framleiðslugongdina. Bæði kundar og framleiðsluvirkir eru bundin av, at laksur er tøkur dagliga og líta fult á støðugan streym av tiknum fiski.

Góðskan á laksinum er endaliga úrslitið av øllum virkseminum, frá virking av fiskamjøli og lýsi til hagreiðing av laksinum. Skjalprógvanin og sporførið frá lidnu vøruni og aftur til rávøruna í fóðrinum og rognini hava týdning fyri kundan og tí eisini fyri Bakkafrost.

At hava ræði á allari virðisketuni ger Bakkafrost fört fyri at gera langtíðar veitingarsáttmálar og at fara inn í langtíðar samstarv við kundar uttan at vera bundið av nøkrum triðjaparti fyri at tryggja góðsku og veitanartrygd. Haraftrat gevur hetta betri møguleikar at gagnnýta framleiðslutólini í allari virðisketuni og tryggjar, at bestu loysnirnar verða nýttar á øllum kostnaðarøkjum.

Bakkafrost betrar, tillagar og leingir virðisketuna áhaldandi og alsamt. Í 2018 vórðu lívfiskur og biogass løgd afturat virðisketuni. Og í 2019 keypti Bakkafrost The Scottish Salmon Company, ið hóskar væl til okkara virðisketu og er eitt týðandi ískoyti til hesar partar av virðisketuni: Lívfisk, smoltstøðir, aling, FSV, kryvjing, góðsking og sølu.

Fig. 4



Fig. 5

FISKAMJØL, LÝSI OG ALIFÓÐUR

Bakkafrost útvegar rávøru til virking av fiskamjøli og lýsi. Rávøran er í høvuðsheitum ymisk uppsjóvarfiskasløg. Umframt heilan fisk gagnnýta vit eisini hjávørur av fiski, ið eru ætlaðar til mannaføði, so sum avskurð av fiski og fiskasúrløgu. Okkara krøv um bert at brúka fisk við høgari góðsku saman við okkara framleiðslutøkni ger okkum før fyri at framleiða fyrstafloks fiskamjøl, lýsi og alifóður. Fiskamjøl hevur eitt sera høgt proteininnihald við eini javnvág av aminosýrum, sum ger tað framúr væl egnað sum alifóður. Lýsi er ein frálík orkukelda og inniheldur tær neyðugu longu keturnar av omega-3 feittsýrum. Fiskurin kemur fyrst og fremst frá føroyskum skipum og fiskavirkjum og frá útlendskum fiskiskipum, ið fiska í Norðuratlantshavi.

Sum framleiðarar av okkara egnu hágóðsku rávørum til fóður, er Havsbrún í serstøðu at kunna velja allar besta fiskamjølið og lýsið til egna fóðurframleiðslu. Fiskasløgini, sum vit virka til fiskamjøl og lýsi, eru ein partur av teimum natúrligu føðikeldunum, sum villur laksur etur. Soleiðis geva hesar høvuðsrávørurnar í føðslusamanseting okkara grundarlag fyri góðum vøkstri hjá laksinum í okkara alivirksemi.

Áðrenn lýsið verður latið í fóður okkara, er tað farið ígjøgnum eina kolevnis-reinsisílan fyri at avmarka innihaldið av Dioxin og Dioxin-líknandi PCB'um (DL-PCB'ir). Dioxin og DL-PCB'ir kunnu síggjast í ymsum matvørum. Strangt eftirlit er við markvirðum av innihaldi av hesum umhvørvisdálkandi evnum. Áðrenn farið varð undir at nýta reinsað lýsið, vístu úrslit frá eftirliti hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni av føroyskum laksi, at støðið á hesum dálkandi evnunum lá langt undir øllum ásettum markvirðum. Kortini hava vit valt at styrkja støðuna hjá Bakkafrost vørumerkinum á marknaðinum við einum heilsugóðum laksi, sum skilir seg burturúr, við millum annað bert at nýta reinsað lýsi í okkara Havsbrún fóðri.

Vit leggja alla orku í at hava høgt marint innihald í fóðrinum og miða eftir at hava fóðrið til laksin so líkt natúrligu føðini hjá villa laksinum sum gjørligt, fyri at skapa eina føðsluríka og framúrskarandi Bakkafrost vøru til endabrúkarar.

Tað er týdningarmikið fyri okkum, at rávørurnar til okkara fóðurframleiðslu eru útvegaðar á burðardyggan hátt. Vit raðfesta høgt bert at nýta rávørur, sum er góðkendar sum burðardyggar, í framleiðsluni av fóðri til okkara laks. Í 2020 fekk allur Bakkafrost laksur fóður, sum bert er framleitt úr burðardygt góðkendari rávøru.

- **450 tons av fiskamjøli**
- **300 tons av lýsi**
- **700 tons av alifóðri**

Fig. 6

LÍVFISKUR

Lívfiskaskráin til føroyska upprunan
Í apríl 2018 yvirtók Bakkafrost lívfiskaskránna og tók fulla ábyrgd av henni. Bakkafrost hevur framíhjárættin at fáa ílegurættindini í 2021.

Lívfiskaskráin er partur av strategiini at fáa sum mest burtur úr lívfrøðiligu trygdini, kleking og arvafrøði og at hava longstu samfeldu virðisketuna í vinnuni.

Lívfiskaskráin fer at gera tað møguligt at seta ferð á menningina av mótstøðuførum rognum – sum fer at minka um sjúkuváðan í alilaksi – og eisini at verja vitanarfeingið í Føroyum, sum er bygt upp gjøgnum árini við skránni. Íløgan í nýtt undirstøðukervi á einum nýggjum øki á Sandoynni fer at geva neyðugu umstøðurnar til, at skráin kann mennast til fulnar við einum vælútbúnum starvsfólkahópi.

Klekiskráin varð uppafturtikin í 2016 við stuðli frá Føroya Landsstýri við at nýta teir fáu føroysku laksarnar, ið eftir vóru. 1.200 familjur vórðu skaptar, 300 familjur um árið í einum ættarliðs tíðarskeiði á 4 ár.

Útvalda klekiskráin verður nýtt fyri at finna hesi týdningarmiklu lyndiseyðkennini: vøkstur, góðska og mótstøðuføri ímóti sjúku.

Lívfiskaskráin til hebridiska upprunan
Í Skotlandi arbeiðir samtakið við eini serstakari hebridiskari lívfiskaskrá. Endamálið er at ala laks frá skotsku oyggjunum, sum upprunaliga varð klaktur frá einum villum stovni og bert aldur í hebridiskum sjógvi. Hettar hevur við sær ein sterkan, soltnan og týðiliga fastari laks enn annar atlantiskur laksur.

Lívfiskaskráin verður stýrd frá Langass støðini í North Uist. Lívfiskurin verður aldur undir avtalu við ein triðja part.

Lívfiskaskráin til hebridiska upprunan hevur framleiðsluorku at framleiða 6 milliónir rogn við ætlan um íløgur fyri at økja framleiðsluna til 10 milliónir rogn um árið.

- **Lívfiskaskráin til føroyska upprunan yvirtikin í 2018**
- **Framíhjárætt at fáa ílegurættindini í 2021**
- **Nýggj lívfiskastøð í Skálavík í 2023**
- **Lívfiskur av hebridiskum uppruna: Framleiðsluorku til 6 milliónir rogn um árið**

Fig. 7

SMOLTSTØÐIR

Smoltstøðir í Føroyum

Bakkafrost rekur seks smoltstøðir í Føroyum. 14,3 milliónir smolt vórðu sjósett í 2020 við eini miðalvekt á 318 gramm. Hetta fer at hækka í 2021 til 14,5 milliónir smolt á 370 gramm.

Bakkafrost keypir rogn uttanífrá umframt nýtir egin rogn. Veitararnir megna at nøkta tørvin á rognum hjá Bakkafrost nú og framyvir.

Lívfærið á fiskinum er umráðandi. Tí er útveljingin av bestu genetisku ílegunum av alstórum týdningi. Mótstøðuføri ímóti sjúkum er ein týdningarmikil eginleiki hjá fiskinum. Fyri at tryggja atgongd til rogn av høgari góðsku er strategiin hjá Bakkafrost at keypa rogn frá útvaldum veitarum uttanífrá, sum leggja stóra orku og pening í at betra vørugóðskuna og úrslitini.

Smoltstøðirnar hjá Bakkafrost eru í umhvørvum við stórum nøgdum av reinum feskum vatni, har ongar bygdir ella vinnur kappast um vatnið. Hetta er umráðandi, tí í Føroyum er einki grundvatn tøkt. Smoltstøðirnar eru útgjørdar við afturlatnari skipan til endurnýtslu av vatninum við biofiltrum, og smoltkørini eru innandura fyri at sleppa undan ávirkanum uttaneftir av veðri, fugli og aðrari dálking. Bakkafrost hevur væl útbúgvin og roynd starvsfólk á smoltstøðunum; nøkur teirra hava starvast í áratíggju.

Málið hjá Bakkafrost er at økja støddina á øllum smolti til sjósetingar til eina miðalvekt á 500 gramm í 2022. Fyrimunirnir eru styttri framleiðslutíð á sjónum og minni lívfrøðiligur váði.

Í januar 2019 boðaði Bakkafrost frá ætlanini um at økja framleiðsluorkuna á smoltstøðunum við 30.000 m^3 í alt. Hetta verður framt við at økja framleiðsluorkuna av verandi smoltstøðum á Norðtoftum og í Glyvradali til at fara undir framleiðslu í 2022. Harafturat hava vit ætlanir um at byggja nýggja smoltstøð í Ónavík í Suðuroy. Hendan smoltstøðin fer væntandi at hava eina framleiðsluorku á umleið 3 milliónir smolt.

Smoltstøðir í Skotlandi

Í Skotlandi rekur Bakkafrost 11 gamlar feskvatns smoltstøðir. Í staðin fyri hesar ætlar Bakkafrost komandi 3–4 árini at byggja tríggjar stórar og nýmótans smoltstøðir við tøkni til endurnýtslu av vatni. Tann fyrsta av hesum smoltstøðum verður smoltstøðin í Applecross. Í løtuni verður kannað, hvar best er at leggja tær báðar næstu stóru smoltstøðirnar.

Árliga framleiðsluorkan hjá okkara smoltstøðum í Skotlandi er umleið 8 milliónir smolt við eini miðalvekt á góð 90 gramm.

- **Nýggja smoltstøðin á Strond er nú fult virkin, 9 milliónir smolt á 500 gramm**
- **Økt framleiðsluorka í 2023 á Norðtoftum og á Glyvradali, 9,1 milliónir smolt á 500 gramm**
- **Økt framleiðsla í 2023 í Applecross, 11 milliónir smolt á 250 gramm**

Fig. 8



BIOGASS

Nýggja biogassverkið nýtir spillúrdráttir frá okkara aling og øðrum fiski og frá bóndum til at framleiða varandi orku og tøð. Hetta fer fram við at niðurbróta lívrunnin evni í lívfrøðiliga tilfeinginum til minni mýl gjøgnum sodning í súrevnisfátækum umhvørvi. Tá ið hendan tilgongdin er lokin, er lívrunna tilfeingið umgjørt til biogass, nevniliga koltvísúrni og mýrigass (metan) (sum verður brúkt til framleiðslu av varandi orku), og gerevni (sum verða nýtt til taðing).

Mett verður, at virkið verður fört fyri at umgera upp til 45–50.000 tons um árið av øllum aliburturkasti, útvega hita til 400 húsarhald og el til 1.900 húsarhald við verandi inntaki.

Hetta verður mett at spara 11.000 tons av CO2 útláti (grundað á tilsvarandi avloysing av lívrunnari orku) um árið.

Umframt at framleiða varandi orku, fer virkið at framleiða 45–50.000 tons av natúrligum flótandi biotøðum árliga, sum verða flutt aftur til bøndur í ymsu oyggjunum uttan kostnað. At upptøkuførleikin hjá biotøðunum er hægri, fer væntandi at minka um útlátið á firðirnar.

Varandi orkan, ið verður framleidd, verður latin inn á føroyska elnetið og fer at geva sítt íkast til føroyska málið at hava 100% av eli frá varandi orkukeldum innan 2030.

Byggingin av biogassverkinum byrjaði í 2019 og raksturin byrjaði á sumri 2020.

Framsøkna íløgustrategiin hjá Bakkafrost leggur dent á virknan vøkstur til at nøkta vaksandi eftirspurningin eftir proteinum, ið verða framleidd burðardygt. Hetta umfatar framkomnar endurnýtsluloysnir so sum hesa, sum minka um burturkast, avmarka og koma sær undan CO2 útláti og stimbra burðardygd gjøgnum aðrar vinnur.

- **Rakstur byrjaði á nýggja biogassverkinum á sumri 2020**
- **Mett framleiðsla um árið: 45–50.000 tons av natúrligum flótandi biotøðum**

Fig. 9

ALING

Høvuðsmálið við alingini er at ala laks við lágum fóðurfaktori og lítlum felli. Bakkafrost metir, at umhvørvið hevur stóran týdning fyri at náa hesum máli, og tí ger Bakkafrost sítt ítasta fyri at skapa og varðveita fiskinum eitt sunt umhvørvi. Í tráð við tjóðskaparligar reglur verða umhvørviskanningar gjørdar av uttanhýsis fyritøkum á hvørjum ári á hvørjum einstøkum aliøki. Úrslitið av hvørji einstakari kanning verður nýtt sum inngangandi upplýsingar í skipaðum ætlanum fyri at náa best møguligum úrslitum fyri umhvørvisligari og burðardyggari aling.

Aling í Føroyum

Tey 19 aliøkini, ið eru í nýtslu hjá Bakkafrost í 2020, eru á 17 føroyskum firðum og hava ágóðan av framúrskarandi sjógóðsku og útskifting orsakað av hørðum streymi og svalandi og støðugum hita.

Fiskurin svimur í stórum aliringum, har hann verður fóðraður og ansaður, og eru hesir ringar ríkiliga stórir til, at fiskurin kann vaksa í 16–18 mánaðir. Hetta tíðarskeiðið veksur fiskurin frá okkurt um 300+ grammum til miðalvektina – umleið 6,0–6,5 kg í livandi vekt – sum Bakkafrost miðar eftir. Hendan miðalvektin verður mett at geva besta støddarbýtið, so hon bæði nøktar tørvin á feskfiskamarknaðinum og á innanhýsis liðugvøru framleiðsluni.

Vanliga verður tann størri fiskurin seldur sum feskur, og tann minni fiskurin verður nýttur sum rávøra í framleiðsluni av virðisøktum vørum. Fiskurin verður fóðraður fleiri ferðir um dagin, og áhaldandi eftirlit er við fóðurnýtsluni.

Í allari framleiðslutíðini verður hvør árgangur hildin á einum firði fyri seg, og eftir at allur fiskurin á einum firði er tikin, verður fjørðurin ikki nýttur í 2–4 mánaðir, til eitt nýtt ættarlið verður sett út.

Aling í Skotlandi

Bakkafrost samtakið rekur 44 sjógvalistøðir í serstaka náttúruumhvørvinum fram við vesturstrondini í Skotlandi og kring Hebridurnar við eini núverandi loyvisnøgd á 74.765 tons.

Fiskurin svimur í stórum aliringum, har hann verður fóðraður og ansaður, og eru hesir ringar ríkiliga stórir til, at fiskurin kann vaksa í 18–24 mánaðir. Hetta tíðarskeiðið veksur fiskurin frá okkurt um 90 g til eina miðalvekt á umleið 5,0 kg í livandi vekt, sum miðað verður eftir.

Eftir at allur fiskurin er tikin, verður økið ikki nýtt í meir enn 2 mánaðir, til eitt nýtt ættarlið verður sett út.

- **19 aliøkir í nýtslu á 17 firðum í Føroyum**
- **44 aliøkir í nýtslu fram við skotsku vesturstrondini og kring Hebridurnar**

Fig. 10

TÆNASTUSKIP TIL ALING (FSV)

FSV í Føroyum

Í tænastuflotanum til alingina (FSV) hjá Bakkafrost eru seks før: Fýra flutningsskip til livandi fisk og tvey tænastuskip.

Í flutningsflotanum til livandi fisk eru tvey skip til smoltflutning og tvey skip at flyta fisk til tøku.

Annar av teimum báðum bátunum, sum flytir tøkufisk, er ein miðalstórur brunnbátur (660 m³/110 tons lv) og hin er ein stórur brunnbátur (3.500 m³/450 tons lv), útgjørdur við nýggjastu tøknini og báðir við afturlatnum skipanum. Umframt at flyta fisk til tøku hevur størri brunnbáturin útgerð til viðgerð av fiski við feskvatni.

Tey bæði tænastuskipini eru útgjørd við ymiskum skipanum til viðgerð móti lús uttan nýtslu av medisinskum evnum og skipanum at reinsa nótir, umframt skipanum til annað virksemi.

Sum liður í strategiini hjá felagnum at framleiða størri nøgdir av burðardygt aldum laksi, hevur Bakkafrost bílagt ein nýggjan brunnbát. Brunnbáturin verður bygdur á Sefine skipasmiðjuni í Turkalandi og væntast liðugur í 2022.

Nýggi brunnbáturin er 109 metrar langur og 22 metrar breiður. Hann hevur eina rúmd á 10.000m³, har teir fýra brunnarnir hava samlaða rúmd á 7.000m³ av sjógvi, og tangarnir hava eina rúmd á tilsamans 3.000m³ av feskum vatni. Báturin hevur kapasitet til 1.000 tons av laksi.

Bakkafrost roynir áhaldandi at betra um avlúsingarhættir uttan nýtslu av kemiskum evnum, og at laksurin verður strongdur minst møguligt.

FSV í Skotlandi

Í Skotlandi rekur Bakkafrost samtakið ein flota við 6 førum, fýra brunnbátar og tveir stórar arbeiðsbátar, sum øll eru undir langtíðar leigusáttmála, og harumframt ein flota við smærri bátum til alivirksemið, har Bakkafrost eigur meginpartin.

- **6 tænastuskip (íroknað 4 før til livandi fisk, 2 stórar arbeiðsbátar) í Føroyum**
- **6 tænastuskip (íroknað 4 før til livandi fisk, 2 stórar arbeiðsbátar) í Skotlandi**
- **Nýtt tænastuskip til alingina (FSV) at stuðla lívfrøðiligu trygdini í 2022**

Fig. 11

TØKA OG KRYVJING

Kryvjing í Føroyum
Í Føroyum verður allur fiskurin hjá Bakkafrost hagreiddur á kryvjivirkjunum á Glyvrum og í Vági. Kryvjivirkið á Glyvrum hevur eina framleiðsluorku á umleið 350 tons lv um dagin við einari vakt í miðal, men dagliga framleiðsluorkan kann økjast við 100–150 tonsum lv. Kryvjivirkið í Vági hevur eina framleiðsluorku á 100 tons í lv um dagin.

Fiskurin verður fluttur frá aliøkjunum til kryvjivirkið í brunnbátum við afturlatnari skipan.

Kryvjing í Skotlandi
Bakkafrost samtakið rekur tvey kryvjivirkir í Skotlandi: Arnish Point í Norðurskotlandi og Ardyne í Suðurskotlandi. Dagliga framleiðsluorkan er tilsamans 266 tons.

Fiskurin verður fluttur frá aliøkjunum til kryvjivirkini í brunnbátum.

- **Samlað kryvjiorka um dagin: 450 tons lv í Føroyum og 266 tons lv í Skotlandi**

Fig. 12

VIRÐISØKING

Virðisøking í Føroyum
4.000 m² stóra góðskingarvirkið á Glyvrum hevur eina framleiðsluorku á umleið 100 tons av virðisøktum vørum um dagin. Høvuðskundarnir til hesar vørurnar eru retailvinnan og matstovutænastuvinnan (hotell, matstovur og vistaveiting).

Ein annar týðandi partur av marknaðinum fyri virðisøktu vørurnar er ídnaðarkundar, sum keypa heil fløk og hjávørur til víðari framleiðslu. Hesin marknaðurin er mentur seinasta tíggjuáraskeiðið. Kundarnir í hesum geiranum eru í høvuðsheitum úr Evropa og Fjareystri.

- **Framleiðsluorka í Føroyum um árið: 40.000 tons av virðisøktum vørum**
- **Samlaða árliga framleiðsluorkan til hagreiðing og góðsking í Skotlandi øktist til 50.000 tons í 2020**

Virðisøking í Skotlandi
Bakkafrost samtakið rekur tvey góðskingarvirkir, Marybank í Norðurskotlandi og Cairdow í Suðurskotlandi og eitt roykivirki í Stornoway. Bæði góðskingarvirkini eru útgjørd við pre-rigor flakaskering, portiónskutarum og pakkiútgerð.

Fig. 13

KASSAFRAMLEIÐSLA

Kassavirkið hjá Bakkafrost er á Glyvrum og er sameint við framleiðsluhølini. Kassavirkið framleiðir styroporkassar til feskan laks, bæði til flutning sjóvegis og við flogfari. Kassavirkið á Glyvrum nøktar allan tørv hjá Bakkafrost á styroporkassum og hevur útbúnað at tillaga kassarnar við búmerki o.s.fr.

- **Framleiðsluorka:**
  Kassar til 70.000 tons av laksi um árið

Fig. 14

SØLA OG FLUTNINGUR

Strategiin hjá samtakinum er at javnviga søluna millum ymsar landafrøðiligar marknaðir og ymsar vørugeirar. Mest týðandi marknaðirnir eru tann evropeiski, tann amerikanski, tann kinesiski og tann russiski. Vanliga verður heili fiskurin úr Føroyum seldur á dagsmarknaðinum, meðan heili fiskurin úr Skotlandi verður seldur bæði á dagsmarknaðinum og við langtíðarsáttmálum. Virðisøktu vørurnar verða bert seldar við langtíðarsáttmálum.

Bakkafrost metir, at møguleikin at røkja hesar landafrøðiligu marknaðirnar til lítar við báðum vørubólkunum minkar um sveiggið bæði í umsetningi og avlopi.

Strategiin er at bjóða teimum stóru handilsketunum fyrimunir við at tryggja teimum at vøra er tøk, javna hágóðsku, og at tær fáa vørurnar, tær ynskja.

Flutningur úr Føroyum

Núverandi flutningsnet úr Føroyum er grundað á flutning við skipi og flutningsbili til Evropa og Russlands og við flogfari til USA og Kina úr Stórabretlandi og/ella Danmark. Møguligt er hjá Bakkafrost at flyta bæði feskan og frystan fisk til ymsu marknaðirnar.

Við verandi flutningsleið er møguligt hjá Bakkafrost at flyta vørur úr Føroyum til Stórabretlands við skipi innan fyri 20 tímar og til Danmarkar innan fyri 36 tímar. Úr Stórabretlandi og Danmark verða vørurnar fluttar við flogfari til týðandi floghavnir í USA og Kina innan fyri 24 tímar.

Vørur til evropeiska og russiska marknaðin fara við skipi til Danmarkar ella Stórabretlands, og eru har innan fyri tveir dagar til at verða fluttar víðari í flutningsbilum.

Flutningur úr Skotlandi

Flutningsnetið úr Skotlandi er grundað á flutning gjøgnum Eurotunnilin og við flogfari til Norðuramerika, Asia og aðrar marknaðir úr Stórabretlandi.

- **Marknaðarbýti:**
  Vesturevropa (67%)
  Norðuramerika (18%)
  Asia (8%)
  Eysturevropa (5%)
  Onnur (2%)

AVRIK

Frágreiðing um virksemið

ALING

Bakkafrost hevur sjógvaliloyvir í landnyrðingspartinum og sunnara parti av Føroyum umframt loyvir í útnyrðingspartinum av Skotlandi og Hebridunum. Loyvini geva rætt til at gagnnýta ávís økir á firðum til at ala laks. Alimyndugleikar leggja dent á avgerandi veteriner og umhvørvislig avrik. Árligar frásagnir og ætlanir, ið skulu góðtakast av myndugleikunum, verða kravdar fyri at góðkenna virksemið.

Golfstreymurin veitir støðugar umstøður í Føroyum og Skotlandi at ala alt árið og eina framúr góða sjógóðsku. Hitin í sjónum er støðugur í økjunum og sveiggjar bert 6–8 °C gjøgnum árið. Kaldast er vanliga í februar, um 6 °C, og heitast er seinastu summarmánaðirnar, um 10,5 °C í Føroyum og 14,5 °C í Skotlandi.

Øll aliøkini í Føroyum og Skotlandi verða umhvørvisgóðkend og skoðað árliga av eftirlitsfeløgum. Laksaaling í Skotlandi er ein av búnaðarvinnunum í Stórabretlandi, ið er gjøgnumskygnast og undir størst eftirliti. Aliøkini hjá Bakkafrost í Skotlandi verða regluliga skoðað av eini rød av stovnum, harímillum Marine Scotland, Scottish Environmental Protection Agency (SEPA), Fish Health Inspectorate og Scottish Natural Heritage. SSC hevur bundið seg til at virka gjøgnumskygt og at luta upplýsingar bæði á kravdan og sjálvkravdan hátt gjøgnum ymsar kanalir so sum Salmon Producer's Organisation (SSPO) og Marine Skotland.

Framleiðsluætlanirnar í Føroyum verða góðtiknar árliga av bæði veterinerum og umhvørvisligum myndugleikum. Lívfrøðiliga støðan í Føroyum gevur møguleika at ala laks við eini hægri miðalvekt enn vanligt aðrastaðni. Hetta lækkar eindarkostnaðirnar og lívfrøðiliga fóðurfaktorin og gevur bestu úrslit í vinnuni. Frálíka lívfrøðiliga støðan er altavgerandi fyri at halda framleiðslukostnaðum á verandi støði og at fáa sum mest avkast av peningaligu íløgunum, ið gjørdar verða.

KOSTNAÐAR TILVITAÐUR FRAMLEIÐARI OG VETERINERA SKIPANIN

Viðvíkjandi framleiðslukostnaði hevur alivirksemið hjá Bakkafrost givið góð úrslit sammett við kappingarneytarnar.

Høvuðsendamálið við aliháttinum hjá Bakkafrost í Føroyum er at hækka lívfrøðiligu og veterineru trygdina og stuðla undir burðardyggum og heilsugóðum virksemi. Hettar verður tryggjað við fullari atskiljing av árgangum av laksi, koppseting móti ymsum sjúkum (so sum ILA), strongum flutningsreglum fyri útbúnað og fisk og øðrum reglugerðum. Hesin hátturin hevur áhaldandi betrað fiskaheilsuna og minkað kostnaðin.

Lívfrøðiliga og lógásett er alingin í Skotlandi ólík alingini í Føroyum. Tað fer tí at taka tíð at menna og bøta um alihættirnar í Skotlandi. Eisini er neyðugt við munandi íløgum í virðisketuna sum heild.

Útreiðslurnar at ala eru hækkaðar seinastu árini, serliga av øktum útreiðslum til fóður og heilsu. Ein onnur orsøk er, at aliøkini í Føroyum eru flutt longri út á firðirnar til óvardari økir, har dýrari útgerð er neyðug. Ætlanin er eisini at gera tað í Skotlandi, har tað er møguligt.

Alifóður við høgum marinum innihaldi, sum líkist kostinum hjá villa laksinum, verður brúkt bæði í Føroyum og Skotlandi. Hetta ber lutfalsliga høgan fóðurkostnað við sær. Men fyrimunirnir síggjast aftur í hægri framleiðsluávøksti og hevur ávirkan á høga støðið á djóravælferð, sum aftur hevur positiva ávirkan á annað enn fóður.

Heilsukostnaðurin hevur serliga við viðgerð móti fiskalús at gera. Frá 2015 hevur Bakkafrost í høvuðsheitum brúkt ikki medisinska viðgerð, harímillum feskt vatn, flógvan sjógv og skoling við reinum sjógvi við vanligum hita. Hesar nýggju mekanisku viðgerðirnar elvdu til økt felli fyrstu tíðina, men eftir eitt byrjanarskifti og fleiri royndir og betri vitan um

útgerðina og viðgerðarhættirnar er fellið minkað. Bakkafrost arbeiðir framvegis við at bøta um neiligu hjáárinini av mekanisku viðgerðunum.

Herumframt hevur Bakkafrost nýtt rognkelsi fyri at minka um talið av fiskalús. Endamálið við hesum átøkum er at varðveita eitt burðardygt, kostnaðartilvitað alivirksemi.

ÍLØGUR AT MINKA UM LÍVFRØÐILIGAN VÁÐA

Bakkafrost hevur síðani 2015 gjørt íløgur fyri 3,9 milliardir krónur í øll lið í virðisketuni. Fimmára íløguætlanin frá august 2018 var áljóðandi umleið 3 milliardir krónur. Umleið 1,6 milliardir krónur eru nýttar til íløgur seinastu tvey árini. Umframt ætlaðu íløgurnar í virðisketuna í Føroyum, væntar Bakkafrost at gera íløgur fyri umleið 400 milliónir krónur um árið frá 2020–2024 í Skotlandi. Onkrar av hesum íløgum, t.d. smoltstøðin í Applecross og góðskingarvirkið í Marybank, eru settar í verk, ímeðan aðrar eru í umbúnað.

Endamálini við íløguætlanini eru at minka lívfrøðiliga váðan, gera virksemið effektivari og at geva organiskan vøkstur.

Íløgur á umleið 1 milliard krónur verða gjørdar í smoltalingina í Føroyum. Alingin í Føroyum er sjálvbjargin við smolti og miðar ímóti, at øll sjósett smolt skulu hava eina miðalvekt á 500 gramm. Smoltstøðirnar á Norðtoftum og Viðareiði eru útbygdar, og útbyggingar av smoltstøðunum á Glyvradali og á Norðtoftum eru í gongd. Nýggja smoltstøðin á Strond er eisini liðug og virkar við fullari orku. Tá økti kapasiteturin frá Glyvradali og Norðtoftum er tøkur, fer kapasiteturin at verða omanfyri 20 milliónir smolt við eini miðalvekt á 500 gramm.

Bakkafrost ætlar eisini at byggja eina nýggja smoltstøð í Suðuroy, fyri at økja smoltframleiðsluna enn meira.

Miðalstøddin á sjósettum smolti í Føroyum er økt úr 120 grammum í 2014 til umleið 319 gramm í 2020, svarandi til eina øking á 166%.

Størra smoltið fer at hava positiva ávirkan á lívfrøðiliga váðan og á framtíðar vakstrarmøguleikarnar, tí størri smolt fer at stytta framleiðslutíðina á sjónum á aliøkjunum. Ætlanin er eisini at økja støddina á smoltinum í Skotlandi til 500 gramm og verða sjálvbjargin við smolti.

Bakkafrost hevur gjørt Íløgur í nýggjan útbúnað til alivirksemið. Síðan 2015 hevur Bakkafrost útvegað sær trý skip: Eitt skip til flutning av livandi fiski og tvey tænastuskip. Harafturat varð ein 7.000 m³ brunnbátur bílagdur í 2020 og verður latin í 2022. Munandi upphæddir eru eisini nýttar til nýggjan útbúnað á aliøkjunum hjá Bakkafrost, t.d. nýggir fóðurflakar, tvíkiljur og størri aliringar.

GÓÐKENNINGAR

Fyri at tryggja fyrstafloks góðsku hevur Bakkafrost sett eina rað av mannagongdum og góðskueftirlitsskipanum í verk, ikki bara á okkara egnu alistøðum og framleiðsluvirkjum, men eisini fyri okkara veitarar. Øll lið í føroysku framleiðsluketuni eru í samsvari við GLOBAL G.A.P. Aðrar góðkenningar eru ASC, HACCP, IFS, GMP+, MSC, ISO 9001:2015 og BRC. Bakkafrost er limur í Global Salmon átakinum (GSI). GSI leggur áherðslu á tríggjar súlur av burðardygd: At minka um árinið á umhvørvið, at økja samfelagsligt íkast og at varðveita búskaparligan vøkstur.

Fig. 15

FELLI Í MUN TIL TØKU Í PROSENTUM



Fig. 16

LÍVFRØÐILIGUR FÓÐURFAKTORUR



Fig. 17

MIÐAL TØKUVEKT (LIVANDI VEKT)



Fig. 18



Bakkafrost fegnaðist um at røkka málinum at hava øll okkara aliøkir í Føroyum ASC góðkend í 2020 – tað seinasta varð góðkent í november. ASC standardurin varð mentur í samstarvi við WWF og verður mettur sum strangasti standardur innan alivinnu við krøvum til fiskavælferð, fiskalús, smoltframleiðslu, fóðurframleiðslu og umhvørvi.

Alingin hjá Bakkafrost í Skotlandi hevur ríkis- og altjóða viðurkenningar og góðkenningar yvir alla virðisketuna, íroknað Global G.A.P. SSC var fyrsti laksaalari í ES, ið fekk handað 4-stjørnu Best Aquaculture Practice (BAP) góðkenning fyri øll sjó- og framleiðsluøkir og fóðurveitarar. Hetta er hægsta útnevning í triðjaparts góðkenningarskránni hjá BAP.

Framleiðsluvirkini hava fingið handað hægsta støðið av British Retail Consortium (BRC) góðkenning fyri matartrygd, framleiðslu og stýring av veitingarketuni.

LANDAFRØÐILIG STAÐSETING

Alistøðirnar hjá Bakkafrost í Føroyum og Skotlandi eru í økjum við góðum eginleikum til laksaaling, so sum sjógóðsku, hita og útskifting. Føroysku firðirnir veita skilnað millum økini. Hetta lættir um lívfrøðiliga eftirlitið og stýringina av økinum. Lutfalsliga stutt er millum alistøðirnar og framleiðsluvirkini, og góða infrakervið ger tað lutfalsliga bíligt at flyta fisk og fóður bæði á landi og sjógvi.

GOTT KUNDAGRUNDARLAG Í ØLLUM HØVUÐSMARKNAÐUM

Við at leggja seg eftir at geva kundum tað, teir vilja hava, hevur Bakkafrost notið ágóðan av áralongum sambandi við ein stóran kundaskara. Sambandið við kundarnar hevur víst seg at givið kappingarfyrimunir við at menna framleiðslu og marknaðarføring.

Seinastu mongu árini hevur Bakkafrost ment eina fjølbroytta marknaðarstrategi. Hetta hevur tryggjað Bakkafrost góða marknaðarstøðu í høvuðsmarknaðunum: ES, Fjareystur, USA og Eysturevropa.

VIRÐISØKING

Bakkafrost hevur drúgvar royndir í at framleiða og selja virðisøktar vørur. Langtíðarætlanin hjá Bakkafrost er, at virðisøktu vørurnar skulu vera umleið 40% av tiknu føroysku nøgdunum hjá samtakinum. Sølan av virðisøktum vørum ger inntøkurnar hjá samtakinum støðugari, tí sølan er grundað á sáttmálar við avtalaðum prísum. Sáttmálaprísirnir eru ikki so óstøðugir sum prísurin á dagsmarknaðinum fyri feskan laks. Tíðarmunur er frá tí, at dagsprísurin hækkar, og til sáttmálabundni prísurin fyri virðisøktar vørur hækkar. Hinvegin er tíðarmunurin eisini galdandi, tá ið eitt fall í dagsprísinum førir til lægri sáttmálaprísir.

Í 2020 vórðu 47% av føroysku tøkunøgdunum nýttar í góðskingargeiranum. Stóri parturin til góðskingargeiran stóðst av øktum eftirspurningi í retailvinnuni. Tað sum gjørdi hesa broyting í eftirspurninginum var marknaðarórógvin, sum stóðst av Covid-19 farsóttini. Góðskingargeirin framleiddi 23.931 tons í 2020, sammett við 16.690 tons í 2019. Øktu nøgdirnar í góðskingargeiranum í 2020 høvdu eina jaliga ávirkan á úrslitið í góðskingargeiranum.

FRAMLEIÐSLA AV FISKAMJØLI, LÝSI OG ALIFÓÐRI

Havsbrún – geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður – hevði aftur eitt sera gott avrik í 2020 og hevði góða atgongd til rávøru. Havsbrún tók ímóti 283.307 tonsum av rávøru í 2020, ein hækking á 2% í mun til 2019. Framleiðslan av fiskamjøli og lýsi er treytað av møguleikunum at útvega rávøru. Tøka nøgdin er neyvt tengd at kvotunum av uppsjóvarfiski í Norðuratlantshavinum. Rávørustøðan verður meira óstøðug framyvir, millum annað tí svartkjaftakvoturnar eru lækkaðar seinastu árini. 30. desember 2020 hevur Marine Stewardship Council (MSC) sett úr gildi góðkenningina av øllum svartkjafti. Í 2020 hevur Havsbrún uppbygt eina goymslu við góðkendum fiskamjøli fyri at tryggja framhaldandi ASC-góðkenning av føroysku alibrúkunum í 2021.

Umframt uppsjóvarfisk útvegar Havsbrún sær eisini avskurð frá fiskavirkjum í Føroyum. Framleiðsluvirkir til uppsjóvarfisk eru bygd í Føroyum seinastu árini, ið hava økt atgongdina til avskurð frá hesi framleiðsluni.

Havsbrún seldi øðrum keyparum 18.675 tons av fiskamjøli í 2020, sammett við 31.769 tons í 2019, ein lækking á 41%. Framyvir fer sølan til aðrar keyparar væntandi at minka, so hvørt sum innanhýsis nýtslan økist. Øll framleiðslan av lýsi er nýtt í framleiðsluni av alifóðri.

Havsbrún seldi 111.998 tons av alifóðri í 2020, harav 84% vórðu nýtt innanhýsis. Í 2019 seldi Havsbrún 97.408 tons av alifóðri.

Alheims framleiðslan av lýsi hevur verið lutfalsliga støðug í fleiri áratíggju, samstundis sum eftirspurningurin eftir lýsi er øktur. Tískil verður mett, at lýsi verður eitt tepurt tilfeingi í

Stødd: **3mm**

Stødd: **4mm**

Stødd: **6mm**

Stødd: **9-12mm**

Alifóður

framtíðini; men minkandi innihaldið av lýsi í laksafóðri – sum størstu framleiðararnir stýra – fer at minka nakað um eftirspurningin. Strategiin hjá Bakkafrost er at hava eitt høgt innihald av lýsi í alifóðrinum, sum hevur við sær ein laks við høgum Omega-3 innihaldi.

FÓLK

Starvsfólkini eru okkara týdningarmesta tilfeingi, og skal Bakkafrost varðveita og víðka leiðandi marknaðarstøðuna í alivinnuni, er tað av alstórum týdningi at varðveita og draga starvsfólk at sær við teimum røttu førleikunum og tí røttu vitanini. Tí fara vit framhaldandi at leggja stóran dent á menniskjaliga tilfeingið, nøgdsemi millum starvsfólk og at menna røttu førleikarnar.

Grundarlagið fyri menningini av okkara menniskjaliga tilfeingi er fyritøkumentanin og grundleggjandi virðini hjá Bakkafrost at vera ein álítandi og ábyrgdarfullur samstarvsfelagi. Mong avbera góð úrslit eru nádd seinastu árini, og vit stremba áhaldandi eftir at menna fyritøkumentanina.

Vit miða eftir alsamt at styrkja førleikarnar hjá starvsfólkunum á øllum stigum í samtakinum við at seta viðkomandi venjingarskipanir í verk til tess at nøkta núverandi og framtíðar tørv á eini skikkaðari arbeiðsmegi. Alneyðugt er, at øll venjing hevur til endamáls at stuðla strategiini hjá Bakkafrost, at tryggja høgar standardar í okkara atferð í øllum virksemi og at skapa kundum okkara best møgulig virðir.

Upplæring hjá Bakkafrost verður framd sum arbeiðsupplæring, innanhýsis og uttanhýsis skeið umframt aðrar upplæringarhættir. Dentur verður áhaldandi lagdur á at menna professionellar førleikar enn meira, og at menna leiðsluevni á øllum stigum í samtakinum.

Í sambandi við arbeiðsupplæring, innan- og uttanhýsis skeið eins og aðrar upplæringarhættir, bíleggja og samstarva vit við útbúgvingarstovnar á staðnum, og serfrøðingar, við denti á heilsu, trygd, handil og vinnuútbúgving.

Undir Covid-19 farsóttini í 2020 hevur tað verið avgerandi fyri okkum at verja okkara starvsfólk. Beinanvegin, tá farsóttin byrjaði, varð ein røð av trygdartiltøkum sett í verk fyri at verja okkara starvsfólk ímóti at verða smittað av Korona-virusinum og fyri at minka møguligu ávirkanina av einum útbrotið í samtakinum. Okkara starvsfólk hava verið sera vælviljað og tikið væl undir við tiltøkunum undir farsóttini. Bakkafrost hevur eisini samstarvað við serfrøðingar á heilsuøkinum, sum hava vegleitt okkum væl. Í apríl 2020 byrjaði Bakkafrost at bjóða øllum starvsfólki í Føroyum Covid-19 kanningar aðru hvørja viku.

Í 2020 samsvaraði fulltíðartalið av starvsfólkum í Bakkafrost samtakinum við 1.699 starvsfólk (FO: 940, SCT: 714, US/UK: 45), sammett við 1.553 starvsfólk í 2019. Stórar árstíðarbroytingar eru í sambandi við kryvji- og góðskingardeildirnar, fyrst og fremst orsakað av starvssetanum í styttri tíðarskeið.

Sí frásøgn okkara um burðardygd 2020 til nærri kunning.

Fíggjarlig frágreiðing

Útboðið av laksi á heimsmarknaðinum hækkaði umleið 4% í 2020 (2019: 6% hækking). Miðal dagsprísurin á laksi í 2020 var 38,78 kr./kg, sammett við 44,20 kr./kg í 2019, ið er ein minking á 12%.

Prísirnir á virðisøktum vørum í 2020 vóru á sama støði sum í 2019. Rávøruprísirnir hava alstóran týdning fyri úrslitið hjá góðskingargeiranum, tí góðskingargeirin keypir rávøruna á dagsmarknaðinum hvørja viku. Í 2020 var miðalprísurin á dagsmarknaðinum lægri, sammett við 2019. Úrslitið av framleiðsluni av virðisøktum vørum hjá Bakkafrost var ávirkað positivt av lægri framleiðslukostnaði í 2020, eisini tí nøgdirnar vóru størri. Tískil hevði góðskingargeirin avlop í 2020. Virðisøktu vørurnar verða vanliga seldar, grundað á sáttmálar við føstum prísum fyri eitt 6-12 mánaðar tíðarskeið. Tískil fylgja prísirnir á virðisøktu vørunum prísgongdini á dagsmarknaðinum við einum tíðarmuni.

Miðal fóðurprísurin var hægri í 2020 enn í 2019. Orsøkin til sveiggini í fóðurprísinum er marknaðarstøðan fyri lýsi og fiskamjøl, sum eru høvuðstilfarið í alifóðrinum hjá Bakkafrost. Sveiggini í fóðurprísinum endurspeglast í framleiðslukostnaðinum á laksi.

RAKSTRARROKNSKAPUR

KR. 1.000	2020	2019
Nettosøla	**4.651.892**	**4.511.107**
Vørukeyp	-2.358.623	-1.354.921
Broytingar í vørugoymslum og í svimjandi fiski (til kostvirði)	401.679	-29.423
Lønir og starvsfólkakostnaður	-608.347	-512.761
Annar rakstrarkostnaður	-1.062.719	-978.787
Avskriving	-446.765	-310.115
Onnur inntøka	44.041	0
Operationelt EBIT	**621.158**	**1.325.100**
Dagsvirðisjavning av biomassa	118.003	-220.567
Inntøkur frá atknýttum feløgum	5.546	13.812
Umsetningsskattur	-53.584	-99.128
EBIT	**691.123**	**1.019.217**
EBT	**625.984**	**981.916**
Skattur	-163.139	-180.031
Ársúrslit	**462.845**	**801.885**

Nettosølan hjá Bakkafrost samtakinum var 4.651,9 mió kr. í 2020, sammett við 4.511,1 mió kr. í 2019. SSC er tó bert tikið við í nettosøluna frá 8. oktober 2019. Orsøkin til vøksturin í nettosøluni er í høvuðsheitum størri nøgdir av bæði feskum/frystum laksi og virðisøktum vørum í 2020. Tiknu nøgdirnar av laksi hækkaðu 32% í 2020, sammett við 2019. Hetta kemst í størstan mun av, at SSC er íroknað fyri alt 2020 og bert ein ársfjórðing í 2019. Nøgdirnar, sum vórðu seldar sum virðisøktar vørur, hækkaðu 43% í 2020. Í samtakinum vórðu tikin tilsamans 85.687 tons í kruvdari vekt, sammett við 65.109 tons í 2019. Umsetningurin frá sølu av fiskamjøli til onnur minkaði í 2020, sammett við 2019. Sølan av alifóðri til onnur lækkaði 41%.

Primerur rakstur – operationelt EBIT – var 621,2 mió kr., sammett við 1.325,1 mió kr. í 2019. Ein positiv broyting í dagsvirðisjavnan á lívfrøðiligu ognini hjá samtakinum varð staðfest í 2020. Hendan er áljóðandi 118,0 mió kr., sammett við -220,6 mió kr. í 2019. Positiva dagførisjavningin kemst mest av hægri biomassa í sjónum og styttri framleiðslutíð til tøku.

Ongar avsetingar eru gjørdar fyri tapsgevandi sáttmálar, av tí at Bakkafrost ikki hevur nakran tapsgevandi langtíðarsáttmála.

Í 2020 góvu atknýttu feløgini hjá samtakinum Bakkafrost eitt nettoúrslit á 5,5 mió kr., sammett við 13,8 mió kr. í 2019.

Fíggjarinntøkan í 2020 var áljóðandi 1,4 mió kr., sammett við 5,0 mió kr. í 2019. Netto rentukostnaðurin var áljóðandi -36,3 mió kr., sammett við -17,1 mió kr. í 2019. Netto gjaldoyraávirkanin var áljóðandi -13,1 mió kr. í mun til -12,7 mió kr. í 2019. Annar fíggjarligur kostnaður var áljóðandi -17,1 mió kr. samanborið við -12,5 mió kr. í 2019.

Nettoskattur var áljóðandi -163,1 mió kr. í mun til -180,0 mió kr. í 2019.

Konsolideraði nettovinningurin var tilsamans 462,8 mió kr. í 2020, sammett við 801,9 mió kr. í 2019. Vinningur fyri hvørt partabræv var tilsamans 7,83 kr. í 2020 samanborið við 15,53 kr. í 2019.

FÍGGJARSTØÐA

Samlaðu ognirnar hjá samtakinum vóru 13.208,3 mió kr. við árslok 2020, samanborið við 13.101,4 mió kr. við árslok 2019.

Immateriella støðisognin hjá samtakinum var áljóðandi 4.493,4 mió kr. við árslok 2020 í mun til 4.395,7 mió kr. við árslok 2019. Immateriella støðisognin stavar fyri tað mesta frá keypinum av The Scottish Salmon Company Plc., dagsvirðinum, umframt av keyptum aliloyvum í Skotlandi og í Føroyum.

Materiella støðisognin var áljóðandi 4.220,6 mió kr. við árslok 2020, sammett við 3.780,5 mió kr. við árslok 2019. Í 2019 gjørdi Bakkafrost íløgur í materiella støðisogn fyri áljóðandi 836,4 mió kr., sammett við 701,5 mió kr. í 2019. Mest týðandi íløgurnar, sum Bakkafrost framdi í 2020, vóru í smoltstøðir og nýggjan brunnbát. Aðrar íløgur eru í høvuðsheitum viðlíkahaldsíløgur.

Ognir við nýtslurætti vóru áljóðandi 353,2 mió kr. við árslok 2020 í mun til 332,8 mió kr. við ársenda 2019.

Íløgur í atknýtt feløg og partabrøv vóru áljóðandi 122,5 mió kr. við árslok 2020, samanborið við 119,1 mió kr. við árslok 2019. Hækkingin í fíggjarligari støðisogn stavar frá úrslitinum frá atknýttum feløgum.

Bakkafrost hevði 8,1 mió kr. í langfreistaðari áogn við árslok 2020, samanborið við 4,4 mió kr. við ársenda 2019.

Bókaða virðið (dagsvirðið) á lívfrøðiligu ognunum hjá samtakinum var áljóðandi 2.117,0 mió kr. við árslok 2020, sammet við 1.901,7 mió kr. við árslok 2019. Við í bókaða virðinum á lívfrøðiligu ognunum er ein javning til dagsvirði áljóðandi 145,4 mió kr., sammett við 27,7 mió kr. við árslok 2019.

Samlaða goymslan hjá samtakinum var áljóðandi 776,0 mió kr. við árslok 2020, sammett við 548,5 mió kr. við árslok 2019. Goymslan umfatar í høvuðsheitum goymsluna hjá Havsbrún av fiskamjøli, lýsi og alifóðri, umframt fóðrið á alistøðunum, lidna virðisøkta vøru, pakkitilfar og aðra rávøru.

Samlaða áognin hjá samtakinum var áljóðandi 623,6 mió kr. við árslok 2020 sammett við 671,5 mió kr. við árslok 2019.

Tøkur peningur var við árslok 2020 áljóðandi 466,9 mió kr. í mun til 1.309,5 mió kr. við ársenda 2019.

Eginognin hjá samtakinum var 8.729,5 mió kr. við árslok 2020, sammett við 8.496,9 mió kr. við árslok 2019. Vøksturin í eginognini stavar fyrst og fremst frá positiva úrslitinum fyri 2020.

Samlaða langfreistaða skuldin hjá samtakinum var áljóðandi 3.708,6 mió kr. við árslok 2020, sammett við 3.679,6 mió kr. við árslok 2019. Útsettur skattur var áljóðandi 1.222,2 mió kr., sammett við 1.123,8 mió kr. við árslok 2019.

Langfreistað rentuberandi skuld var 2.219,7 mió kr. við árslok 2020, sammett við 2.328,2 mió kr. við árslok 2019.

Avleidd fíggjarlig amboð vóru áljóðandi 11,2 mió kr. við árslok 2020, sammett við 15,5 mió kr. við árslok 2019.

Við árslok 2020 var stuttfreistaða skuldin hjá samtakinum 770,2 mió kr., sammett við 925,0 mió kr. við árslok 2019.

Vøru- og tænastuskuldin var áljóðandi 563,9 mió kr., sammett við 584,4 mió kr. við ársbyrjan.

Solvensurin hjá Bakkafrost var 66% við árslok 2020, samanborið við 65% við árslok 2019.

KR. 1.000	2020	2019
OGN		
Støðisogn		
Immateriell støðisogn	4.493.395	4.395.687
Materiell støðisogn	4.573.791	4.113.323
Fíggjarlig støðisogn	157.494	161.099
STØÐISOGN	**9.224.680**	**8.670.109**
Ogn í umferð		
Goymsla	2.893.056	2.450.237
Áogn	623.649	671.513
Tøkur peningur	466.939	1.309.546
OGN Í UMFERÐ	**3.983.644**	**4.431.296**
OGN	**13.208.324**	**13.101.405**
Eginogn	**8.729.487**	**8.496.875**
Útsettur skattur	1.222.222	1.123.796
Langfreistað rentuberandi skuld	2.219.690	2.328.231
Langfreistað leasingskuld	265.235	225.585
Avleidd fíggjaramboð	1.480	1.966
Langfreistað skuld	**3.708.627**	**3.679.578**
Stuttfreistað skuld		
Avleidd fíggjaramboð	9.710	13.493
Stuttfreistað rentuberandi skuld	563.857	584.435
Stuttfreistað skattaskuld	37.422	195.484
Stuttfreistað leasingskuld	131.336	107.808
Onnur stuttfreistað skuld	27.885	23.732
Stuttfreistað skuld	**770.210**	**924.952**
Skuld tilsamans	**4.478.837**	**4.604.530**
EGINPENINGUR OG SKULD	**13.208.324**	**13.101.405**

Gjaldføri

Samlaða gjaldførið frá rakstrinum var 474,0 mió kr. í 2020, sammett við 1.036,4 mió kr. í 2019. Gjaldførið frá rakstrinum í 2020 er fyrst og fremst orsakað av positivum úrslitum. Goldin skattur hevði negativa ávirkan á gjaldførið frá rakstrinum í 2020. Gjaldførið frá íløgum var áljóðandi -816,1 mió kr., sammett við -4.601,2 mió kr. í 2019.

Fyri 2020 var gjaldførið frá fígging áljóðandi -500,4 mió kr., sammett við 4.557,5 mió kr. fyri 2019. Broytingin í langfreistaðari rentuberandi skuld á -107,5 mió kr. hevði negativa ávirkan á gjaldførið av fígging í 2020. Onnur tøl í 2020 vóru minnilutauppkeyp á -167,6 mió kr., fíggjarligar útreiðslur á -53,4 mió kr. og leasinggjøld á -134,6 mió kr.

Við endurnýggjaðu samtaksfíggingini er gjaldførið og fíggjarliga orkan hjá samtakinum mett at vera góð. Bakkafrost hevði tøka fígging á umleið 1.674,4 mió kr. við árslok 2020.

KR. 1.000	2020	2019
Gjaldføri frá rakstrinum		
Rakstrarvinningur (EBIT)	691.123	1.019.217
Gjaldføri frá rakstri	473.970	1.036.407
Gjaldføri frá íløgum	-816.128	-4.601.246
Gjaldføri frá fígging	-500.449	4.557.491
Tøkur peningur við ársbyrjan	**1.309.546**	**316.894**
Tøkur peningur við ársenda	**466.939**	**1.309.546**

Aligeirin – Føroyar (FO)

Aligeirin framleiðir atlantslaks av bestu góðsku frá yngli til tøkubúnan laks. Laksurin verður seldur til altjóða feskfiskamarknaðir og til egna virðisøking. Aliøkini eru í Føroyum.

KR. 1.000	2020	2019	Broyting
Umsetningur í alt	2.340.261	3.152.462	-26%
EBIT	180.689	1.028.840	-82%
Operationelt EBIT	447.829	1.103.001	-59%
Aling - Operationelt EBIT/kg	8,83	19,29	-54%
Tikin nøgd (tkv)	50.700	57.184	-11%
Sjósett smolt (túsund)	14.278	12.651	13%

NØGDIR

Aligeirin hjá samtakinum tók 50.700 tons í kruvdari vekt í 2020 sammett við 57.184 tons í kruvdari vekt í 2019. Norðurøkið tók 31.030 tons í kruvdari vekt í 2020 samanborið við 18.252 tons í 2019. Vesturøkið tók 14.415 tons í kruvdari vekt í 2020 samanborið við 32.210 tons í 2019. Suðurøkið tók 5.255 tons í kruvdari vekt í 2020 sammett við 6.722 tons í 2019.

Samtakið setti 14,3 mió smolt á sjógv í 2020. Í 2019 vórðu 12,7 mió smolt sjósett.

FÍGGJARLIGT AVRIK

Nøgdir og EBIT vórðu frá síðst í 1. ársfjórðingi og restina av árinum ávirkað av marknaðarórógvini, sum stóðst av Covid-19 farsóttini. Í 2020 vóru útreiðslur á 36 mió kr. orsakað av hendingum við óvanliga høgum felli.

Samlaði umsetningurin hjá aligeiranum hjá Bakkafrost í 2020 var áljóðandi 2.340,3 mió kr., samanborið við 3.152,5 mió kr. í 2019. Hettar er ein minking á 26%. Uttanhýsis umsetningurin hjá aligeiranum hjá Bakkafrost minkaði til 1.548,6 mió kr. í 2020 úr 2.501,6 mió kr. í 2019. Nøgdirnar, ið vórðu seldar øðrum, minkaðu í 2020 samanborið við 2019. Innanhýsis umsetningurin øktist í 2020 frá 650,8 mió kr. í 2019 til 791,6 mió kr. í 2020. Nøgdirnar, ið vórðu seldar góðskingargeiranum, vóru hægri í 2020 enn í 2019.

Í 2020 var rakstrarúrslitið (operationelt EBIT) 448 mió kr. sammett við 1.103,0 mió kr. í 2019. Hetta svarar til eitt rakstrarúrslit (operationelt EBIT) á 8,83 kr. (NOK 12,69) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt sammett við 19,29 kr. (NOK 25,44) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt í 2019.

Fig. 19

UMSETNINGUR (KR. 1.000)



Fig. 20

OPERATIONELT EBIT/KG (KR.)



Fig. 21

TIKIN NØGD (TKV)



Fig. 22

SJÓSETT SMOLT (MIÓ) FO



Fig. 23

TIKIN NØGD FO (TKV)



Aligeirin – Skotland (SCT)

Gevið gætur, at samanberingartøl og -tekstur fyri 2019 í hesum partinum er pro forma fyri tíðarskeiðið áðrenn Bakkafrost keypti SSC og er ikki partur av konsolideraðu frásøgnini hjá Bakkafrost.

Skotski aligeirin umboðar vinnuvirksemið hjá The Scottish Salmon Company Plc (SSC), sum var konsoliderað frá 08. oktober 2019, tá ið Bakkafrost fekk ræðisrættin á felagnum. The Scottish Salmon Company framleiðir fyrstafloks Scottish Salmon av skotskum uppruna og við fullum sporbari. SSC hevur aliøkir fram við vesturstrondini í Skotlandi og kring Hebridurnar og útflytir kring allan heim.

KR. 1.000	2020	2019	Change
Umsetningur í alt	1.595.561	437.171	n/a
EBIT	308.265	-224.285	n/a
Operationelt EBIT	-24.013	18.129	n/a
Aling - Operationelt EBIT/kg (kr.)	-0,69	2,29	n/a
Tikin nøgd (tkv)	34.986	7.925	n/a
Sjósett smolt (túsund)	10.354	5.696	n/a

NØGDIR

Samlaða nøgdin, sum varð tikin í 2020 var 34.986 tons í kruvdari vekt, sammett við 33.799 tons í kruvdari vekt (pro forma) fyri alt árið 2019.

10,4 milliónir smolt vórðu sjósett í 2020, sammett við 12,4 milliónir smolt alt árið 2019 (pro forma).

FÍGGJARLIGT AVRIK

Nøgdir og EBIT vórðu frá síðst í 1. til 4. ársfjórðing ávirkað av marknaðarórógvini, sum Covid-19 hevði við sær. Í 2020 vóru útreiðslur á 90 mió kr. orsakað av hendingum við óvanliga stórum felli.

Umsetningurin hjá aligeiranum í SCT í 2020 var 1.595,6 mió kr., samanborið við 437,2 mió kr. í 2019.

Operationelt EBIT var -24,0 mió kr. í alt sammett við 18,1 mió kr. í 2019 (pro forma). Hetta svarar til eitt operationelt EBIT á -0,69 kr. (NOK -0,99) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt, sammett við 4,22 kr. (NOK 5,57) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt í 2019 (pro forma).

Fig. 24

UMSETNINGUR (KR. 1.000)



Fig. 25

OPERATIONELT EBIT/KG (KR.)



Fig. 26

TIKIN NØGD SCT (TKV)



Fig. 27

SJÓSETT SMOLT SCT (MIÓ)



Fig. 28

TIKIN NØGD SCT (TKV)



Góðskingargeirin

Góðskingargeirin framleiðir laksaportiónir uttan skræðu og bein í Føroyum. Høvuðsmarknaðurin fyri virðisøktu vørurnar er Evropa, men sølan til aðrar marknaðir er vaksandi. Virðisøktu vørurnar verða seldar við langtíðar sáttmálum við ásettum prísum.

KR. 1.000	2020	2019	Broyting
Umsetningur í alt	1.116.216	964.484	16%
EBIT	139.693	63.727	119%
Operationelt EBIT	139.693	63.727	119%
Virðisøktar vørur - Operationelt EBIT/kg	5,84	3,82	53%
Virðisøktar vørur nøgd (tkv)	23.931	16.690	43%

NØGDIR

Langtíðar strategiin hjá Bakkafrost er, at 40-50% av tiknu nøgdini av laksi skulu virðisøkjast. Virðisøktu vørurnar eru í høvuðsheitum portiónir til evropeiska retailmarknaðin, men nakað av sølu er eisini til amerikanska retailmarknaðin. Hugsanin við virðisøktu vørunum er – umframt at økja inntøkugrundarlagið hjá samtakinum – at minka sveiggini í nettovinninginum hjá Bakkafrost samtakinum við tað, at hesar vørur verða seldar við ymiskum sáttmálum til ásettar prísir fyri eitt tíðarskeið á upp til 12 mánaðir. Av tí at tíðarmunur er millum broytingarnar í prísinum á feskum laksi og sáttmálabundnu prísirnar, hevur góðskingargeirin hjá Bakkafrost vanliga vinning, tá ið dagsprísirnir lækka, og umvent, tá ið dagsprísirnir hækka í eina tíð.

Í 2020 fóru 47% av samlaðu tiknu nøgdunum til framleiðslu av virðisøktum vørum sammett við 29% í 2019.

Framleiðslan av virðisøktum vørum í 2020 var 23.931 tons í kruvdari vekt, samanborið við 16.690 tons í kruvdari vekt í 2019.

FÍGGJARLIGT AVRIK

Sáttmálaprísirnir í 2020 eru ikki lækkaðir við somu ferð sum dagsprísirnir, men sáttmálaprísirnir vóru á lægri støði enn í 2019. Umsetningurin hjá góðskingargeiranum var 1.116,2 mió kr. í 2020 samanborið við 964,5 mió kr. í 2019 – ein hækking á 16%.

Úrslitið av operationellum EBIT, ið er EBIT javnað fyri tapsgevandi sáttmálar vm., var tilsamans 139,7 mió kr. í 2020 sammett við 63,7 mió kr. í 2019. Hetta svarar til eitt operationelt EBIT á 5,84 kr. (NOK 8,39) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt sammett við 3,82 kr. (NOK 5,04) fyri hvørt kilo í kruvdari vekt í 2019.

Góðskingargeirin hevði ongar tapsgevandi sáttmálar við árslok 2020 ella 2019.

Fig. 29

UMSETNINGUR (KR. 1.000)



Fig. 30

OPERATIONELT EBIT/KG (KR.)



Fig.31

NØGD VIRÐISØKING (TKV)



Fig. 32

VIRÐISØKING (TKV)



Fig. 33

BÝTI AV TIKNARI NØGD (%)



Geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður

Havsbrún, ið umboðar hendan geiran, framleiðir fiskamjøl, lýsi og alifóður. Meginparturin av framleiðsluni verður nýttur til alifóður, sum verður brúkt innanhýsis í aligeiranum. Góðskan á alifóðrinum hevur stóran týdning fyri góðskuna á laksinum frá Bakkafrost. Fiskamjøl, lýsi og alifóður verða eisini seld øðrum.

KR. 1.000	2020	2019	Broyting
Umsetningur í alt	1.418.970	1.388.461	2%
EBIT	181.610	257.870	-30%
EBITDA	207.695	275.796	-25%
EBITDA avlop	14,6%	19,9%	-26%
Fóðursøla (tons)	111.998	97.408	15%

NØGDIR

Rávørustøðan hjá Havsbrún er vorðin betri seinastu árini til virking av fiskamjøli og lýsi. Virkaða fiskamjølið og lýsið vórðu lutvíst nýtt til egna fóðurframleiðslu og lutvíst útflutt. Í 2020 tók Havsbrún ímóti 283.307 tonsum av rávøru sammett við 278.664 tons í 2019, sum svarar til ein vøkstur á 2%. Hvussu nógvari rávøru, tikið verður ímóti, er treytað av fiskiskapinum í Norðuratlantshavinum, og hvørji fiskasløg eru at fáa.

Framleiðslan av fiskamjøli var 60.661 tons í 2020 sammett við 60.646 tons í 2019. Framleiðslan av lýsi var 9.932 tons í 2020 í mun til 9.633 tons í 2019. Framleiðslan av lýsi broytist, alt eftir hvørji fiskasløg fáast til framleiðsluna, og nær tey verða fiskað.

Havsbrún seldi 111.998 tons av alifóðri í 2020 í mun til 97.408 tons í 2019. Bakkafrost nýtti 94.345 tons av selda fóðrinum í 2020. Hetta svarar til 84%. Í 2019 var egna nýtslan 76.583 tons, svarandi til 79%.

FÍGGJARLIGT AVRIK

Samlaði umsetningurin hjá geiranum fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður hjá Bakkafrost var áljóðandi 1.419,0 mió kr. í 2020 samanborið við 1.388,5 mió kr. í 2019, ein vøkstur á 2%.

Umsetningurin til onnur hjá geiranum fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður var áljóðandi 391,5 mió kr. í 2020 sammett við 607,8 mió kr. í 2019. Lækkingin í uttanhýsis umsetninginum frá 2019 til 2020 stavaði fyrst og fremst frá lægri sølu av alifóðri til onnur.

Innanhýsis umsetningurin í 2020 var áljóðandi 1.027,5 mió kr. í mun til 780,7 mió kr. í 2019. Innanhýsis umsetningurin fevnir um søluna av alifóðri til alivirksemið hjá Bakkafrost í Skotlandi og Føroyum.

EBITDA var 207,7 mió kr. í 2020 sammett við 275,8 mió kr. í 2019, og EBITDA avlopið var 14,6% í 2020 í mun til 19,9% í 2019.

Fig. 34

EBITDA Í ALT (KR. 1.000)



Fig. 35

Søla alifóður (tons)



Fig. 36

EBITDA AVLOP %



Fig. 37

FRAMLEIÐSLA ALIFÓÐUR (TONS)



Fig. 38

KEYP AV RÁVØRU (TONS)



Frágreiðing um marknaðin

Bakkafrost hevur bundið seg til at framleiða leskiligan, heilsugóðan, burðardyggan og hágóðsku laks, ið veruliga skapar kundunum virðir. Hetta gevur eitt eykagjald fyri hvørt kilo av laksi, sum sæst aftur í fíggjarligu úrslitunum hjá samtakinum.

Bakkafrost samtakið ætlar at styrkja hesa støðuna enn meira við at gera íløgur í fjølbroytni og hesi serstøku sølu eyðkenni:

UPPRUNI

Náttúrugivnu umstøðurnar og kaldi sjógvurin í Norðuratlantshavi kring Føroyar eins væl og í Skotlandi eru júst tær røttu fortreytirnar at ala laks. Bakkafrost fer at leggja seg enn meira eftir at marknaðarføra hendan serstaka upprunan sum ein hágóðsku laks í serflokki.

AVMARKAÐ NØGD

Ásannað verður kring heimin, at laksur úr Føroyum og Skotlandi er av bestu góðsku, men av tí at Føroyar bert framleiða umleið 3,0% og Skotland 6,7% av heimsins laksi, verður laksur av hesum upprunum nógv eftirspurdur. Laksur okkara verður tikin fram um annan laks av útvaldum kundum, ið eru tilreiðar at gjalda hægri prís fyri vøruna.

STÓRUR LAKSUR

Føroyska alivinnan er kend fyri at framleiða størsta atlantslaksin í heiminum. Prísmunurin á ymsu støddunum av laksi hevur verið eyðsýndur seinastu árini. Orsakað av manglandi útboði hevur laksur størri enn 6 kilo fingið munandi hægri prís. Bakkafrost hevði stórt úrval av størru støddunum av laksi og kundi tí fáa fyrimun av hesi støðuni. At ala stóran laks krevur góða lívfrøði. Tess longur laksurin er í sjónum, tess meira útsettur er hann fyri ymsum váðum, sum í øllum natúrligum umhvørvi.

SØLA OG LANDAFRØÐILIG SPREIÐING

Sølu- og marknaðardeildin hjá Bakkafrost hevur ábyrgdina av at selja laksin hjá Bakkafrost kring heimin. Samtakið miðar ímóti at selja laksin so beinleiðis sum møguligt til geirarnar, har eginleikarnir hjá laksinum frá Bakkafrost eru viðurkendir og eykagjald kann røkkast. Strategiin hjá Bakkafrost er at hava eina góða landafrøðiliga spreiðing at avmarka váðan fyri sveiggjum á hvørjum einstakum marknaði.

RØKKA KRING ALLAN HEIMIN

Skjótar og álítandi flutningsleiðir, ið røkka kring allan knøttin, eru lívsneyðugar, tá ið feskar vørur, ið skjótt kunnu spillast, skulu flytast hagar, sum tær verða eftirspurdar kring heimin. Til tess at varðveita eina leiðandi støðu á hesum øki arbeiðir Bakkafrost tætt saman við týðandi flutningsfeløgum fyri at tryggja munadyggan flutning og fyrsta floks tænastu til kundar kring heimin. Hetta tryggjar at laksurin hjá Bakkafrost verður sendur so feskur, sum til ber, við flutningsførum til stórar floghavnir, haðani laksurin verður fluttur á marknaðirnar kring heimin við ferðafólkaflogførum.

GEIRABÝTI

Bakkafrost vørumerkið er serliga sterkt í USA, haðani eftirspurningur eftir laksi oman fyri 6 kilo er serliga stórur, serstakliga frá sushi geiranum. Marknaðarparturin í Kina er eisini stórur.

Góða burðardygga vangamyndin hjá laksi frá Bakkafrost er serstakliga týdningarmikil fyri kundar, ið gjalda yvirprís í sushi geiranum. Bakkafrost nýtir eingi antibiotika og nýtir bert rávøru, sum ikki er íleguviðgjørd, í fóðrinum.

Fig. 39

VIRÐISØKTAR VØRUR

Bakkafrost er ein av fremstu framleiðarunum av frystum laksaportiónum. Høvuðsmarknaðirnir eru leiðandi evropeiskar og amerikanskar handilsketur. Bakkafrost økir virðið á framleiðsluni av virðisøktum vørum við at leggja dent á hágóðsku vørur og at vera ein álítandi og ábyrgdarfullur veitari.

Strategiin um at spreiða framleiðsluna av ymsu vørunum hjá Bakkafrost hevur aðrar greiðar fyrimunir fyri samtakið. Hon ger umsetningin støðugari við 6 og 12 mánað avtalaðum sáttmálum og hevur ein sølumarknað fyri heilan feskan fisk, tá ið marknaðurin ikki er til vildar.

ALIFÓÐUR

Fóðrið er eitt av týdningarmestu liðunum í aling av laksi, bæði tá ið hugsað verður um kostnað og góðsku á laksinum.

VERTIKAL SAMEINING

Bakkafrost er ein av mest vertikalt sameindu fyritøkunum innan laksaaling í heiminum. Sum eitt eindømi virkar Bakkafrost enntá sítt egna fiskamjøl og lýsi. Hetta gevur Bakkafrost fult tamarhald og fulla ábyrgd av øllum liðum í framleiðsluni, og tað gevur kundum okkara eitt sporføri, ið ikki kann javnsetast.

FÓÐUR VIÐ HØGUM MARINUM INNIHALDI

Vertikala sameiningin gevur Bakkafrost vitanina og førleikan at velja at gera íløgur í alifóður við einum munandi hægri marinum innihaldi. Natúrligi kosturin hjá villum laksi hevur nógv marint tilfeingi í sær og við at hava føðina hjá laksinum hjá Bakkafrost so natúrliga sum møguligt, ber til hjá samtakinum at hava ein av lægstu fóðurfaktorunum í vinnuni, sum er ein greið ábending um, at fiskurin hevur tað gott. Harafturat medvirkar lági fóðurfaktorurin til lægri framleiðslukostnað.

Nógva marina innihaldið í føðini er týdningarmesti tátturin fyri góðskuna á laksinum hjá Bakkafrost samtakinum. Marina innihaldið tryggjar skilabesta feittinnihaldið, fult av heilsugóðu Omega-3 feittsýrunum DHA og EPA. Hesin natúrligi kosturin tryggjar eisini njótingina í framúr góða smakkinum á laksinum hjá Bakkafrost.

ASC

Bakkafrost leggur dent á burðardygd og umsorgan fyri umhvørvinum, har tað hevur virksemi, og tað er grundleggjandi fyri skynsamar kundar. Bakkafrost var ein av fyrstu fyritøkunum at fáa ASC góðkenning, sum undirstrikar dentin hjá Bakkafrost á burðardygd, og í 2020 vóru øll aliøki hjá Bakkafrost í Føroyum ASC góðkend.

NÝTSLA AV SJÓGÆTI

Fiskiveiða og havbúnaður vórðu mett til umleið 178 millónir tons í 2018. Av hesum vórðu umleið 156 milliónir tons gagnnýtt sum matvøra. Hetta svarar til eina nýtslu av sjógæti (umroknað til livandi vekt) á 20 kg fyri hvønn íbúgva í heiminum. Samlaða útboðið í ES var í 2018 mett til 14,7 millónir tons til høvuðsmarknaðin fyri veitarar innan fiskiskap og havbúnað í Evropa. Hetta svarar til eina lækking á 1% í mun til 2017. Nýtslan fyri hvønn íbúgva í ES var í 2018 mett til 24,4 kg (umroknað til livandi vekt).

Samlaða framleiðslan frá alheims fiskiskapi er framvegis støðug – omanfyri 90 millónir tons. Av hesum verða umleið 20 milliónir tons gagnnýtt til framleiðslu av fiskamjøli og lýsi. Tann parturin, ið ikki hevur verið nýttur til matvøru, hevur verið støðugur seinastu 2–3 árini.

Ímeðan framleiðslan frá fiskiveiðu hevur staðið í stað, er tað framleiðslan frá havbúnaðinum, sum heldur á at nøkta økta eftirspurningin eftir sjógæti. Hetta rákið kemur væntandi at halda fram komandi árini.

Fig. 40

FRAMLEIÐSLA AV SJÓGÆTI (FRÁ ALHEIMS FISKIVEIÐU OG ALIVINNU) TIL MANNAFØÐI OG NÝTSLA FYRI HVØNN ÍBÚGVA



Kelda: Kontali, FAO

HØVUÐSMARKNAÐIR FYRI LAKS OG NÝTSLURÁK

Í 2020 vaks alheims útboðið av aldum atlantslaksi 4% og fór uppum 2,6 milliónir tons í livandi vekt (lv). Hetta svarar til ein vøkstur beint undir 100.000 tons (lv). Vøkstur var í útboðnum til Evropa (+60.000 tons lv) og Norður Amerika (+40.000 tons lv), meðan útboðið til onnur øki minkaði.

Útboðið av atlantslaksi í 2020 má síggjast í ljósinum av COVID-19 farsóttini. Avmarkingar og stongsul hava minkað um eftirspurningin frá matstovuídnaðinum, og tað hevur økt um eftirspurningin eftir vørum í retailgeiranum. Umframt hetta hava forðingar á flutningsleiðunum, so sum minkaður kapasitetur innan farmaflúgving og økt flutningsgjøld, avmarkað marknaðaratgongdina og møguleikarnar enn meira.

Evropeisku dagsprísirnir fyri atlantslaks lendu beint omanfyri 55 NOK fyri kg (-5%) ella 5,2 EUR per kg (-13%). Serliga økta bundni at Evropeiska marknaðinum (retailgeiranum) og víðarigóðsking fórdu við sær lágar príshækkingar frá 2. ársfjórðingi 2020. Eitt líknandi rák sást eisini á amerikanska marknaðinum við lægri marknaðarprísi fyri vørur, framleiddar úr atlantslaksi, og bundni til at selja ígjøgnum retailgeiran.

Fig. 41

NÝTSLA AV ALDUM ATLANTSLAKSI FYRI HVØNN ÍBÚGVA FYRI ÚTVALDAR MARKNAÐIR (KG LV/ÍBÚGVA)



Kelda: Kontali

AMERIKANSKI MARKNAÐURIN

USA hevur verið hart rakt av Covid-19 farsóttini (27 milliónir tilburðir og 466 túsund deyð *jan 2021). Hóast hettar øktist innflutninginum av atlantslaksi munandi í 2020. Amerikanski marknaðurin fyri aldan atlantslaks øktist við meir enn 40.000 tonsum (lv) - til eitt samlað útboð uppá 562.100 tons. Við einum fólkatali á 329 milliónir svarar hetta til eina nýtslu fyri hvønn íbúgva á umleið 1,7 kg lv – ella 5-6 verðar fyri hvønn íbúgva um árið.

Marknaðurin á eysturstrondini varð sera nógv ávirkaður, tá farsóttin tók seg upp. Ein stórur partur av matstovutænastuvinnuni (hotell, matstovur og vistaveiting) lat aftur fyribils og hevði hetta stóra ávirkan á veitingarnar av laksi frá evropeiskum framleiðarum. Síðani tá eru eisini onnur økir í USA latin aftur. Útboðið av atlantslaksi til amerikanska marknaðin broyttist munandi í 2020 og veitarar hava lagað seg til støðuna við at leggja størri dent á retailgeiran, har sølan er økt munandi undir farsóttini. Hendan tillaging hevur við sær øktan innflutning av feskum og frystum fløkum til amerikanska marknaðin.

Økingin uppá 40.000 tons í útboðnum frá Kili (+14%) skal síggjast saman við framleiðsluøking og øktari tøkunøgd i Kili. Harumframt hevur COVID-19 farsóttin, minkaður eftirspurningur, og avbjóðingar gjørt marknaðarumstøðurnar fyri kilenskan alilaks truplari. Atgongd til amerikanska marknaðin saman við evnunum hjá smásølugeiranum at taka stórar nøgdir, loyvdi hesum vøkstri. Samstundis fall miðal útflutningsprísurin á kilenskum laksafløkum frá 10 USD/kg í 2019 til 7,8 USD/kg seinasta ár (-22%).

Fig. 42

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI Á AMERIKANSKA MARKNAÐINUM (TONS LV)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Kili	99.100	162.200	191.600	214.700	224.100	217.300	220.400	267.200	284.300	325.100
Kanada	80.400	98.200	77.400	55.000	92.900	100.900	92.100	90.500	91.600	91.600
Noreg	28.700	23.700	27.000	39.900	51.200	55.700	68.400	67.300	68.300	68.200
Føroyar	16.600	13.100	16.400	17.100	14.700	16.900	14.800	12.800	18.500	14.800
Stóra Bretland	21.500	17.700	16.100	20.400	16.300	12.700	18.000	16.100	20.300	11.900
USA	13.200	9.400	10.100	16.200	13.800	7.700	13.100	7.300	8.100	8.900
Onnur	6.800	5.700	11.400	10.600	14.600	16.300	19.600	22.700	29.700	41.600
Ialt	**266.300**	**330.000**	**350.000**	**373.900**	**427.600**	**427.500**	**446.400**	**483.900**	**520.800**	**562.100**

Fig. 43

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI Á AMERIKANSKA MARKNAÐINUM (TONS LV)



Kelda: Kontali

ES MARKNAÐURIN

Í 2020 vaks útboðið av aldum atlantslaksi á ES marknaðinum (íroknað Stóra Bretland) við 5,3%, ella 60.000 tons (lv) – til eitt útboð á ialt 1,19 milliónir tons (lv). Ialt 512 milliónir búgva í ES og svarar hetta til eina nýtslu fyri hvønn íbúgva á 2,3 kg (lv) um árið – ella 7–8 verðar.

Týskland, Frakland og Stóra Bretland standa fyri umleið 50% av samlaðu nýtsluni. Sostatt eru hesi londini størstu størstu laksa nýtslumarknaðirnar í ES.

COVID-19 farsóttin hevur fört við sær, at ein størri partur av søluni hjá evropeiskum framleiðarum er komin á evropeiska marknaðin. Grundin til hetta var avbjóðingar við loftvegis flutningi til aðrar marknaðir saman við avmarkingum og stongsli, sum minkaðu um eftirspurningin frá matstovugeir-anum. Handilsstreymarnir vóru ávirkaðir av einum meira miðsavnaðum marknaði, við øktum bundni til sølu ígjøgnum retailgeiran, har lond við framleiðsluorku til víðarigóðsking av laksi (t.d. Póland +20%) høvdu munandi vøkstur í nøgd í 2020.

Fig. 44

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI TIL ES MARKNAÐIN (ES+STÓRA BRETLAND) (TONS LV)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Noreg	648.400	761.900	755.500	834.600	912.200	860.200	841.400	910.800	944.500	993.800
Stóra Bretland	117.500	117.000	110.300	117.800	121.100	115.400	124.900	108.000	142.300	154.700
Kili	17.200	27.000	50.200	50.500	44.900	53.900	42.500	40.700	36.200	40.900
Føroyar	28.700	36.800	34.300	32.300	20.400	28.400	27.800	20.600	30.800	33.200
Onnur/ Re-export	-9.000	-9.600	-19.100	-30.100	-27.700	-16.900	-17.100	-25.800	-23.200	-32.800
Ialt	**802.800**	**933.100**	**931.200**	**1.005.100**	**1.070.900**	**1.041.000**	**1.019.500**	**1.054.300**	**1.130.600**	**1.189.800**

Fig. 45

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI TIL ES MARKNAÐIN (ES+STÓRA BRETLAND) (TONS LV)



Kelda: Kontali

KINA / HONG KONG

Útboðið av atlantslaksi til Kina og Hong Kong meir enn 3-faldaðist í árunum frá 2010 til 2019 til 124.000 tons (lv). Mest merkisvert vaks útboðið úr Kili, men eisini frá framleiðarum í Evropa (Noreg, Føroyum og Stóra Bretlandi). Útboðið til Kina er í høvuðsheitum heilur feskur, stórur laksur (6+ kg), har matstovugeirin eigur ein stóran part av nýtsluni.

Útboðið til Kina og Hong Kong minkaði við meir enn 30% (40.000 tons lv) í fyrru helvt av 2020 grundað á COVID-19 stongsulin av Kina. Minni kapasitetur í loftvegis flutningi frá 2. ársfjórðingi og ógvusligar hækkingar í flutningsprísum tarnaðu marknaðarmøguleikunum.

Ein onnur orsøk, sum avmarkaði eftirspurningin í seinnu helvt av 2020, var óttin fyri at COVID-19 smitta kundi verða borin víðari við feskum og frystum matvørum. At nýggjar eftirlitsskipanir vóru settar í verk fyri innflutt sjógæti til Kina, hevði við sær seinkingar í innflutningi av feskum sjógæti, íroknað atlantslaks. Afturat hesum komu góðkenningarskipanir fyri veitarar (eftirlitis- og sóttarhaldsváttanir, upplýsingar um sporføri o.s.fr.).

Útboðið til Kina frá bæði Kili (-17.000 tons lv) og Evropa (-26.500 tons lv) minkaði munandi síðsta ár, meðan útboðið frá Avstralia øktist (+3.000 tons lv) grundað á landafrøðiligu staðsetingina og minni ávirkan av COVID-19.

Fig. 46

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI TIL KINA OG HONG KONG (TONS LV)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Noreg	21.840	32.370	32.190	34.140	31.110	16.480	17.860	30.920	42.990	32.540
Kili	1.180	5.470	10.750	19.960	18.270	29.280	27.790	44.770	45.540	28.580
Stóra Bretland	1.740	8.120	12.200	16.430	14.920	12.250	12.660	12.370	10.900	3.360
Danmark	50	90	300	350	130	80	340	330	320	220
Avstralia	870	270	230	940	6.420	1.360	9.630	6.770	7.590	10.810
Føroyar	530	6.780	9.710	11.050	9.520	10.410	8.730	10.620	14.690	6.280
Kanada	60	600	410	280	2.430	5.790	2.120	5.090	870	680
Onnur	70	6.060	10.090	3.240	2.570	12.220	18.590	800	960	920
Ialt	**26.340**	**59.760**	**75.880**	**86.390**	**85.370**	**87.870**	**97.720**	**111.670**	**123.860**	**83.390**

Fig. 47

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI TIL KINA OG HONG KONG (TONS LV)



Kelda: Kontali

Fig. 48

ALHEIMS ÚTBOÐ AV ØLLUM LAKSASLØGUM (TONS LV)

	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Atlantslaksur	1.633.400	1.998.550	2.041.250	2.229.300	2.318.600	2.162.550	2.291.400	2.403.400	2.581.800	2.715.400
Smá síl	490.600	534.100	577.500	555.700	573.400	612.700	630.800	648.300	666.300	689.300
Chum	274.600	294.700	338.300	321.900	338.100	280.900	261.100	268.600	228.600	180.600
Pink	587.500	410.300	580.600	307.900	398.900	354.300	448.400	591.400	524.500	285.200
Stór síl	344.400	385.900	320.600	307.300	280.400	278.100	260.400	262.400	293.600	307.100
Sockeye	148.800	142.300	133.200	173.700	190.300	183.000	173.700	171.600	178.400	160.200
Coho	174.400	191.000	176.800	200.400	190.600	151.800	194.900	211.100	234.600	227.800
Chinook	22.000	18.800	19.500	18.800	20.900	19.200	19.900	19.800	20.600	20.600
Ialt	**3.675.700**	**3.975.650**	**4.187.750**	**4.115.000**	**4.311.200**	**4.042.550**	**4.280.600**	**4.576.600**	**4.728.400**	**4.586.200**

Fig. 49

ALHEIMS ÚTBOÐ AV ØLLUM ALDUM OG VILLUM LAKSASLØGUM (TONS LV)



Kelda: Kontali

ALHEIMS TØKA AV ALDUM ATLANTSLAKSI

Noreg er størsta framleiðaralandið av atlantslaksi og stóð fyri 50% av alheims framleiðsluni í 2020. Seinastu 2–3 árini er mest loyvdi biomassi øktur bæði við „ferðsluljós"-skipanini og við nýggjum menningarloyvum. Hettar hevur fört við sær størri vøkstur og goymslu. Tó hava avbjóðingar við laksalús og høgur viðgerðartíttleiki avmarkað framleiðsluna, millum annað við mistum fóðurdøgum, sum minka um tøkuvektina.

Næststørsta framleiðaralandið av atlantslaksi, Kili, stóð fyri 29% av altjóða framleiðsluni í 2020. Kili er komið fyri seg lívfrøðiliga aftaná ILA kreppuna í 2008-2009, og framleiðnið er batnað ár um ár. Aftaná stóra fellið, orsakað av kreppuni við alguvøkstri í 2016, hevur kilenska vinnan áhaldandi víst betringar í lyklaframleiðslutølum. Í 2020 var tøkunøgdin tann hægsta nakrantíð.

Í øðrum evropeiskum aliøkjum minkaði samlaða tøkunøgdin við 3%, við lægri framleiðslu bæði í Føroyum og Stóra Bretlandi seinasta ár. Framleiðslan í Norður Amerika (Kanada) var á sama støði, meðan framleiðslan vaks í Íslandi og Avstralia.

Onnur øki við vanligari aling av laksi á sjónum eru Írland og Russland, ið framleiða minni enn 20.000 tons lv. Har afturat kemur alheims tøkunøgdin frá alistøðum á landi, sum er mett til umleið 8.500 tons lv í 2020.

Fig. 50

ALHEIMS TØKUNØGDIR AV ATLANTSLAKSI (TONS LV)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Noreg	1.005.600	1.183.100	1.143.600	1.199.000	1.234.200	1.171.100	1.207.800	1.253.400	1.333.400	1.369.200
Kili	221.000	364.000	468.100	582.900	598.200	504.400	564.200	660.100	690.300	778.400
Stóra Bretland	154.700	159.400	157.800	170.500	166.300	157.400	177.200	152.100	190.500	181.200
Norður Amerika	137.800	156.100	135.400	119.000	155.400	168.500	158.700	165.400	158.800	161.400
Føroyar	56.300	70.300	72.600	82.700	75.600	77.300	80.300	71.700	86.600	80.800
Írland	16.000	15.600	10.600	12.300	15.700	15.800	17.000	14.300	15.500	15.800
Avstralia	36.000	40.000	39.000	42.000	54.400	50.900	61.200	62.600	64.000	77.800
Ísland	1.200	3.250	3.350	4.400	3.600	8.100	11.600	13.600	24.500	31.200
Russland	4.000	6.000	10.000	14.500	13.600	5.000	8.600	5.400	11.500	11.000
Onnur	700	300	300	300	300	450	500	500	500	500
Aling á landi	100	100	300	1.800	1.300	3.500	4.200	4.300	6.200	8.300
Ialt	**1.633.400**	**1.998.150**	**2.041.050**	**2.229.400**	**2.318.600**	**2.162.450**	**2.291.300**	**2.403.400**	**2.581.800**	**2.715.600**

Fig. 51

ALHEIMS TØKUNØGDIR AV ATLANTSLAKSI (TONS LV)



Kelda: Kontali

ÚTBOÐ AV ALDUM ATLANTSLAKSI ÚR FØROYUM

Lívfrøðiliga úrslitið hjá føroyskum alarum hevur verið tað besta í heiminum seinasta tíggjuáraskeiðið – við lítlum felli, høgum tøkuvektum og hægstu smoltúrtøku í vinnuni.

Seinastu 5 árini hevur føroyska alivinnan tó havt nakað av avbjóðingum við fiskaheilsu. Hetta er millum annað táknusjúka (t.d. felli í 2017), hægri lúsatøl, óvanligar hendingar (t.d. felli grundað á illveður), og hevur hetta ávirkað framleiðsluna. Í 2019 var skrásetta tøkunøgdin omanfyri 85.000 tons lv (+21%). Hetta er hægsta tøkunøgd nakrantíð. Seinasta ár fall útboðið úr Føroyum við umleið 7% (5–6.000 tonsum), sjálvt um tað framvegis er mett at fara uppum 80.000 tons lv.

Útboðið í 2020 var nógv ávirkað av avbjóðandi marknaðarumstøðum. Hetta ger seg mest galdandi á marknaðum, har laksurin verður fluttur loftvegis (t.d. Kina). Á teimum marknaðum, har laksurin verður fluttur við skipi og trailarum, vaks sølan hinvegin bæði í nøgd og lutfalsliga. Parturin av føroyska útflutninginum, sum fer á russiska marknaðin í 2020, er mettur til 24%, í mun til 21% í 2019. Samstundis er útflutningurin til ES, høvuðsmarknaðin hjá føroyskum laksi, komin uppá 40% í 2020, ein vøkstur uppá umleið 5% frá 2019.

Fig. 52

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI ÚR FØROYUM (TONS LV)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Russland	2.373	7.997	2.613	15.465	25.660	19.798	24.096	23.812	18.276	17.318
USA	16.579	13.085	16.394	17.105	14.671	16.908	14.820	12.829	18.469	13.297
Kina	3.648	6.738	9.603	10.945	9.505	10.305	8.556	10.615	14.539	5.633
Danmark	5.195	4.806	1.447	2.122	5.489	5.010	4.920	7.654	10.860	9.600
Stóra Bretland	7.631	9.466	10.199	9.050	4.633	8.024	5.621	6.538	5.015	3.494
Spania	3	33	0	0	0	19	92	306	3.973	4.653
Týskland	6.265	8.637	11.439	11.256	5.404	8.156	10.916	1.421	2.646	2.888
Holland	637	1.466	906	176	138	651	1.056	460	2.150	1.472
Italia	43	25	75	0	253	363	404	599	1.776	1.438
Frakland	3.636	5.304	3.938	3.663	1.740	3.061	1.557	1.375	1.352	2.459
Onnur	8.158	13.056	15.071	11.557	7.266	5.780	7.273	5.183	7.399	8.782

Fig. 53

ÚTBOÐ AV ATLANTSLAKSI ÚR FØROYUM TIL 10 TEIR STØRSTU MARKNAÐIRNAR (TONS LV)



Kelda: Kontali

BROYTING Í MARKNAÐARÚTBOÐI OG MARKNAÐARPRÍSI

Fyrsta ársfjórðing 2020 vóru laksaprísirnir yvirhøvur høgir, umleið 70 NOK per kg. Nærum ongin vøkstur var í alheims útboðnum og evropeiski marknaðurin var enn ikki ávirkaður av COVID-19.

COVID-19 farsóttin kring heimin hevði við sær avmarkingar, ið ávirkaðu laksamarknaðin. Til dømis ávirkaði minni ferðing og afturlatingar av londum eftirspurningin frá matstovuídnaðinum. Sum úrslit av hesum gjørdist alheims laksamarknaðurin alt meira miðsavnaður við øktum bundni at sølu til retailgeiran. Bæði marknaðarjavnvágin og prísstøðið á feskum, heilum laksi vóru ávirkað frá 2. ársfjórðingi, samantvinnað við at vøkstur var í útboðnum. Hetta førdi til, at evropeisku miðal dagsprísirnir fyri feskan hágóðsku laks vóru um 46 NOK/kg í seinnu helvt av 2020.

Laksaframleiðsluvinnan í Evropa hevur havt ein søguliga týðandi leiklut undir kreppuni í 2020. Vinnan hevur stóra framleiðsluorku, góðar møguleikar at taka ímóti størri nøgdum og at framleiða størri nøgdir til retailgeiran – til dømis royktan laks, fesk laksafløk og frystar laksavørur. Póland, ið er størsti miðdepilin fyri víðarigóðsking av laksi, hevði ein munandi vøkstur í 3. og 4. ársfjórðingi 2020. Hetta vísir økta bundnið og marknaðarsavningina, sum er hildin fram í 2021.

Fig. 54

ÚTBOÐ OG MARKNAÐARPRÍSIR



Kelda: Kontali

15 TEY STØRSTU ALIFELØGINI

Í 2019 tóku 15 tey størstu laksaalifeløgini í heiminum umleið 1,9 milliónir tons lv (atlantslaksur, coho, chinook, stór síl), umboðandi 62% av samlaðu tøkunøgdini. Í Noregi stóðu hesi feløgini fyri 59% av samlaðu tøkuni og í Kili var talið 70%.

Fig. 55

15 TEY STØRSTU ALIFELØGINI Í 2019 (TØKUNØGD, ØLL ALD LAKSASLØG)

Feløg	Høvuðssæti	Ialt	Noreg	Stórabr.	Kili	Norðuram.	Føroyar	Onnur
Mowi	NO	484.300	263.200	72.600	73.000	60.400	7.700	7.400
Agrosuper * ("New Aquachile")	CL	218.000			218.000			
Cermaq Group	NO	210.000	80.700		109.500	19.800		
Lerøy Seafood Group **	NO	175.800	175.800					
Salmar **	NO	170.100	159.200					10.900
Cooke Aquaculture	CA	107.800		26.000	19.000	62.800		
Multiexport	CL	95.500			95.500			
Grieg Seafood	NO	92.200	64.000	12.500		15.700		
Australis Seafood	CL	72.000			72.000			
Bakkafrost * **	**FO**	**63.500**					**63.500**	
Salmones Camanchaca	CL	58.000			58.000			
Nova Sea ****	NO	51.100	51.100					
Nordlaks	NO	43.900	43.900					
The Scottish Salmon Company * **	**UK**	**37.600**		**37.600**				
Salmones Blumar	CL	36.800			36.800			
15 tey størstu		1.916.600	837.900	148.700	681.800	158.700	71.200	18.300
Ald laksasløg		3.098.300	1.411.700	195.300	977.400	169.300	86.600	258.000
Partur		62%	59%	76%	70%	94%	82%	7%

* Aquachile, Salmones Magellanes, Los Fiordos and Friosur løgdu saman í 2018
** Nøgdir frá Scottish Sea Farms (50% partur) ikki íroknaðar
*** Bakkafrost keypt The Scottish Salmon Company í 4. ársfjórðingi 2019
**** Mowi eigur 48% í Nova Sea

Øll ald laksasløg (atlantslaksur, stór síl, Coho og Chinook). Tølini eru avrundað til 100 tons lv

Kelda: Kontali

FRÁGREIÐING UM VINNUNA – ALIFÓÐUR

Samlaða fóðurnýtslan til sjóald laksasløg er vaksin við umleið 1,3 milliónum tonsum seinastu tíggju árini. Fóðurnýtslan er farin upp um 4,6 milliónir tons í 2020. Noreg og Kili standa fyri umleið 75% av hesum vøkstrinum.

Tillutan av nýggjum aliloyvum og øktum smoltnøgdum í Noregi hevur givið rúm fyri framleiðsluvøkstri og øktari fóðurnýtslu seinastu 2-3 árini. Í Kili hava hægri smoltnøgd og betra framleidni (hægri vekt) fört til hægri fóðurnýtslu.

Samlaða fóðurnýtslan í Europa í 2020 endaði methøg við einum vøkstri á 8%. Í seinasta ársfjórðingi var vøksturin nærum 16% í Noregi, sum stóðst av stórari øking í nýggjasta ættarliðnum (20G grundað á áður økta smoltnøgd og munandi øking av stórum smoltum (+250 gramm)). Samstundis var stórur vøkstur (næstan 10%) í øðrum evropeiskum framleiðsluøkjum, serstakliga í Stóra Bretlandi, Føroyum og Íslandi.

Fóðurnýtslan í Kili hevur verið minkandi fyrra hálvár 2020 aftaná stóran vøkstur í fóðurnýtsluni í 2019 og vøkstur í tøkunøgdini í 2020. Hetta skal síggjast í samband við lægri smoltnøgd bæði í seinna hálvári 2019 og fyrra hálvári 2020 og lægri biomassa seinast í 2020.

Rákið seinasta tíggjuáraskeiðið hevur verið soleiðis, at parturin av marinum rávørum í fóðri til ald laksasløg hevur verið minkandi. Hóast hettar ávirka prísirnir á fiskamjøli og lýsi framvegis fóðurprísin til alarar.

Alheims útboðið av mjøli og lýsi øktist frá árinum fyri, orsakað av øking í fiskiskapinum eftir peruanskum ansjósum í 2020. Alheims framleiðslan av fiskamjøli er mett at økjast við umleið 5% til 5,1 milliónir tons. Lýsiframleiðslan er mett at økjast við umleið 7% til 1,25 milliónir tons í 2020.

Kina innflutti umleið 1,4 milliónir tons av fiskamjøli í 2020. Hetta var áleið sama nøgd sum árið frammanundan, men omanfyri miðal innfluttu nøgdina á 1,3 milliónir tons seinasta tíggjuáraskeiðið. 46% av nøgdunum vórðu keyptar úr Peru, 8% úr Kili, meðan tey írestandi 18% komu frá øðrum asiatiskum veitarum (í høvuðsheitum úr Vjetnam og Tailandi). Fram til august í fjør var innflutningurin úr Peru sera nógv tarnaður av umfarssóttini, men tapið hevur mánaðirnar aftaná næstan javnað seg aftur.

Prísirnir fyri fiskamjøl verða væntandi verandi høgir, tí eftirspurningurin eftir fiskamjøli er framvegis stórur, og stórir partar av seinastu framleiðsluni í Peru eru seld í forsølu, áðrenn fiskitíðarskeiðið er byrjað. Verandi høgi prísurin á soyamjøli og soyaolju – vørur, sum verða nýttar í staðin fyri marin protein og lýsi - benda eisini á varandi høgar prísir. Um prísurin á soyamjøli heldur sær á núverandi støði, verður tað meir áhugavert at keypa fiskamjøl. Tískil fer prísurin á fiskamjøli og lýsi helst at halda áfram við at hækka.

Lutfallið í prísi millum fiskamjøl (Hamburg) og soyamjøl (Hamburg) er higartil í ár minkað til minni enn 3, sum er tað lægsta síðani mars 2014, og munandi undir 4,5, sum er frá juni 2020.

Fig. 56

METT FÓÐURNÝTSLA/SØLA TIL LAKSASLØG HJÁ ÚTVALDUM FRAMLEIÐSLULONDUM AV ALIFISKI ATLANTSLAKSUR, STÓR SÍL, COHO OG CHINOOK (1.000 TONS)

Land	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020E
Noreg	1.494	1.652	1.618	1.738	1.743	1.704	1.822	1.837	1.965	2.120
Kili	1.037	1.255	1.209	1.263	1.239	1.036	1.191	1.269	1.406	1.336
Stóra Bretland	227	210	223	231	245	244	242	249	273	286
Norður Amerika	225	235	202	235	255	264	282	289	307	286
Føroyar	85	89	96	98	103	107	101	103	108	116
Onnur	263	280	291	324	346	354	382	393	440	455
Tilsamans	**3.330**	**3.720**	**3.640**	**3.890**	**3.930**	**3.710**	**4.020**	**4.140**	**4.500**	**4.600**

Fig. 57

GONGDIN Á ALIFÓÐRI (RÁVØRUPRÍSIR SEINASTU FIMM ÁRINI (USD/TONS)



Kelda: Kontali

VÁÐAR



Váðastýring

Bakkafrost samtakið er ábært fyri eini rød av váðum, og váðar verða altíð ein natúrligur partur av okkara vinnuvirksemi. Váðastýring er tí alneyðug, so váðarnir, sum Bakkafrost er ábært fyri og møguliga fíggjarliga ávirkanin av teimum, verða hildin niðri á einum støði, ið kann góðtakast.

Bakkafrost hevur vanligar virksemis- og vinnuváðar, ið koma av vanliga vinnuvirkseminum í virðisketuni. Umframt virksemisváðarnar er Bakkafrost eisini ábært fyri marknaðarváðum og fíggjarligum váðum, ið koma av vanliga vinnuvirkseminum í virðisketuni.

VÁÐASTÝRING BYGNAÐUR OG MANNAGONGD

Nevndin hevur endaligu ábyrgdina av váðastýringini hjá samtakinum. Nevndin avger rammurnar fyri at eyðmerkja og avmarka váðar. Grannskoðaranevndin hevur umsjón við váðastýringini.

Samtaksleiðslan hevur ábyrgdina av, at samtakið dagliga er í samsvari við rammurnar fyri váðastýring og av dagligu stýringini hjá samtakinum av váðum. Samtaksleiðslan metir leypandi um høvuðsváðarnar hjá samtakinum grundað á vikuligar ella mánaðarligar frásagnir frá fyritøkuni um vinnuvirksemið, gongdina í marknaðinum, tøkni o.s.fr. Leypandi váðametanin verður uppfylgd árliga við eini víðtøknari váðagreining av øllum samtakinum. Váðarnir verða mettir og mátaðir í stødd, og frágreiðing verður send samtaksleiðsluni. Seinasta greiningin av váðunum hjá samtakinum varð gjørd í desember 2020.

Við árslok verður støðan á høvuðsváðum send grannskoðaranevndini og skal góðtakast av bæði grannskoðaranevndini og nevndini fyri samtakið.

VIRKSEMISVÁÐAR

Aling

Ein av størstu váðunum, sum Bakkafrost er ábært fyri, er vakstrartíðin hjá laksinum í sjónum. Dømi um slíkar váðar eru beinleiðis hóttanir, sum fiskinum er fyri, so sum sjúka, fiskalýs og alguvøkstur. Hóast umfatandi átøk eru sett í verk at avmarka neiligu ávirkanina av ábærinum fyri hesum váðunum, so er altíð ein variatión í týðandi vísitølunum so sum felli, vøkstri, úrtøka fyri hvørt smolt, fingnu prísunum mótvegis tilvísingarprísum, fóðurfaktorum, mekaniskari og medisinskari viðgerð og kravdari hvílitíð millum árgangir fyri aliøkir ella størri landafrøðilig økir. Ávirkanin av at vera ábært fyri slíkum váðum kann vera skiftandi frá smávegis kostnaðarbroytingum til fullkomna týning av biomassanum í einum stórum landafrøðiligum øki. Orsakað av sera tálmandi tiltøkum í Føroyum hava týðandi vísitøl verið góð seinastu árini. Men í Skotlandi hava tilsvarandi úrslit vanliga ikki verið so góð og hava verið nógv meira óstøðug.

Hóast virksemisváðar eru avspeglaðir í ein ávísan mun í fíggjarætlanum við metingum um fellið og lutfallið av laksi, ið verður niðurflokkaður í góðsku í sambandi við hagreiðing, so kunnu slíkir váðar, um teir henda, ávirka úrslitið og fíggjarstøðuna hjá Bakkafrost munandi. Virksemið hjá Bakkafrost kann eisini ávirkast munandi av tí, ið verður bólkað sum vanligir virksemisváðar, t.d. góðska frá veitarum og undirveitarum o.s.fr. Laksavinnan er ábær fyri nógvum lívfrøðiligum váðum, og Bakkafrost miðar ímóti at minka slíkar váðar gjøgnum alla framleiðsluringrásina við at nýta skipað biotryggjað eftirlit, ið fevnir um alt samtakið.

Felli

Alivinnan í Føroyum hevur seinasta tíggjuáraskeiðið havt lægri felli enn restin av alivinnuni. Tó hevur Bakkafrost seinastu árini havt økt felli í høvuðsheitum av broytingini frá medisinskari til mekaniska viðgerð fyri lús og av onkrum einstøkum øðrum hendingum. Vøksturin í fellinum seinastu árini vísir, at broyting í alihættum kann hava munandi ávirkan á felli. Bakkafrost arbeiðir áhaldandi við at lækka fellið, og miðar eftir at 94% av fiskinum skal koma undan.

Prísvinningur

Seinastu árini hava Bakkafrost og SSC fingið hægri prís samanborið við tilvísingarprísir. Prísvinningurin er grundaður á m.a. vørumerki, góðsku og stødd á laksinum. Hesin prísvinningurin kann bert fáast, um Bakkafrost sum samtak eisini framyvir verður ført fyri at gera mun á sær og restini av alivinnuni. Bakkafrost samtakið strembar eftir at varðveita hesa støðuna á marknaðinum.

Ódnarveður

Veðurlíkindi hava m.a. avgerandi ávirkan á, hvussu skjótt aldur laksur veksur. Óvæntaður hiti ella kuldi kann hava sera ringa ávirkan á vøkstur og fóðurnýtslu. Bakkafrost virkar stundum undir truplum umstøðum á sjónum. Hetta kann hava hendingar ella neyðugar atgerðir við sær, ið kunnu hava munandi útreiðslur við sær t. d. óvæntað viðlíkahald/umvælingar ella, at fiskur sleppur, hóast Bakkafrost støðugt arbeiðir við at minka váðar við at nýta tær royndir, sum felagið hevur gjørt sær, við útgerð, aliøkjum og skipan av virkseminum. Alistøðirnar hjá Bakkafrost eru á økjum, har veðurlíkindini eru væl kend og økini væl tryggjað, hóast onnur veðurlíkindi, so sum stormar ella flóðir, kunnu hava óvæntaðan miss við sær.

Sjúka

Virksemi við aliøkjum hevur stóran váða við sær viðvíkjandi sjúkum. Gerst fiskurin sjúkur, fær Bakkafrost, umframt beinleiðis missin av fiski, stórar útreiðslur av framskundaðari tøku, góðskan á tikna fiskinum verður verri og eftirfylgjandi tíðarskeið við minni framleiðsluorku. Dømi um sjúkur, sum hava verið vanligar í Føroyum seinastu árini, eru amøba táknusjúkan (AGD), bakteriella nýrasjúkan (BKD), smittandi laksaanemi (ILA), hjartaklovningur (CMS) og bruni í hjarta- og beinagrindsvøddum (HSMI). Tilsvarandi sjúkur í Skotlandi eru, umframt omanfyri nevndu, sjúka í brisinum (PD) til dømis.

Fiskalýs
Vaksandi talið av fiskalúsum er ein av størstu váðunum og avbjóðingunum í altjóða alivinnuni og í Føroyum í dag. Økt tal av fiskalúsum kann viðføra strongd, sum kann føra til sjúku. Bakkafrost hevur mannagongdir fyri, hvussu talið av fiskalús kann minkast við ymsum viðgerðarhættum. Mannagongdirnar verða framhaldandi betraðar.

Bakkafrost nýtir rognkelsi sum reinsifisk til fiskalýs. Rognkelsi er einasti reinsifiskur, sum verður nýttur í Føroyum, og er ein týðandi fyribyrging móti fiskalús. Bakkafrost fer at vaksa nýtsluna av rognkelsi á aliøkjunum. Bakkafrost nýtir bæði baðing í feskvatni umborð á einum brunnbáti, og viðgerð við lunkaðum sjógvi í tveimum tænastuskipum sum viðgerð móti fiskalús. Herumframt strembar Bakkafrost áhaldandi eftir at betra avlúsingarhættir.

Laksur, ið sleppur
Bakkafrost hevur eina 0 toleransu fyri, at aldur laksur sleppur. Men fyritøkan hevur virksemi á nógvum sjóøkjum, sum hvør og ein eru ábærar fyri váðum av ringum veðri, handfaring av fiski, skiftan av nótum, virksemi við arbeiðsbátum og brunnbátum, ránsdjórum o.s.fr. At fiskur sleppur, hendir vanliga orsakað av feilum við útbúnaðinum ella mistøkum hjá starvsfólki. Beinleiðis fíggjarliga ábærið í sambandi við, at laksur sleppur, er avmarkað orsakað av landafrøðiligu spjaðingini av alistøðunum. Óbeinleiðis ávirkanin so sum spreiðing av sjúku, negativ ávirkan á villan laks, revsitiltøk frá landsmyndugleikum og vánalig umrøða er trupult at seta tal á í roknskapinum hjá Bakkafrost og hjá samfelagnum sum heild. Mannagongdir, góðskutryggingarskipanir og nýggjar tøkniligar loysnir hava stóran týdning í royndini at avmarka váðan av laksi, ið sleppur.

Vanskapningar
Sum havbúnaðarvinnan hevur tikið seg fram og ment seg, eru lívfrøðiligu mørkini fyri, hvussu skjótt fiskur kann vaksa, eisini vorðin ein avbjóðing. Sum við allari aðrari kravmiklari matvøruframleiðslu er eisini alingin vorðin rakt av ymsum framleiðslutengdum brekum, t.e. brek orsakað av kravmiklum hættum at ala.

Vanliga síggjast hesi brek sjáldan, men ávísir stovnar kunnu vera illa plágaðir. Týdningarmesta framleiðslubrekið er viðvíkjandi vanskapningum og grástari. Slíkt elvir ófrávíkiliga til fíggjarligan miss orsakað av minni vøkstri og verri heilsu, verri góðsku við tøku og skaða á ummælið hjá vinnuni.

Net (cyber) trygd
Við øktu nýtsluni av tøkni so sum alnótini at fremja handilsskap er samtakið, tænastuveitarar til samtakið og keypsskálin í Oslo (Oslo Børs) viðkvæmir yvir fyri virksemis-, upplýsingartrygd og váðum í sambandi við netið, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Hesir váðar kundu havt sera skaðiligar fylgjur fyri samtakið og partaeigararnar, so sum at elva órógv og ávirka vinnuliga virksemið og møguliga fört til fíggjarligt tap. Ólíkt mongum øðrum váðum, sum samtakið stendur yvir fyri, eru hesir váðarnir ofta ikki fevndir av nakrari trygging. Vanliga kunnu nettilburðir komast av tilætlaðum ella ótilætlaðum hendingum. Nettilburðir kunnu fevna um, men eru ikki avmarkaðir til, at fáa ólógliga atgongd til digitalar skipanir (t.d. gjøgnum teldusníking ella illviljaða avkoding av teldusskráum) við ætlan um misnýtslu av ognum ella viðkvomum upplýsingum, at oyðileggja upplýsingar ella skapa rakstrarligt órógv.

Álop á netið kann eisini verða framt á slíkan hátt, at tað ikki krevur ólógliga atgongd, so sum álop at nokta tænastu á heimasíðum (t.e. royndir at gera nettænastur óvirknar fyri ávísar brúkarar). Seinastu tíðina hava verið dømi um, at stór vinnusamtøk hava verið fullkomiliga niðurstongd orsakað av netálopum. Fyri Bakkafrost vildi ein slíkur tilburður kravt, at avvarðandi starvsfólk nýttu manuellar back-up skipanir í mest møguligan mun. Ábærastu økini í virðisketuni hjá samtakinum, um netálop varð framt, eru framleiðsla og søla. Tøkubúgvin fiskur kundi hildið fram at svomið á sjónum í aliøkjunum Í styttri tíð, til ein loysn varð funnin á slíkum neiligum tilburði, sum hevði borið seinking í vinningi og tøkum peningi við sær.

Fiskamjøl, lýsi og alifóður
Fiskamjøl, lýsi og alifóður verða framleidd eftir viðurkendum framferðarhættum við væl ansaðum og sjálvvirknum mannagongdum. Sum sjálvbjargin framleiðari av fiskamjøli, lýsi og alifóðri er Bakkafrost ábært yvir fyri ávísum váðum, sum kunnu innibera, at Bakkafrost noyðist at keypa alifóður frá triðjaparti. Bakkafrost er t.d. viðkvæmt yvir fyri hendingum við matartrygd, troti á rávøru ella rávørusteðgi. Óvæntað trot á rávøru, tí ov lítið verður fiskað, ella ov lítil møguleiki er fyri fiskakeypi, ella tí at nýtt tilfar ikki kemur til tíðina, kunnu hava ávirkan á, hvussu stór framleiðslan á virkinum verður. Hetta kann hava við sær hendingar ella neyðug tiltøk, sum kunnu vera sera kostnaðarmikil. Bakkafrost arbeiðir støðugt við at minka um váðar.

Deildin hjá Bakkafrost á virkinum hjá Havsbrún, ið ger fiskamjøl, lýsi og alifóður, er í Føroyum. Hetta ger, at felagið kann líða dyggan smeit – beinleiðis av handilsavmarkingum og óbeinleiðis av avmarkingum á kvotur og fiskiskap. Hóast ein og hvør laksaalari, sum keypir alifóður, eisini óbeinleiðis er ábærur yvir fyri sama váðanum, verður hesin váðin vanliga avmarkaður gjøgnum sáttmálar við kravið um endurgjald frá triðjaparti.

Dálkandi evni í fóðrinum
Fóður kann verða dálkað av ymsum óynsktum evnum, sum kunnu vera í teimum ymsu sløgunum av ráevnum og tilfari, ið nýtt verða til framleiðsluna ella í framleiðslutilgongdini. Flestu dálkandi evni hópast upp í lívverum sum til dømis fiski og sjógæti, ið nýtt verða til at framleiða fiskamjøl og lýsi. Hesi dálkandi evni seta seg í feittið í lívveruni, og tess hægri í føðiketuni hon er, tess størri er innihaldið av dálkandi evninum. Myndugleikar áseta mest loyvdu nøgd av teimum mest týðandi dálkandi evnunum. Hesi markvirði verða

javnan eftirkannað av myndugleikunum og kunnu verða broytt. Møguleiki er eisini fyri, at „nýggj" dálkandi evni verða sett á listan við jøvnum millumbilum.

Yvirhøvur kann framleiðslan verða dálkað av misgáum ella við, at latið verður í framleiðsluna av illvilja. Slík dálking kann møguliga hava ávirkan á umhvørvið, fiskaheilsuna og/ella matvørutrygdina og kann skaða álitið hjá vanliga brúkaranum til at eta laks. Allir slíkir tilburðir kunnu hava neiliga ávirkan á framleiðsluúrslit og fíggjarligu støðuna hjá Bakkafrost. Framtíðar lóggáva kann økja vandan fyri, at reglurnar ikki verða hildnar og kostnaðin av at halda tær. Verða reglurnar ikki hildnar, kann umdømisváðin hava álvarsamar fylgjur við sær, hóast hvørki umhvørvi, fiskaheilsa ella matvørutrygd eru skadd.

Fóðurdeildin hjá Bakkafrost, Havsbrún, hevur fleiri eftirlit fyri at minka um dálkingarvandan. Dømi um slík tiltøk og eftirlit, ið eru tikin við í HACCP- og ISO-mannagongdirnar, eru eftirlit og kanningar av veitarum og nágreiniligar rávørulýsingar hjá veitarum, at keypa ráevni frá gjølla úrvaldum veitarum, regluligar góðskukanningar av ráevnum og lidnum fóðri, mannagongdir at reinsa lýsi o.s.fr. og strangar trygdarmannagongdir á virkinum. Sloppið verður kortini ongantíð fullkomiliga av við váðarnar.

Evni, ið kunnu dálka alifóður, eru til dømis – men eru ikki avmarkað til – organisk dálkandi evni so sum dioxin og DL-PCB'ir, mycotoxinir, pesticidir, antioxidantar (so sum Ethoxyquin og BHT), brominerað eldforðingarevni og bakteriudálking og óorganisk dálkingarevni so sum blýggj, kyksilvur, arsenikk og kadmium.

Hóast allar kanningar vísa, at støðið á dálkingarevnum í laksinum hjá Bakkafrost er væl innan fyri trygdarkrøvini, ásett av t.d. ES, so hevur Bakkafrost kortini frá tíðliga í 2015 reinsað lýsið, sum verður nýtt til alifóðrið hjá laksinum hjá Bakkafrost, fyri DL-PCB'ir og onnur dálkingarevni, og síðan fyrst í 2018 er antioxidantið, Ethoxyquin, skift út við natúrligt antioxidant.

Fóðrið kann eisini verða dálkað, antin av misgáum ella við vilja við øðrum óorganiskum evnum so sum mineralolju, ítøkiligum lutum o.s.fr. Eftirlit er við fleiri enn oman fyri nevndu evnum.

Lógarásetingar
Ásetingar við lóg orsakað av viðurskiftum, sum hava við umhvørvið ella djóravælferð at gera, kunnu ávirka virksemið og fíggjarligu støðuna hjá samtakinum munandi. Felagið leggur dent á, at skipa virksemið soleiðis, at váðin av óvæntaðum lógaruppskotum minkar, men tað verður altíð ein duldur váði fyri, at lógarmyndugleikar áseta skerjingar og/ella brádligar broytingar fyri karmarnar hjá vinnuni.

Laksaaling er skipað við loyvum. Samtakið hevur gott samskifti við føroyskar og skotskar myndugleikar viðvíkjandi fortreytunum og avmarkingunum, sum eru knýttar at einum aliloyvi.

Í Skotlandi hevur The Scottish Environment Protection Agency (SEPA) umsjón við øllum loyvum og samtyktum, reglum og lógásetingum.

Føroysku myndugleikarnir kunnu taka loyvir til alivirksemi aftur, um avgerandi fortreytir eru broyttar, síðan loyvið varð givið, ella um loyvið stríður ímóti menningarætlanum sum heild og verndartiltøkum, ella um loyvishavarin fremur brot á treytirnar, sum vórðu settar í sambandi við, at loyvið varð givið. Loyvið kann eisini verða tikið aftur, um felagið brýtur regluna um mestloyvda ognarrætt av loyvinum, ella um felagið ikki ger nýtslu av loyvinum. Loyvið kann eisini verða tikið aftur, um umhvørvisloyvið hjá felagnum verður tikið aftur.

Í Føroyum verður eitt aliloyvi latið fyri 12 ár í senn. Føroya Landsstýri kann leingja loyvið. Um felagið uppfyllir treytirnar í loyvinum, og um framhald av virkseminum ikki stríðir ímóti samtyktum menningarætlanum sum heild, má metast (tó uttan vissu), at felagið hevur lógligt krav um at fáa loyvið longt.

Sambært lógini um umhvørvisverju og soleiðis, sum hon verður umsitin í dag, kunnu avvarðandi umhvørvismyndugleikar krevja, at minka verður um útsetingina av smolti samanborið við útsetingina frammanundan, um kanningar av havbotninum ella aðrar umhvørvisligar kanningar vísa, at dálking av umhvørvinum fer upp um ávís ásett mørk. Føroyska umhvørvið hevur fingið alt størri áhuga og almenna umrøðu í sambandi við havbúnað, og tí kann væntast, at reglurnar á hesum øki kunnu gerast strangari, ella at núverandi framferð verður strangari.

Kunningartøkni (KT)
Váðar í sambandi við KT eru øktir seinastu árini, sum KT er vorðið ein alt størri samfeldur partur av virkseminum hjá Bakkafrost. Tí hevði steðgur í eftirlitsskipanum og fyrisitingarskipanum hjá Bakkafrost havt neiliga ávirkan á virksemið hjá Bakkafrost. Mett verður alsamt um KT-váðar grundað á týdningin av møguligum tilburðum og sannlíki fyri, at slíkur tilburður kann henda.

MARKNAÐARVÁÐAR

Prísur á aldum laksi
Fíggjarstøðan og framtíðarmenningin hjá Bakkafrost er í stóran mun tengd at prísinum á aldum laksi, sum søguliga hevur verið rættiliga óstøðugur. Alilaksur er ein handilsvøra, og tí er rímiligt at halda, at marknaðarprísurin fer at halda fram við at sveiggja. Javnvágin millum samlaða útboðið og eftirspurningin er ein týdningarmikil broytil.

Prísur á fiskamjøli og lýsi
Fíggjarliga støðan og framtíðarmenningin hjá Bakkafrost eru í ávísan mun tengd at prísinum á fiskamjøli og lýsi, sum søguliga hava verið fyri munandi sveiggjum. Fiskamjøl og lýsi eru handilsvørur, og tí kann væntast, at marknaðarprísurin støðugt broytist. Javnvágin millum samlaða útboðið og eftirspurningin eftir fiskamjøli og lýsi er ein týdningarmikil broytil. Minkandi útboð kann fáa prísirnir at hækka. Hetta kann, um so er, hava ávirkan á rakstrarúrslitið og gjaldførið hjá felagnum.

Prísur á alifóðri
Fóðurkostnaðurin er týðandi partur av samlaða framleiðslukostnaðinum hjá aligeiranum, og sveiggj í fóðurprísum kunnu tí hava stórt árin á lønsemið. Fóðurprísir verða bæði ávirkaðir av altjóða marknaðinum fyri fiskamjøl og lýsi, djóra- og plantuolju og av, at fóðurvinnan er stýrd av fáum stórum altjóða framleiðarum.

Náttúruligar avmarkingar í tilfeinginum í havinum kunnu elva til heimsumfatandi trot á fiskamjøli og á lýsi til framleiðslu av alifóðri. Tó eru fóðurframleiðarar komnir langt í royndunum at nýta ráevni úr plantum í staðin fyri ráevni úr sjónum sum part av fóðrinum. Harumframt er framleiðslan av alifóðri ein sameindur partur av virðisketuni hjá Bakkafrost. Hetta minkar tí um váðan.

FÍGGJARLIGIR VÁÐAR

Bakkafrost roynir at stýra fíggjarligum váðum við virksemistiltøkum ella (har slík tiltøk ikki eru møgulig) við at nýta fíggjarlig amboð. Nevndin hevur samtykt reglur fyri, hvussu hesir váðar verða stýrdir.

Uppfylging av innanhýsis mannagongdum, sum hava við fíggjarligu frásøgnina at gera, er partur av dagligu umsjónini hjá leiðsluni og uppfylgjan av arbeiðshættum hjá teimum, ið vara av mannagongdum. Sí Notu 4.1 til nærri kunning.

Gjaldoyraváði

Bakkafrost handlar á heimsmarknaðinum fyri aldan laks. Umsetningurin og áognin eru í høvuðsheitum skrásettar í DKK, EUR, USD og GBP, men í ávísan mun eisini í øðrum fremmandum gjaldoyrum. Hinvegin verður keyp av rávørum o.ø. í høvuðsheitum skrásett í DKK, sum hevur lutfalsliga støðugan kurs í mun til EUR. Bakkafrost hevur tí nakað av natúrligari gjaldoyratrygging. Sveiggj í fremmandum gjaldoyra á tí, sum ikki verður fult gjaldoyratryggjað, er ein fíggjarligur váði hjá Bakkafrost. Fíggingin hjá Bakkafrost er bankafígging og er í DKK, EUR og GBP, men Bakkafrost hevur møguleikan at fíggja í øðrum gjaldoyrum. Í samband við onkrar materiellar íløgur er Bakkafrost í ávísan mun ábært yvir fyri NOK, GBP, USD og EUR. Høvuðs handilsgjaldoyrað hjá SSC er GBP, sum eisini er høvuðsgjaldoyrað fyri meginpartin av sáttmálabundna umsetninginum. Vinnu- og útflutningssølur kunnu vera ásettar í øðrum gjaldoyra, har EUR er tað týdningarmesta. Sum útflutningur fær alt størri týdning fyri umsetningin hjá samtakinum, fer nevndin at halda fram við strategiini at nýta sáttmálar um gjaldoyratrygging.

Kredittváði

Váðin, at keyparar av vørum ella tænastum ikki hava fíggjarliga orku at halda sínar skyldur, verður mettur at vera lutfalsliga lítil, tí tap av skuldarum søguliga hevur verið lítið. Bakkafrost hevur leiðreglur at tryggja, at selt verður einans til kundar, sum ikki fyrr hava havt trupulleikar at gjalda, og at útistøða ikki fer upp um ásett kredittmørk. Meginparturin av samlaða skuldaraágóðanum er tryggjaður. Av tí at ikki allar áognir eru tryggjaðar, noyðist Bakkafrost at góðtaka ein ávísan kredittváða.

Meginparturin av kredittváðanum er í skuldarahópinum.

Gjaldførisváði

Gjaldførisváði er vandin fyri, at Bakkafrost ikki verður ført fyri at halda sínar fíggjarligu skyldur, tá ið tær falla til gjaldingar. Gjaldførisváðin verður stýrdur við at hava eina liðiliga fíggjarskipan, ið er tryggjað við stovnaðu lánimøguleikunum. Málið hjá Bakkafrost er at hava nóg mikið av tøkum peningi ella miðallongum kredittmøguleikum, so felagið er ført fyri at gjalda skuld so hvørt, sum hon fellur til gjaldingar. Ónýtt rakstrarfígging verður umrødd í Notu 4.1, har treytirnar eisini eru lýstar.

Kapitalskipan og eginogn

Høvuðsendamálið við fíggjarleiðsluni hjá Bakkafrost er at tryggja, at fyritøkan varðveitir eitt gott kredittvirði fyri at fáa góðar lánstreytir. Bakkafrost stuðlar sínum vinnuvirksemi við at tryggja eitt gott sjálvfíggjanarstig. Bakkafrost stýrir og tillagar kapitalskipanina samsvarandi teimum støðugt broytandi fíggjartreytunum, sum felagið arbeiðir undir, og í samsvari við stuttu og miðallongu framtíðarútlitini, íroknað tillagingar í útgjaldi av vinningsbýti, keyp av eginpartabrøvum, lækking ella hækking av partapeningi og útgávu av nýggjum partabrøvum.

LEIÐSLA

Virkisleiðsla (Corporate Governance)

P/F Bakkafrost hevur sett sær fyri at varðveita virkisleiðsluna á høgum støði. Felagið leggur seg eftir at vera í samsvari við norsku fyriskipanirnar viðvíkjandi virkisleiðslu, sum nágreiniliga eru lýstar í norsku stevnumiðunum fyri virkisleiðslu (Code of Practice for Corporate Governance), útgivið 17. oktober 2018 av „Norwegian Corporate Governance" nevndini (the „Code of Practice"). Tilmælið er at finna á www.nues.no. Umframt lýsingina av virkisleiðslu í árligu ársfrásøgnini hevur Bakkafrost eina nágreiniligari frágreiðing um virkisleiðslu, sum er at síggja á okkara heimasíðu.

Bakkafrost er ikki í samsvari við hesi tilmæli í norsku fyriskipanunum viðvíkjandi virkisleiðslu í hesum øki:

- Grein 3 sigur, at „fulltrúir, veittar nevndini, skulu vera tíðaravmarkaðar til ikki seinni enn dagfestingina fyri næsta aðalfund".

  Viðtøkurnar hjá Bakkafrost § 4a, geva nevndini heimild til at hækka partapeningin galdandi til vanliga aðalfund felagsins í 2022, og § 4b gevur nevndini heimild til at keypa eginpartabrøv fyri felagið galdandi til árliga aðalfundin í 2022. Sambært føroysku lógini fyri feløg kann eitt felag í viðtøkum felagsins avgera, at aðalfundurin kann geva nevndini heimild til at hækka partapeningin og at keypa eginpartabrøv. Hetta loyvið kann galda í meir enn eitt ár. Av praktiskum orsøkum er hetta tikið við í viðtøkunum hjá Bakkafrost. Nevndin er av tí áskoðan, at um partaeigarar halda, at hendan heimildin ikki kann góðtakast, fer nevndin at taka undir við eini broyting í viðtøkum felagsins.

LEIÐSLUMYNDIL HJÁ BAKKAFROST

PARTAEIGARAR

ÁRSAÐALFUNDUR

Partaeigararnir hjá Bakkafrost nýta síni rættindi á ársaðalfundinum.

VALNEVND

Samansett av fýra limum, ið verða valdir á ársaðalfundinum. Kemur við tilmælum um persónar at velja í nevndina og áseting av samsýning hjá nevndarlimum.

NEVND

Samansett av 3-7 limum, sum verða valdir hvørt ár. Nevndin hevur evstu ábyrgd av leiðsluni hjá Bakkafrost.

GRANNSKOÐARANEVND

Samansett av trimum limum úr nevndini og verður stýrd av nevndarformanninum.

ÚTINNANDI LEIÐSLAN FYRI SAMTAKIÐ

Útinnandi samtaksleiðslan hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Bakkafrost.

Leiðslumyndilin hjá Bakkafrost
Til tess at tryggja, at hesar meginreglur verða fylgdar, hevur felagið evnað neyvar vegleiðingar viðvíkjandi reglum fyri framferðarhátt hjá nevndini, vegleiðingar fyri valnevndina, vegleiðingar fyri stjóra (CEO) og aðra leiðslu, vegleiðingar viðvíkjandi virðum og etikki, vegleiðingar fyri grannskoðaranevndina, eina mannagongd viðvíkjandi íleggjarum, leiðreglur í sambandi við yvirtøkutilboð og leiðreglur fyri handlar við nærstandandi partar.

Partaeigarar og aðalfundur
Partaeigarar nýta sín rætt á ársaðalfundinum hjá Bakkafrost – so sum at útnevna valnevndina hjá Bakkafrost, nevnd og grannskoðara.

Mannagongdirnar á ársaðalfundinum hjá Bakkafrost fylgja vanligu reglunum, sum eru ásettar í føroysku lógini fyri feløg, og viðtøkunum hjá Bakkafrost.

Valnevnd
Valnevndin kemur við tilmælum um persónar at velja í nevndina og samsýning til nevndarlimir. Tíðarfreistin at koma við uppskotum til valnevndina er 31. januar.

Aðalfundurin hjá Bakkafrost velur limirnar – eisini formannin til valnevndina – fyri 2 ár, uttan so at aðalfundurin avger øðrvísi. Aðalfundurin tekur eisini avgerð um áseting av samsýning til limirnar í valnevndini.

Reglugerðin, ið stjórnar arbeiðinum hjá valnevndini, er sett inn í viðtøkurnar hjá Bakkafrost.

Við árslok 2020 vóru limirnir í valnevndini hesir:
- Gunnar í Liða (Chairman)
- Eyðun Rasmussen
- Rógvi Jacobsen
- Leif Eriksrød

Nevnd
Nevndin hjá Bakkafrost hevur ábyrgdina av allari leiðsluni hjá felagnum og útnevnir eina leiðslu við einum ella fleiri stjórum at stjórna dagliga rakstrinum av Bakkafrost. Nevndin ásetur strategiina fyri Bakkafrost og tekur avgerð um høvuðsíløgur og sølu av ognum. Nevndin hevur eisini ábyrgd av, at Bakkafrost altíð hevur hóskandi kapitalgrundarlag, høvuðspolitikki, eftirliti og grannskoðaraviðurskiftum. Nevndin hevur ábyrgd av váðastýringini hjá Bakkafrost og av týðandi avgerðum viðvíkjandi virkseminum.

Meirilutin av nevndarlimunum í nevndini skulu vera búsitandi í Føroyum. Formaðurin í nevndini verður valdur av aðalfundinum, meðan næstformaðurin verður útnevndur av nevndini. Nevndin skal vera mannað við trimum til sjey limum. Kunning um limirnar í nevndini eru undir „vangamynd av nevndarlimum“ í ársfrásøgnini.

Nevndin hevur niðurfelt nágreiniligar reglur viðvíkjandi sínum virksemi í eina starvsmannagongd, sum verður eftirmett regluliga.

Nevndin helt 10 fundir í 2020. Upplýst er undir hvørjum nevndarlimi sær, hvussu nógvum nevndarfundum hann luttók á í 2020.

Limirnir í nevndini fáa eina ásetta samsýning, sum er samtykt av aðalfundinum. Nevndarlimirnir eru ikki partur av partabrævaskipanini hjá Bakkafrost fyri starvsfólk.

Grannskoðaranevnd
Grannskoðaranevndin er ein undirnevnd hjá samtaksnevndini fyri Bakkafrost og hjálpir nevndini at hava umsjón við fíggjarligu og ikki fíggjarligu frásagnargongdini, fíggjarligum og rakstrartengdum váðum, innanhýsis eftirliti og samsvari við lógarásett og onnur krøv frá almennum myndugleikum.

Grannskoðaranevndin avger karmin hjá uttanhýsis grannskoðarunum hjá Bakkafrost og eftirmetir teirra óheftni og førleikar.

Grannskoðaranevndin hjá felagnum hittist 5 ferðir í 2020 at eftirmeta grannskoðan og virksemismál nágreiniliga. Í nevndini sita Rúni M. Hansen (formaður), Øystein Sandvik og Teitur Samuelsen.

Útinnandi leiðsla fyri samtakið
Útinnandi leiðslan fyri samtakið leiðir dagliga raksturin hjá Bakkafrost og skal halda seg til eina og hvørja avgerð, sum nevndin hevur tikið, eins og eina og hvørja áseting og umbøn frá nevndini.

Nevndin hevur niðurfelt serstakar reglur í leiðsluleiðbeiningum viðvíkjandi heimildum og pliktum hjá leiðsluni í samtakinum. Nevndin avger eisini arbeiðsviðurskiftini hjá útinnandi leiðsluni í samtakinum og ásetur nágreiniligari reglur viðvíkjandi arbeiði hennara.

Útinnandi samtaksleiðslan er mannað við Regini Jacobsen, stjóra (CEO), Høgna D. Jakobsen, fíggjarstjóra (CFO), og stjóranum (MD) í Havsbrún, Odd Eliasen. Upplýsingar um útinnandi samtaksleiðsluna eru at finna undir „vangamynd av samtaksleiðslu“ í ársfrásøgnini.

Felagsábyrgd og burðardygd

Stjórn og leiðsla
Kjarnuvirðini hjá Bakkafrost leggja dent á endamálið at bera seg ábyrgdarfult at. Hetta fevnir eisini um at hugsa fram í tíðina á búskaparligu, sosialu og umhvørvisligu økjunum. Felagið fylgir einum hugburði við fyriliti til stýring av váðum í sambandi við burðardygd gjøgnum okkara mannagongd fyri váðameting. Mannagongdin útlutar ábyrgd til avmarking av týðandi virksemisváðum. Yvirvøka er av váðum gjøgnum alla virðisketuna, og váðar verða fráboðaðir regluliga innanhýsis og árliga uttanhýsis í ársfrásøgnini og frásøgnini um burðardygd.

Grannskoðaranevndin stuðlar nevndini við at hava umsjón við fíggjarligum váðum og váðum, ið hava við vinnuna at gera, innanhýsis eftirliti, og at felagið er í samsvari við lógarásetingar og krøv frá almennum myndugleikum. Nevndin hevur umsjón við strategium í sambandi við burðardygd, stýring og fráboðan og av dagligu ábyrgdini av samtaksleiðsluni hjá Bakkafrost.

Burðardygd er partur av felagsstrategiini og leiðsluætlanunum hjá Bakkafrost og verður framhaldandi innbygd í hesar í 2021 gjøgnum Sunt Lív frásøgnina.

Samsvar og etiskur atburður
Bakkafrost starvar í samsvari við strangar landsumfatandi føroyskar og skotskar reglur fyri arbeiðsmarknað, heilsu og trygd, umhvørvi og fiskaheilsu og vælferð. Felagið bindur seg alsamt til ikki at verða í ósamsvari í nøkrum føri.

Felagið varðveitir og virkar fyri góðari vinnuatferð gjøgnum alla virðisketuna í samsvari við kjarnuvirðini og meginreglurnar hjá Bakkafrost. Virði felagsins stýra atferð og hugburði tess til at skapa kundum, partaeigarum og samfelagnum langtíðar virðir og eru lýst í leiðreglunum hjá Bakkafrost fyri atferð, sum miðar ímóti at skapa eina sunna felagsmentan. Leiðreglurnar krevja, at øll starvsfólk skulu vísa fyrimyndarligan atburð í sínum virki og persónligan etikk í síni atferð, tá ið tey fremja sínar skyldur og ábyrgdir. Tey skulu hava ein rættvísan og ærligan hugburð í øllum samskifti við starvsfelagar og allar uttanhýsis áhugapartar.

Fleiri skyldur í sambandi við sjálvkravdar standardar fyri burðardygd og góðkenningar eru nevndar í stuttum niðanfyri.

Arbeiðsstað og mannarættindi
Fyritøkan bindur seg til at virða verju av mannarættindum og at tryggja sær, at hon ikki ger seg seka í misnýtslu av mannarættindum.

Leiðreglurnar geva lyfti um at tryggja, at hvørki Bakkafrost ella vinnufelagar tess skulu misnýta børn sum arbeiðsmegi. Hetta verður handhevjað við grundreglum, sum veitarar verða bidnir um at undirskriva, tá ið sáttmálar verða gjørdir.

Leiðreglurnar fyri atferð hjá Bakkafrost undirstrika eisini hugburðin at skapa best hóskandi arbeiðsumstøður og mentan, íroknað skylduna at skapa eitt professionelt og positivt arbeiðsumhvørvi, sum er umfevnandi og ikki ger mannamun.

Í 2018 styrkti Bakkafrost skyldu sína á hesum øki við at melda seg til tær tíggju meginreglurnar í altjóða sáttmálanum hjá ST (UN Global Compact) um at plikta seg til at verja mannarættindi; virða viðtøkur um frælsi og rættin til sáttmálasamráðingar; og at hava eina arbeiðsmegi, sum er uttan vald/tvingsil/barnaarbeiði og mismun. Felagið sigur frá árliga um framgongdina í mun til hesar meginreglurnar gjøgnum Sunt Lív frásøgnina um burðardygd.

Starvsfólk
Bakkafrost hevur 1.699 fólk í starvi í Føroyum, Onglandi, Skotlandi og USA. Felagið ásannar, at til tess at náa síni missión og røkka strategisku málunum er neyðugt at hava eina dugnaliga og heilhugaða arbeiðsmegi, sum er bundin til kjarnuvirði felagsins.

Felagið pliktar seg til at hava eitt fjølbroytt og umfevnandi arbeiðsstað, at draga at sær og halda fast við gávað og serkøn starvsfólk, at uppbyggja starvsfólkaførleikar og varðveita stóran starvsfólkaáhuga. Sunt Lív ætlanin fyri 2023 fer at lýsa økir, sum felagið fer at leggja enn størri dent á fyri at styrkja starvsfólkatilfeingið.

Heilsa, trygd og vælvera
At verja starvsfólkini inniber at varðveita arbeiðsheilsu- og arbeiðstrygd á einum høgum støði og at skapa eina sunna arbeiðsmentan.

Leiðreglurnar hjá felagnum undirstrika endamálið at tryggja eina skipaða tilgongd til tess at verða eitt arbeiðspláss uttan mein og vanlukkur. Hetta verður framt við eini rød av leiðreglum, ið eru grundaðar á hægstu heilsu-, trygdar- og umhvørvisstandardar. Starvsfólk fáa regluliga venjing í hesum.

Vørugóðska og -trygd
Við ymsum standardum, ið nágreina, hvussu besta góðska verður tryggjað, og ymsum góðkenningum (nevndar í stuttum niðanfyri), veitir Bakkafrost trygd fyri, at felagið er í fremstu rød í vinnuni innan vørugóðsku og trygdarstandardar. Bakkafrost hevur eina umfatandi innanhýsis eftirlitsskipan, sum verður eftirkannað javnan av myndugleikunum; hetta inniber dagligar royndir av vøruni og eftirlit við, at vøran er í samsvari við trygdarreglur landsins innan heilsu og matvøru. Umframt støðugt at liva upp til hægstu standardar, hevur felagið pliktað seg til at varðveita høga Omega-3 støðið og at varðveita høga stigatalið hjá kundum fyri vørugóðsku.

Lívfrøðitrygd, fiskaheilsa og vælferð
Bakkafrost leggur dent á at hava fremstu standardar innan vælferð og at minka nýtsluna av kemikalium og medisini í fyribyrging av sjúkum og laksalús. Roynda fiskaheilsuliðið – mannað við góðkendum djóralæknum, lívfrøðingum og hjálparfólki – hevur eina starvsætlan at náa hesum máli, sum umfatar eftirlit kring øll aliøkir at tryggja, at best møgulig heilsa og vælferð altíð verður hildin. Felagið hevur bundið seg til at halda eitt lágt felli, at varðveita fremsta hugburð til fiskavælferð í vinnuni, og at eingin fiskur skal sleppa úr ringunum.

Handfaring av umhvørvinum og burðardygt fóður
Bakkafrost leggur dent á at avmarka dálking av umhvørvinum, galdandi fyri hvørt einstakt lið í virðisketuni. Leiðreglur felagsins undirstrika endamálið at stremba eftir at vera á odda í vinnuni í verju av umhvørvinum. Kravt verður av øllum starvsfólkum, at tey hugsa um ávirkanina á umhvørvið, sum virksemið knýtt at arbeiðinum hevur á natúrina og umhvørvið og at nýta umhvørvisvinarligar loysnir so langt skynsamliga møguligt.

Felagið miðar ímóti at gagnnýta munadyggu nýtsluna av fossilum brennievnum enn meira og hevur lagt dent á fleiri øki innan heilsu og umhvørvi, harímillum at ganga einum standardi fyri umhvørvið á møti frá triðjaparti, at minka um árinið á umhvørvið av pakkitilfari og minka um GHC útlátið í hesum sambandi.

Samstarv og góðkenningar
Samstundis, sum Bakkafrost samarbeiðir við laksavinnuna gjøgnum Havbúnaðarfelagið og altjóða laksaátakið GSI (Global Salmon Initiative), er Bakkafrost haldari av fleiri uttanhýsis standardum og góðkenningarskráum til tess at tryggja burðardygga vøru, góðsku og trygd. Øll virðisketan í Føroyum – fóðurframleiðsla, lívfiskur, smoltstøðir, aliøkir, kryvjivirkir og góðskingarvirkið – eru góðkend eftir altjóða GLOBAL G.A.P. standardinum, sum miðsavnar seg um matvørutrygd í allari framleiðsluni, fiskavælferð, heilsu og trygd og handfaring av umhvørvinum. Virðisketan hevur eisini Ohne Gentechnik ikki íleguviðgjørd tilsetingarevni átekningina.

Virksemið í Skotlandi er góðkent sambært BAP (4 stjørnað) og BRC fyri góðskingarvirkir og roykivirkir.

Framleiðslurnar á kryvjivirkjunum og góðskingarvirkinum hjá Bakkafrost hava ASC (Aquaculture Stewardship Council) „Chain of Custody“ góðkenning, og framleiðslan av virðisøktum vørum er góðkend eftir BRC og IFS matvørutrygdar standardunum. Mjøl-, lýsi- og fóðurframleiðslurnar á Havsbrún hava fleiri góðkenningar. Allar eindirnar eru góðkendar eftir ISO 9001:2015 standardinum, og mjøl- og lýsideildin er góðkend eftir GMP+ standardunum, IFFO RS góðkenning og MSC „Chain of Custody“ standardinum. Laksamjøl og lýsi hava eisini GMP+.

Øll aliøki í Føroyum eru ASC góðkend.

Ábyrgdarfull leiðsla og virðisskapan
Stóra virðið, sum Bakkafrost framleiðir til Føroyar við arbeiði, skattum og avlopum, merkir, at felagið hevur stóra ábyrgd yvir fyri øllum, ið hava íløguáhuga í felagnum. Felagið hevur bundið seg til at vísa ábyrgdarfulla leiðslu bæði á staðbundnum og altjóða støði og at økja gjøgnumskygnið viðvíkjandi málum, ið hava stóran áhuga hjá áhugapørtum so sum íløga í samfelagið.

Nærri kunning um, hvussu Bakkafrost handfer hesi mál, ætlan tess at náa tí, sum felagið hevur bundið seg til, og úrslitini hjá felagnum fyri 2020 samsvarandi hesum, er at finna í frásøgnini hjá Bakkafrost um burðardygd: Sunt Lív 2020.

Kunning til partaeigarar

Bakkafrost leggur stóran dent á, at partaeigarar verða kunnaðir. Felagið miðar ímóti at varðveita regluligt samskifti við partaeigararnar í samtakinum gjøgnum formellu kunningarleiðirnar á virðisbrævamarknaðinum, miðvegisfrásagnir, ársfrásagnir, ársaðalfundir og framløgur fyri íleggjarar og greinarar.

GRANNSKOÐARAR

Árs- og konsernfrágreiðingin er grannskoðað av P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki, sum eisini er grannskoðari hjá móðurfelagnum og øllum dótturfeløgum, sum eru skrásett í Føroyum. Grannskoðari hjá dótturfelagi

- Bakkafrost UK Ltd. er Forrester Boyd Chartered Accountants, Grimsby
- Bakkafrost USA LLC er Clifton Larsen Allen LLC, New Jersey
- The Scottish Company Plc er Azets, Glasgow

VINNINGSBÝTI

Bakkafrost miðar ímóti at geva partaeigarunum eitt kappingarført avkast av teirra íløgum, bæði við útgjaldi av vinningsbýti frá felagnum og við at tryggja virðisøking av eginognini við positivum virksemi.

Vanliga rindar felagið partaeigarunum vinningsbýti, men endaliga ábyrgdin er hjá nevndini at gera eina heildarmeting fyri at tryggja felagnum eitt gott fíggjarligt grundstøði, bæði til dagliga virksemið og til ein sunnan vøkstur framyvir.

Eitt langtíðarmál hjá nevndini er, at 30 til 50% av tillagaðum EPS skal gjaldast út sum vinningsbýti.

Fíggjarliga støðan hjá Bakkafrost er góð við eini sunnari fíggjarstøðu, kappingarførum rakstri og tøkum kredittmøguleikum. Nevndin hevur tí avgjørt at skjóta upp á ársaðalfundinum, at 3,65 kr. (NOK 5,03*) fyri hvørt partabræv skulu verða goldnar út sum vinningsbýti. Hetta svarar til 216 mió kr. (NOK 297* mió).

FÍGGJARLIGAR FRÁSAGNIR HJÁ MÓÐURFELAGNUM OG BÝTI AV VINNINGI FYRI ÁRIÐ

Móðurfelagið P/F Bakkafrost hevði ein nettovinning á 981 mió kr. í 2020. Nevndin hevur avgjørt at skjóta upp fyri ársaðalfundinum, at 3,65 kr. (umleið NOK 5,03*) fyri hvørt partabræv verða goldnar út sum vinningsbýti. Hetta svarar til 216 mió kr. (NOK 297* mió).

Nevndin skjýtur hervið upp, at peningurin verður útlutaður soleiðis:

- Úrslit fyri 2020: 981 mió kr.
- Flutt til aðra eginogn: 765 mió kr.
- Samlað upphædd til vinningsbýti: 216 mió kr.

Eftir útgoldið vinningsbýti er fría eginognin í alt 8.822 mió kr.

PARTAEIGARAR, VIRÐI OG ATKVØÐUR

Tann 31. desember 2020 hevði P/F Bakkafrost 59.143.000 partabrøv útistandandi tilsamans við áljóðandi virði á 1 kr. hvørt. Av hesum 59.143.000 partabrøvunum útistandandi eigur P/F Bakkafrost 98.929 eginpartabrøv tann 31. desember 2020.

Eyðmerking: BAKKA

STØRSTU PARTAEIGARAR

Hesir partaeigarar áttu beinleiðis ella óbeinleiðis meira enn 5% av partabrøvunum í felagnum tann 31. desember 2020: Oddvør Jacobsen, Regin Jacobsen og Folketrygdfondet.

* Vinningsbýti fyri hvørt partabræv í NOK broytist alt eftir vekslifótinum millum NOK/DKK. Vekslifóturin NOK/DKK verður fráboðaður á ex-degnum.

Nevnd og stjórn

Vangamynd av nevndarlimum

RÚNI M. HANSEN

Nevndarformaður

Føddur í 1967. Føroyingur. Kom í nevndina í 2009 og hevur verið formaður síðan tá. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður mettur sum verandi óheftur. Formaður í nevndini hjá vinnufelagnum Tjaldur.

Útbúgving:

MSc. í búskaparfrøði og virkisleiðslu, Copenhagen Business School. Postgraduate, Lancaster University.

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur 10.761 partabrøv við ársenda 2020.

Rúni M. Hansen er limur í Global Compact's Platform for Sustainable Ocean Business hjá ST. Hann var limur í the World Economic Forum's Agenda Council on the Arctic í tíðarskeiðinum frá 2012-2016. Rúni M. Hansen hevur drúgvar royndir innan altjóða olju- og gassvinnu. Hann var millum annað limur í Equinor's Exploration Executive team. Meðan hann var hjá Equinor (fyrrverandi Statoil) hevur hann havt sæti í London, Keypmannahavn, Oslo og Føroyum. Áðrenn Rúni M. Hansen kom til Equinor (Statoil), var hann í sjógætis- og skipaferðsluvinnuni.

JOHANNES JENSEN

Næstformaður í nevndini

Føddur í 1962. Føroyingur. Kom í nevndina í 2009 og hevur verið næstformaður síðan tá. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður mettur sum verandi óheftur. Stjóri á P/F Gist & Vist.

Útbúgving:

MBA, Lancaster University Management School.

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur ongi partabrøv – óbroytt virðisbrævaogn í 2020.

Johannes Jensen hevur drúgvar royndir innan sjógæti og marknaðarføring. Hann arbeiddi í mong ár hjá Faroe Seafood, har hann var marknaðarstjóri frá 1992 til 2001. Johannes Jensen er í løtuni eisini nevndarformaður í P/F Frost og í P/F Visit Faroe Islands.

TEITUR SAMUELSEN

Nevndarlimur

Føddur í 1972. Føroyingur. Kom í nevndina í 2016. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður mettur at vera óheftur. Stjóri á P/F Eystur- og Sandoyartunlar.

Útbúgving:

MSc. í búskaparfrøði & grannskoðan, Copenhagen Business School

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Number of shares in Bakkafrost:

Eigur 100 partabrøv – óbroytt virðisbrævaogn í 2020.

Teitur Samuelsen hevur drúgvar royndir frá grannskoðan og fígging. Hann hevur arbeitt hjá KPMG og Dong E/P í Danmark og hevur verið fíggjarstjóri í Atlantic Petroleum (2005–2009) og á Bakkafrost (2009-2014). Teitur Samuelsen er í løtuni limur í nevndini í P/F 6. september, Vest Pack og Betri Trygging.

ANNIKA FREDERIKSBERG

Nevndarlimur

Fødd í 1971. Føroyingur. Kom í nevndina í 2008. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður ikki mett at vera óheft. Søluleiðari á Bakkafrost.

Útbúgving:

Prógv frá Føroya Handilsskúla.

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur beinleiðis og óbeinleiðis 16.063 partabrøv – broyting í virðisbrævaogn í 2020: +253 partabrøv.

Annika Frederiksberg hevur drúgvar royndir frá laksavinnuni og sølu. Hon hevur verið partur av fyrisitingini og søluliðinum hjá Bakkafrost í meira enn 25 ár.

ØYSTEIN SANDVIK

Nevndarlimur

Føddur í 1948. Norskur ríkisborgari. Kom í nevndina í 2013. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður mettur sum verandi óheftur.

Útbúgving:

Búskaparfrøðingur innan banka.

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur eingi partabrøv – óbroytt virðisbrævaogn í 2020.

Øystein Sandvik hevur drúgvar royndir frá fíggjarvinnuni og sjógæti. Hann hevur havt fleiri størv í Nordea Bank Norge innan aling og fiskivinnu. Øystein Sandvik er í løtuni nevndarlimur í Coldwater Prawns of Norway AS.

EINAR WATHNE

Nevndarlimur

Føddur í 1961. Norskur ríkisborgari. Kom í nevndina í 2019. Nevndarskeiðið endar í 2021. Verður mettur sum verandi óheftur.

Útbúgving:

Master í Animal Nutrition, NMBU.
Ph.D. í Aquaculture, NMBU.
MBA, Handelshøyskolen BI.

Nevndarfundir í 2020:

Var við á øllum 10 nevndarfundunum í 2020.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur eingi partabrøv – óbroytt virðisbrævaogn í 2020.

Einar Wathne hevur drúgvar royndir frá sjógætisvinnuni og hevur verið stjóri í Cargill og Ewos.

Group Management's Profiles

REGIN JACOBSEN

Forstjóri (CEO)

Føddur í 1966. Føroyingur. Regin Jacobsen hevur verið stjóri (CEO) á Bakkafrost síðan 1989.

Útbúgving:

Prógv í virkisleiðslu og roknskapi (HD-R), Aarhus School of Business.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur 4.616.755 partabrøv við árslok 2020.

Broyting í virðisbrævaogn í 2020: +792 partabrøv.

Regin Jacobsen hevur drúgvar royndir frá laksavinnuni og fígging. Hann var fíggjarleiðari á Bakkafrost, áðrenn hann bleiv stjóri (CEO) á Bakkafrost.

HØGNI DAHL JAKOBSEN

Fíggjarstjóri (CFO)

Føddur í 1972. Føroyingur. Høgni Dahl Jakobsen hevur verið fíggjarstjóri (CFO) á Bakkafrost síðan 2019.

Útbúgving:

Business Design, Henley Business School.
MSc. í virkisleiðslu & KT-vísund (cand merc.dat), Copenhagen Business School.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur 412 partabrøv við árslok 2020.

Broyting í virðisbrævaogn í 2020: +272 partabrøv.

Høgni Dahl Jakobsen hevur drúgvar royndir innan leiðsluráðgeving. Áðrenn hann kom til Bakkafrost var hann senior partnari í Quorum Consulting og hevur starvast sum leiðsluráðgevi hjá PA Consulting Group.

ODD ELIASEN

Stjóri á Havsbrún

Føddur í 1965. Føroyingur. Odd Eliasen hevur verið stjóri á Havsbrún síðan 2012 og stjóri í The Scottish Salmon Company í tíðarskeiðnum frá desember 2019 til mars 2021.

Útbúgving:

Læraraprógv frá Føroya Læraraskúla.

Tal av partabrøvum í Bakkafrost:

Eigur 184.479 partabrøv við árslok 2020.

Broyting í virðisbrævaogn í 2020: +609 partabrøv.

Odd Eliasen hevur drúgvar royndir frá alivinnuni og hevur verið virkin luttakari í arbeiðinum at endurskipa føroyska alivinnu. Hann hevur havt ábyrgdina av alivirkseminum hjá Havsbrún og hevur sitið í fleiri nevndum í vinnuni. Odd Eliasen hevur verið nevndarlimur í Bakkafrost frá 2006 til 2012.

Leiðsluátekning

Stjórn og nevnd hava í dag gjøgnumgingið og góðkent árs- og konsernfrásøgnina hjá P/F Bakkafrost fyri roknskaparárið 1. januar 2020 til 31. desember 2020.

Ársfrásøgnin er uppsett í samsvari við altjóða roknskaparstandardar, góðkendir av ES, og samsvarandi føroysku upplýsingarkrøvunum fyri feløg, ið eru skrásett á keypskála.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at árs- og konsernfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av fíggjarligu støðuni hjá konsernini og móðurfelagnum tann 31. desember 2020 og av virksemi og peningastreymi hjá konsernini og móðurfelagnum í roknskaparárinum 1. januar 2020 til 31. desember 2020.

Tað er okkara fatan, at frágreiðingin frá stjórn og nevnd gevur eina rættvísandi mynd av virkseminum hjá samtakinum og konsernini og fíggjarligu umstøðunum, av úrslitinum fyri árið og samlaðu fíggjarstøðuni hjá samtakinum og konsernini og frágreiðing um týdningarmestu váðar og tættir av óvissu, ið samtakið og konsernin standa yvirfyri.

Vit mæla til, at ársfrásøgnin verður samtykt á ársaðalfundinum.

Glyvrar, hin 10. mars 2021

Leiðsla:

Regin Jacobsen
CEO

Nevndin í P/F Bakkafrost

Rúni M. Hansen
Nevndarformaður

Johannes Jensen
Næstformaður

Øystein Sandvik
Nevndarlimur

Annika Frederiksberg
Nevndarlimur

Teitur Samuelsen
Nevndarlimur

Einar Wathne
Nevndarlimur

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til kapitaleigararnar í P/F Bakkafrost

Niðurstøða
Vit hava grannskoðað árs- og samtaksroknskapin hjá P/F Bakkafrost fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2020 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, heildarinntøku, eginpeningsuppgerð, peningastreymum og notum, íroknað ein samandrátt av nýttum roknskaparhátti felaganna. Árs- og samtaksroknskapurin er gjørdur samsvarandi altjóða roknskaparstandardum (IFRS), sum settum í verk í ES.

Tað er okkara fatan, at árs- og samtaksroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felaganna ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2020 og av úrslitinum og peningastreymum av virksemi felaganna í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2020 samsvarandi altjóða roknskaparstandardum (IFRS), sum settum í verk í ES.

Grundarlag undir niðurstøðuni
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardum fyri grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti „Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða árs- og samtaksroknskapin“.

Vit eru óheft av samtakinum í samsvari við altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Megingrannskoðanarevni
Megingrannskoðanarevni eru evni, ið vit meina eru meginevnini í okkara grannskoðan av árs- og samtaksroknskapinum fyri 2020. Evnini eru væl umhugsað, meðan vit hava grannskoðað árs- og samtaksroknskapirnar í síni heild, og tá ið vit hava gjørt okkara niðurstøðu. Vit gera onga serstaka niðurstøðu um hesi evnini einsæris.

Megingrannskoðanarevni	Okkara reaktión meðan vit hava grannskoðað
Biomassi uppgjørdur til kostnað Biomassi á sjónum kann ikki sannast nágreiniliga fyrr enn við tøku. Roknskaparføring av biomassa á sjónum inniber, at leiðslan ger roknskaparligar metingar um hjáveru og virðisáseting. Metingarnar eru grundaðar á faktuella vitan um útsett tal, fóðring, hiti í sjónum, dagslýsi og viðgerð fyri lús og onnur heilsuviðurskifti, eins og vitan um hvussu laksur reagerar uppá hesi viðurskifti so sum við vøkstri, deyðiligheit, fóðurfaktor, og í hvønn mun hetta kann elva til strongd og sjúku. Týðandi íborðin váði er knýttur at biomassa í sjónum.	**Tilgongd til grannskoðan í stuttum** Undir grannskoðanini hava vit: • Brúkt okkara royndir og vitan um eyðkennini við laksaaling í sambandi við endurmeting av roknskaparligum metingum • Sannað, at metingarnar eru grundaðar á vitan og upplýsingar, ið byggja á sannroyndir. • Sannført okkum um, at leiðslan ger metingar á ein hátt, ið er í samsvarið við vitan um framleiðslutilgongdina, og at metingarnar verða gjørdar einsháttað, og uttan helling. • Sannført okkum um, at leiðslan hevur førleika at gera hesar metingar við at eftirkanna metingar, gjørdar pr. roknskapardagin, eftir at fiskurin er tikin.
Biomassi til dagsvirði eftir ISA 41 Máting av biomassa inniber útrokningar av nútíðarvirðum á torgreiddum grundarlag, herundir eyðkenni við verðandi biomassa og forsagnir viðvíkjandi vøkstri og deyðstíttleika frá roknskapardegnum til tøku, góðskubýti eins og hvussu marknaðarviðurskiftini kunnu væntast at vera við tøku.	**Tilgongd til grannskoðan í stuttum** Undir grannskoðanini hava vit: • Gjøgnumgingið, og samanhildið fyritøkusereyðkennini í grundupplýsingunum, og samanhildið hesar við tað sum er brúkt í útrokningar-modellunum. • Samanhildið grundupplýsingarnar í útrokningarmodellinum við galdandi marknaðarstøðu á roknskapardegum • Gjøgnumgingið útrokningarmodellið, og sanna at tað kann samanberast við tað, sum vinnan brúkar • Við stakroyndum endurroknað roknaðu nútíðarvirðini
Virðisáseting av loyvum og Goodwill Samtakið hevur útvegað framleiðsluloyvi fyri týðandi upphæddir, sum partur av yvirtøku av dótturfeløgum har samtakið er nágreinað sum yvirtakandi partur eftir IFRS 3. Í tilgongdini at býta keypsprísin, eru framleiðsluloyvi og goodwill eyðmerkt. Dagsvirði eru roknað við at brúka alment góðtiknar roknihættir, grundað á ikki alment kendar fyritreytir, sambært stigi 3 í IFRS13.	**Tilgongd til grannskoðan í stuttum** Undir grannskoðanini hava vit: • Gjøgnumgingið roknimyndlar til útrokningar av niðurskrivingum, og staðfest, at teir byggja á kendar fyritreytir. • Avstemmað brúktar upplýsingar við leiðslugóðkendar ætlanir og hvussu einstøku loyvini søguliga hava roynst. • Gjøgnumgingið roknimyndlar fyri støddfrøðiligan samanhang og við stakroyndum eftirroknað virðini. • Gjøgnumgingið og bjóðað av fyritreytina um, at loyvini eru varandi.

Ummæli av leiðslufrágreiðingini
Leiðslan hevur ábyrgdina fyri leiðslufrágreiðingini.

Niðurstøða okkara um árs- og samtaksroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av árs- og samtaksroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin ikki er í samsvari við árs- og samtaksroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir altjóða roknskaparstandardum (IFRS) sum settum í verk í ES eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við árs- og samtaksroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í altjóða roknskaparstandardum (IFRS) sum settum í verk í ES. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Ábyrgd fyri roknskapinum og grannskoðanini

Ábyrgd leiðslunnar av árs- og samtaksroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein árs- og samtaksroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við altjóða roknskaparstandardum (IFRS) sum settum í verk í ES. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at árs- og samtaksroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið árs- og samtaksroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað hevur týdning at upplýsa um viðurskiftir viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera árs- og samtaksroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið og samtakið, støðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða árs- og samtaksroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at árs- og samtaksroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um hesir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um tað eru sannlíkindi fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í árs- og samtaksroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í árs- og samtaksroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanaratgerðir, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til síðis.
- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týðning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.
- Taka støðu til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.
- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt árs- og samtaksroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskiftir, sum kunnu viðføra týðandi óvissu um, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskiftini í árs- og samtaksroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.
- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í árs- og samtaksroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um árs- og samtaksroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskiftir og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.
- Fáa til vega nøktandi og hóskandi grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um einstøku eindirnar, ella vinnuliga virkseminum í samtakinum, til at gera eina niðurstøðu um samtaksroknskapin. Vit hava ábyrgdina fyri leiðslu, umsjón og útinning av samtaksgrannskoðanini. Vit einsamøll hava ábyrgdina av okkara niðurstøðu.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Vit veita eisini teimum, ið hava ábyrgd av leiðslu, eina váttan um, at vit liva upp til øll viðkomandi etisk krøv viðvíkjandi óheftni. Vit samskifta um øll viðurskifti, sum kunnu hugsast at ávirka okkara óheftni, og har tað er viðkomandi, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk.

Grundað á kunningina til nevndina, avgera vit, hvørji evni vit meina eru høvuðsevnini í okkara grannskoðan av árs- og samtaksroknskapinum fyri hetta tíðarskeiðið og harvið megingrannskoðanarevni. Vit lýsa hesi evni í okkara átekning, um ikki lóggáva ella aðrar lógarforðingar forða fyri, at hesi evni verða almannakunngjørd, ella í teimum sera sjáldsomu førum, har vit meina, at vit ikki kunnu umrøða hesi evni í grannskoðanarátekningini orsakað av, at neiligu fylgjurnar kunnu viga tyngri enn almenni áhugin í lýsingini av megingrannskoðanarevnunum.

Tórshavn, tann 10. mars 2021.

Januar P/F
løggilt grannskoðanarvirki
Partafelagsskrásetingarnr. 5821

Heini Thomsen
Statsaut. revisor

Fróði Sivertsen
Statsaut. revisor

Fíggjarligar frásagnir og notur

BAKKAFROST SAMTAKIÐ

BAKKAFROST SAMTAKIÐ

Innihaldsyvirlit

Konsolideraður rakstrarroknskapur fyri árið endað 31. desember	90
Konsolideraðar heildarinntøkur fyri árið endað 31. desember	91
Konsoliderað fíggjarstøða tann 31. desember	92
Konsoliderað gjaldførisfrásøgn fyri árið endað 31. desember	94
Konsolideraðar broytingar í eginognini tann 31. desember	95

NOTUR – 1. PARTUR GRUNDARLAG FYRI TILRÆTTISLEGGING 96

Í hesum partinum er eitt yvirlit yvir nýttan roknskaparhátt sum heild og eitt yvirlit yvir høvuðs roknskaparligu metingarnar hjá leiðsluni.

Nota 1 Almenn kunning	97
Nota 1.1 Samandráttur av nýttum roknskaparhátti	97
Nota 1.2 Grundarlag undir framløguni	97
Nota 1.3 Konsolideringsreglur	97
Nota 1.4 Umrokning av fremmandum gjaldoyra	98
Nota 1.5 Bólkingarreglur	98
Nota 1.6 Virkandi gjaldoyra	98
Nota 1.7 Nýggir standardar	98
Nota 1.8 Roknskaparligar metingar	99

NOTUR – 2. PARTUR ÁRSÚRSLIT **100**

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av úrslitinum fyri árið, íroknað rakstrargeirar, skattir og starvsfólkakostnaðir.

Nota 2.1 Nettosøla 100

Nota 2.2 Høvuðskundar 100

Nota 2.3 Upplýsingar um rakstrargeirar 101

Nota 2.4 Lønir og annar starvsfólkakostnaður 105

Nota 2.5 Annar rakstrarkostnaður 107

Nota 2.6 Gransking og menning 107

Nota 2.7 Fíggjarpostar netto 108

Nota 2.8 Skattur 109

NOTUR – 3. PARTUR OGN OG SKULD **111**

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av ognum, ið eru grundarlagið undir virkseminum hjá Bakkafrost, og skyldunum, ið eru tengdar at teimum.

Nota 3.1 Immateriell ogn 111

Nota 3.2 Materiell støðisogn 115

Nota 3.3 Leasing 117

Nota 3.4 Feløg í samtakinum 119

Nota 3.5 Partabrøv og kapitalpartar í øðrum feløgum 121

Nota 3.6 Vørugoymsla 122

Nota 3.7 Lívfrøðilig ogn 123

Nota 3.8 Vøru- og tænastuáogn og onnur áogn 126

Nota 3.9 Tøkur peningur 127

Nota 3.10 Partapeningur og størstu partaeigarar 128

Nota 3.11 Rentuberandi skuld 130

Nota 3.12 Veðskuld og veðsetingar 133

Nota 3.13 Avleidd fíggjaramboð 134

Nota 3.14 Avsetingar 135

NOTUR – 4. PARTUR KAPITALBYGNAÐUR OG FÍGGING **136**

Í hesum partinum fæst innlit í kapitalbygnað og fígging.

Nota 4.1 Fíggjarlig váðastýring 136

Nota 4.2 Flokkar og virðisjavning av fíggjarligum amboðum 141

Nota 4.3 Vinningur fyri hvørt partabræv 142

NOTUR – 5. PARTUR AÐRAR UPPLÝSINGAR **143**

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av lógarásettum notum, ið sambært sjónarmiðinum hjá Bakkafrost koma í aðru røð.

Nota 5.1 Kapitalbindingar 143

Nota 5.2 Handlar við nærstandandi partar 144

Nota 5.3 Keyp og samanlegging av feløgum 145

Nota 5.4 Hendingar eftir roknskaparlok 147

Nota 5.5 Grannskoðarakostnaður 147

Nota 5.6 Framhaldandi virksemi 148

Nota 5.7 Alternativar virksemismátingar 148

Konsolideraður rakstrarroknskapur

FYRI ÁRIÐ ENDAÐ 31. DESEMBER

KR 1.000		2020	2019
Nettosøla		**4.651.892**	**4.511.107**
Vørukeyp		-2.358.623	-1.354.921
Broytingar í vørugoymslum og í svimjandi fiski (til kostvirði)		401.679	-29.423
Lønir og starvsfólkakostnaður	2.4	-608.347	-512.761
Annar rakstrarkostnaður	2.5	-1.062.719	-978.787
Avskrivingar	3.1/3.2/3.3	-446.765	-310.115
Aðrar inntøkur	2.5	44.041	0
Rakstrarúrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt (Operationelt EBIT)*		**621.158**	**1.325.100**
Dagsvirðisjavning av biomassa	3.7	118.003	-220.567
Inntøkur frá atknýttum feløgum		5.546	13.812
Umsetningsskattur – FO		-53.584	-99.128
Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt (EBIT)		**691.123**	**1.019.217**
Fíggjarinntøkur	2.7	1.399	4.996
Netto fíggjarkostnaður	2.7	-36.317	-17.114
Netto gjaldoyrabroytingar	2.7	-13.096	-12.670
Aðrir fíggjarkostnaðir	2.7	-17.125	-12.513
Úrslit áðrenn skatt (EBT)		**625.984**	**981.916**
Skattur	2.8	-163.139	-180.031
Ársúrslit		**462.845**	**801.885**
Ársúrslit skift til			
Minnilutaáhugamál		0	-8.382
Eigarar av P/F Bakkafrost		462.845	810.267
		462.845	**801.885**
Inntøkur/útvatnaðar inntøkur fyri hvørt partabræv	4.3	7.83	15.53

*Operationelt EBIT er EBIT áðrenn virðisjavnan av biomassanum, tapsgevandi sáttmálum, inntøkum frá atknýttum feløgum og umsetningsskatti FO

Konsolideraðar heildarinntøkur

FYRI ÁRIÐ ENDAÐ 31. DESEMBER

KR. 1.000	2020	2019
Ársúrslit	**462.845**	**810.267**
Dagvirðisjavningar á avleiddum fíggjaramboðum	602	-17.789
Herav ávirkan á inntøkuskatt	-83	2.705
Gjaldoyramunir av konsolidering	-44.303	72.673
Grunnur til partabrævatengd gjøld	1.170	-1.094
Broyting í eginpartabrøvum	-37.604	15.457
Netto heildarinntøka at umflokka til rakstrarroknskap í seinni tíðarskeiði	**-80.218**	**71.952**
Netto heildarinntøka ikki umflokkað til rakstrarroknskap í seinni tíðarskeiði	**0**	**0**
Aðrar heildarinntøkur	**-80.218**	**71.952**
Aðrar heildarinntøkur tilsamans eftir skatt	**382.627**	**882.219**
Heildarinntøka skift til		
Minnilutaáhugamál	0	-8.382
Eigarar av P/F Bakkafrost	382.627	890.601

Konsoliderað fíggjarstøða

TANN 31. DESEMBER

KR. 1.000	Note	2020	2019
OGN			
Støðisogn			
Immateriell støðisogn		4.493.395	4.395.687
Immateriell støðisogn tilsamans	3.1	**4.493.395**	**4.395.687**
Bygningar og grundøki	3.2	1.555.019	1.174.427
Framleiðslutól, rakstrargøgn og aliútgerð	3.2	1.703.233	1.420.379
Onnur framleiðslutól	3.2	242.147	210.750
Skip	3.2	332.254	341.259
Undangjald til keyp av materiellari støðisogn	3.2	387.946	633.683
Ognir við nýtslurætti	3.3	353.192	332.824
Materiell støðisogn tilsamans		**4.573.791**	**4.113.323**
Kapitalpartar í atknýttum felǫgum	3.4	67.141	63.766
Aðrir kapitalpartar	3.5	55.318	55.318
Langfreistað áogn	3.8	8.101	4.422
Útsett skattaáogn	2.8	26.934	37.593
Fíggjarlig støðisogn tilsamans		**157.494**	**161.099**
STØÐISOGN TILSAMANS		**9.224.680**	**8.670.109**
Ogn í umferð			
Svimjandi fiskur (biomassi)	3.7	2.117.024	1.901.729
Aðrar vørugoymslur	3.6	776.032	548.508
Vørugoymslur tilsamans		**2.893.056**	**2.450.237**
Vøruáogn	3.8	490.075	625.993
Skattaáogn		72.143	0
Onnur áogn	3.8	61.431	45.520
Áogn tilsamans		**623.649**	**671.513**
Tøkur peningur	3.9	466.939	1.309.546
OGN Í UMFERÐ TILSAMANS		**3.983.644**	**4.431.296**
OGN TILSAMANS		**13.208.324**	**13.101.405**

KR. 1.000	Nota	2020	2019
EGINOGN OG SKYLDUR			
Eginogn			
Felagskapitalur	3.10	59.143	59.143
Framflytingar		8.670.344	8.270.112
Minniluta áhugamál		0	167.620
Eginogn tilsamans		**8.729.487**	**8.496.875**
Langfreistað skuld			
Útsettur skattur	2.8	1.222.222	1.123.796
Langfreistað rentuberandi skuld	3.11	2.219.690	2.328.231
Langfreistað leasing skuld	3.3	265.235	225.585
Avleidd fíggjaramboð	3.13	1.480	1.966
Langfreistað skuld tilsamans		**3.708.627**	**3.679.578**
Stuttfreistað skuld			
Avleidd fíggjaramboð	3.13	9.710	13.493
Ognarar og onnur skuld		563.857	584.435
Stuttfreistað skattaskuld	2.8	37.422	195.484
Stuttfreistað leasing skuld	3.3	131.336	107.808
Onnur stuttfreistað skuld		27.885	23.732
Stuttfreistað skuld tilsamans		**770.210**	**924.952**
SKULD TILSAMANS		**4.478.837**	**4.604.530**
EGINOGN OG SKULD TILSAMANS		**13.208.324**	**13.101.405**

Konsoliderað gjaldførisfrásøgn

FYRI ÁRIÐ ENDAÐ 31. DESEMBER

Nýttur roknskaparháttur
Konsolideraða gjaldførisfrásøgnin vísir eina sundurgreining av øllum gjaldførinum hjá samtakinum í rakstrar-, íløgu- og fíggjarvirksemi. Gjaldførisfrásøgnin er eftir óbeinleiðishátt-inum. Frásøgnin vísir ávirkanina hjá einstaka virkseminum á tøkan pening. Gjaldføri, ið stavar frá keypi og sølu av støðis-ogn, er lýst undir íløguvirksemi.

KR. 1.000	Nota	2020	2019
Gjaldføri frá rakstri			
Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt (EBIT)		**691.123**	**1.019.217**
Javning av niðurskrivingum og avskrivingum	3.1/3.2/3.3	446.501	313.844
Javning til marknaðarvirði á fiski	3.7	-118.003	220.567
Javning av inntøkum frá atknýttum feløgum		-5.546	-13.812
Javning av gjaldoyraávirkan		-65.402	-65.556
Goldin skattur		-189.132	-152.000
Goymslubroytingar		-309.873	-181.295
Broytingar í áogn		48.252	-261.369
Broytingar í stuttfreistaðari skuld		-23.950	156.811
Gjaldførisúrslit frá primerum rakstri		**473.970**	**1.036.407**
Gjaldføri frá íløgum			
Keyp/Søla av atknýttum fyritøkum og virksemi o.s.fr. netto		0	-3.907.972
Sølu ágóði frá seldum materiellum støðisognum		18412	669
Íløgur í keyp av materiellum støðisognum	3.2	-836.383	-702.173
Íløgur í kapitalpartar og virðisbrøv		1843	3.988
Broyting í langfreistaðari áogn		0	4.242
Gjaldførisúrslit, íløgur		**-816.128**	**-4.601.246**
Gjaldføri frá fígging			
Broytingar í rentuberandi skuld (stutt- og langfreistaðari)		-107.451	1.217.600
Keyp av minnilutum		-167.620	0
Fíggjarinntøkur		1.399	4.998
Fíggjarkostnaðir		-53.442	-20.807
Goldin leasing		-134.569	-42.274
Broyting á eginpartabrøvum		-38.766	68.358
Inngjald av hækkaðum partapeningi		0	3.731.129
Goldið vinningsbýti		0	-401.513
Gjaldførisúrslit, fígging		**-500.449**	**4.557.491**
Nettobroytingar í tøkum peningi		**-842.607**	**992.652**
Tøkur peningur við ársbyrjan		1.309.546	316.894
Tøkur peningur við ársenda		**466.939**	**1.309.546**

Konsolideraðar broytingar í eginognini

TANN 31. DESEMBER

Bundin eginogn er eginogn, har útlutan til eigararnar bert kann gerast eftir serligum framferðarhættum sum fyriskrivað í føroysku vinnufelagslógini. Bundin eginogn er samansett av tiltaksgrunni fyri uppskrivingum av fíggjarligari støðisogn og tiltaksgrunni fyri uppskriving av biomassa til dagsvirði. Frí eginogn kann verða býtt út til partaeigararnar, ella nýtt á annan hátt, við aðalfundarsamtykt. Samansetingin av eginognini kann sundurgreinast soleiðis:

KR. 1.000	Partapeningur	Yvirkurs grunnur	Egin partabrøv	Partabrævatengd gjøld	Kursmunur av konsolidering	Avleidd fíggjaramboð	Uppskot til vinningsbýti	Dagsvirðisjavning á biomasa	Framflutt	Eginogn tilsamans
Eginogn 01.01.2020	**59.143**	**4.027.375**	**-68**	**5.059**	**78.850**	**-15.348**	**0**	**162.203**	**4.179.661**	**8.496.875**
Nettovinningur	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**118.003**	**346.196**	**464.199**
Umflokking 01.01.2020	0	0	0	0	0	0	0	-134.819	134.819	0
Onnur inntøka										
Virðisjavning av keypsprístillutan	0	0	0	0	0	0	0	0	16.253	16.253
Virðisjavning av avleiddum fíggjaramboðum:	0	0	0	0	0	602	0	0	0	602
Ávirkan av inntøkuskatti	0	0	0	0	0	-83	0	0	0	-83
Partabrævatengd gjøld	0	0		1.170	0	0	0	0	0	1.170
Gjaldoyramunir av konsolidering	0	0	0		-44.305	0	0	0	0	-44.305
Onnur inntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**1.170**	**-44.305**	**519**	**0**	**0**	**16.253**	**-26.363**
Heildar inntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**1.170**	**-44.305**	**519**	**0**	**-16.816**	**497.268**	**437.836**
Handlar við partaeigarar:										
Broyting í eginpartabrøvum	0	0	-37.604	0	0	0	0	0	0	-37.604
Uppskot um vinningsbýti	0	0	0	0	0	0	215.872	0	-215.872	0
Handlar við partaeigarar íalt	**0**	**0**	**-37.604**	**0**	**0**	**0**	**215.872**	**0**	**-215.872**	**-37.604**
Broyting í eginognini tilsamans	**0**	**0**	**-37.604**	**1.170**	**-44.305**	**519**	**215.872**	**-16.816**	**281.396**	**232.612**
Broyting í minnilutaáhugamálum	0	0	0	0	0	0	0	0	-167.620	-167.620
Eginogn tilsamans 31.12.2020	**59.143**	**4.027.375**	**-37.672**	**6.229**	**34.545**	**-14.829**	**215.872**	**145.387**	**4.293.438**	**8.729.487**
Eginogn 01.01.2019	**48.858**	**306.537**	**-15.525**	**6.153**	**6.176**	**-264**	**403.079**	**382.770**	**2.939.245**	**4.077.029**
Nettovinningur	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**-220.567**	**1.071.230**	**850.663**
Onnur inntøka:										
Virðisjavning av avleiddum fíggjaramboðum	0	0	0	0	0	-17.789	0	0	0	-17.789
Ávirkan av inntøkuskatti	0	0	0	0	0	2.705	0	0	0	2.705
Partabrævatengd gjøld	0	0	0	-1.094	0	0	0	0	0	-1.094
Gjaldoyramunir av konsolidering	0	0	0	0	72.674	0	0	0	0	72.674
Onnur inntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**-1.094**	**72.674**	**-15.084**	**0**	**0**	**0**	**56.496**
Inntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**-1.094**	**72.674**	**-15.084**	**0**	**-220.567**	**1.071.230**	**907.159**
Handlar við partaeigarar:										
Hækkan av partapeningi*	10.285	3.720.838	0	0	0	0	0	0		3.731.123
Eginpartabrøv	0	0	15.457	0	0	0	0	0	0	15.457
Útgoldið vinningsbýti	0	0	0	0	0	0	-403.079	0	1.566	-401.513
Handlar við partaeigarar íalt	**10.285**	**3.720.838**	**15.457**	**0**	**0**	**0**	**-403.079**	**0**	**1.566**	**3.345.067**
Broyting í eginognini tilsamans	**10.285**	**3.720.838**	**15.457**	**-1.094**	**72.674**	**-15.084**	**-403.079**	**-220.567**	**1.072.796**	**4.252.226**
Herav minniluta áhugamál	0	0	0	0	0	0	0	0	167.620	167.620
Eginogn tilsamans 31.12.2019	**59.143**	**4.027.375**	**-68**	**5.059**	**78.850**	**-15.348**	**0**	**162.203**	**4.179.661**	**8.496.875**

*Íroknað handilskostnað 99.4 mio kr.

Notur til konsolideraða ársroknskapin

BAKKAFROST SAMTAKIÐ

NOTUR – 1. PARTUR

Grundarlag fyri tilrættislegging

Í hesum partinum er eitt yvirlit yvir nýttan roknskaparhátt sum heild og eitt yvirlit yvir høvuðsroknskaparligu metingarnar hjá leiðsluni.

NOTA 1. ALMENN KUNNING

P/F Bakkafrost („felag") er eitt partafelag við bústaði í Føroyum á Bakkavegi 9, Glyvrum.

P/F Bakkafrost varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Oslo í 2010 við eyðmerkingini: BAKKA.

NOTA 1.1 SAMANDRÁTTUR AV NÝTTUM ROKNSKAPARHÁTTI

Aðalreglurnar innan roknskaparuppseting, ið konsolideraða ársfrásøgnin fyri samtakið er grundað á, standa frágreiddar niðanfyri. Hesar reglur eru nýttar fyri øll tey vístu tíðarskeiðini.

NOTA 1.2 GRUNDARLAGIÐ UNDIR FRAMLØGUNI

Ársfrásøgnin fevnir um rakstrarroknskapin, heildarinntøkurnar, fíggjarstøðuna, uppgerð yvir broytingar í eginognini, gjaldførisfrásøgn og notuupplýsingar hjá samtakinum. Roknskaparárið er tað sama sum álmanakkaárið. Ársroknskapurin er formliga settur upp í samsvari við altjóða roknskaparstandardir (IFRS), góðkendir av ES, og samsvarandi føroysku upplýsingarkrøvunum fyri feløg, ið eru skrásett í keypsskála.

Árs- og konsernfrásøgnin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2020 umfatar bæði konsernroknskapin og ársroknskapin fyri P/F Bakkafrost og dótturfeløgini (samtakið) og serskilda ársroknskapin fyri móðurfelagið.

Formliga góðkendi nevndin ársroknskapin hin 10. mars 2021.

Ársroknskapurin er settur upp eftir søguligum kostprísi, uttan har, ið IFRS krevur, at hetta varð gjørt eftir dagsvirði, og er hetta serliga, har mett verður um virðið á aliloyvum, sum eru útvegað við samanleggingum ella keypi av feløgum og av livandi fiski.

Ávísir roknskaparpostar eru grundaðir á metingar og á aðrar fyritreytir. Um metingar ella fyritreytir broytast, verður væl og virðiliga greitt frá hesum, so hvørt tær koma fyri. Gjølligari lýsingar av ymsu metingunum og fyritreytunum standa í notunum til roknskapin, har tað verður mett viðkomandi.

NOTA 1.3 KONSOLIDERINGSREGLUR

Konsolideraða ársfrásøgnin umfatar P/F Bakkafrost og øll dótturfeløgini, sum Bakkafrost hevur ræði á, antin við at eiga meirilutan av partabrøvunum ella av atkvøðurættinum. Vanliga ræður eitt felag á einum øðrum, tá ið tað beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meir enn helvtina av atkvøðuføru partabrøvunum; men tað kann eisini gerast eftir avtalu. Eisini kann semja um avmarkingar í atkvøðurættinum gerast, og tá broytist felagið til at verða eitt atknýtt felag.

Nýkeypt dótturfeløg eru innroknað frá tí degi, avgerandi ávirkan er tryggjað, og seld dótturfeløg verða tikin við fram til søludagin. Konsernroknskapurin er uppsettur eftir einsháttaðum roknskaparhátti fyri somu roknskaparpostar hjá øllum feløgum, sum eru við í konsernroknskapinum.

Allir handlar og allar millumrokningar millum feløgini í samtakinum eru eliminerað.

Partabrøv í dótturfeløgum eru tikin við sambært reglunum um yvirtiknar fyritøkur (yvirtøkuháttinum). Hetta merkir, at ogn og skuld hjá yvirtiknum feløgum verða tiknar við til dagsvirði tann dagin, ið felagið varð yvirtikið. Ein møguligur meirprísur verður tikin við sum goodwill. Um marknaðarprísurin er hægri enn keypsprísurin, verður munurin inntøkuførdur sum negativt goodwill í rakstrarroknskapinum.

Tá ið partabrøv verða útvegað í stigum, er virðið á ognum og skyldum grundað á virðini tann dagin, ið felagið hevur útvegað so mikið, at talan er um eitt samtak. Partabrøv í verandi dótturfeløgum, ið verða útvegað seinni, ávirka ikki

virðini á ognum og skyldum, burtursæð frá goodwill, ið verður roknað so hvørt partabrøv verða útvegað.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða tiknir upp eftir innaravirðisháttinum í konsernroknskapinum. Talan er um atknýtt feløg, tá ið samtakið eigur 20-50% av atkvøðugevandi partabrøvunum. Parturin hjá samtakinum í rakstrarúrslitinum hjá hesum fyritøkunum er roknaður út frá úrslitinum eftir skatt, eftir at innanhýsis vinningur er drigin frá, og eftir at tann meirprísur, sum samtakið hevur keypt kapitalpartarnar fyri, er avskrivaður. Úrslitið verður tikið við í rakstrarroknskapin sum rakstrarpostur fyri seg, meðan kapitalpartarnir verða tiknir við í fíggjarstøðuni sum ein langtíðar fíggjarlig støðisogn. Roknskapirnir hjá atknýttum feløgum eru tillagaðir, har neyðugt er fyri at fáa samsvar við nýtta roknskaparháttin fyri alt samtakið

NOTA 1.4 UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA

Fyri hvørt felag, sum er tikið við í konsolideraðu ársfrásøgnina, er staðfest, hvat virkandi gjaldoyra er, ið konsolideraða felagið mátar sítt úrslit og sína fíggjarstøðu í. Virkandi gjaldoyra er høvuðsgjaldoyrað í fíggjarliga umhvørvinum, har felagið hevur sítt virksemi. Handlar í øðrum gjaldoyrum enn virkandi gjaldoyranum eru mettir sum handlar í fremmandum gjaldoyra.

Ein handil í fremmandum gjaldoyra er í fyrsta umfari skrásettur í virkandi gjaldoyranum við spotkursinum millum virkandi gjaldoyra og fremmant gjaldoyra á degnum, handilin fer fram.

Tann dagin, fíggjarstøðan verður dagfest, verða áogn, skuld og aðrir fíggjarpostar í fremmandum gjaldoyra umroknaðir til virkandi gjaldoyra við endaliga kursinum uppgerðardagin. Kursmunir, ið koma, tá ið peningaupphæddir í fremmandum gjaldoyra verða realiseraðar ella, tá ið peningaupphæddir verða umroknaðar við kursi, ið er øðrvísi, enn hann var, tá ið umroknað varð í uppruna tíðarskeiðinum ella fíggjarstøðuni fyri árið fyri, verða tiknir við í rakstrarroknskapinum undir inntøkum og útreiðslum.

Tá ið konsoliderað verður, verða úrslitini og fíggjarstøðan hjá einstøku feløgunum í samtakinum, ið hava ymisk virkandi gjaldoyra enn tað hjá samtakinum (DKK), umsett til virkandi gjaldoyra hjá samtakinum á henda hátt:

- Ogn og skuld verða umroknað við enda kursinum fíggjarstøðudagin.
- Inntøkur og útreiðslur verða umroknaðar við kursinum tann dagin, handilin fer fram.
- Allir kursmunir verða tiknir við beinleiðis í eginognina sum ein serskildur postur í eginognini. Av praktiskum ávum verður ein miðalkursur nýttur fyri tíðarskeiðið, tá ið handlarnir verða framdir.

NOTA 1.5 BÓLKINGARREGLUR

Í fíggjarstøðuni verður lívfrøðiliga ognin tikin við til dagsvirði. Munurin í virðinum á lívfrøðiligari ogn og goymslu, tikin upp til framleiðsluvirði, stendur á einari reglu fyri seg í rakstrarroknskapinum. Kostnaðurin av lívfrøðiligari ogn umfatar allan framleiðslukostnað. Lívfrøðilig ogn verður síðani virðisjavnað til dagsvirði, t.v.s. dagsvirðið frádrigið kostnaðir til at gera vørurnar lidnar, við at leggja IFRS-virðisjavningina aftrat ella draga hana frá. IFRS-virðisjavningin er munurin millum kostnaðin at framleiða lívfrøðiliga ogn og dagsvirðið.

Reiður peningur og innistandandi í peningastovni verða tikin við undir tøkum peningi. Ognir, sum eru neyðugar í framleiðsluni og skulu gjaldast innan eitt ár, verða bólkaðar sum ogn í umferð. Aðrar ognir verða bólkaðar undir støðisognum. Skuld, sum er neyðug í framleiðsluni ella skal gjaldast innan eitt ár, verður bólkað sum stuttfreistað skuld. Onnur skuld verður bólkað sum langfreistað skuld.

Uppskot um at gjalda vinningsbýti verður ikki tikið við sum skuld, fyrr enn móðurfelagið hevur átikið sær skyldu at gjalda vinningsbýtið. Vanliga hendir tað á ársaðalfundinum, tá ið uppskotið um at gjalda vinningsbýti er samtykt.

Avdráttirnir av langfreistaðu skuldini, sum skulu gjaldast komandi ár, verða bólkaðir sum stuttfreistað skuld.

Broytingar í dagsvirði av lívfrøðiligum ognum eru vístar í serstakari reglu, atskilt frá virðinum á lívfrøðiligu ognunum mátaðar til kostvirði undir rakstrarinntøkum og kostnaðum. Hetta ger tað møguligt hjá tí, ið lesur ársfrásøgnina, at meta um bæði framleiðsludugnaskapin hjá fyritøkuni og lívfrøðiligu ognina til dagsvirði.

NOTA 1.6 VIRKANDI GJALDOYRA

Konsolideraða ársfrásøgnin er sett upp í donskum krónum (DKK), sum er bæði virkandi og framløgu gjaldoyra samtaksins. Allir handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til DKK, tann dagin handilin fer fram. Í fíggjarstøðuni verða allir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok.

NOTA 1.7 NÝGGIR STANDARDAR

Standardar og tulkingar, sum eru útgivin roknskapardagin. men ikki fáa virknað fyrr enn seinni, eru viðgjørd niðanfyri. Upplýsingarnar vísa standardar, íroknað broytingar, ið kunnu ávirka innrokning og virðisásetingar í roknskapinum, broyta upplýsingarkrøv ella hava við sær, at fleiri upplýsingar skulu gevast, tá ið hesir seinni fáa fullan virknað. Standardarnir verða tiknir í nýtslu, so hvørt hesir fáa virknað.

Nýggir standardar, sum ikki eru viðkomandi fyri samtakið, eru ikki tiknir við í hesa frásøgn.

Nýggir standardar,
við virknaði frá 1. januar 2020 og frameftir

Bert smærri broytingar hava verið til standardar og tulkingar (IFRIC), ið hava virknað fyri fíggjarárið 2020. Fyri fíggjarárið 2021 eru ongar broytingar ella tillagingar av tílíkum standardum, ið væntast hava nakran týdning fyri Bakkafrost samtakið.

NOTA 1.8 ROKNSKAPARLIGAR METINGAR

Tá ið roknskapir verða settir upp eftir IFRS, krevst, at leiðslan dømir um og ger metingar og nýtir fyritreytir, sum ávirka nýtta roknskaparháttin og roknskaparligu virðini á ognum, skyldum, inntøkum og kostnaðum. Tær gjørdu metingarnar og fyritreytirnar, sum liggja til grund fyri metingunum, eru settar upp eftir royndum og øðrum viðurskiftum, sum mett vóru viðkomandi og sannlík, tá ið metast skuldi.

Metingarnar verða tíðum gjøgnumgingnar, og tey ásannaðu virðini og úrslitini kunnu víkja frá upprunaligu metingunum. Broytingarnar í metingunum verða tiknar við í tí tíðarskeiði, tá ið metingin verður broytt. Virðismetingarnar og metingarnar, sum hildnar vera at hava størst týdning fyri ársfrásøgnina hjá Bakkafrost samtakinum eru lýstar í notunum.

NOTUR – 2. PARTUR

Ársúrslit

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av úrslitinum fyri árið, íroknað rakstrargeirar, skattir og starvsfólkakostnaðir.

NOTA 2.1 NETTOSØLA

Nettosølur verða tiknar við, við dagsvirði á tí samsýning, ið er innkomin ella er bókað sum ágóði fyri seldar vørur ella tænastur í vanligum handli. Nettosøla verður tikin við, eftir at avsláttur, meirvirðisgjald og onnur avgjøld eru frádrigin.

Meginparturin av nettosøluni hjá samtakinum stavar frá sølu av laksi, fiskamjøli, lýsi og alifóðri. Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, tá ið veiting og váði eru farin til keypara. Vanliga er hetta, tá ið vøran verður latin.

NOTA 2.2 HØVUÐSKUNDAR

Í 2020 var ein høvuðskundi – sum lýst í IFRS 8.34, sum umboðaði 570 milliónir kr. av umsetninginum í góðskingargeiranum, sammett við 510 milliónir kr. í 2019. Hetta er 52% av samlaða umsetninginum í góðskingargeiranum, samanborið við 53% í 2019.

NOTA 2.3 UPPLÝSINGAR UM RAKSTRARGEIRAN

2020 – KR. 1.000	Aling FO	Virðisøktar vørur	Fiskamjøl, lýsi og alifóður	Aling SCT	Eliminering	Bakkafrost samtakið
Søla til onnur	1.548.623	1.116.216	391.491	1.595.561	0	4.651.891
Søla innanhýsis	791.638	0	1.027.480	0	-1.819.118	0
Umsetningur tilsamans	**2.340.261**	**1.116.216**	**1.418.971**	**1.595.561**	**-1.819.118**	**4.651.891**
Avskriving og niðurskriving	-239.814	-19.530	-30.912	-156.508	0	-446.764
Rakstrarkostnaðir	-773.619	-165.355	-1.211.275	-1.358.626	-119.135	-3.628.010
Rakstrarkostnaðir innanhýsis	-878.999	-791.638	0	-148.481	1.819.118	0
Onnur inntøka	0	0	0	44.041	0	44.041
Operationelt EBIT	**447.829**	**139.693**	**176.784**	**-24.013**	**-119.135**	**621.158**
Dagsvirðisjavning av biomassa	-214.275	0	0	332.278	0	118.003
Inntøkur frá atknýttum feløgum	719	0	4.827	0	0	5.546
Umsetningsskattur – FO	-53.584	0	0	0	0	-53.584
EBIT	**180.689**	**139.693**	**181.611**	**308.265**	**-119.135**	**691.123**
Netto fíggjarpostar	-52.661	-631	-12.069	222	0	-65.139
Vinningur áðrenn skatt	**128.028**	**139.062**	**169.542**	**308.487**	**-119.135**	**625.984**
Skattir	-30.445	-25.032	-30.517	-98.887	21.742	-163.139
Nettovinningur	**97.583**	**114.030**	**139.025**	**209.600**	**-97.393**	**462.845**
Operationelt EBITDA	**687.643**	**159.223**	**207.696**	**132.495**	**-119.135**	**1.067.922**
ÍLØGUR						
Materiell støðisogn	582.419	3.334	30.866	246.837		863.456
Avskrivingar	-239.814	-19.530	-30.878	-156.508		-446.764

2019 – KR. 1.000	Aling FO	Virðisøktar vørur	Fiskamjøl, lýsi og alifóður	Aling SCT*	Eliminering	Bakkafrost samtakið
Søla til onnur	2.501.646	964.484	607.807	437.171	0	4.511.107
Søla innanhýsis	650.816	0	780.654	0	-1.431.470	0
Umsetningur tilsamans	**3.152.462**	**964.484**	**1.388.461**	**437.171**	**-1.431.470**	**4.511.107**
Avskriving og niðurskriving	-207.344	-17.482	-28.619	-56.670	0	-310.115
Rakstrarkostnaðir	-1.061.463	-232.458	-1.112.665	-362.372	-106.934	-2.875.892
Rakstrarkostnaðir innanhýsis	-780.654	-650.816	0	0	1.431.470	0
Operationelt EBIT	**1.103.001**	**63.728**	**247.177**	**18.129**	**-106.934**	**1.325.100**
Dagsvirðisjavning av biomassa	21.847	0	0	-242.414	0	-220.567
Inntøkur frá atknýttum feløgum	3.119	0	10.693	0	0	13.812
Umsetningsskattur – FO	-99.127	0	0	0	0	-99.128
EBIT	**1.028.840**	**63.728**	**257.870**	**-224.285**	**-106.934**	**1.019.217**
Netto fíggjarpostar	-25.922	-541	-5.863	-4.977	0	-37.303
Vinningur áðrenn skatt	**1.002.918**	**63.187**	**252.007**	**-229.262**	**-106.934**	**981.916**
Skattir	-161.566	-11.375	-44.976	37.886	0	-180.031
Nettovinningur	**841.352**	**51.812**	**207.031**	**-191.376**	**-106.934**	**801.885**
Operationelt EBITDA	**1.310.345**	**81.210**	**275.796**	**74.799**	**-106.934**	**1.635.216**
ÍLØGUR						
Materiell støðisogn	666.776	15.212	20.185	521		702.694
Avskrivingar	-207.344	-17.482	-28.619	-56.670		-310.115

* Aling SCT er konsoliderað frá 8. oktober 2019.

	2020		2019	
ALING FO – BÝTI AV TIKNARI NØGD	**tons kruvt**	**%**	**tons kruvt**	**%**
Tikin nøgd FO nýtt í framleiðslu av virðisøktum vørum	23.931	47,2%	16.690	29,2%
Tikin nøgd FO seld fesk/fryst	26.769	52,8%	40.494	70,8%
Tikin nøgd tilsamans	**50.700**	**100,0%**	**57.184**	**100,0%**

BÝTI Í NØGD AV SELDUM ALIFÓÐRI	**tons kruvt**	**%**	**tons kruvt**	**%**
Nøgd nýtt innanhýsis	94.345	84,2%	76.583	78,6%
Nøgd seld øðrum	17.653	15,8%	20.825	21,4%
Seld nøgd tilsamans	**111.998**	**100,0%**	**97.408**	**100,0%**

FRAMLEIÐSLA AV FISKAMJØLI OG LÝSI	**tons kruvt**	**%**	**tons kruvt**	**%**
Fiskamjøl	60.661	85,9%	60.646	86,3%
Lýsi	9.932	14,1%	9.633	13,7%
Framleiðsla tilsamans	**70.593**	**100,0%**	**70.279**	**100,0%**

ALING SCT – BÝTI AV TIKNARI NØGD	**tons kruvt**	**%**	**tons kruvt**	**%**
Tikin nøgd nýtt í framleiðslu av virðisøktum vørum	0	0,0%	0	0,0%
Tikin nøgd seld fesk/fryst	34.986	100,0%	7.925	100,0%
Tikin nøgd tilsamans	**34.986**	**100,0%**	**7.925**	**100,0%**

LANDAFRØÐILIGT BÝTI AV SØLU GRUNDAÐ Á GEIRAR OG KUNDAØKI

2020 – KR. 1.000	Aling FO	Virðisøktar vørur	Fiskamjøl, lýsi og alifóður	Aling SCT	Tilsamans
Vesturevropa	473.616	941.026	391.491	1.443.510	3.249.642
Norðuramerika	594.301	94.001	0	87.573	775.875
Asia	300.792	43.929	0	11.585	356.306
Eysturevropa	179.733	37.259	0	0	216.992
Restin av heiminum	181	0	0	52.893	53.075
Total	**1.548.623**	**1.116.216**	**391.491**	**1.595.561**	**4.651.891**
2019 – KR. 1.000					
Vesturevropa	632.916	771.587	607.807	408.318	2.420.628
Norðuramerika	727.979	41.473	0	8.743	778.195
Asia	833.048	24.112	0	3.497	860.658
Eysturevropa	307.702	127.312	0	16.612	451.627
Tilsamans	**2.501.646**	**964.484**	**607.807**	**437.171**	**4.511.108**

Samtakið hevur fýra geirar, sum geva frásøgn sambært IFRS 8 Rakstrargeirar. Høvuðs vinnuøkið hjá samtakinum er alivinna, sum er samansett av fýra geirum: Aligeirin í Føroyum og Skotlandi, virðisøktar vørur (VAP), og framleiðsla og søla av fiskamjøli, lýsi og alifóðri.

Somu roknskaparligu meginreglur, sum lýstar eru fyri konsolideraðu ársfrásøgnina, eru nýttar í frásagnum fyri geirar. Flytingar ella handlar geiranna millum fara fram eftir vanligum handilsligum treytum og ábyrgdum, og mátingin, sum verður nýtt í frásøgn av geirunum, er tann sama, sum verður nýtt í triðjaparts transaktiónum. Meginreglan viðvíkjandi prísi millum góðskingargeiran og aligeiran er grundað á marknaðartilvísingarprís fyri dag til dag sølu (dagsprís). Meginreglan viðvíkjandi prísi millum geiran fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður og aligeiran er grundað á sáttmálar fyri hvønn ársfjórðing.

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR FRÁSØGN FYRI GEIRAR

Aligeirin – Føroyar (FO) íroknað søluv av feskum laksi

Aling av laksi fevnir bæði um kleking og víðari aling av laksi, tøku og kryvjing, sølu og flutning av laksi. Samtakið hevur framleiðsluvirksemi ymsastaðni í Føroyum. Eingir týðandi munir eru á ymsu framleiðslueginleikunum á aliloyvunum, og tí bólkar samtakið allan alda laksin, íroknað søluv av feskum laksi, í ein og sama geira. Laksurin verður seldur á dagsmarknaðinum fyri laksavørur og til fremmand feløg, ið virka sjógæti.

Aligeirin – Skotland (SCT)

Aling SCT geirin fevnir um alt virksemið í The Scottish Salmon Company Plc, sum Bakkafrost fekk ræðisrættin á tann 8. oktober 2019. Virksemið er í Skotlandi og inniber laksaaling, kryvjing, flakaskering, sølu og fyrisiting.

Góðskingargeirin

Ein týðandi partur av aldu vørunum verður virðisøktur á góðskingarvirkinum á Glyvrum. Framleiðslan á virkinum er í høvuðsheitum portiónir til retailmarknaðin. Allýsingin av vinnugeiranum er grundað á skilnaðin millum vøru, sum verður seld til ídnaðarmarknaðin, og virðisøktar vørur, ið verða seldar endabrúkaranum á retailmarknaðinum.

Geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður

Geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður fevnir um framleiðslu og søluv av fiskamjøli, lýsi og alifóðri. Framleiðslan av fiskamjøli, lýsi og alifóðri fer fram á Havsbrún, sum er dótturfelag hjá Bakkafrost. Havsbrún búleikast í Fuglafirði.

NOTA 2.4 LØNIR OG ANNAR STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR

KR. 1.000	2020	2019
Lønir	516.445	432.550
Partabrævatengd gjøld	3.676	2.529
Arbeiðsmarknaðargjøld	34.025	32.782
Eftirlønargjøld	42.656	33.214
Aðrir lønarkostnaðir	11.545	11.687
Lønarkostnaðir tilsamans	**608.347**	**512.761**
Tal av ársverkum í miðal	1.699	1.553

SAMSÝNING TIL SAMTAKSLEIÐSLU

KR. 1.000					Tilsamans
Lønir og aðrir goldnir kostnaðir	**Løn**	**Viðbót**	**Eftirløn**	**Annað**	**2020**
Forstjóri (CEO)	2.145	0	146	89	2.380
Stjóri	1.703	115	124	0	1.942
Fíggjarstjóri (CFO)	1.328	115	98	89	1.630
Samsýning tilsamans	**5.176**	**230**	**368**	**178**	**5.952**

KR. 1.000					Tilsamans
Lønir og aðrir goldnir kostnaðir	**Løn**	**Viðbót**	**Eftirløn**	**Annað**	**2019**
Forstjóri (CEO)	2.164	300	137	88	2.689
Stjóri	1.493	115	89	0	1.697
Fíggjarstjóri (CFO)*	1.755	115	91	88	2.049
Samsýning tilsamans	**5.412**	**530**	**317**	**176**	**6.435**

* Í 2019 er løn útgoldin til bæði fyrrverandi og nýggja fíggjarstjóran.

NEVNDARSAMSÝNINGAR

KR. 1.000		2020	2019
Rúni M. Hansen**	Nevndarformaður	479	461
Johannes Jensen	Næstformaður	271	261
Annika Frederiksberg*	Nevndarlimur	217	209
Einar Wathne***	Nevndarlimur	231	161
Teitur Samuelsen **	Nevndarlimur	262	252
Øystein Sandvik**	Nevndarlimur	278	265
Samsýningar tilsamans		**1.738**	**1.609**

* Annika Frederiksberg starvast eisini hjá Bakkafrost samtakinum. Fyri hetta fekk hon 651 túsund kr. (2019: 641 túsund kr.)
** Limir í grannskoðaranevndini. Samsýning til grannskoðaranevndina er við í lønini
*** Limur í nevndini frá apríl 2019

Samsýning til samtaksleiðslu

Samlaða samsýningin til leiðsluna er grundløn (meginparturin), aðrir fyrimunir og eftirlønaravtalur. Hetta er ymiskt frá persóni til persón. Forstjórin í samtakinum (CEO) ásetur samsýningar til aðra leiðslu í samráð við nevndarformannin. Samlaða samsýningin er ásett grundað á tørvin á kappingarførum treytum í teimum ymisku virkisøkjunum. Samsýningin skal stiðja undir kappingarførið hjá samtakinum á viðkomandi arbeiðsmarknaðum.

Samlaða samsýningin skal hvørki hótta umdømið hjá Bakkafrost ella verða marknaðarførandi, men skal tryggja, at Bakkafrost dregur leiðarar at sær við neyðugum førleikum og royndum og varðveitir teir. Grundlønin verður endurmett árliga og verður fastløgd út frá vanliga støðinum á arbeiðsmarknaðinum.

Uppsagnarfráboðan og fráfaringarløn

Bakkafrost kann siga leiðarum í samtaksleiðsluni upp við at geva teimum eina uppsagnartíð. Uppsagnartíðin hjá forstjóranum (CEO) í samtakinum er 24 mánaðir, og uppsagnartíðirnar hjá hinum í samtaksleiðsluni er frá 6 til 12 mánaðir.

PARTABRÆVATENGD GJØLD

Bakkafrost hevur stovnað eina partabrævaskipan fyri starvsfólkið. Ætlanin hjá nevndini er, at skipanin skal vera framhaldandi partur av bonusskipanini hjá starvsfólkunum. Nevndin hevur kortini fullan rætt at avgera um skipanin verður longd framyvir og treytirnar fyri skipanini.

Starvsfólk kunnu gera Íløgur í Bakkafrost partabrøv fyri upp til 5% av grundlønini. Uppsparda upphæddin verður tikin av mánaðarligu nettolønini og verður nýtt til at keypa Bakkafrost partabrøv fyri starvsfólkið. Keypið verður gjørt frá eginpartabrøvunum hjá Bakkafrost ella á marknaðinum. Starvsfólk kann ikki broyta upphæddina til skipanina í árinum, men starvsfólk kann avlýsa tekningina í árinum. Keypsprísurin og talið av útvegaðum partabrøvum frá felagnum verða fráboðað í samsvari við galdandi reglur.

Eftir at vera læst í eitt tíðarskeið á tvey kalendaraár verður eitt partabræv eyka latið fyri hvørt keypt partabræv. Partabrøv, ið verða flutt starvsfólki, eru útvegað av felagnum á marknaðinum.

STARVSFÓLKALÁN

Tann 31.12.2020 vóru eingi starvsfólkalán.

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR PARTABRÆVATENGD GJØLD

Skyldur í sambandi við partabrævaskipanina og kostnaðir av lønarútgjaldingum verða tillutað yvir innvinningarskeiðið hjá starvsfólkunum. Innvinningarskeiðið er, frá tí starvsfólkið undirskrivaði partabrævaskipanina, og til partabrøvini verða givin. Dagsvirðisjavningin av hesum skyldum verður gjørd upp við at nýta talið av partabrøvum, ið sáttmáli varð gjørdur um við byrjan av partabrævaskipanini við at nýta kursin tann dagin, sum starvsfólkið skrivaði undir, tillagað fyri tey, ið væntast at fara úr partabrævaskipanini. Munurin millum dagsvirðisjavningina og kursin, tá ið partabrøvini verða latin, verður bókaður sum fíggjarpostur í rakstrarroknskapinum. Skuldin verður skrásett undir grunnum undir eginognini.

EFTIRLØNIR

Samtakið hevur sett í verk ásetta veitingarskipan til eftirløn. Eftirlønargjøldini verða tikin við í rakstrarroknskapin so hvørt. Samtakið hevur ongar eftirlønarskyldur mótvegis starvsfólkunum burtursæð frá hesum tíðarbundnu gjaldingunum.

NOTA 2.5 ANNAR RAKSTRARKOSTNAÐUR OG ONNUR INNTØKA

KR. 1.000	2020	2019
Viðlíkahald	-161.327	-131.118
Rakstrarútreiðslur	-175.788	-152.442
Heilsa	-127.605	-102.884
Flutningur	-424.575	-364.288
Orka	-167.999	-156.697
Annar kostnaður	-5.425	-71.359
Annar rakstrarkostnaður tilsamans	**-1.062.719**	**-978.787**
Skattaafturbering vegna granskingar- og menningarútreiðslur í Skotlandi	44.041	0
Onnur inntøka í alt	**44.041**	**0**

NOTA 2.6 GRANSKING OG MENNING

Bakkafrost hevur eina natúrliga menning av allari virðisketuni. Hetta verður ikki roknað sum R&D, men er ein heildarpartur av øðrum rakstrar- og lønarútreiðslum.

Bakkafrost hevur eftirmett og økt dentin á gransking og menning (R&D) nakað seinastu árini. Minking av talinum av fiskalús, eftirlit við lívfrøðiliga tilfeinginum og góðskan á smoltinum hava framvegis høga raðfesting, tað sama er galdandi fyri menning og ábót av koppseting, fóðri, fóðring og virksemistøkni. Harumframt metir Bakkafrost javnan um mannagongdirnar fyri virksemið.

Bakkafrost miðar ímóti at víðka granskingar- og menningarvirksemið (R&D) innan fóður og fóðring og sær ein stóran tørv á at leggja seg eftir grundleggjandi vitan, um hvussu fiskurin verður fóðraður, og hvussu vit kunnu varðveita ein heilsugóðan laks. Farna árið hevur víst seg at vera betri enn væntað, tá ið tað snýr seg um ábøtur innan framleiðslu og aling. Vit eru sannførd um, at okkara tillaging av rávørublanding hevur havt við sær, at vit hava eina betri føðslugóðsku í fóðrinum. Týðiliga framborna málið hjá Bakkafrost er at taka stig til betri og meira umfatandi kanning av hesum økjum í størri málistokki.

Bakkafrost leggur alsamt dent á at minka um lívfrøðiligan váða og hevur gjørt fleiri nýggjar íløgur og mannagongdir fyri at avmarka hendan váðan. Bakkafrost leggur dent á ikki at nýta medisinskar viðgerðarhættir móti fiskalús og hevur gjørt íløgur í nýggja tøkni fyri at fylgja hesi strategiini.

Bakkafrost miðar ímóti at verða sjálvbjargið við 500 gramm smolti í 2023. Fyrimunirnir eru styttri framleiðslutíð á sjónum og minni lívfrøðiligur váði. Nýggja smoltstøðin á Strond, ið varð tikin í fulla nýtslu í 2020, er ein týðandi partur av hesi ætlan. Økta smoltframleiðslan, ið stavar frá hesari íløgu, sæst nú aftur í væntaðu tøkunøgdini í 2021.

NOTA 2.7 FÍGGJARPOSTAR NETTO

KR. 1.000	2020	2019
Aðrar fíggjarinntøkur	1.399	4.996
Fíggjarinntøkur	**1.399**	**4.996**
Rentukostnaður av langfreistaðum lánum	-33.512	-14.437
Rentukostnaður av rakstrarkredittum	-2.476	-2.085
Rentukostnaður av vøru- og tænastuskuld	-329	-592
Fíggjarkostnaðir	**-36.317**	**-17.114**
Aðrir gjaldoyramunir	-13.096	-12.670
Gjaldoyraávirkan netto	**-13.096**	**-12.670**
Aðrir fíggjarligir kostnaðir	-17.125	-12.513
Aðrir fíggjarligir kostnaðir	**-17.125**	**-12.513**
Fíggjarpostar netto	**-65.139**	**-37.301**

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Fíggjarinntøkur eru uppgjørdar samlaðar við árslok. Vinningsbýti verður skrásett sum skylda, tá ið ársaðalfundurin hevur samtykt, at vinningsbýtið skal verða goldið partaeigarunum.

LÁNSKOSTNAÐIR

Lán verða í fyrsta umfari umroknað til dagsvirði, frádrigið kostnaðir í sambandi við lántøkuna, tá ið teir koma fyri. Lán verða síðan virðisásett við amortiseraða kostvirðinum. Møguligir munir millum útgoldnu lánsupphæddina og afturgjaldsupphæddina (eftir at kostnaðir í sambandi við lántøkuna eru drignir frá), verða kostnaðarførdir um rakstrarroknskapin, býtt út á lánitíðina. Lán verða víst sum stuttfreistað skuld uttan so, at samtakið hevur ótreytaðan rætt at útseta afturgjald av skuldini í minsta lagi 12 mánaðir eftir roknskapardagin.

NOTA 2.8 SKATTUR

Skattaútreiðslur fyri árið kunnu útgreinast soleiðis:

KR. 1.000	2020	2019
Skattur at gjalda	38.783	195.484
Skattur at fáa aftur	-23.974	0
Broyting í útsettum skatti	148.330	-4.748
Skattur av eginpartabrøvum	0	-10.705
Skattur av ársúrsliti	**163.139**	**180.031**
Skattur at gjalda	38.783	195.484
Skattur at gjalda í fíggjarstøðuni	**38.783**	**19.484**

Sundurgreiningar av tíðarbundnum munum og útsettum skatti:

KR. 1.000		2020		2019
Útsett skattaáogn	**Tíðarbundin munur**	**Útsett skattaáogn**	**Tíðarbundin munur**	**Útsett skattaáogn**
Aliloyvir	0	0	-190.181	-36.134
Materiell støðisogn	43.483	8.224	35.946	6.830
Fíggjarogn	0	0	8.860	1.683
Biomassi	104.415	18.460	337.250	64.078
Skuldarar	1.318	224	1.089	207
Avleidd fíggjaramboð (bókað á eginognina)	147	25	4.406	837
Aðrir munir	0	0	486	92
Tíðarbundnir munir tilsamans		**26.933**		**37.593**

KR. 1.000		2020		2019
Útsettur skattur	**Tíðarbundin munur**	**Útsett skattaáogn**	**Tíðarbundin munur**	**Útsett skattaáogn**
Aliloyvir	3.624.015	680.554	3.438.453	618.922
Materiell støðisogn	1.562.011	269.909	1.358.688	244.564
Fíggjarogn	78.742	13.610	59.067	10.632
Biomassi	1.413.357	258.023	1.390.953	250.371
Skuldarar	0	0	-1.245	-224
Gjaldoyraávirkan	0	0	-1.534	-276
Avleidd fíggjaramboð (bókað á eginognina)	0	0	-633	-114
Aðrir munir	510	126	-437	-79
Tíðarbundnir munir tilsamans		**1.222.222**		**1.123.796**
Úrslit áðrenn skatt		-26.933		-37.593
Útsettur skattur		1.222.222		1.123.796
Útsettur skattur (+) / Útsett skattaáogn (-)		**1.195.289**		**1.086.203**

Avstemma nominella skattasatsin til aktuellan

KR. 1.000	2020	2019
Úrslit áðrenn skatt	625.984	981.916
Roknaður skattur (nominelt skattaprosent)	106.417	176.745
Permanentir munir*	56.722	3.286
Roknaður skattakostnaður	**163.139**	**180.031**
Effektivt skattaprosent uttan eginognarbókingar	26.06%	18.33%

Vanligur skattasatsur fyri lond í samtakinum:
- Føroyar 18%
- Stóra Bretland/Skotland 19%
- USA 28%

*Harav 64,9 mio kr. stava frá broytingum í skattastigi í Skotlandi frá 17% til 19%

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Skattakostnaðurin svarar til tann skatt, sum áhvílir úrslitinum áðrenn skatt, sum sæst í roknskapinum. Skattur, sum stendst av eginpeningsflytingum, verður fórdur beinleiðis um eginognina. Skatturin fevnir um skatt, sum skal gjaldast (skattur á beinleiðis skattskyldugu inntøkuna í árinum), og um broytingar í útsettum skatti, netto. Útsettur skattur og skattaáogn verða víst netto í fíggjarstøðuni, treytað av, at útsettur skattur og skattaáogn kunnu mótroknast.

Útsetti skatturin í fíggjarstøðuni verður tikin upp til áljóðandi virði, sum verður roknað av tíðarbundnu mununum millum tey roknskaparligu og tey skattligu virðini og av skattligum hallum við árslok.

TÝÐANDI FYRITREYTIR HVUSSU ÚTSETTUR SKATTUR VERÐUR VIÐGJØRDUR ROKNSKAPARLIGA

Útsettur skattur verður roknaður eftir galdandi skattastigi og eftir galdandi skattalóg, umframt ásetingum, sum eru settar í gildi ella viðtiknar tann dagin, ársfrásøgnin er dagfest. Skattaáogn verður tikin við, grundað á væntaðan rentabilitet hjá samtakinum í framtíðini. Umframt tað verða útrokningar gjørdar í sambandi við vanliga raksturin, har skattligu viðurskiftini eru óviss.

Útsettur skattur verður roknaður eftir áljóðandi skattastigi í samsvari við IAS 12.

TÝÐANDI FYRITREYTIR HVUSSU ÚTSETTAR SKATTAOGNIR VERÐA VIÐGJØRDAR ROKNSKAPARLIGA

Einaferð um árið verður mett um útsettar skattaáognir, íroknað framflutt hall. Hall verða skrásett, um líkt er til, at tey verða gagnnýtt um ikki so langa tíð.

NOTUR – 3. PARTUR

Ogn og skuld

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av ognunum, ið eru grundarlagið undir virkseminum hjá Bakkafrost, og skyldunum, ið eru tengdar at teimum.

NOTA 3.1 IMMATERIELL STØÐISOGN

KR. 1.000	Goodwill	Loyvir	Vørumerkir	Tilsamans 2020
Útveganarkostnaðir tann 01.01.20	568.885	3.720.158	108.400	4.397.443
Tilgongd í árinum grundað á broytingar í keypsprísinum í fjør	114.245	0	0	114.245
Frágongd í árinum	-16.180	0		-16.180
Útveganarkostnaðir tann 31.12.20	**666.950**	**3.720.158**	**108.400**	**4.495.508**
Virðislækkingar tann 01.01.20	-1.756	0	0	-1.756
Avskrivingar í árinum	-357	0	0	-357
Akkumulerað niðurskriving/avskriving og virðislækking tann 31.12.20	**-2.113**	**0**	**0**	**-2.113**
Bókað virði netto tann 31.12.20	**664.837**	**3.720.158**	**108.400**	**4.493.395**

KR. 1.000	Goodwill	Loyvir	Vørumerkir	Tilsamans 2019
Útveganarkostnaðir tann 01.01.19	18.485	372.138	0	390.623
Útveganarkostnaðir í árinum	550.400	3.348.020	108.400	4.006.820
Útveganarkostnaðir tann 31.12.19	**568.885**	**3.720.158**	**108.400**	**4.397.443**
Virðislækkingar tann 01.01.19	-878	0		-878
Avskrivingar í árinum	-878	0		-878
Akkumulerað niðurskriving/avskriving og virðislækking tann 31.12.19	**-1.756**	**0**	**0**	**-1.756**
Bókað virði netto tann 31.12.19	**567.129**	**3.720.158**	**108.400**	**4.395.687**

Í Føroyum hevur Bakkafrost alivirksemið í 14 peningaskapandi eindum (CGU). Hesar eindir eru eitt ella fleiri aliloyvir. Sjey av hesum aliloyvum eru latin av myndugleikunum uttan viðurlag og hava tí ikki roknskaparligt virði. Hesi loyvir hoyra til norðurøkið.

Hinar sjey peningaskapandi eindirnar (CGU) eru útvegaðar í sambandi við uppkeyp ella samanlegging við onnur feløg herundir, tá ið Vestlax samtakið, Havsbrún samtakið og Faroe Farming vórðu keypt. Hetta eru tríggir bólkar av CGU. Hesi loyvir hoyra øll til vesturøkið. Bakkafrost metir hesi at vera týðandi samanborið við samlaða bókaða virðið á goodwill og immateriellari ogn uttan tíðaravmarkaða livitíð.

Í Skotlandi hevur Bakkafrost alivirksemið í 21 peningaskapandi eindum (CGU), ið kunnu vera einkult ella fleiri aliloyvir.

Kanning av virðislækking
Hvørt ár kannar samtakið immateriellu ognirnar fyri lækkað virði, og oftari, um ábendingar eru um, at virðið er lækkað á ognunum. Kannað verður við árslok. Samtakið hevur ræði á fitt av ognum uttan tíðaravmarking í líki av loyvum. Í árligu kanningini verða loyvini kannað fyri lækkað virði saman við goodwill. Hvørt aliøki sær kann hava antin eitt ella fleiri loyvir ella alibrúk, men tey verða tald sum ein peningaskapandi eind.

Hvussu lækkað virði verður kannað
Kannað verður eftir lækkaðum virði við at rokna út nútíðar nettovirðið á væntaða nýtsluvirðinum hjá peningaskapandi eindini í tráð við IAS 36, og við at samanbera nútíðar nettovirðið á peningastreyminum við roknskaparvirðið á nettoognum, ið peningaskapandi eindin (CGU) eigur. Nýtti peningastreymurin umboðar leiðslunnar besta boð, tá ið roknskapurin verður gjørdur. Er roknskaparvirðið størri enn roknaða nyttuvirðið, verður roknaða nyttuvirðið niðurskrivað. Væntaða gjaldførið verður mett við støði í áhaldandi virksemi. Mett verður um væntaða gjaldførið við støði í virkisætlanini fyri komandi árini. Leiðslan í samtakinum hevur eftirhugt og góðkent virkisætlanina.

Allar peningaskapandi eindir hava somu rakstrarfyritreytir, tí í høvuðsheitum eru somu rakstrarfyritreytir í øllum Føroyum. Rakstrarfyritreytirnar umfata fóður-, smolt-, tøku- og kryvjingar-, pakkingar-, flutnings- og annan kostnað. Aðrar rakstrarfyritreytir eru felli, framleiðsluskeið, hvíldarskeið og tøkuvekt. Í roknaða tíðarskeiðinum eru íløgurnar (CAPEX) eisini mettar at vera tær somu hjá øllum peningaskapandi eindum. Somuleiðis er roknað við, at eindirnar hava sama vektaða miðalkostnað av kapitali (WACC). Um tað í framtíðini verða frávik í fyritreytunum hjá ymsu peningaskapandi eindunum, so verður hædd tikin fyri hesum í kanningini av niðurskrivingartørvinum.

Ábendingar um lækkað virði
Eingin ábending var um lækkað virði, tá ið kannað varð við árslok. Immateriellar ognir vórðu kannaðar fyri virðislækking fyri at meta um, hvørt ein varlig meting av gjaldførinum er nóg góð í mun til roknskaparvirðið á nettoognunum. Kanningin váttaði virðið á ognunum.

Høvuðsfortreytir
Høvuðsfortreytirnar, nýttar at rokna út nýtsluvirðið, eru tøkunøgd, prísir og kostnaðir, tessvegna EBITDA og vektaður miðalkostnaður av kapitali (WACC). Av øðrum fortreytum kunnu nevnast inflasjón, íløgur (CAPEX) og vøkstur í tíðarskeiðinum.

Í høvuðsheitum er nýtsluvirðið ásett grundað á framtíðar strategiskar ætlanir, har mett er um væntaðu menningina í bæði makrobúskaparligum viðurskiftum, og viðurskiftum, tengdum at felagnum.

Fyritreytirnar, sum eru brúktar, eru grundaðar á eina ávísa óvissu í mun til áseting av vøruprísum, keypsprísum, biologisku gongdina og framtíðar galdandi lógum og reglum. Kostnaðurin kann tó vanliga metast við størri neyvleika enn inntøkan. Tí søguliga hevur vinningurin í laksavinnuni sveiggjað nógv, alt eftir gongdini á søluprísinum á laksi. Bakkafrost nýtir roknskaparætlanir og langtíðarætlanir fyri komandi fimm árini í sínum útrokningum av mettum vinningi, hereftir verða langtíðar søgulig miðaltøl nýtt at meta um vinningin frá sætta ári og frameftir.

Fyri at meta um nýtsluvirðið eru hesar høvuðsfyritreytir nýttar:

- Væntað tikin nøgd er grundað á núverandi útsetingarætlanir fyri hvørja eind og mett tøl fyri vøkstur, metta tøkuvekt og mett felli, grundað á søgulig tøl.
- Kostnaðurin er grundaður á egna meting hjá samtakinum, grundað á søguligan kostnað og vánir. Væntað verður, at kostnaðurin verður verandi støðugur, men er útroknaður at hækka við einum inflasjónsstigi á 0,9%.
- Framtíðarásettu prísirnir eru grundaðir á vísitalið hjá Fish Pool, sum er ein partur av Oslo Børs ASA, útrokningardagin. Langtíðar framtíðarprísir eru grundaðir á triðjaparts keldu.
- Vektaði miðalkostnaðurin av kapitali (WACC) er 7,2% áðrenn skatt (2019: 7,4%) og er roknaður samsvarandi IAS 36. WACC-modellið verður nýtt at meta um diskonteringssatsin. Inngangandi upplýsingar verða dagførdir árliga, tá ið árliga kanningin fyri niðurskriving verður gjørd. Val av inngangandi upplýsingum ávirka úrslitið á modellinum munandi og fyri at tryggja, at minst møgulig óvissa er um útrokningina av vektaða miðalkostnaðinum av kapitali (WACC), eru triðjaparts keldur nýttar, har tær eru tøkar (renta, inflasjón, betavirði). Diskonteringsrentan er grundað á 5 ára miðaltøl á tíggjuára lánsbrøvum, latin av dansku stjórnini, við eini tillagaðari margu fyri matvøruídnaðin í ES.
- Inflasjónin er ásett til 0,9% í rakstrarætlanartíðarskeiðinum. Hetta er gjørt vísandi til triðjaparts keldur. Langtíðarvøksturin er settur til 0%.
- Íløguútreiðslur (CAPEX). Í fimm ára forsagnartíðarskeiðinum er atlit tikið til íløgurnar, sum eru neyðugar fyri at nøkta vøksturin í inntøku og úrsliti. Íløgukostnaðurin er javnaður fyri vakstrar- og viðlíkahaldsætlanir. Íløgukostnaður, ið er neyðugur at nøkta núverandi lógar- og reglukrøv, er eisini tikin við. Játtaður og góðkendur íløgukostnaður til effektivisering er eisini tikin við til at stuðla inklusjónini av fyrimunum í nýttu marguni. Broytingar í lóggávu og reglum kunnu ávirka framtíðarmetta tørvin á íløgukostnaði, atlit er ikki tikið til hetta í tølunum, sum nýtt eru til niðurskrivingarkanningina. Út um forsagnartíðina fer íløgukostnaður í høvuðsheitum at svara til avskriving og hava samband við viðlíkahaldsíløgur.

Viðkvæmi
Tá ið immateriellar ognir vórðu kannaðar fyri niðurskriving, varð ein viðkvæmisgreining gjørd. Viðkvæmisgreining varð

gjørd fyri hvørja einstaka peningaskapandi eind. Við metingini, sum varð nýtt, er fríhæddin 9.459 mió kr.

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Immateriellar ognir, ið eru keyptar serstakt, verða tiknar upp til útveganarvirði. Immateriellar ognir, ið verða útvegaðar í sambandi við, at eitt felag verður yvirtikið, verða tiknar upp til kostvirði, tá ið treytirnar fyri serskildari upptøku eru loknar.

Immateriellar ognir við eini avmarkaðari fíggjarligari livitíð verða avskrivaðar yvir livitíðina. Immateriellar ognir verða niðurskrivaðar til innvinningarvirði, um mett verður, at teir fíggjarligu fyrimunirnir eru lægri enn tað bókaða virðið.

Kostnaður fyri gransking og menning verður bókaður sum kostnaður, so hvørt hann kemur fyri. Granskingar- og menningarkostnaðir verða ognarførdir í fíggjarstøðuni, tá ið tað kann ávísast, at hesir kostnaðir føra við sær, at samtakið fær ein fíggjarligan fyrimun, at hann kann nýtast tekniskt, og at felagið ætlar og megnar at heysta fíggjarligu fyrimunirnar.

Ognarførdir granskingar- og menningarkostnaðir verða tiknir við til útveganarvirði eftir at akkumuleraðar av- og niðurskrivingar eru drignar frá. Ognarførdir granskingar- og menningarkostnaðir verða avskrivaðir javnt yvir tíðarskeiðið, ið mett verður, at ognin kann nýtast.

Aliloyvir, sum samtakið ognar sær antin sum beinleiðis virkisyvirtøku ella við samanleggingum sambært IFRS 3, verða ognarførd til kostvirði, eftir at akkumuleraðar niðurskrivingar eru drignar frá sambært eini keypsprísgreining (PPA). Aliloyvir í Føroyum og Skotlandi verða mett at vera galdandi uttan tíðaravmarking, tó bert so leingi felagið yvirheldur allar umhvørvis- og djóraverndartreytir. Tí verða aliloyvir ikki avskrivað; men árliga verður kannað, um neyðugt er at niðurskriva tey. Um innvinningarvirðið er lægri enn roknskaparliga bókaða virðið, verður mett, at loyvini hava verið fyri eini virðisminking, og tey verða tí niðurskrivað. Niðurskrivingin verður tikin við í rakstrarroknskapin.

Ásetingin uttan tíðaravmarking verður eftirkannað árliga til tess at avgera, um heitið „uttan tíðaravmarking" framvegis er rætt. Um ikki, verður livitíðin broytt frá uttan tíðaravmarking til tíðaravmarkað.

Loyvir uttan tíðaravmarking

Aliloyvir á sjónum í Føroyum eru allýst sum ein rættur at brúka eitt øki at ala fisk á. Tað er ikki nøkur avmarking í nøgd av fiski, men lóggevararnir hava ásett strangar reglugerðir, ið avmarka alivirksemið, so alingin er umhvørisliga burðardygg.

Aliloyvini í Føroyum verða latin fyri 12 ár í senn. Loyvini verða endurnýggjað, uttan so at serligar orsakir, grundaðar á vantan at uppfylla djóramyndugleikakrøv, tala ímóti hesum. Í sambandi við endurnýggjan av loyvum kunnu myndugleikarnir bert nokta fyri hesum, um serlóggáva er um økisskipan, djóravælferð ella umhvørvisverju, sum stríðir ímóti endurnýggjan. Serligur dentur skal leggjast á, at talan er um endurnýggjan av verandi loyvum. Hetta merkir í roynd og veru, at talan er um endurnýggjan av verandi loyvum 12. hvørt ár. Í serumstøðum, har myndugleikar hava noktað endurnýggjan, tí økið skal nýtast til annað endamál, hava alarar fingið loyvi at ala á øðrum øki.

Aliloyvini í Skotlandi ganga ikki út, so leingi sum ávísar umhvørvisligar, rakstrarligar og lívfrøðiligar treytir, ásettar í givnu loyvunum, verða hildnar.

Samtakið hevur tí avgjørt, at aliloyvir við einum bókaðum virði skulu viðgerast eins og loyvir uttan tíðaravmarking.

GOODWILL

Tá ið felagið yvirtekur eitt serstakt felag fyri meira enn marknaðarvirðið á nettoognunum, verður munurin tikin upp sum goodwill í fíggjarstøðuni.

Goodwill, sum samtakið fær, tá ið tað keypir dótturfeløg og atknýtt feløg, verður tikið við sum immateriellar ognir. Goodwill verður ikki avskrivað, men kannað verður árliga, um virðið er lækkað, og oftari, um ábendingar eru um, at virðið er lægri enn tað bókaða virðið. Tá ið mett verður, um goodwill skal niðurskrivast, verður goodwill tikið upp saman við teirri inntøkugevandi deildini ella deildunum, sum mettar verða at fáa ágóða av útveganini.

Niðurskrivingar verða gjørdar eftir eini meting av endurvinningarvirðinum fyri hvørja einstaka inntøkugevandi eind, sum goodwill verður mett at hoyra til. Fyri at eyðmerkja tær inntøkugevandi eindirnar í samtakinum verða ognirnar bólkaðar í tey lægstu stigini, har trygt kann sigast, at tær fáa inntøkurnar. Endurinnvinningarvirðið verður roknað eftir nyttuvirðinum. Hetta virðið verður ásett eftir eini meting um peningastreymarnar komandi árini.

Um tað roknaða nyttuvirðið er lægri enn tað roknskaparliga virðið av teirri inntøkugevandi eindini, verður goodwill avskrivað fyrst, og síðan verða aðrar ognir niðurskrivaðar eftir tørvi.

ÚTGREINAN AV CGU – BÓKAÐ VIRÐI Á KANNAÐUM OGNUM OG VIÐKVÆMI

Viðkvæmislýsing og bókað virði á hvørji CGU:

CGU KR. 1.000	Loyvir	Onnur ogn****	Virðið á kannaðari ogn ialt	WACC	Tal av smolti (1.000)	EBITDA broyting á +/-1%	WACC broyting á -1%	WACC broyting á +1%
31.12.2020								
The Scottish Salmon Company keypið	4.006.820	574.114	4.580.934	7.2%	23.083	311.560	379.700	-362.679
Vestlax keypið*	132.708	1.338.793	1.724.535	7.2%	7.900	41.453	212.495	-154.003
Havsbrún keypið**	157.430	482.380	580.033	7.2%	2.250	145.545	746.094	-540.723
Faroe Farming keypið***	82.000	736.823	972.295	7.2%	4.200	77.378	396.657	-287.473
Tilsamans	**4.378.958**	**3.132.110**	**7.857.797**	**7.2%**	**37.433**	**575.936**	**1.764.946**	**-1.344.878**
31/12/2019								
The Scottish Salmon Company keypið	4.006.820	695.706	4.702.526	7.4%	23.083	142.248	321.873	-91.078
Vestlax keypið*	132.708	1.591.827	1.724.535	7.4%	7.670	48.201	195.123	-134.045
Havsbrún keypið**	157.430	422.603	580.033	7.4%	2.250	163.560	662.102	-454.849
Faroe Farming keypið***	82.000	890.295	972.295	7.4%	3.500	83.946	339.820	-233.449
Tilsamans	**4.378.958**	**3.600.431**	**7.979.389**	**7.4%**	**36.503**	**437.955**	**1.518.918**	**-913.421**

* 4 CGU í loyvum nummar A-03, A-05, A-06, A-25, A-57, A-80 og A-81. Keypt í 2010.
** 2 CGU í loyvum nummar A-71 og A-82. Keypt í 2011.
*** 1 CGU í loyvum nummar A-15 og A-92. Keypt í 2016.
**** Onnur ogn er goodwill, materiell støðisogn, goymsla, áogn, v.m., sum kann tillutast einstøku CGU'ini ella er beinleiðis atknýtt eini CGU.

NOTA 3.2 MATERIELL STØÐISOGN

KR. 1.000	Bygningar og grundøki	Framleiðslutól og líknandi	Annar framleiðslu-útbúnaður	Skip	Undangjald fyri keyp av støðisogn	Tilsamans
Útveganarkostnaðir tann 01.01.20	1.491.693	2.326.299	343.733	427.014	633.683	5.222.422
Umflokking	343.386	172.562	847	977	-539.554	-21.781
Keyp í árinum	145.918	356.500	62.418	26.846	293.556	885.238
Frágongd og burturbeining í árinum	-33.008	-93.169	-386	-690	0	-127.253
Gjaldoyramunir	-11.022	-15.517	-119	-3.248	261	-29.645
Útveganarkostnaðir tann 31.12.20	**1.936.967**	**2.746.675**	**406.493**	**450.899**	**387.946**	**5.928.980**
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar tann 01.01.20	-317.266	-905.920	-132.983	-85.755	0	-1.441.924
Avskrivingar í árinum	-67.606	-216.699	-33.882	-33.613	0	-351.800
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar av frágongdum og burturbeining	1.825	82.909	386	603	0	85.723
Gjaldoyra umrokningar munir	1.099	-3.732	2.133	122	0	-379
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar tann 31.12.20	**-381.949**	**-1.043.442**	**-164.346**	**-118.644**	**0**	**-1.708.381**
Bókað virði netto tann 31.12.20	**1.555.019**	**1.703.233**	**242.147**	**332.254**	**387.946**	**4.220.599**
Útveganarkostnaðir tann 01.01.19	1.248.933	1.688.862	271.661	416.440	447.059	4.072.955
Umflokking	23.910	121.847	-44.002	96	-101.851	0
Keyp av dótturfelag	28.210	271.092	41.982	3.594	120.698	465.576
Keyp í árinum	191.506	259.463	76.333	7.093	167.778	702.173
Frágongd og burturbeining í árinum	-865	-14.965	-2.242	-210	0	-18.282
Útveganarkostnaðir tann 31.12.19	**1.491.693**	**2.326.299**	**343.733**	**427.014**	**633.683**	**5.222.422**
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar tann 01.01.19	-254.579	-762.528	-111.598	-59.925	0	-1.188.630
Avskrivingar í árinum	-63.400	-154.685	-22.974	-25.835	0	-266.894
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar av frágongdum og burturbeining	714	11.318	1.590	9	0	13.631
Gjaldoyra umrokningar munir	-1	-25	-1	-3	0	-30
Akkumuleraðar av- og niðurskrivingar tann 31.12.19	**-317.266**	**-905.920**	**-132.982**	**-85.754**	**0**	**-1.441.923**
Bókað virði netto tann 31.12.19	**1.174.427**	**1.420.379**	**210.750**	**341.259**	**633.683**	**3.780.500**

Lýsing av avskrivingum	Mett livitíð	Avskrivingarháttur	Rest virði
Bygningar og grundøki	10-25 ár	linierur	10%
Framleiðslutól og líknandi	3-20 ár	linierur	0%-10%
Annar framleiðsluútbúnaður	3-8 ár	linierur	0%
Skip	25 ár	linierur	10%

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Materiella støðisognin verður ognarførd til útveganarvirði frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Tá ið ognir verða seldar ella frátiknar, verður bókaða virðið drigið frá, og eitt møguligt hall ella ein møguligur vinningur verður tikin við í rakstrarroknskapinum. Vanligar avskrivingar verða gjørdar frá tí degi, at ognin verður tikin í vanliga nýtslu, og verður ásett eftir mettu fíggjarligu livitíðini á ognini. Avskrivingarnar verða gjørdar javnt yvir livitíðina og verða tá avskrivaðar niður til tað virðið, ið mett verður, at ognin tá kann seljast fyri eftir nýtslu.

Um ein ogn er samansett av fleiri týðandi lutum, ið hava ymiska livitíð, verður hvør lutur avskrivaður fyri seg. Rest-virðið á ognunum, avskrivingartíðarskeiðið og -hátturin verða tikin upp til endurmetingar á hvørjum ári.

Ognir í gerð verða ikki avskrivaðar. Avskrivað verður, tá ið ognin kann takast í nýtslu. Um mett verður, at tað bókaða virðið á ognini ikki kann innvinnast, verður støða tikin til, um ognin skal niðurskrivast. Um bókaða virðið er hægri enn innvinningarvirðið, og mett verður, at talan ikki bert er um eina fyribils virðislækking, verður ognin niðurskrivað til innvinningarvirðið. Innvinningarvirðið er tað hægra virðið av nettosøluvirðinum og nýtsluvirðinum. Nýtsluvirðið er nútíðarvirðið av teimum peningastreymum, sum ognin gevur samtakinum.

NOTA 3.3 LEASING

Ognir við nýtslurætti

KR. 1.000	Bygningar og grundøki	Motorakfør	Skip, bátar, virki og útgerð	Tilsamans
Byrjanarkostnaður tann 01.01.20	140.809	10.116	223.304	374.230
Útveganarkostnaður frá samanløgdum felag	-2.586	-571	-16.608	-19.765
Tilgongd	0	0	189.019	189.019
Frágongd	-28.276	0	-19.125	-47.401
Endurmeting	15.686	-1.876	2.771	16.580
Kostnður tilsamans 31.12.20	**125.633**	**7.669**	**379.361**	**512.663**
Byrjanaravskriving tann 01.01.20	7.092	881	33.433	41.405
Goldið í árinum	11.281	2.770	89.325	103.376
Goldið í árinum bókað sum annar kostnaður	0	0	27.331	27.331
Gjaldoyramunir	-178	-103	-3.978	-4.259
Útjavnað á frágongd	0	0	-8.382	-8.382
Avskriving tilsamans 31.12.20	**18.195**	**3.548**	**137.729**	**159.471**
Bókað virði tann 31.12.20	**107.439**	**4.122**	**241.632**	**353.193**
Leasingskuld				
Byrjanarskuld tann 01.01.20	135.140	9.327	188.926	333.393
Tilgongd/endurmeting	15.772	-1.886	198.246	212.131
Goldið í árinum	-12.745	-2.911	-118.913	-134.569
Renta	2.566	170	7.646	10.382
Gjaldoyramunur	0	0	-8.497	-8.497
Gjaldoyramunir frá samanlegging	-2.962	-478	-12.828	-16.268
Skuld tann 31.12.20	**137.771**	**4.222**	**254.579**	**396.572**
Fallið < 1 ár	11.743	2.858	116.735	131.337
Fallið > 1 ár	126.027	1.364	137.844	265.235

Ognir við nýtslurætti

KR. 1.000	Bygningar og grundøki	Motorakfør	Skip, bátar, virki og útgerð	Tilsamans
Byrjanarkostnaður tann 01.01.19	94.106	0	0	94.106
Útveganarkostnaður frá samanløgdum felag	46.703	7.526	214.058	268.287
Tilgongd	0	2.590	9.246	11.836
Kostnaður tilsamans 31.12.19	**140.809**	**10.116**	**223.304**	**374.229**
Byrjanaravskriving tann 01.01.19	0	0	0	0
Goldið í árinum	-7.090	-880	-33.391	-41.361
Gjaldoyramunir	-2	-1	-42	-45
Avskriving tilsamans 31.12.19	**-7.092**	**-881**	**-33.433**	**-41.406**
Bókað virði tann 31.12.19	**133.717**	**9.235**	**189.871**	**332.823**

Leasingskuld

Byrjanarskuld tann 01.01.19	94.106	0	0	94.106
Byrjanarskuld frá samanløgdum felag	47.061	7.598	214.783	269.442
Tilgongd/endurmeting	0	2.595	9.264	11.859
Goldið í árinum	-7.319	-929	-34.027	-42.275
Renta	1.292	63	1.819	3.174
Gjaldoyramunir frá samanlegging	0	0	-2.913	-2.913
Skuld tann 31.12.19	**135.140**	**9.327**	**188.926**	**333.393**
Fallið < 1 ár	11.972	3.502	92.335	107.809
Fallið > 1 ár	123.168	5.826	96.591	225.585

Bakkafrost hevur tikið reglurnar fyri stuttfreistaðum leasingum og leasingar við lágvirðis leasaðum ognum í nýtslu og hevur útreiðslufört hesar í rakstrarroknskapinum. Upphæddin er ótýðandi fyri samtakið.

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Við støði í nýtta roknskaparháttinum hevur Bakkafrost bókað eina ogn við nýtslurætti og eina leasingskuld frá byrjanardegi av sáttmálanum fyri allar leasingar, ið avhenda rættin at hava tamarhald á eini ávísari ogn í eitt tíðarskeið. Byrjanardagurin er dagurin, tá ið ein útleigari ger eina ávísa ogn tøka til nýtslu av leigaranum.

Ognirnar við nýtslurætti eru tiknar við til kostvirði. Kostnaðurin á ognini fevnir um samlaðu diskonteraðu leasinggjøldini (leasingskylduna), umframt goldin leasinggjøld, sum vórðu goldin, tá ið sáttmálin varð gjørdur (t.e. undangjøld), frádrigið møgulig tilelvingargjøld, pluss ein og hvønn kostnað, ið hevur beinleiðis samband við liðuggerð av avtaluni og skyldu at burturbeina ella endurreisa ognina eftir nýtslu.

Eftirfylgjandi máting av leasaðu ognini er gjørd sambært sama framferðarhátt sum fyri líknandi ognir, sum felagið eigur. Hetta merkir, at leasaðar ognir eru flokkaðar sum materiell støðisogn, hóast hetta í roynd og veru er ein ogn við nýtslurætti.

Leasingskyldan er tikin við til nútíðarvirði á leasinggjøldunum, sum eru fingin til vega við at diskontera leasinggjøldini og nýta marginalu lánsrentuna hjá felagnum, av tí at innanhýsis rentan ikki kann ásetast rætt.

Leasinggjøldini fevna um ásettu leasinggjøldini, tryggjað restvirði og gjald fyri møguleikan at keypa ognina ella gjald fyri uppsøgn av leasingini, tá ið mett verður við rímiligari vissu, at møguleikarnir verða nýttir. Herumframt broytilig leasinggjøld, sum eru tillagað við støði í einum vísitali, av tí at nýtslugrundað leasinggjøld ikki verða bókað sum partur av kostnaðinum av leasaðu ognini og skuldini.

Leasinggjøldini eru býtt millum ein avdráttarpart og ein rentupart. Leasingskyldan verður eftirroknað við eini fastari rentu, sum svarar til diskontostigið, ið nýtt verður. Í fyrsta umfari svarar virðið á leasaðu ognini til virðið á skylduni, uttan so er, at undangjøld og/ella endurgjaldskrøv eru viðvíkjandi ognini.

Bakkafrost valdi at taka tey bæði praktisku undantøkini í IFRS 16 í nýtslu viðvíkjandi stuttfreistaðum leasingum og lágvirðisognum. Stuttfreistaðar leasingar fevna um leasingavtalur styttri enn 12 mánaðir frá dagfesting av sáttmálanum, og lágvirðis ognirnar fevna um leasingavtalur, sum eru lægri enn 35.000 kr. hvør.

NOTA 3.4 FELØG Í SAMTAKINUM

Konsoliderða ársfrásøgnin fyri 2020 umfatar hesi dótturfeløg og atknýtt feløg:

Dótturfeløg KR. 1.000	Gjaldoyra	Slag av virksemi	Høvuðssæti	Ognarlutur	Nominellur partapeningur
P/F Bakkafrost Farming	DKK	Laksaaling	Glyvrar	100%	19.762
P/F Bakkafrost Processing	DKK	Virðisøking av vørum	Glyvrar	100%	50.000
P/F Bakkafrost Sales	DKK	Søla av laksi og virðisøktum vørum	Glyvrar	100%	667
P/F Bakkafrost Packaging	DKK	Framleiðsla av styroporkassum	Glyvrar	100%	8.022
P/F Havsbrún	DKK	Framleiðsla av fiskamjøli, lýsi og alifóðri	Fuglafjørður	100%	2.000
Bakkafrost UK Ltd.	GBP	Søla av laksi	Grimsby	100%	2£
Bakkafrost USA LLC	USD	Søla av laksi	Clifton,New Jersey	100%	2 mUSD

Dótturfeløg KR. 1.000	Gjaldoyra	Slag av virksemi	Høvuðssæti	Ognarlutur	Nominellur partapeningur
P/F Förka	DKK	Framleiðsla av biogassi og taðingarevni	Glyvrar	100%	5.000
The Scottish Salmon Company Limited	GBP	Laksaaling	Edinburgh	100%	20.000.000
Salmon Finance (Scotland) Ltd	GBP	Fíggjarfelag	Edinburgh	100%	1
Harris & Lewis Smokers Trading Ltd	GBP	Undir avtøku	Edinburgh	100%	100
Bradan Cuan Sair Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	5.000
Lighthouse Caledonia Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	2
West Minch Salmon Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	7.000
Atlantic West Salmon Company Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	12.505
Sidinish Salmon Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	50.000
Hebridean Salmon (Scotland) Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Scottish Smoked Salmon Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Hebridean Smoked Salmon Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Loch Fyne Salmon (Scotland) Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Loch Fyne Salmon Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Murray Seafoods Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	130.000
Corrie Mhor Salmon Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	20.000
Minnamurra Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	5.408.023
Fjord Seafood Scotland Farming Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	5.928.594
Pieters UK Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	2
Fjord Seafoods Scotland Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	300.000
Highland Fish Farmers Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	3.190.001
Mull Salmon Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	340
Kenmore Salmon Farms Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	39.750
Portree Salmon Farmers Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	2.500
Pulford (Scotland) Ltd	GBP	Strikað 12. januar 2021	Edinburgh	100%	100
Scotfish Farms Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	2.200
Sea Catch PLC	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	934.558
Tobson Fish Farms Ltd	GBP	Hvílandi felag	Edinburgh	100%	10.000

Atknýtt feløg KR. 1.000	Høvuðs-sæti	Ognarlutur	Netto tilgongd	Partur av vinningi	Bókað virði 2020	Bókað virði 2019
P/F Pelagos	Fuglafjørður	30%	0	0	59.887	56.778
P/F Salmon Proteins*	Eiði	79%	0	0	6.521	6.255
Svínoyar rognkelsisstøð	Svínoy	42%	733	733	733	733
Tilsamans					**67.141**	**63.766**

	Ogn ialt 2020	Ogn ialt 2019	Eginogn 2020	Eginogn 2019	Úrslit 2020	Úrslit 2019
P/F Pelagos	331.598	360.039	197.645	187.385	18.519	35.190
P/F Salmon Proteins*	9.537	11.128	8.275	7.936	340	255
Svínoyar rognkelsisstøð**	6.896	N/A	-5	N/A	-1.480	-1.480

* Atkvøðurættur 30%. Atkvøðurætturin er avmarkaður í viðtøkunum hjá P/F Salmon Proteins
** Tøl frá 2019

NOTA 3.5 PARTABRØV OG KAPITALPARTAR Í ØÐRUM FELØGUM

KR. 1.000	Bókað virði	Bókað virði
Feløg	**2020**	**2019**
Onnur	55.318	55.318
Bókað virði tilsamans	**55.318**	**55.318**

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Íløgur í onnur feløg verða flokkaðar sum tøkar at selja. Partabrøv og kapitalpartar, har samtakið ikki hevur týðandi ávirkan, eru tikin upp til útveganarvirði. Hetta er, tí at marknaðarvirðið ikki kann mátast álítandi.

NOTA 3.6 VØRUGOYMSLA

KR. 1.000	2020	2019
Rávørur og vørur í gerð	576.355	422.765
Lidnar vørur	199.677	125.743
Vørugoymsla tilsamans	**776.032**	**548.508**

Rávøra er í høvuðsheitum rávøra, ið verður nýtt til at framleiða fiskamjøl, lýsi og alifóður, og pakkitilfar, ið verður nýtt í framleiðslu.

Vørur í gerð umfata ólidnar vørur og eykalutir.

Liðugvøra umfatar alla framleiðslu, ið er búgvin at selja, so sum alifóður, feskan og frystan heilan laks og virðisøktar laksavørur.

Vørugoymsla er tikin upp til kostvirði.

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Vørugoymsla er vørugoymslan á alideildini FO, alideildini SCT, góðskingardeildini og deildini fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður.

ALIDEILDIN FO OG ALIDEILDIN SCT

Vørugoymslan fevnir í høvuðsheitum um alifóður, pakkitilfar og lidnar vørur. Vørur á goymslu verða tiknar upp til kostprís ella væntaðan søluprís, eftir at sølukostnaður er frádrigin, um hesin er lægri.

Kostnaðurin av framleiddum vørum er fullur framleiðslukostnaður, sum fevnir um beinleiðis tilfar og lønarkostnað og ein prosentpart av óbeinleiðis framleiðslukostnaði. Rentukostnaður er ikki við í virðinum á goymsluni.

Kostprísurin á keyptum vørum er útveganarprísurin. Vørugoymslan verður gjørd upp eftir FIFO háttinum.

Nettorealisatiónsvirði er mettur søluprísur frádrigið søluútreiðslur.

GÓÐSKINGARDEILDIN

Vørugoymslan fevnir um rávørur, tilsetingarevni, pakkitilfar og liðugvørur. Rávørurnar á góðskingardeildini eru í høvuðsheitum virkaðar laksavørur. Rávørurnar verða tiknar upp til marknaðarvirðið, tá ið fiskurin varð tikin.

Pakkitilfar og tilsetingarevni verða tikin upp til kostprís ella væntaðan søluprís, um hesin er lægri, eftir at møguligur sølukostnaður er frádrigin. Vørugoymslan verður gjørd upp eftir FIFO-háttinum.

Goymslan av liðugvørum, bæði feskar og frystar, verður tikin upp til kostprís ella væntaðan søluprís, eftir at møguligur sølukostnaður er frádrigin, um hesin er lægri. Um kostprísurin er hægri enn søluprísurin, eftir at møguligur sølukostnaður er frádrigin, verður goymslan niðurskrivað. Niðurskrivingin verður kostnaðarført.

Kostprísurin á tí, sum er framleitt innanhýsis, er allur beinleiðis og óbeinleiðis framleiðslukostnaður, íroknað kostnað, sum bert kann tillutast framleiðslu av vøru óbeinleiðis, frádrigið fyrisitingarkostnað.

DEILDIN FYRI FISKAMJØL, LÝSI OG ALIFÓÐUR

Rávørur og keyptar hjálpivørur verða virðisásettar til tað lægra av søguligum kostvirði og nettorealisatiónsvirði sambært FIFO háttinum.

Lidnu vørurnar eru fiskamjøl, lýsi og alifóður, ið er búgvið at senda kundum, virðisásett til tað lægra av kostvirði ella nettorealisatiónsvirði. Við í kostnaðinum á lidnum vørum er allur framleiðslukostnaður, ið vøran hevur tikið á seg. Við í framleiðslukostnaðinum eru flutningur, handfaring og goymslukostnaður.

Kostprísurin á tí, sum er framleitt innanhýsis, er allur beinleiðis og óbeinleiðis framleiðslukostnaður, frádrigið fyrisitingarkostnað.

NOTA 3.7 LÍVFRØÐILIG OGN

KR. 1.000	2020	2019
Bókað virði á lívfrøðiligari ogn 01.01.	1.901.730	1.358.462
Vøkstur grundað á framleiðslu ella keyp	3.012.251	2.021.601
Vøkstur grundað á útveganum	0	667.482
Minking grundað á tøku ella sølu (kostnaðir av seldari vøru)	-2.761.374	-1.921.456
Minking grundað á felli (kostnaðir av serhendingum)	-125.806	0
Dagsvirði við ársbyrjan afturført	-27.695	-248.262
Dagsvirði við árslok	145.387	27.695
Afturføring av elimineringum við ársbyrjan	59.121	53.790
Elimineringar	-80.083	-59.121
Gjaldoyra umrokningar munir	-6.508	1.539
Bókað virði á lívfrøðiligari ogn tann 31.12.	**2.117.024**	**1.901.730**
Kostprísur á lívfrøðiligari ogn	2.058.228	1.931.617
Dagsvirðisjavning við árslok	145.387	27.695
Elimineringar	-80.083	-59.121
Gjaldoyra umrokningar munir	-6.508	1.539
Bókað virði á lívfrøðiligari ogn	**2.117.024**	**1.901.730**
Lívfrøðilig ogn (tons livandi vekt)		
< 1 kg	5.777	5.210
1 < 2 kg	10.258	8.649
2 < 3 kg	10.880	10.334
3 < 4 kg	11.921	14.146
4 kg <	25.642	22.980
Lívfrøðilig ogn tilsamans	**64.478**	**61.319**
Fiskar í sjónum (1.000 stk.)		
< 1 kg	11.960	12.801
1 < 2 kg	6.192	5.481
2 < 3 kg	4.338	4.271
3 < 4 kg	3.415	4.148
4 kg <	5.324	4.633
Fiskar í sjónum tilsamans	**31.229**	**31.334**

	2020	2019
Tikið í árinum (tkv)	**85.686**	**65.109**
Sjósett smolt (1.000 stk.)		
KV 1	3.295	1.721
KV 2	5.757	3.580
KV 3	6.161	2.365
KV 4	9.418	10.682
Sett á sjógv tilsamans	**24.631**	**18.348**

*SSC setti 6,7 millión smolt á sjógv frá 1. til 3. ársfjórðing 2019

Viðkvæmisgreining av lívfrøðiligari ogn (KR. 1.000)		
Broyting í diskonto +1%	-150.403	-101.607
Broyting í diskonto -1%	169.708	115.364
Broyting í søluprísi á +5 kr.	466.110	251.416
Broyting í søluprísi á -5 kr.	-465.110	-251.416
Broyting í nøgd á lívfrøðiligari ogn +1%	5.414	5.836
Broyting í nøgd á lívfrøðiligari ogn -1%	-5.414	-5.836

Framtíðarásettir prísir í eitt ár í EUR FCA Oslo*		
Við ársenda	4,36	7,24
1. ársfjórðingur (fram í tíðina)	4,85	6,72
2. ársfjórðingur (fram í tíðina)	5,39	6,75
3. ársfjórðingur (fram í tíðina)	5,10	5,51
4. ársfjórðingur (fram í tíðina)	5,25	5,62

* Kelda: Fish Pool

VIRÐISMÁTING Á LÍVFRØÐILIGUM OGNUM

IAS 41 ásetur, at livandi lívfrøðilig ogn skal virðisásetast til mett dagsvirði minus tøku- og sølukostnaðir. Útrokningin á mettum dagsvirði er grundað á dagsvirðið fyri tiknan laks. Í roknskapinum verður broytingin í mettum dagsvirði bókað í rakstrarroknskapin so hvørt.

Lívfrøðiliga ognin hjá samtakinum er laksur á øllum stigum í lívsringrásini. Fiskurin verður býttur í tveir høvuðsbólkar, alt eftir stigi á lívsringrásini. Fyrsti bólkur er fiskur aldur á landi í feskum vatni. Annar er, tá ið fiskurin er sjósettur.

Hjá fyrsta bólkinum verður søguligur kostnaður mettur at vera skynsamt atlit til dagvirðisjavning, tí lívfrøðiliga broytingin er lítil. Hendan metingin skal síggjast í ljósinum av, at smolt verður í løtuni sjósett við eini lutfalsliga lágari vekt.

Hjá øðrum bólki verður dagvirðisjavningin roknað við at nýta virðismodellið á 3. stigi í dagførisjavningar stigskipanini í IFRS 13. Sambært meginregluni í IFRS 13 fyri hægstu og bestu nýtslu metir samtakið, at best hóskandi vektin fyri Aling FO er 5,2 kg kruvd vekt (6,3 kg livandi vekt) og vektin fyri Aling SCT er 4,9 kg kruvd vekt (6,0 kg livandi vekt).

Virðismetingarmyndilin

Virðismetingarmyndilin roknar núverandi nettovirði av væntaðum gjaldføri frá lívfrøðiligari ogn.

Broytingar til mett dagsvirði av lívfrøðiligu ognini verða vístar á regluni dagsvirðisjavning av lívfrøðiligari ogn í rakstrarroknskapinum.

Mátingareindin er einstaki fiskurin; men av praktiskum orsøkum verða gjaldføri og metingar gjørdar fyri hvørt aliøki sær.

Høvuðsstaklutirnir í myndlinum eru:

- Nøgd
- Framleiðslukostnaður
- Sølusprísur
- Diskonteringsrenta

Nøgd

Mett tøkunøgd er grundað á veruliga talið av fiski í sjónum fíggjarstøðudagin, frádrigið mett framtíðarfelli frá fíggjarstøðudegnum og faldað við best hóskandi tøkuvekt fyri hvønn fisk.

Framtíðar mánaðarliga fellið er mett til 0,6% hjá Farming FO og 1,0% hjá Farming SCT av talinum av skrásettum fiski fyri hvønn mánað.

Kostnaður

Mettur framtíðarkostnaður er grundaður á metingarnar hjá samtakinum fyri hvørt øki. Kostnaður fevnir í høvuðsheitum um fóður-, framleiðslu-, tøku- og flutningskostnað.

Prísur

Mettur sølusprísur er grundaður á uttanhýsis skrásettar prísir frá Fish Pool við tillagingum til lokalar umstøður.

Fish Pool er eitt torg fyri fíggjarligar keyps- og sølusáttmálar fyri superior norskan laks í støddunum 3–6 kilo í kruvdari vekt. Men nøgdin á Fish Pool er avmarkað. Hesin marknaðurin er tí í grundini ikki nóg virkin og munadyggur. Hóast hetta, metir Bakkafrost, at hesir sjónligu framtíðarásettu prísirnir eru frægasta boðið til ein sølusprís fyri laks.

Prísirnir eru frádrignir tøkukostnað, flutningskostnaðir á marknað og – fyri Aling FO – føroyskan umsetningsskatt fyri at koma til nettovirðið úr ringi. Virðið endurspeglar eisini væntaða góðskuflokking.

Diskontering

Metta framtíðargjaldførið verður diskonterað mánaðarliga. 31. desember 2020 er mánaðarliga diskonteringsstigið mett til 6% um mánaðin. Diskonteringsstigið tekur hædd fyri eini váðatillaging og einum tíðarvirði. Váðatillagingin tekur hædd fyri sveiggi í nøgd, kostnaði og prísi.

Felli
Felli hægri enn væntað verður skrásett, um eitt øki hevur hægri felli sæð yvir tíð ella grundað á einstaka hending á aliøkinum.

Kostnaðir, ið hava við óvanligt felli at gera, verða vístir í rakstrarroknskapinum á regluni fyri goymslubroytingar, meðan vanligt felli verður flokkað sum partur av framleiðslukostnaðum.

Bakkafrost nýtir eina felags ábending og lægstamark fyri øll aliøkini til áseting av vanligum og óvanligum felli. Ábending um óvanligt felli er, tá ið eitt aliøki skrásetur eitt felli yvir 1,5% í ein mánað av innkomna fiskatalinum. Hetta er galdandi fyri Aling FO; fyri Aling SCT er talið 4%. Síðan verður ein nágreiniligari áseting gjørd til tess at meta, um fellið er óvanligt. Hesar ásetingarnar taka hædd fyri orsøkini til fellið og støddini á fiskinum.

TÝÐANDI FYRITREYTIR UM VIÐKVÆMI
Metta dagsvirðið á livandi fiski verður altíð grundað á óvissar fyritreytir, hóast felagið hevur drúgvar royndir at meta um hesi viðurskifti.

Samtakið metir, at hesi trý hava nógv at siga fyri virðismetingina: Miðalprísur, mánaðarligt diskonteringsstig og mett nøgd av lívfrøðiligu ognini. Í talvuni frammanfyri er ein ímyndað viðkvæmislýsing til broytingar í dagsvirði av lívfrøðiligu ognunum vístur, um broytingar verða í hesum fyritreytunum.

NOTA 3.8. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN OG ONNUR ÁOGN

KR. 1.000	2020	2019
Vøru- og tænastuáogn	490.116	625.993
Avseting móti tapi	-41	0
Netto vøru- og tænastuáogn	**490.075**	**625.993**
MVG	12.087	24.782
Annað	49.344	20.738
Onnur áogn	**61.431**	**45.520**
Stuttfreistað áogn tilsamans	**551.506**	**671.514**
Langfreistað áogn	8.101	4.422
Vøru- og tænastuáogn og onnur áogn tilsamans	**559.607**	**675.935**

VØRU- OG TÆNASTUÁOGN ALDURSBÝTT		
KR. 1.000	**2020**	**2019**
Áogn ikki gjaldkomin	420.212	515.125
0-6 mánaðir eftir gjaldkomu	66.194	107.945
Meira enn 6 mánaðir eftir gjaldkomu	3.669	2.923
Tilsamans	**490.075**	**625.993**

Kredittváði samtaksins, knýttur at vøru- og tænastuáogn, er lýstur í Notu 4.1.

GJALDOYRAVÁÐI KNÝTTUR AT VØRU- OG TÆNASTUÁOGN

Samtakið hevði vøru- og tænastuáogn í fremmandum gjaldoyra fyri tilsamans 430,9 mió kr. við ársenda 2020 (2019: 576 mió kr.).

Niðanfyri er bókaða virðið á áogn, sundurgreinað eftir gjaldoyra, umroknað til DKK eftir kursinum tann 31.12.

VØRU- OG TÆNASTUÁOGN, DEILT Á GJALDOYRA

KR. 1.000	2020	2019
DKK	59.217	49.953
EUR	113.778	294.621
USD	214.800	109.054
GBP	80.200	115.605
NOK	16.567	36.025
Onnur	5.513	20.736
Tilsamans	**490.075**	**625.993**

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Vøru- og tænastuáogn og onnur áogn verður tikin við til áljóðandi virði, eftir at møguligur tapsvági er drigin frá. Avsett verður ímóti tapi eftir einstaklingameting. Orsaka av, at kostnaðirnir eru smáir, og at kreditttíðin er stutt, svarar amortiserað kostvirði áleið til áljóðandi virði, eftir at drigið er frá fyri møguligt tap.

NOTA 3.9 TØKUR PENINGUR

Tøkur peningur er stutttíðar innistandandi í peningastovnum og var 467,0 mió kr. við ársenda 2020 sammett við 1.309 mió kr. við ársenda 2019.

NOTA 3.10 PARTAPENINGUR OG STØRSTU PARTAEIGARARNIR

Partapeningur:

KR. 1.000	2020	2019
Partapeningur tann 1. januar	59.143	48.858
Hækkaður partapeningur (nýggj partabrøv)	0	10.285
Partapeningur tann 31. desember	**59.143**	**59.143**

Partapeningurin hjá móðurfelagnum fevnir um:

KR.	Tal av partabrøvum	Navn virði	Partapeningur
Vanlig partabrøv	59.143.000	1	59.143.000
Partapeningur tilsamans			**59.143.000**

Avstemman av útistandandi partabrøvum:	2020	2019
Útistandandi partabrøv 1. januar	59.142.108	48.655.500
Keyp av eginpartabrøvum	-134.500	0
Søla av partabrøvum til bonusskipan fyri starvsfólk	36.463	201.673
Útgáva av nýggjum partabrøvum	0	10.284.935
Útistandandi partabrøv tann 31. desember	**59.044.071**	**59.142.108**
Eginpartabrøv tann 31. desember	98.929	892

Øll fulltíðar starvsfólk í 2019, ið framvegis vóru í starvi hjá Bakkafrost, hava fingið partabrøv í bonus í 2020 við einum samlaðum virði á 2% av útgoldnari løn í 2019. Samanlagt hevur Bakkafrost útlutað 14.368 partabrøv til starvsfólkini við einum dagsvirði áljóðandi 6,2 mió kr. Avhendingardagurin var 3. juni 2020, og prísurin á partabrævinum var 429,04 kr. (NOK 614,50) fyri hvørt partabræv.

PARTAEIGARAR

Tann 31. desember 2020 áttu hesir partaeigarar beinleiðis ella óbeinleiðis meiri enn 5% av partabrøvunum hjá felagnum: Oddvør Jacobsen, Regin Jacobsen og Folketrygdfondet.

Partabrøv, ið limir í nevndini og samtaksleiðsluni áttu antin beinleiðis ella óbeinleiðis:

Navn	Starvsheiti	Tal av partabrøvum	Ognarpartur
Rúni M. Hansen	Nevndarformaður	10.761	0.02%
Johannes Jensen	Næstformaður	0	0.00%
Teitur Samuelsen	Nevndarlimur	100	0.00%
Annika Frederiksberg	Nevndarlimur	16.063	0.03%
Øystein Sandvik	Nevndarlimur	0	0.00%
Einar Wathne	Nevndarlimur	0	0.00%
Regin Jacobsen	Forstjóri (CEO)	4.616.755	7.80%
Odd Eliasen	Stjóri (MD)	184.479	0.31%
Høgni D. Jakobsen	Fíggjarstjóri (CFO)	412	0.00%

Vinningsbýti

Nevndin hevur skotið upp eitt vinningsbýti fyri hvørt partabræv á 3,65 kr. fyri 2020. Onki vinningsbýti varð útgoldið fyri 2019. Uppskotið til vinningsbýti skal góðkennast av aðalfundinum, og um tað verður samtykt, verður samlaða upphæddin til útgjald av vinningsbýti áljóðandi 215,9 mió kr. Uppskotið til vinningsbýti er ikki innroknað sum skuld tann 31. desember 2020, men sum ein partur av eginognini.

NOTA 3.11 NETTO RENTUBERANDI SKULD

KR. 1.000	2020	2019
Langfreistað rentuberandi skuld	2.219.690	2.328.232
Rentuberandi skuld tilsamans 31.12.	**2.219.690**	**2.328.232**
Rentuberandi skuld tilsamans	2.219.690	2.328.232
Tøkur peningur	-466.939	-1.309.546
Netto rentuberandi skuld	**1.752.751**	**1.018.686**

Afturgjaldsmynstrið á fíggjarligu skyldunum hjá samtakinum er grundað á ikki-diskonteraðsáttmálaásett gjøld. Av tí at ikki er víst, at hámarkið á kredittinum er í sama gjaldoyra, sum úttikna skuldin, ávirka sveiggj í gjaldoyra tøkan pening leypandi.

Afturgjaldsætlan fyri rentuberandi skuldina hjá samtakinum:

KR. 1.000	2020 Bókað virði	2020 Sáttmálaásett gjøld	2019 Bókað virði	2019 Sáttmálaásett gjøld
Lániskuld	2.219.690	2.237.307	2.328.232	2.348.488
Rentuberandi skuld brutto	**2.219.690**	**2.237.307**	**2.328.232**	**2.348.488**
Kredittmark		3.444.396		3.505.974
Bankatrygdir		17.200		0
Tøkt kredittmark		1.207.506		1.177.742
Tøkur peningur		466.939		1.309.546
Tøk fígging tilsamans		**1.674.445**		**2.487.288**

EFTIRVERANDI TÍÐARSKEIÐ

31.12.2020	1-3 mánaðir	3-12 mánaðir	1-5 ár	> 5 ár	Tilsamans
Rentuberandi bankalán	0	0	2.219.690	0	2.219.690
Vøru-, tænastu- og onnur skuld	591.742	37.422	0	0	629.164

EFTIRVERANDI TÍÐARSKEIÐ

31.12.2019	1-3 mánaðir	3-12 mánaðir	1-5 ár	> 5 ár	Tilsamans
Rentuberandi bankalán	0	0	2.328.231	0	2.328.231
Vøru-, tænastu- og onnur skuld	608.167	195.484	0	0	803.651

Munurin millum bókað virði og samlað væntað gjøld í talvuni omanfyri er orsakað av forútgjaldi og gjaldi til sakførara í sambandi við endurfígging av lániskuld. Eitt langfreistað bankalán er nýtt av verandi kredittrammu, haðani samtakið kann flyta og gjalda eina og hvørja upphædd. Sáttmálaásett skuld, sum lýst í talvuni omanfyri, vísir ikki dagfestingar fyri leinging av afturgoldnum lánum, men er grundað á afturgjaldstíðina av kredittrammuni.

NÁGREINILIGARI UM RENTUBERANDI SKULD

Fígging av Bakkafrost samtakinum er í høvuðsheitum framt av móðurfelagnum. Dótturfeløg kunnu bert fara undir fígging uttanhýsis, um hetta verður mett gagnligt fyri alt Bakkafrost samtakið. Samtakið fór undir tveir fíggjarsáttmálar í 2019, sum í september 2020 vórðu samanlagdir í ein.

Samanlegging av báðum sáttmálunum

Sáttmálarnir frá desember 2019 (352 mió EUR og 100 mió GBP) vórðu samanlagdir í september 2020 í eitt fult veðrættartryggjað 5-ára lán á tilsamans EUR 463 mió við Coöperatieve Rabobank U.A, DNB Bank ASA og Nordea Bank ABP (Deild í Noreg).

Nýggja kredittramman fevnir um eitt „multicurrency“ lán (t.v.s. lán, ið kann leggjast um til annað gjaldoyra) á 95 mió evrur og eitt „multicurrency“ lán á 368 mió evrur við einum innbygdum møguleika fyri, at partarnir eftir avtalu kunnu økja lánið við upp til 150 mió evrur.

Viðvíkjandi sáttmálanum stendur, at treytirnar eru tær somu sum í sáttmálunum frá desember 2019 sum er, at solvensurin hjá samtakinum skal vera í minsta lagi 35%, og rentudeknings-lutfallið skal ikki vera minni enn 3,00.

Samtakið helt lánstreytirnar við árslok 2020.

Tøka bankafíggingin hjá Bakkafrost samtakinum við árslok 2020 var tilsamans DKK 1.677 mió.

KR. 1.000	2021	2022	2023	2024	2025
Langfreistað lániskuld	0	0	0	2.328.232	0
Rentuberandi skuld brutto	0	0	0	2.328.232	0

Avstemman av gongdini á rentuberandi skuld

	2019	Gjaldføri	Tilgongd	Umflokking	Kursbroyting	2020
Langfreistað rentuberandi skuld	2.328.232	-108.542	0	0	0	2.219.690
Rentuberandi skuld tilsamans	**2.328.232**	**-108.542**	**0**	**0**	**0**	**2.219.690**

Avstemman av gongdini á rentuberandi skuld

	2018	Gjaldføri	Tilgongd	Umflokking	Kursbroyting	2019
Langfreistað rentuberandi skuld	812.053	1.211.347	304.832		0	2.328.232
Rentuberandi skuld tilsamans	**812.053**	**1.211.347**	**304.832**	**0**	**0**	**2.328.232**

NOTA 3.12 VEÐSKULD OG VEÐSETINGAR

Bókað virði á veðskuld og veðsetingum

Bakkafrost samtakið hevur eina samlaða fígging fyri alt samtakið. Harafturat hava feløgini í samtakinum solidariska sjálvskuldarakautión fyri hvørt annað.

Tryggingarendurgjøld standa eisini sum trygd.

KR. 1.000	2020	2019
Langfreistað skuld til fíggjarstovnar	**1.752.751**	**2.328.232**
Bókað virði á veðsettari ogn		
Aliloyvir	4.493.395	4.277.587
Materiell støðisogn	3.320.949	3.051.180
Fíggjarligar ognir	67.141	1.428.628
Lívfrøðiligar ognir (biomassi)	2.117.024	1.901.728
Vørugoymsla	763.146	548.509
Tilsamans	**10.761.655**	**11.207.632**

NOTA 3.13 AVLEIDD FÍGGJARAMBOÐ

KR. 1.000	2020	2019
Gjaldoyraumbýti viðvíkjandi langtíðarsáttmálum	6.449	14.452
Rentu- og gjaldoyraumbýti viðvíkjandi lánsbrøvum	4.741	1.007
Avleidd fíggjaramboð tilsamans	**11.190**	**15.459**

Dagsvirðisjavning av avleiddum fíggjaramboðum á fíggjarstøðudegnum kann flokkast soleiðis:

	Dagsvirðisjavning 2020	Tikið við í rakstrarroknskapin 2020	Tikið við í eginogn 2020	Dagsvirðisjavning 2019	Tikið við í rakstrarroknskapin 2019	Tikið við í eginogn 2019
Gjaldoyraavleiðing	6.449	0	6.449	14.452	0	14.452
Rentu- og gjaldoyraavleiðing	4.741	0	4.741	1.007	0	1.007
Tilsamans	**11.190**	**0**	**11.190**	**15.459**	**0**	**15.459**

Mett tíðarbil fyri ávirkan á rakstrarroknskapin:

	Gjaldoyra-avleiðing	Rentu- og gjaldoyra-avleiðing	Tilsamans 2020	Gjaldoyra-avleiðing	Rentu- og gjaldoyra-avleiðing	Tilsamans 2019
Innan eitt ár	6.212	3.498	9.710	11.483	2.010	13.493
Millum 1 og 5 ár	237	1.243	1.480	2.969	-1.003	1.966
Aftan á 5 ár	0	0	0	0	0	0
Tilsamans	**6.449**	**4.741**	**11.190**	**14.452**	**1.007**	**15.459**

FÍGGJARLIG AMBOÐ
Sambært IFRS 9 skulu fíggjarlig amboð, sum standardurin viðger, bólkast undir hesi heiti: Dagsvirði við virðisjavningum í rakstrarroknskapinum, hava-til-enda, lán og ágóðar, tøkt til sølu og aðrar skyldur.

Fíggjarlig amboð til dagsvirði við virðisjavningum í rakstrarroknskapinum
Fíggjarlig amboð, sum samtakið í høvuðsheitum hevur ætlað at keypa og selja stuttfreistað, verða bólkað sum ogn tøk til sølu. Hesi amboð verða tikin við í bólkin av fíggjarligum amboðum, sum verða tikin við til dagsvirði við virðisjavna í rakstrarroknskapinum saman við terminssáttmálum, sum verða tiknir við til dagsvirði við virðisjavna í rakstrarroknskapinum.

Viðgerð av roknskaparligari váðaavmarking
Lánsbrøv verða tikin upp til dagsvirði.

Rentuswappar og tryggingar av gjaldoyra fram í tíðina verða nýtt sum roknskaparligar tryggingar orsakað av váðanum yvir fyri fremmandum gjaldoyra, rentuútreiðslum og avdráttum í fremmandum gjaldoyra. Gjaldoyraváðaavmarkingar verða mettar at vera roknskaparligar gjaldføristryggingar.

Ávirkaði parturin av vinningi ella halli av nýtsluni av gjaldoyratrygging verður tikin beinleiðis við í aðrar heildarinntøkur undir grunni til roknskaparligar gjaldføristryggingar.

Upphæddir skrásettar sum onnur heildarinntøka verða fluttar í rakstrarroknskapin, tá ið handilin við roknskaparligu tryggingunum viðførir vinning ella hall, og tá ið endalig skuld er staðfest, so sum tá ið tryggjaða inntøkan ella hallið er staðfest.

Um ætlaðu handlarnir ella bindingarnar ikki longur væntast at henda, verður samlaði vinningurin ella tapið, sum áður er staðfest yvir eginognina, flutt til rakstrarroknskapin.

Um roknskaparliga tryggingin gongur út ella verður seld, endað ella nýtt, uttan at annað kemur í staðin, ella verður longd, ella um roknskaparliga tryggingin verður afturkallað sum heitið, so skal einhvør vinningur ella eitthvørt tap, sum áður er tikið við í aðrari heildarinntøku, verða verandi sum onnur heildarinntøka, til greið áseting er um ávirkanina av vinningi ella tapi, ella endaligt gjald verður framt.

NOTA 3.14 AVSETINGAR
Ein avseting er staðfest, tá ið og bert tá ið samtakið veruliga hevur eina skyldu (rættarliga ella veruliga), sum er viðvíkjandi hendingum, sum eru farnar fram, og har tað er sannlíkt, at samtakið skal gjalda hesa skylduna, og at gjaldið kann gerast neyvt upp. Avsetingarnar verða gjøgnumgingnar hvørja ferð, roknskapurin verður uppsettur, og støddin lýsir ta bestu metingina av upphæddini á skylduni. Samtakið hevur ongar avsetingar 31. desember 2020.

AVSETINGAR FYRI TAPSGEVANDI SÁTTMÁLAR

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR
Samtakið ger áhaldandi sølusáttmálar um virðisøktar laksavørur. Sáttmálarnir fevna um ítøkiligar avtalur, og veitingar í sambandi við sáttmálarnar og eru partur av vanliga virkseminum hjá samtakinum. Sáttmálarnir hava eingi innbygd avleidd fíggjaramboð.

Tá ið umræður sáttmálar við fastløgdum prísi, sum føra til, at samtakið selur laksavørur lægri enn kostvirðið á vørunum (íroknað dagsvirðisjavningar av rávøruni við tøku), verða sáttmálarnir mettir at vera tapsgevandi, og avsett verður fyri at standa ímóti hesum skyldunum, sum verða tiknar við í fíggjarstøðuna. Avsetingin verður kostnaðarførd í rakstrarroknskapinum.

TÝÐANDI FYRITREYT
Felagið hevur langtíðarsáttmálar um laksavørur. Hesir sáttmálar innihalda ikki partar av avleiddum fíggjaramboðum og verða tí ikki viðgjørdir sum fíggjarlig amboð. Sáttmálarnir taka einans støði í, at laksavørurnar verða latnar. Sáttmálarnir eru ikki umsetiligir og hava heldur onga treyt um, at gjaldast skal við reiðum peningi ella samsvarandi virði.

Avsett verður til at standa ímóti møguligum tapsgevandi sáttmálum, har samtakið hevur bundið seg at selja laksavørur fyri ein prís, sum er lægri enn tann roknaði kostprísurin íroknað rávøru, biomassa, mátaður í dagsvirði.

NOTUR – 4. PARTUR

Kapitalbygnaður og fígging

Í hesum partinum fæst innlit í kapitalbygnað og fígging.

NOTA 4.1 FÍGGJARLIG VÁÐASTÝRING

FÍGGJARSTÝRING

Endamálið hjá samtakinum við fíggjarstýring er at varðveita eitt fíggjarmynstur, sum er fört fyri at stuðla virkseminum og fáa sum mest burturúr til partaeigararnar. Alivinnan er sermerkt av skiftandi prísum og avbjóðandi framleiðsludynamikki. Samtakið má vera fíggjarliga sterkt fyri at kunna standa seg ímóti sveiggjum í vinningi og fíggjarstøðu, og konsolideraði solvensurin skal ongantíð vera lægri enn 35 prosent. 31. desember 2020 var solvensurin hjá samtakinum 66%.

Í samsvari við vinningsbýtispolitikkin hjá samtakinum skal vinningsbýtið yvir fleiri ár, undir vanligum umstøðum, vera í miðal 30 til 50 prosent av tillagaðum nettovinningi. Grundað á COVID-19 varð onki vinningsbýti útgoldið í 2019. Nevndin hevur skotið upp, at vinningsbýtið fyri fíggjarárið 2020 skal vera 3,65 kr. fyri hvørt partabrøv. Hetta svarar til eina útlutan til partaeigarar á 215,9 mió kr.

Samtakið stýrir fíggjarmynstrinum og ger tillagingar í tráð við broytingar í undirliggjandi fíggjarumstøðum. Samtakið eygleiðir alsamt atgongd til at læna pening og hevur áhaldandi samskifti við sínar lánsveitarar. Samtakið er fíggjað við bankalánum. 31. desember 2020 var netto rentuberandi skuldin áljóðandi 1.752,8 mió kr. Nota 3.10 gevur eitt yvirlit yvir afturgjaldsætlanina av skuldini og upplýsingar um fíggjarligu treytirnar. Við árslok 2020 heldur Bakkafrost treytirnar, sum eru knýttar at láninum.

STÝRING AV FÍGGJARLIGUM VÁÐUM

Samtakið hevur hesar váðar í samband við nýtslu av fíggjarligum amboðum: marknaðarváða, gjaldførisváða og kredittváða. Í hesi notuni verður sagt frá, hvussu ábært samtakið er fyri hvørjum einstøkum av hesum váðum; og mál, reglur og mannagongdir hjá samtakinum fyri máting og handfaring av váða.

Fleiri málbærir upplýsingar eru at finna í hesi konsolideraðu ársfrásøgnini.

Høvuðsendamálið við reglunum fyri stýring av fíggjarligum váða hjá Bakkafrost er áhaldandi at tryggja gjaldførið hjá samtakinum, t.v.s. altíð av vera í eini støðu, har samtakið er fört fyri at greiða sínar skyldur, so hvørt tær falla til gjaldingar. Hetta umfatar eisini, at samtakið skal vera fört fyri at halda fíggjarligu sáttmálarnar í sambandi við skuld undir vanligum umstøðum.

Viðvíkjandi tryggingarfulnaði, so tryggjar samtakið móti týðandi váða, har tað loysir seg fíggjarliga at tryggja. Javnvágin millum umfevndar upphæddir, og hvat verður latið til egnar váðar, er ymiskt, alt eftir hvør váðin er, virðið á ognini og hugsandi skyldur og kostnað, hvat veruliga verður umfevnt og møguleikin at tryggja.

Nevndin er av tí áskoðan, at tað, sum hevur størst týdning fyri allan váða, sum samtakinum kann vera fyri, er, at samtakið er fíggjarliga sterkt. Tann 31. desember 2020 var solvensurin hjá samtakinum 66%.

Reglur og mannagongdir fyri váðastýring verða eftirmettar javnan, so hædd verður tikin fyri broytingum í marknaðartreytum og í virkseminum hjá samtakinum.

FÍGGJARVÁÐI

Fíggjarváði kann lýsast sum váðin fyri, at samtakið ikki verður fört fyri at halda sínar fíggjarligu skyldur.

Umframt bankalán hevur samtakið fíggjarlig amboð, so sum vøru- og tænastuáogn, tøkan pening, partabrøv, vøru- og tænastuskuld o.s.fr., sum stava beinleiðis frá dagliga vinnuvirkseminum.

Samtakið nýtir avleidd fíggjaramboð, í høvuðsheitum gjaldoyrasáttmálar fram í tíðina. Endamálið við hesum amboðum er at stýra gjaldoyraváða, ið kemur av virkseminum hjá samtakinum.

Samtakið hevur eingi fíggjarlig amboð, herundir avleidd fíggjarlig amboð, við spekulatiónsendamáli.

Mest týðandi fíggjarligu váðarnir, ið felagið er ábært fyri, eru rentuváði, gjaldoyraváði, gjaldførisváði og kredittváði. Leiðslan hevur alsamt eyguni við hesum váðum og hevur leiðreglur fyri, hvussu hesir skulu handfarast.

MARKNAÐARVÁÐI

Marknaðarváði kann lýsast sum váðin, at inntøkur og útreiðslur samtaksins, framtíðar peningastreymurin ella dagsvirði av fíggjarligum amboðum sveiggja orsakað av broytingum í marknaðarprísum. Marknaðarváði umfatar trý sløg av váðum: gjaldoyraváða, rentuváða og annan prísváða (so sum prísir á handilsvørum og dagsprísir á laksi).

Samtakið hevur eftirlit við og stýrir handfaringini av marknaðarváðum. Ábæri yvir fyri hesum váðum verður avmarkað við váðaspjaðing, hóskandi eftirliti og vinnuligum atgerðum. Í summum førum verður marknaðarváðin latin triðjapersóni gjøgnum sáttmálatillaging av prísum, men sjáldan við nýtslu av fíggjarligum amboðum. Av tí at váðaavmarking vanliga ber í sær lægri væntað avkast í miðal, nýtir samtakið bert uttanhýsis váðaavmarking, har týðandi váði er fyri broti á fíggjarligar sáttmálar.

Gjaldoyraváði

Við tað at virksemið hjá samtakinum er á altjóða pallinum, er samtakið ábært fyri sveiggi í gjaldoyrakursunum. Til tess at stýra hesum váða eru trý sløg av gjaldoyraváðum eyðmerkt: umrokningarváði, váði viðvíkjandi keypi og sølu og økonomiskur gjaldoyraváði.

Umrokningarváði

Bakkafrost hevur dótturfeløg uttanlands í Skotlandi, Onglandi og USA. Tískil hevur Bakkafrost ein váða við umrokning hjá dótturfeløgum, sum hava annað virkisgjaldoyra enn samtakið. Váðin, ið hevur við eginogn hjá dótturfeløgum uttanlanda at gera, verður vanliga ikki váðaavmarkaður, tí hann verður ikki mettur at vera týðandi.

Váði viðvíkjandi keypi og sølu

Flestu virkandi feløgini í samtakinum hava váða í sambandi við virði, ið verða móttikin ella goldin í fremmandum gjaldoyra. Hjá aligeiranum kemur váðin fyri tað mesta í sambandi við sølu, meðan geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður hevur váðar í sambandi við keyp av rávøru á altjóða handilsvørumarknaðinum.

Minkað verður um váðan hjá samtakinum viðvíkjandi keypi og sølu við ágóðanum av váðaspjaðing. Har tann mótvirkandi váðin frá ymsum geirum ikki er fullkomiliga mótroknaður, kann váðin, ið eftir er av negativum kursbroytingum í fremmandum gjaldoyra á keyps- og sølufloymin, ávirka úrslitið og fíggjarligu støðuna hjá samtakinum negativt og tískil ávirka lánstreytir, ið eru grundaðir á roknskaparligar virðismetingar.

Talvan niðanfyri gevur eitt samlað yvirlit yvir váðan av fremmandum gjaldoyra á netto gjaldoyrastøðuna hjá øllum samtakseindunum mótvegis virkandi gjaldoyranum. Váðin við at umrokna fíggjarligu frásagnirnar hjá dótturfeløgunum til gjaldoyrað, ið nýtt verður í framlagda gjaldoyranum, er ikki tikin við í greiningini.

Ábæri yvir fyri gjaldoyraváða			Gjaldoyra		
KR. 1.000					
2020	**EUR/DKK**	**GBP/DKK**	**USD/DKK**	**NOK/DKK**	**JPY/DKK**
Tøkur peningur	211.736	0	125.532	0	9.239
Vøru- og tænastuáogn	113.778	80.200	214.800	16.566	0
Vøru- og tænastuskuld	-35.530	-125.931	-26.581	-37.265	0
Rentuberandi skuld	-706.733	-724.465	0	-9.075	0
Langtíðarsáttmálar	0	0	0	11.190	0
Váði netto	**-416.749**	**-770.196**	**313.751**	**-18.584**	**9.239**

2019	**EUR/DKK**	**GBP/DKK**	**USD/DKK**	**NOK/DKK**	**JPY/DKK**
Tøkur peningur	478.875	88.869	309.152	288.238	8.585
Vøru- og tænastuáogn	304.021	115.608	109.840	36.025	10.618
Vøru- og tænastuskuld	-6.565	-211.901	-38.746	-12.262	0
Rentuberandi skuld	-373.485	-517.124	0	0	0
Langtíðarsáttmálar	0	0	-25	-192.768	0
Váði netto	**402.846**	**-524.548**	**380.221**	**119.233**	**19.203**

Viðkvæmisgreining			Gjaldoyra			
KR. 1.000						
2020	**EUR/DKK**	**GBP/DKK**	**USD/DKK**	**NOK/DKK**	**JPY/DKK**	**Úrslit**
Ábæri netto	-416.749	-770.196	313.751	-18.584	9.239	
Søguligt sveiggj síðstu 5 árini	0.31%	8.63%	7.08%	9.05%	8.71%	
Samlað árin á úrslit (vinningur)	**-1.292**	**-66.468**	**22.214**	**-1.682**	**805**	**-46.423**
Samlað árin á úrslit (hall)	**1.292**	**66.468**	**-22.214**	**1.682**	**-805**	**46.423**

2019	**EUR/DKK**	**GBP/DKK**	**USD/DKK**	**NOK/DKK**	**JPY/DKK**	**Úrslit**
Ábæri netto	402.845	-524.548	380.221	119.232	19.202	
Søguligt sveiggj síðstu 5 árini	0.33%	8.83%	8.12%	7.42%	8.99%	
Samlað árin á úrslit (vinningur)	**1.329**	**-46.318**	**30.874**	**8.847**	**1.726**	**-3.542**
Samlað árin á úrslit (hall)	**-1.329**	**46.318**	**-30.874**	**-8.847**	**-1.726**	**3.542**

Greiningin byggir á gjaldoyru, sum samtakið er mest ábært fyri við árslok 2020. Rímiligu broytingarnar í gjaldoyrakursunum í talvuni omanfyri eru grundaðar á søgulig fimm ára sveiggj.

Um fremmandu gjaldoyrakursirnir broyttust við upphæddunum, vístar í talvuni omanfyri, so hevði ávirkanin á nettovinningin hjá samtakinum verið -46,4 mió kr. (2019: 3,5 mió kr.). Vanliga tryggjar samtakið ikki váða viðvíkjandi keypi og sølu á fíggjarliga marknaðinum. Hættir at verja gjaldoyra kunnu kortini verða loyvdir til tess at fyribyrgja fíggjarligan váða í teimum førum, har ikki er møguligt at minka váðan við at nýta virksemistrygging.

Gjaldoyra terminssáttmálar tann 31. desember 2020

Bakkafrost samtakið keypir		Bakkafrost samtakið selur	
KR. 1.000			
NOK	138.730	GBP	12.684

Gjaldoyra terminssáttmálar 31. desember 2019

Bakkafrost samtakið keypir		Bakkafrost samtakið selur	
KR. 1.000			
DKK	26.742	USD	4.002
DKK	30.000	NOK	40.840
NOK	253.423	GBP	23.185

Búskaparligur gjaldoyraváði

Samtakið er ábært yvir fyri váðanum, at miðal/langtíðar broytingar í gjaldoyrakursum kunnu ávirka kappingarførið. Fylgt verður væl við hesum strategiska gjaldoyraváðanum, men av tí at hesin váðin verður mettur at vera avmarkaður í løtuni, eru stig ikki tikin til at tryggja hann.

Týðandi gjaldoyrakursir (miðal) í árinum	EUR/DKK	GBP/DKK	USD/DKK	NOK/DKK	JPY/DKK
2020	743,93	823,78	605,76	70,53	5,88
2019	746,60	850,93	667,03	75,80	6,12

Rentuváði

Samtakið er ábært yvir fyri hækking í rentusatsinum, tí skuldin verður rentað við flótandi rentusatsi fyri hvørja termin. Øktur lánskostnaður kann hava týðandi ávirkan á vinningsførið hjá samtakinum. Samtakið hevur ikki skuld við føstum rentusatsum.

Sambært fíggjarpolitikkinum hjá samtakinum, so er høvuðsendamálið við at stýra rentuváðanum at avmarka vandan fyri brot á lánsavtalurnar hjá samtakinum og at sleppa undan fíggjarligari trongstøðu, sum kann seta strategiska liðileikan í váða. Handil við avleiddum rentuamboðum er framdur at dekka váða, ið er til staðar. Keyp og søla við reinari spekulatión fyri eyga er ikki loyvd.

Samtakið hevur ikki skuld við fastlæstari rentu og er tí ikki í vanda fyri, at broytingar í rentusatsum kunnu føra til broytingar í marknaðarvirði á útistandandi skuld.

Ein øking á 100 basisstig í rentusatsi roknskapardagin vildi havt eina negativa ávirkan á rakstrarroknskapin á 17,5 mió kr. (2019: 10,2 mió kr.) grundað á NIBD.

Prísváði

Aligeirin er viðkvæmur yvir fyri sveiggjum í dagsprísunum á laksi, sum eru bundnir av altjóða útboði og eftirspurningi. Ávirkanin av broytingum í laksaprísunum verður lutvíst avmarkað við langtíðarsáttmálum við føstum prísum í góðskingargeiranum og við fíggjarligum sáttmálum; men orsakað av langa framleiðslurenslinum er trupult at svara altjóða rákinum á marknaðarprísum við tað sama. Laksur er í stóran mun handlaður grundað á dagsprísir, hóast hesir kunnu vera skiftandi á ymsu marknaðunum og ávirkast av marknaðarstøðuni hjá samtakinum.

Annar prísváði

Geirin fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður hjá samtakinum er virkin á altjóða marknaðinum fyri handilsvørur. Ein stórur partur av rávøruni, ið krevst í framleiðsluni, verður avtalaður, áðrenn søluprísurin verður ásettur, tí verður váðin við øktum prísum á rávøruni yvirførdur beinleiðis til fóðurkundar, í høvuðsheitum í samtakinum. Men tað kann frá tíð til aðra vera neyðugt at keypa meira rávøru, um sølan verður størri enn væntað. Hesar rávørur gerast vanliga dýrari enn tær, sum eru keyptar við langtíðarsáttmálum. Undir hesum umstøðum er vanliga ómøguligt at flyta hendan kostnað til kundan, og sostatt gerst vinningurin minni.

Gjaldførisváði

Gjaldførisváðin er váðin fyri, at samtakið ikki verður fært fyri at svara fíggjarligum skyldum yvir fyri veitarum og útvegarum av fígging. Fylgt verður væl við gjaldførisstøðuni hjá samtakinum, og leypandi forsagnir fyri gjaldførisrensli og tøkum peningi verða gjørdar regluliga.

Gjaldførisváðin verður fyrisitin við at hava ein liðiligan fíggjarstruktur, ið er tryggjaður við tøkum, játtaðum lánskarmum frá okkara bankafelagsskapi og við at hava nøktandi tøkan pening frá sama bankasambandi.

Samtakið leggur seg eftir at varðveita avtalaðu møguleikarnar at nøkta væntaðum lánum næstu 12 mánaðirnar, umframt fíggjarligt rásarúm til ætlaðu íløgurnar og flytingar í gjaldføristreytum, ið ikki kunnu síggjast frammanundan. Sí eisini Notu 3.10 um avtalaðar kredittir, tøkt kredittmark, og nær rentuberandi skuld fellur til gjaldingar.

Umframt keldurnar lýstar omanfyri um gjaldføri, fylgir Bakkafrost við í fíggjarmøguleikum á fíggjarmarknaðinum eins og ráki og kostnaði av slíkum fíggjarmøguleikum við tí fyri eyga at varðveita fíggjarligan liðileika og at avmarka endurfíggingarváða. Íroknað í samlaða gjaldførinum hjá Bakkafrost tann 31. desember 2020 vóru 467 mió kr. (2019: 1.310 mió kr.) (sí Notu 3.11) av tøkum peningi í ymsum gjaldoyrum.

Kredittváði

Kredittváði umfatar roknskaparligt tap, sum skuldi verið staðfest, um aðrir partar ikki høvdu fíggjarliga orku at halda sínar skyldur, og hevur við fíggjarlig amboð at gera so sum tøkan pening, vøru- og tænastuágóða og avleidd fíggjarlig amboð.

Bakkafrost hevur leiðreglur fyri kredittstýring fyri alt samtakið, sum verður stjórnað av kredittnevndini hjá Bakkafrost. Nevndin hevur ábyrgdina av at áseta kundunum hjá samtakinum kredittmark. Vanliga nýtir Bakkafrost kredittrygging, bankatrygdir, móðurfelagstrygdir, faktoringsáttmálar ella aðrar trygdir so sum veðseting av lívfrøðiligum ognum, so veruligi váðin á útistandandi vøru- og tænastuáogn verður munandi avmarkaður. Søguliga hava tapini av vánaligari áogn verið lítil hjá Bakkafrost. Mvg, ið fæst aftur, íroknað salduna, avmarkar eisini váðan. Umframt váðaavmarkandi tiltøkini leggur samtakið dent á nágreiniliga kredittstýring í ymsu virkandi feløgunum stuðlað av regluligari uppfylging av týðandi funktiónum.

Miðsavnan av kredittváða er ikki mett at hava týdning, tí kundarnir hjá samtakinum umboða ymsar vinnugreinar og ymisk landafrøðilig øki. Mótpartsváði yvir fyri peningastovnum verður ikki hildin at vera týðandi orsakað av avmarkaðum likviditetsognum og lítlum handli við avleiddum fíggjarligum amboðum. Viðvíkjandi hesum handilstiltøkum setur samtakið álit sítt á norðurlendsk bankasambond, onnur bankasambond ella handilsvørumarknaðir, ið eru viðurkendir víða um.

Bókaða virðið av fíggjarligum ognum umboðar hámarkið á kredittvandanum. Hámarksváðin roknskapardagin umfatar vøru- og tænastuáogn, aðra áogn og tøkan pening og er áljóðandi 1.018 mió kr. tann 31. desember 2020 (2019: 1.981 mió kr.). Í Notu 3.8 er yvirlit yvir aldursbýti av vøru- og tænastuáogn.

Kredittváði	**2020**	**2019**
Vøru- og tænastuáogn	490.075	625.993
Onnur áogn	61.431	45.520
Tøkur peningur	466.939	1.309.546
Tilsamans	**1.018.445**	**1.981.059**

Bakkafrost hevur sett leiðreglur í verk fyri stýring av gjaldførinum fyri alt samtakið við tí endamáli at avmarka innistandandi pening og samstundis tryggja nøktandi gjaldføri til virksemistørv, at sleppa undan troti á reiðum peningi og at avmarka lánstørvin. Stýringin av gjaldførinum verður framd frá høvuðsskrivstovu samtaksins.

Samtakið ger ikki stóra nýtslu av fíggjarliga avleiddum amboðum, og í teimum førunum, har tað verður mett hóskandi at tryggja verandi váðar á fíggjarmarknaðinum, verða avtalur gjørdar við eitt av bankasambondum samtaksins.

NOTA 4.2 FLOKKAR OG DAGSVIRÐI AV FÍGGJARLIGUM AMBOÐUM

Dagsvirði av fíggjarligum amboðum

Øll ogn/skuld, har dagsvirði verður bókað ella upplýst, verður flokkað innan dagsvirðisstigskipanina, ið verður lýst soleiðis, grundað á lægsta íkaststig, sum hevur týdning fyri meting av dagsvirðinum sum heild:

Stig 1: Skrásettir marknaðarprísir á einum virknum marknaði (sum ikki eru javnaðir) fyri eins ogn ella skuld.

Stig 2: Virðismetingarteknikkir (har lægsta íkaststigið, sum hevur týdning fyri metingina av dagsvirði, sæst beinleiðis ella óbeinleiðis).

Stig 3: Virðismetingarteknikkir (har lægsta íkaststigið, sum hevur týdning fyri metingina av dagsvirði, ikki er sjónligt).

Fyri lívfrøðiliga ogn er dagsvirðisrútrokningin gjørd við at nýta ein virðismetingarmyndil (stig 3 í virðismetingarskipanini), har virðið er mett við støði í almennum marknaðarprísum fyri hvørt lokið tíðarskeið. Sí Notu 3.6 fyri nærri kunning um hesar útrokningar.

Fyri ogn/skuld, sum verður endurtakandi virðisásett til dagsvirði, tekur samtakið støðu til, um flytingar hava verið millum stigini í stigskipanini við at meta flokkingina av nýggjum (grundað á lægsta íkaststig, sum hevur týdning fyri metingina av dagsvirðinum).

Ongar flytingar hava verið til ella frá mettum dagsvirði í stig 3.

Tann 31. desember hevði samtakið hesar flokkar av ogn/skuld mettar til dagsvirði:

KR. 1.000

Ogn og skuld til dagsvirði	Dagsvirði	Bókað virði	Stig 1	Stig 2	Stig 3
Lívfrøðilig ogn (biomassi)	2.117.024	1.971.637	0	0	2.117.024
Ogn mett til dagsvirði 31.12.20	**2.117.024**	**1.971.637**	**0**	**0**	**2.117.024**
Skuld mett til dagsvirði 31.12.20	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**
Lívfrøðilig ogn (biomassi)	1.901.729	1.874.034	0	0	1.901.729
Ogn mett til dagsvirði 31.12.19	**1.901.729**	**1.874.034**	**0**	**0**	**1.901.729**
Skuld mett til dagsvirði 31.12.19	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**

NOTA 4.3 VINNINGUR FYRI HVØRT PARTABRÆV

KR. 1.000	2020	2019
Avlop fyri árið til partaeigarar í P/F Bakkafrost	462.845	801.885
Dagsvirðisjavning av biomassanum (IAS 41)	-118.003	220.567
Skattur av dagsvirðisjavning	21.241	-39.702
Javnað ársúrslit fyri partaeigarar í P/F Bakkafrost	**366.083**	**982.750**
Vanlig partabrøv tann 01.01.	59.143.000	48.858.065
Útgáva – hækking av partapeningi	0	10.284.935
Vanlig partabrøv tann 31.12.	**59.143.000**	**59.143.000**
Vektað miðaltal av partabrøvum ígjøgnum árið	**59.090.092**	**51.624.366**

Vinningur fyri hvørt partabræv	2020	2019
Útskrivað (KR.)	7,83	15,53
Útvatnað (KR.)	7,83	15,53
Vinningur fyri hvørt partabræv (áðrenn dagsvirðisjavnan av lívfrøðiligari ogn og avseting fyri tapsgevandi sáttmálar) (javnað EPS)		
Útskrivað (KR.)	6,20	19,04
Útvatnað (KR.)	6,20	19,04

Bakkafrost samtakið hevur ongar partabrævaoptiónir í løtuni.

Vinningur fyri hvørt partabræv

EPS verður roknað við at býta avlopið, sum kann tilskrivast partabrævaeigarunum í felagnum við vigaðum miðaltali av vanligum partabrøvum, sum eru útgivin í árinum, frároknað vanlig partabrøv, sum felagið hevur keypt, og sum verða hildin sum eginpartabrøv.

Útvatnaður vinningur fyri hvørt partabræv

Útvatnaður vinningur fyri hvørt partabræv er javnaður við útvatnaðu ávirkanini av útgivnum partabrævaoptiónum. Bakkafrost hevur ongar partabrævaoptiónir útistandandi.

Javnaður vinningur fyri hvørt partabræv

Javnað EPS er grundað á afturføring av ávísum dagsvirðisjavningum, vístar í talvuni omanfyri, tí Bakkafrost metir, at hetta talið gevur eina meira álítandi meting av undirliggjandi virkseminum.

NOTUR – 5. PARTUR

Aðrar upplýsingar

Í hesum partinum er nágreiniligari lýsing av øðrum lógarásettum notum, ið koma í aðru rød sambært sjónarhorninum hjá Bakkafrost.

NOTA 5.1. KAPITALBINDINGAR

2020	2021	2022
Sáttmálabundið í nýggjar smoltstøðir í Føroyum	340.883	202.587
Sáttmálabundið í nýggjar sjógvalistøðir og menning av verandi feskvatnsstøðum í Skotlandi	102.216	0
Sáttmálabundið í aðra materiella støðisogn	109.692	269.253
Tilsamans	**552.791**	**471.840**

2019	2020	2021
Sáttmálabundið í nýggjar smoltstøðir í Føroyum	53.600	53.600
Sáttmálabundið í nýggjar sjógvalistøðir og menning av verandi feskvatnsstøðum í Skotlandi	121.000	0
Sáttmálabundið í nýtt biogassverk	7.100	0
Sáttmálabundið í aðra materiella støðisogn	89.700	0
Tilsamans	**271.400**	**53.600**

Samtakið hevði gjørt avtalur um íløgur og harav standandi peninganýtslu á tilsamans umleið 1.025 mió kr., 553 mió kr. í 2021 og 472 mió kr. í 2022, ið ikki eru avsettar í fíggjarstøðuni við roknskaparlok.

NOTA 5.2 HANDLAR VIÐ NÆRSTANDANDI PARTAR

Nærstandandi partar í hesum høpinum eru persónar ella løgfrøðiligar eindir, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava avgerandi ella týðandi ávirkan á Bakkafrost samtakið ígjøgnum ognarpart ella við starvi og umvent. Handlar við nærstandandi partar fara fram eftir marknaðartreytum.

KR. 1.000	2020	2019
Grundað á lyklapersónar		
Søla – Betri P/F	0	17.189
Keyp – Betri P/F	0	32.490
Vøru- og tænastuskuld – Betri P/F	0	1.332
Søla – Gist & Vist P/F	806	1.017
Keyp – Gist & Vist P/F	24	676
Vøru- og tænastuáogn – Gist & Vist P/F	92	166
Vøru- og tænastuskuld – Gist & Vist P/F	0	4
Søla – Frost P/F	8	0
Keyp – Frost P/F	3.289	1.425
Vøru- og tænastuskuld – Frost P/F	592	248
Keyp – Vest Pack P/F	15.293	13.021
Vøru- og tænastuskuld – Vest Pack P/F	1.579	1.427
Keyp – Tjaldur P/F	66.397	86.118
Vøru- og tænastuskuld – Tjaldur P/F	6.903	6.246
Grundað á atknýti		
Keyp – FF Skagen A/S	98	10.647
Vøru- og tænastuskuld – FF Skagen A/S	83	189
Keyp – Pelagos P/F	40.752	32.239
Søla – Salmon Proteins P/F	560	4.350
Vøru- og tænastuáogn – Salmon Proteins P/F	91	0
Vøru- og tænastuskuld – Salmon Proteins P/F	0	671

NOTA 5.3 KEYP OG SAMANLEGGING AV FELØGUM

2020
Tað hava ikki verið nýggjar samanleggingar í 2020.

2019
Tann 25. september 2019 undirskrivaði Bakkafrost eina bindandi partabræva keypsavtalu um at keypa 68,6% av útistandandi partabrøvunum í The Scottish Salmon Company Plc (SSC) frá Northern Link Ltd. Endadagurin var 08. oktober 2019. Fleiri partabrøv vórðu keypt í 4. ársfjórðingi, og 31. desember 2019 átti Bakkafrost 95,6% av partabrøvunum í SSC. Írestandi keypið varð gjørt í 1. ársfjórðingi 2020, og Bakkafrost eigur nú 100% av partabrøvunum í SSC.

SSC er ein sameind alifyritøka, ið bert virkar í Skotlandi við 60 aliøkjum kring vesturstrondina og Hebridurnar. Felagið virkar í nærum øllum pørtum av virðisketuni. Hetta tryggjar fult sporføri og fulla veitanartrygd. Núverandi framleiðsluførleikin er 50.000 tons. SSC framleiddi 33.789 tons í kruvdari vekt í 2019 og flutti út til 21 lond við serligum atliti til Norðuramerika og Fjareystur. SSC hevur ment eina rød av mætum framstandandi vørumerkjum, harímillum Native Hebridean Salmon, Tartan Salmon Label Rouge og Lochlander Salmon. Felagið hevur 651 starvsfólk.

Høvuðssæti hjá SSC er í Edinburgh, Skotlandi.

Strategisk skilvís grundgeving
Strategiska skilvísa grundgevingin fyri keypið fevnir um hetta:
- Veksur munandi um vavið á virkseminum hjá Bakkafrost og gevur samtakinum nýggjar vakstrar- og menningarmøguleikar.
- Gevur Bakkafrost atgongd til skotska aliøkið og víðkar okkara alivirksemi inn í eina nýggja landafrøði, sum er eitt nisju aliøki við skotskum upprunavørum, ið fáa yvirprís á marknaðinum.
- Skapar ein samansettan altjóða leiðara fyri hágóðsku laks til serprís við atgongd til bæði føroyskan og skotskan laks í serflokki.
- Positivt fjølbroytni av virkseminum hjá Bakkafrost frá at vera ein reinur føroyskur leikari til eina hjáveru í tveimum spennandi alimarknaðum fyri laks, men kortini við denti á mentum marknaðum og marknaðum við vørum fyri serprís.
- Møguleiki fyri týðandi batum í vinningsførinum hjá The Scottish Salmon Company sæð yvir eitt fimmára skeið gjøgnum íverksetan av eyðmerktari samvirkan, við innføran av bestu framferðarhættum og eini málrættaðari íløguætlan. Bakkafrost væntar at skapa samvirkan á trimum økjum, sum í høvuðsheitum hava við Fóður og Innkeyp, Sølusamskipan og SG&A (søla, flutningur, marknaðarføring og fyrisiting) og sparing av føstum útreiðslum at gera.
- Fóður og Innkeyp: Bakkafrost framleiðir alifóður við einum munandi hægri marinum innihaldi samanborið við ídnaðarfóður. At veitt SSC fóður hevði havt við sær, at fasti kostnaðurin á fóðurdeildini hjá Bakkafrost var betur gagnnýttur gjøgnum sølu millum feløgini av fóðri við hægri góðsku til SSC. Netto samvirkanin er mett til 1,20 kr. pr. kg fóður, ið svarar til eina árliga samvirkan á umleið 70 milliónir frá 2022 og frameftir (~NOK 2,60 / kg av tikna laksinum hjá SSC).
- Sølusamskipan: Bæði SSC og Bakkafrost marknaðarføra laks í serflokki og vørumerkir, ið fáa ein munandi hægri prís orsakað av uppruna og fjølbroytni í framleiðsluni. Bæði feløgini ætla at fáa gagn av at samskipa søluna frameftir við at fáa fyrimun av lutfalsligari flutningsstyrki á altjóða marknaðunum.
- SG&A og fastar útreiðslur: Lakari skipan av høvuðssætinum í Skotlandi (við at avtaka skrásetingarvirksemið av SSC).

Bakkafrost metir eisini, at møguligt er at innføra bestu framferðarhættir, herímillum (i) lán av starvsfólki í styttri tíðarskeið at stimbra eyðmerking og innføran av bestu framferðarhættum, (ii) íverksetan av betri mannagongdum í alingini fyri at minka kostnaðin, (iii) stigvísa samanlegging av aliøkjum, (iv) minking av lívfrøðiligum hóttanum gjøgnum avlúsingar serfrøði. Samlaða úrslitið av hesum tiltøkum fer væntandi at føra til størri fisk og at fáa betri prís og vinningsføri.

Bakkafrost ætlar eisini at gera málrættaðar íløgur til at náa gagnnýtsluna, ið er nevnd omanfyri. Talan er um íløgur í eina nýggja nýmótans resirkuleringstøð til smoltaling, sum kann avloysa stóra talið av smáu smoltstøðunum hjá SSC. Herumframt eru íløgur ætlaðar at avloysa núverandi útbúnað á sjónum.

Bakkafrost leggur sera stóran dent á gott samstarv við staðbundnu samfeløgini og myndugleikarnar og vónar at stimbra arbeiðið gjøgnum munandi íløgur í vinnuna. Bakkafrost leggur seg eisini eftir áhaldandi at virka fyri at rammusáttmálarnir við skotska regluverkið verða mentir.

Keyptar ognir netto
Flestu av immateriellu støðisognunum hjá SSC fevna um loyvir. Loyvini eru mett sum loyvir uttan tíðaravmarking og verða tí ikki avskrivað, men meting skal árliga gerast um niðurskriving.

Vit hava eyðmerkt trý týðandi vørumerkir í SSC, nevniliga Tartan Salmon, Lochlander Salmon og Native Hebridean. Hinar nøgdirnar eru seldar undir vanliga Scottish Salmon Company vørumerkinum í stóran mun til heilsølur og beinleiðis til kundar. Vørumerki er virðismett eftir inntøkuháttinum við at rokna nútíðarvirði (NPV).

Vit vænta, at meginparturin av yvirprísinum av handlinum hevur samband við loyvini, og spurningurin verður, hvar markið skal vera millum goodwill og loyvir. Í keypsprísgreiningini hava vit tillutað virðir til allar eyðmerktar ognir íroknað virðir av vørumerkjum, og restin av yvirprísinum er tillutað loyvum. Vit hava ásett hetta virðið við at nýta ein marknaðarhátt stýrdan úr erva. Sí undanfarnu síðu um strategiska skilvísa grundgeving.

Vit hava ikki sæð nakrar ábendingar um, at tey ymisku handilsnøvnini hava endaliga metta livitíð.

Akkumulerað goodwill, sum er ásett til 665,1 mió kr., kemur frá skattaútrokningunum av dagsvirðisjavningini og virðisjavningini gjørd í 3. ársfjórðingi 2020. Talvan niðanfyri gevur eitt stutt yvirlit yvir gjaldið, sum er goldið fyri SSC, og ásetta dagsvirðið á keyptum ognum og skuld keypsdagin.

Útvegaðu tølini verða kannað nærri og kunnu broytast, tá ið Bakkafrost fær atgongd til fleiri upplýsingar frá SSC innan fyri 12 mánaða skeiðið ásett í IFRS 3.

Bakkafrost hevur í tíðarskeiðnum aftaná keypið viðgjørt upplýsingar um viðurskiftir, fingnar til vega eftir keypið, sum kunnu ávirka býtið av keypspeninginum, ella um hesar upplýsingar eru um viðurskifti, hend eftir keypsdagin.

Bakkafrost hevur í eftirmetingartíðarskeiðnum fingið upplýsingar um viðurskifti, sum ávirka upprunaligu metingina. Bakkafrost hevur tí javnað býtið av keypspeninginum. Materiell støðisogn, lívfrøðiligar ognir, útsettur skattur, onnur skuld og goodwill eru javnað.

Kostnaðir, ið hava við keypið at gera, vórðu rakstrarførdir so hvørt og tiknir við í gjaldførið frá rakstrinum í gjaldførisyvirlitinum. Samlaði kostnaðurin hjá Bakkafrost er 10,8 mió kr., og kostnaðirnir hjá SSC eru 57,0 mió kr.

Ogn og skuld umfata:

KR. 1.000.000	Bókað virði 08.10.2019	Dagsvirðis-javning	PPA javning í KV 3 2020	Javnað dagsvirði
Goodwill	50,9	499,6	114,6	665,1
Loyvir	201,8	3.131,6	-	3.333,4
Vørumerkir	-	108,4	-	108,4
Materiell støðisogn – íroknað IFRS 16	702,2	-	-66,0	636,2
Vøruáogn	123,4	-	-	123,4
Goymslur	31,7	-	-	31,7
Lívfrøðiligar ognir	660,5	-	-24,9	635,6
Onnur ogn í umferð uttan reiður peningur og innistandandi	41,0	-	-	41,0
Tøkur peningur, innistandandi og sølutrygdir	32,5	-	-	32,5
Ogn tilsamans	**1.844,0**	**3.739,6**	**23,7**	**5.607,3**
Eginogn íalt	893,2	3.188,3	-	4.081,5
Útsettur skattur	1,7	551,3	-3,2	549,8
Onnur langfreistað skuld íroknað IFRS 16	198,5	-	-	198,5
Langfreistað rentuberandi skuld	192,7	-	-	192,7
Stuttfreistað rentuberandi skuld	108,4	-	-	108,4
Vøru- og tænastuskuld	201,8	-	-	201,8
Onnur stuttfreistað skuld íroknað IFRS 16	239,4	-	26,9	266,3
Stuttfreistað skattaskuld	8,3	-	-	8,3
Eginogn og skuld	**1.844,0**	**3.739,6**	**23,7**	**5.607,3**
Skuld tilsamans	**950,7**	**551,3**	**23,7**	**1.525,7**
Ogn íalt				**4.081,5**
Tillutan av keypsprísi				
Keypsprísur fyri partabrøv (68,6%)				2.800,4
Keypsprísur fyri partabrøv (100%)				4.081,5
Handilsvirði (marknaðarvirði av eginogn)				**4.081,5**

NOTA 5.4 HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK

Notan er viðvíkjandi nýggjum upplýsingum um fíggjarligu støðuna hjá felagnum við árslok, sum eru fingnar til vega eftir roknskaparlok, eru tiknar við í ársfrásøgnina. Hendingar eftir roknskaparlok, sum ikki ávirka fíggjarligu støðuna hjá samtakinum við roknskaparlok, men sum ávirka fíggjarligu støðu samtaksins í framtíðini, verða upplýstar, um tær verða mettar at vera týðandi.

Bakkafrost váttar, at tað, frá dagfestingini á fíggjarstøðuni til í dag, ikki eru hendingar, sum hava týðandi ávirkan á upplýsingarnar givnar í hesari frágreiðing.

NOTA 5.5 GRANNSKOÐARAKOSTNAÐIR

Samsýningar goldnar grannskoðara (u. MVG) verða sundurgreinaðar soleiðis:

KR. 1.000	2020	2019
Lógarkravd grannskoðan	1.357	947
Skattaráðgeving	50	12
Aðrar tænastur	407	309
Samsýning til grannskoðara tilsamans	**1.814**	**1.268**

NOTA 5.6 FRAMHALDANDI VIRKSEMI

Tá ið hugsað verður um vinningin hjá samtakinum, fíggjarligu styrkina og langtíðar forsagnirnar fyri tey næstu árini, so er staðfest, at ársfrásøgnin fyri 2020 er grundað á ta fatan, at Bakkafrost er eitt framhaldandi felag (going-consern). Nevndin metir, at fíggjarstøðan hjá samtakinum er góð.

NOTA 5.7 ALTERNATIVAR VIRKSEMISMÁTINGAR

Fíggjarligu upplýsingarnar hjá samtakinum eru fyrireikaðar sambært altjóða fíggjarligum frásagnarstandardum (IFRS). Herumframt hevur leiðslan í hyggju at útvega aðrar mátingar av virkseminum, sum javnan verða endurskoðaðar fyri at styrkja fatanina av virkseminum hjá fyritøkuni; hesar skulu kortini ikki koma í staðin fyri fíggjarligu frásagnirnar, sum verða fyrireikaðar sambært IFRS. Alternativar virksemismátingar, ið verða nevndar, kunnu vera ásettar og roknaðar øðrvísi av øðrum feløgum. Royndirnar hjá Bakkafrost eru, at hesar alternativu mátingarnar verða ofta nýttar av greinarum, íleggjarum og øðrum.

Hesar alternativu mátingarnar eru tillagaðar IFRS mátingar, lýstar, roknaðar og nýttar á ein reglufastan og gjøgnumskygdan hátt ár fyri ár og yvir alla fyritøkuna, har mett verður hóskandi.

NIBD

Netto rentuberandi skuld (NIBD) er bæði stutt- og langfreistað rentuberandi skuld frádrigin tilhoyrandi stutt- og langfreistaðum tryggingaramboðum, fíggjarligum amboðum so sum skuldaramboð og avleidd fíggjaramboð og tøkum peningi. Netto rentuberandi skuldin er eitt mát fyri netto skuldarbindingina hjá samtakinum, sum gevur eina ábending um styrkina á samlaðu fíggjarstøðuni. Hon er eisini eitt einfalt mát, sum kann nýtast at áseta bæði gjaldføri og skuldarbindingina hjá samtakinum. Nýtslan av málberingini „netto skuld“ merkir ikki neyðturviliga, at tøki peningurin, íroknaður netto skuldarútrokningina, er tøkur til at gjalda skuldina, sum er innroknað í hesa máting. Netto skuld er ein alternativ virksemismáting, tí hon er ikki lýst í IFRS. IFRS mátingin, ið kann sammetast mest beinleiðis, er samanlagda rentuberandi skuldin (bæði stutt- og langfreistað) og tøki peningurin. Ein uppgerð frá hesum til netto skuld sæst niðanfyri.

KR. 1.000	31.12.2020	31.12.2019
Tøkur peningur	466.939	1.309.546
Lang- og stuttfreistað rentuberandi skuld	-2.219.690	-2.328.231
Rentuberandi skuld netto	**-1.752.751**	**-1.018.685**

Operationelt EBIT

Operationelt EBIT er EBIT áðrenn virðisjavnan av lívfrøðiligari ogn, tapsgevandi sáttmálum, inntøkum frá atknýttum feløgum og umsetningsskatti – FO.

Operationelt EBIT er ein sera týðandi alternativ avriksmáting í laksaalivinnuni. Ein uppgerð frá EBIT til operationelt EBIT sæst niðanfyri.

KR. 1.000	2020	2019
EBIT	**691.123**	**1.019.217**
Virðisjavnan av lívfrøðiligari ogn	-118.003	220.567
Inntøkur frá atknýttum feløgum	-5.546	-13.812
Umsetningsskattur FO	53.584	99.128
Operationelt EBIT	**621.158**	**1.325.100**

Operationelt EBIT fyri hvørt kg:

Aligeiri:	Góðskingargeiri:	Aling og virðisøking:
Operationelt EBIT-Aligeiri	Operationelt EBIT-Góðskingargeiri	Operationelt EBIT-Ali- og Góðskingargeiri
Tøkunøgd tilsamans (kruvt)	Framleidd nøgd tilsamans (rávøra kruvt)	Tøkunøgd tilsamans (kruvt)

EBITDA

Vinningur áðrenn rentur, skatt, avskrivingar og avdráttir (EBITDA) er eitt fíggjarligt lyklatal hjá geiranum fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður hjá Bakkafrost. EBITDA áðrenn aðrar inntøkur og aðrar útreiðslur verður lýst sum EBITDA frádrigið vinning og tap av burturbeining av fastari ogn og rakstri og verður uppgjørt í samtaksyvirlitinum yvir deildir. Hetta mátið er hent hjá teimum, sum nýta fíggjarligu upplýsingarnar hjá Bakkafrost til at meta um vinningsførið av rakstrinum grundað á ein broytiligari kostnað, tí tað sær burtur frá avskrivingum og útreiðslum til avdráttir, ið fyrst og fremst hava við kapitalkostnað og uppkeyp at gera, sum eru farin fram, slíkt, ið ikki kemur fyri aftur, eins og at meta um rakstrarúrslit í mun til kappingarneytarnar til geiran fyri fiskamjøl, lýsi og alifóður hjá Bakkafrost. EBITDA avlopið, ið verður víst, verður lýst sum EBITDA áðrenn aðrar inntøkur og aðrar útreiðslur, býtt við samlaðu nettosøluni.

KR. 1.000	2020	2019
Avlop fyri árið til partaeigarar í P/F Bakkafrost	462.845	801.885
Dagsvirðisjavnan av lívfrøðiligari ogn	-118.003	220.567
Skattur av dagsvirðisjavnan	21.241	-39.702
Javnað ársúrslit til partaeigarar í P/F Bakkafrost	**366.083**	**982.750**
Vektað miðaltal av partabrøvum gjøgnum árið	**59.090.092**	**51.624.366**
Tillagaðar inntøkur fyri hvørt partabræv (áðrenn virðisjavnan av lívfrøðiligari ogn og avsetan fyri tapsgevandi sáttmálar) (javnað EPS)	**6,20**	**19,04**

Tillagað EPS

Tillagað EPS er grundað á afturføring av ávísum dagsvirðisjavningum, sum verða vístar í talvuni niðanfyri. Bakkafrost metir, at hetta talið gevur eitt meira álítandi mát av undirliggjandi avrikinum.

Ársroknskapur

P/F BAKKAFROST

P/F BAKKAFROST

Innihaldsyvirlit

P/F BAKKAFROST – Rakstrarroknskapur fyri árið endað 31. desember 153
P/F BAKKAFROST – Fíggjarstøða tann 31. desember 154
P/F BAKKAFROST – Gjaldførisfrásøgn fyri árið endað 31. desember 156
P/F BAKKAFROST – Broytingar í eginognini tann 31. desember 157

Nota 1 – Nýttur roknskaparháttur 158
Nota 2 – Løn og annar starvsfólkakostnaður 158
Nota 3 – Fíggjarligir postar 159
Nota 4 – Materiell støðisogn 160
Nota 5 – Dótturfeløg og atknýtt feløg 161
Nota 6 – Íløgur í virðisbrøv 163
Nota 7 – Partapeningur og størstu partaeigarar 163
Nota 8 – Skattur 164
Nota 9 – Veðsetingar og trygdarveitingar 165
Nota 10 – Handlar við nærstandandi partar 165

P/F BAKKAFROST

Rakstrarroknskapur

FYRI ÁRIÐ ENDAÐ 31. DESEMBER

KR. 1.000	Nota	2020	2019
Nettosøla		164.253	147.843
Starvsfólkakostnaður	2	-36.395	-37.271
Aðrir rakstrarkostnaðir		-100.522	-94.188
Avskrivingar	4	-29.642	-30.729
Avlop áðrenn rentur og skatt (EBIT)		**-2.306**	**-14.345**
Vinningsbýti frá dótturfeløgum		989.908	841.190
Inntøkur frá øðrum kapitalpørtum	6	36	36
Fíggjarinntøkur	3	17.187	12.265
Fíggjarkostnaðir	3	-21.110	-9.985
Gjaldoyravinningur/tap	3	1.350	-10.842
Aðrir fíggjarkostnaðir	3	-6.175	-13.124
Úrslit áðrenn skatt (EBT)		**978.890**	**805.195**
Skattur	8	1.834	-4.365
Ársúrslit hjá partaeigarum P/F Bakkafrost		**980.724**	**800.830**
Yvirskotsbýti			
Vinningsbýti		215.872	0
Flutt fram		764.852	800.830
Tilsamans		**980.724**	**800.830**

P/F BAKKAFROST

Fíggjarstøða

TANN 31. DESEMBER

KR. 1.000	Nota	2020	2019
OGN			
Støðisogn			
Immateriell ogn		1.000	1.000
Immateriell ogn tilsamans		**1.000**	**1.000**
Materiell støðisogn			
Grundøki, bygningar og onnur føst ogn	4	226.706	348.319
Rakstrargøgn v.m.	4	107.423	15.196
Materiell støðisogn tilsamans		**334.129**	**363.515**
Fíggjarlig støðisogn			
Íløgur í dótturfeløg	5	5.576.500	5.408.693
Íløgur í virðisbrøv	6	1.273	1.236
Áogn frá feløgum í samtakinum		0	100.599
Fíggjarlig støðisogn tilsamans		**5.577.773**	**5.510.528**
STØÐISOGN TILSAMANS		**5.912.902**	**5.875.043**
Goymsla		23.840	18.448
Goymsla tilsamans		**23.840**	**18.448**
Áogn frá feløgunum í samtakinum		5.041.764	3.688.612
Vøru- og tænastuáogn		2.780	2.461
Onnur áogn		17.592	236
Áogn tilsamans		**5.062.136**	**3.691.309**
Tøkur peningur		348.385	589.264
Ogn í umferð tilsamans		**5.434.361**	**4.299.021**
OGN TILSAMANS		**11.347.263**	**10.174.064**

KR. 1.000	Nota	2020	2019
EGINOGN OG SKYLDUR			
Eginogn			
Partapeningur	7	59.143	59.143
Onnur eginogn		9.038.737	8.093.403
Eginogn tilsamans		**9.097.880**	**8.152.546**
Langfreistað skuld			
Langfreistað rentuberandi skuld	9	2.219.652	1.710.672
Útsettur skattur	8	11.471	11.372
Langfreistað skuld tilsamans		**2.231.123**	**1.722.044**
Stuttfreistað skuld			
Fíggjarlig amboð	3.12	0	633
Vøru- og tænastuskuld til feløg í samtakinum		0	274.878
Vøru- og tænastuskuld		12.619	13.741
Onnur stuttfreistað skuld		5.641	10.222
Stuttfreistað skuld tilsamans		**18.260**	**299.474**
Skuld tilsamans		**2.249.383**	**2.021.518**
EGINOGN OG SKYLDUR TILSAMANS		**11.347.263**	**10.174.064**

P/F BAKKAFROST

Gjaldførisfrásøgn

FYRI ÁRIÐ ENDAÐ 31. DESEMBER

KR. 1.000	Nota	2020	2019
Gjaldføri frá rakstri			
Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt (EBIT)		**-2.306**	**-14.345**
Javning av niður- og avskrivingum	4	29.642	30.729
Javning av gjaldoyraávirkan netto		1.350	-10.842
Javning av partabrævatengdum gjøldum	2	810	503
Goldin skattur	8	-4.284	-21.970
Goymslubroytingar		-5.392	-2.361
Broytingar í øðrum ognum í umferð		-17.675	23.836
Broytingar í stuttfreistaðari skuld		1.930	2.895
Gjaldførisúrslit frá primerum rakstri		**4.075**	**8.445**
Gjaldføri frá íløgum			
Øking av partapeningi í dótturfeløgum o.s.fr. netto	5	-167.807	-4.008.022
Søluágóði frá sølu ella keypi av materiellum støðisognum		0	522
Íløgur í keyp av materiellum støðisognum	4	-256	-3.034
Gjaldførisúrslit, íløgur		**-168.063**	**-4.010.534**
Gjaldføri frá fígging			
Broytingar í rentuberandi skuld (stutt- og langfreistað)		508.347	945.421
Fíggjarinntøkur		17.187	12.265
Fíggjarkostnaðir		-27.285	-23.109
Fígging av atknýttum/dótturfeløgum		-1.527.431	-724.542
Útvegan/søla av eginpartabrøvum		-37.616	75.349
Vinningsbýti frá dótturfeløgum	5	989.908	841.190
Útgáva – hækking av partapeningi		0	3.731.123
Útgoldið vinningsbýti		0	-401.512
Gjaldførisúrslit, fígging		**-76.890**	**4.456.185**
Broytingar í tøkum peningi í tíðarskeiðinum netto		**-240.878**	**454.096**
Tøkur peningur við ársbyrjan		589.264	135.168
Tøkur peningur við ársenda		**348.385**	**589.264**

P/F BAKKAFROST

Broytingar í eginognini

TANN 31. DESEMBER

KR. 1.000	Partapeningur	Yvirkurs-grunnur	Egin-partabrøv	Parta-bræva-tengd gjøld	Fíggjarlig amboð	Uppskot um vinningsbýti	Fluttur vinningur	Tilsamans
1. januar 2020	**59.143**	**3.838.206**	**-68**	**1.001**	**-520**	**0**	**4.254.784**	**8.152.546**
Ársúrslit netto	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**982.078**	**982.078**
Onnur heildarinntøka								
Dagsvirðisjavning avleidd fíggjaramboð	0	0	0	0	520	0	0	520
Onnur heildarinntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**	**520**	**0**	**0**	**520**
Heildarinntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**	**520**	**0**	**982.078**	**982.598**
Transaktiónir við eigarar								
Eginpartabrøv	0	0	-37.617	0	0	0	0	-37.617
Partabrævatengd gjøld	0	0	0	353	0	0	0	353
Uppskot til vinningsbýti	0	0	0	0	0	215.872	-215.872	0
Transaktiónir við eigarar tilsamans	**0**	**0**	**-37.617**	**353**	**0**	**215.872**	**-215.872**	**-37.264**
Broytingar í eginogn tilsamans	**0**	**0**	**-37.617**	**353**	**520**	**215.872**	**766.206**	**945.334**
31. desember 2020	**59.143**	**3.838.206**	**-37.685**	**1.354**	**0**	**215.872**	**5.020.990**	**9.097.880**
1. januar 2019	**48.858**	**117.368**	**-15.525**	**1.219**	**-265**	**403.079**	**3.392.492**	**3.947.226**
Ársúrslit netto	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**860.725**	**860.725**
Onnur heildarinntøka								
Dagsvirðisjavning avleidd fíggjaramboð	0	0	0	0	-311	0	0	-311
Ávirkan av inntøkuskatti	0	0	0	0	56	0	0	56
Onnur heildarinntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**	**-255**	**0**	**0**	**-255**
Heildarinntøka tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**	**-255**	**0**	**860.725**	**860.470**
Transaktiónir við eigarar:								
Útgáva – hækking í partapeningi	10.285	3.720.838	0	0	0	0	0	3.731.123
Eginpartabrøv	0	0	15.457	0	0	0	0	15.457
Partabrævatengd gjøld	0	0	0	-218	0	0	0	-218
Vinningsbýti eginpartabrøv	0	0	0	0	0	0	1.567	1.567
Ágóði/útvegan av eginpartabrøvum	0	0	0	0	0	0	0	0
Útgoldið vinningsbýti	0	0	0	0	0	-403.079	0	-403.079
Uppskot til vinningsbýti	0	0	0	0	0	0	0	0
Transaktiónir við eigarar tilsamans	**10.285**	**3.720.838**	**15.457**	**-218**	**0**	**-403.079**	**1.567**	**3.344.850**
Broytingar í eginogn tilsamans	**10.285**	**3.720.838**	**15.457**	**-218**	**-255**	**-403.079**	**862.292**	**4.205.320**
31. desember 2019	**59.143**	**3.838.206**	**-68**	**1.001**	**-520**	**0**	**4.254.784**	**8.152.546**

P/F BAKKAFROST

Notur til ársroknskapin

NOTA 1. NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við altjóða roknskaparstandardin (IFRS), góðkendur av ES og samsvarandi føroysku upplýsingarkrøvunum fyri feløg, ið eru skrásett á keypskála. Roknskaparhættirnir, ið eru nýttir til konsolideraða roknskapin, eru eisini nýttir til móðurfelagið, P/F Bakkafrost. Noturnar til konsolideraða roknskapin geva nágreiniligari upplýsingar um roknskapin hjá móðurfelagnum og verða ikki nevndar aftur her. Ársfrásøgnin hjá samtakinum er í donskum krónum. Kapitalpartar í dótturfeløgum verða máldir eftir søguliga kostnaðinum, uttan so er, at ábendingar eru um virðislækking. Um staðfest er, at virðið er lækkað, verður íløgan niðurskrivað til marknaðarvirðið.

NOTA 2. LØN OG ANNAR STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR

KR. 1.000	2020	2019
Lønir	27.754	28.426
Partabrævatengd gjøld	810	503
Arbeiðsmarknaðartengd gjøld	1.773	1.137
Eftirlønargjøld	1.995	1.301
Aðrir lønarkostnaðir	4.063	5.904
Lønir og starvsfólkakostnaður tilsamans	**36.395**	**37.271**
Ársverk	40	35

SAMSÝNING TIL LEIÐSLU OG GRANNSKOÐARAR

Samsýning, goldin til leiðslu, er greinað nærri í notunum til konsolideraðu ársfrásøgnina. Felagið rindaði 954.000 kr. fyri grannskoðan og 50.000 kr. fyri skattaráðgeving. Aðrar tænastur – sí noturnar til konsolideraðu ársfrásøgnina.

NOTA 3. FÍGGJARLIGIR POSTAR

KR. 1.000	2020	2019
Renta av millumrokningum við atknýtt feløg	16.289	7.378
Aðrar fíggjarligar inntøkur	898	4.888
Fíggjarinntøkur	**17.187**	**12.266**
Rentukostnaður av lang- og stuttfreistaðum lánum	-21.110	-9.986
Fíggjarkostnaðir	**-21.110**	**-9.986**
Aðrir kursmunir	1.350	-10.842
Netto kursmunir	**1.350**	**-10.842**
Aðrir fíggjarkostnaðir	-6.175	-13.124
Aðrir fíggjarligir postar	**-6.175**	**-13.124**
Netto fíggjarligir postar	**-8.748**	**-21.686**

NOTA 4. MATERIELL STØÐISOGN

KR. 1.000	Grundøki og bygningar	Onnur rakstrargøgn	Tilsamans
Útveganarvirði tann 01.01.20	415.940	52.313	468.253
Umflokking	-126.167	126.167	0
Tilgongdir í árinum	0	257	257
Útveganarvirði tann 31.12.20	**289.773**	**178.737**	**468.510**
Av- og niðurskrivingar tilsamans tann 01.01.20	-67.622	-37.117	-104.739
Umflokking	15.982	-15.982	0
Avskrivað í árinum	-11.427	-18.216	-29.643
Av- og niðurskrivingar tilsamans tann 31.12.20	**-63.067**	**-71.315**	**-134.382**
Bókað virði netto tann 31.12.20	**226.706**	**107.423**	**334.129**
Útveganarvirði tann 01.01.19	415.081	50.735	465.816
Frágongd og burturbeining í árinum - umflokkað		-597	-597
Tilgongdir í árinum	859	2.175	3.034
Útveganarvirði tann 31.12.19	**415.940**	**52.313**	**468.253**
Av- og niðurskrivingar tilsamans tann 01.01.19	-56.218	-17.867	-74.085
Av- og niðurskrivingar á frágongd	0	75	75
Avskrivað í árinum	-11.404	-19.325	-30.729
Av- og niðurskrivingar tilsamans tann 31.12.19	**-67.622**	**-37.117**	**-104.739**
Bókað virði netto tann 31.12.19	**348.319**	**15.196**	**363.515**

Ein týðandi partur av bygningunum hjá Bakkafrost standa á leigaðum grundøkjum.

	Mett livitíð	Avskrivingarháttur	Restvirði
Bygningar og grundøki	15–25 ár	linierur	10%
Onnur rakstrargøgn	3–8 ár	linierur	0%

NOTA 5. DÓTTURFELØG OG ATKNÝTT FELØG

KR. 1.000	2020	2019
Útveganarvirði tann 01.01.	5.411.459	1.403.437
Tilgongdir í árinum	167.807	4.008.022
Útveganarvirði tann 31.12.	**5.579.266**	**5.411.459**
Uppskrivingar tann 01.01.	-2.766	-2.766
Uppskrivingar tann 31.12.	**-2.766**	**-2.766**
Bókað virði tann 31.12.	**5.576.500**	**5.408.693**

KR. 1.000 Felag	Kost- virðisháttur Ja/Nei	Høvuðs- sæti	Ognarlutur	Atkvøðu- partur	Bókað virði P/F Bakkafrost 2020	Bókað virði P/F Bakkafrost 2019
P/F Bakkafrost Processing	Ja	Glyvrar	100%	100%	258.591	258.591
P/F Bakkafrost Sales	Ja	Glyvrar	100%	100%	879	879
P/F Bakkafrost Packaging	Ja	Glyvrar	100%	100%	7.781	7.781
P/F Bakkafrost Farming	Ja	Glyvrar	100%	100%	314.887	314.887
P/F Havsbrún	Ja	Glyvrar	100%	100%	908.884	908.884
Bakkafrost UK Ltd	Ja	Grimsby	100%	100%	4.649	4.649
Bakkafrost Danmark ApS	Ja	Glyvrar	100%	100%	50	50
Scottish Salmon Company Plc	Ja	Jersey	100%	100%	4.075.779	3.907.972
The Scottish Salmon Company Ltd	Ja	Edinburgh	100%	100%	0	0
P/F Förka	Ja	Glyvrar	100%	100%	5.000	5.000
Dótturfeløg tilsamans					**5.576.500**	**5.408.693**

KR. 1.000	Vinningsbýti*	Munur vinningsbýti yvir úrslit	Úrslit 2020	Úrslit 2019
P/F Bakkafrost Farming	168.100	24.096	192.196	616.897
P/F Bakkafrost Sales	0	-2.181	-2.181	136.252
P/F Bakkafrost Packaging	190	12	202	13.178
P/F Bakkafrost Processing	0	140.064	140.064	30.723
P/F Havsbrún	113.851	5.169	119.020	207.075
Bakkafrost UK Ltd.	0	3.340	3.340	12.059
Scottish Salmon Company Plc**	0	184.609	184.609	-191.377
P/F Förka	0	-2.678	-2.678	-166
Samlaðar inntøkur frá atknýttum feløgum	**282.141**	**352.431**	**634.572**	**824.641**

* Vinningsbýti frá dótturfeløgum útgoldið í 2021
** Síðan keypið 8/10-19

NOTA 6. ÍLØGUR Í VIRÐISBRØV

KR. 1.000	2020	2019
Útveganarvirði tann 01.01.	183	183
Útveganarvirði tann 31.12.	**183**	**183**
Uppskrivingar tann 01.01.	1.053	1.581
Uppskrivingar í árinum	37	-528
Uppskrivingar tann 31.12.	**1.090**	**1.053**
Bókað virði tann 31.12.	**1.273**	**1.236**

Partabrøv og kapitalpartar, sum samtakið ikki hevur týðandi ávirkan á, verða tikin upp til útveganarvirði. Hetta kemst av, at ógjørligt er at áseta nágreiniligt marknaðarvirði.

NOTA 7. PARTAPENINGUR OG STØRSTU PARTAEIGARAR

KR. 1.000	2020	2019
Partapeningur tann 01.01.	59.143	48.858
Útgáva – hækking av partapeningi	0	10.285
Partapeningur tann 31.12.	**59.143**	**59.143**

Partabrøvini eru áljóðandi 1 kr. ella margfald av tí. Um partaeigarar, ið áttu meiri enn 5% í felagnum tann 31. desember 2020, sí ársfrásøgnina hjá samtakinum.

NOTA 8. SKATTUR

Skattur í árinum kann sundurgreinast soleiðis:

KR. 1.000	2020	2019
Skattur at gjalda	1.819	-4.284
Broytingar í útsettum skatti	15	-81
Skattur av ársúrslitinum	**1.834**	**-4.365**
Skattur í fíggjarstøðuni		
Útsettur skattur	11.471	11.372
Skattur í fíggjarstøðuni	**11.471**	**11.372**
Sundurgreining av fyribils munum		
Materiell støðisogn	63.691	63.811
Avleidd fíggjarlig amboð	0	-633
Fyribils munir tilsamans	**63.691**	**63.178**
Útsettur skattur (+) / skattaáogn (-)	**11.471**	**11.372**
Avstemman frá formligum til veruligan skattasats		
Úrslit áðrenn skatt	978.890	805.195
Væntaður skattur við vanligum skattasatsi (18%)	-176.200	-144.935
Permanentir munir, íroknað vinning frá dótturfeløgum, ið ikki eru skattskyldug (18%)	178.183	151.414
Aðrir permanentir munir (18%)	-149	-10.844
Roknaður skattur, ið skal gjaldast	**1.834**	**-4.365**
Effektivur skattasatsur	0,19%	-0,54%

Sum móðurfelag í Bakkafrost samtakinum er Bakkafrost P/F fyrisitingarfelagið í samtakssamskattingini og stendur til svars fyri føroysku skattamyndugleikunum fyri skatt, ið fellur til gjaldingar hjá dótturfeløgunum.

NOTA 9. VEÐSETINGAR OG TRYGDARVEITINGAR

Bókað virði á skuld, ið er tryggjað við veðsetingum og trygdarveitingum:

KR. 1.000	2020	2019
Langfreistað skuld til fíggingarstovnar	2.219.652	1.710.672
Tilsamans	**2.219.652**	**1.710.672**
Bókað virði á ognum, sum eru veðsettar og veittar sum trygd fyri skuld		
Materiell støðisogn	334.129	363.515
Fíggjarlig ogn	5.577.773	5.510.528
Ágóðar	5.062.136	3.691.309
Tilsamans	**10.974.038**	**9.565.352**

Felagið luttekur í samlaðu fíggingini hjá Bakkafrost samtakinum. Í sambandi við hetta hevur felagið saman við øðrum feløgum í samtakinum veðsett loyvir, materiella støðisogn, partabrøv, vørur á goymslu og áogn hjá skuldarum sum trygd fyri samlaðu skuldina hjá samtakinum til bankarnar. Haraftrat seta feløgini í samtakinum solidariska sjálvskuldarakautión fyri hvørt annað í fíggjarstøðuni.

Tryggingarendurgjøld standa eisini sum trygd.

Sum móðurfelag í Bakkafrost samtakinum er P/F Bakkafrost fyrisitingarfelagið í samtakssamskattingini og stendur til svars fyri føroysku skattamyndugleikunum fyri skatt, ið fellur til gjaldingar hjá dótturfeløgunum.

NOTA 10. HANDLAR VIÐ NÆRSTANDANDI PARTAR

Felagið nýtir eina „cash pooling“ skipan í samtakinum. Harumframt veitir felagið lán til dótturfeløg og atknýtt feløg til treytir, ið avspegla vanligar marknaðartreytir fyri líknandi tænastur, har ein margin verður løgd afturat at dekka kostnað og váða. Felagið tekur kostnað fyri leiðslutænastur og aðrar felags tænastur til dótturfeløg og leigu fyri bygningar.

Samlaða upphæddin fyri leigu er 21,2 mió kr. (2019: 21,2 mió kr.), býti fyri fyrisiting o.s.fr. er 82,1 mió kr. (2019: 73,6 mió kr.), fíggjarligar inntøkur áljóðandi 16,7 mió kr. (2019: 7,4 mió kr.) og fíggjarligar útreiðslur áljóðandi 0,4 mió kr. (2019: 0,0 mió kr.). Allur samhandil við nærstandandi partar fer fram eftir marknaðartreytum.

FYLGISKJØL

Fíggjarlig tøl fyri hvønn ársfjórðing 2018–2020

Ársfjórðingur	1	2	3	4	1	2	3	4	1	2	3	4
KR. 1.000	**2018**	**2018**	**2018**	**2018**	**2019**	**2019**	**2019**	**2019**	**2020**	**2020**	**2020**	**2020**
Nettosøla	**851.156**	**954.316**	**621.602**	**750.348**	**963.709**	**946.506**	**996.050**	**1.604.842**	**1.255.226**	**1.134.222**	**1.123.147**	**1.139.297**
Vørukeyp	-289.145	-254.324	-177.389	-332.721	-361.540	-366.899	-274.775	-351.707	-415.276	-642.818	-574.394	-726.135
Broyting í vørugoymslu og lívfrøðiligari ogn (til kostvirði)	31.393	6.770	7.117	154.416	34.013	134.296	-34.510	-163.222	-56.667	215.285	22.773	220.288
Starvsfólkakostnaður	-91.183	-87.115	-71.940	-103.518	-114.552	-117.690	-95.713	-184.806	-148.713	-159.987	-135.441	-164.206
Aðrir rakstrarkostnaðir	-188.224	-163.172	-158.008	-186.569	-200.153	-199.656	-218.367	-360.611	-267.470	-249.039	-248.265	-297.945
Avskrivingar	-45.775	-48.582	-53.094	-51.447	-53.773	-57.793	-69.304	-129.245	-119.017	-115.766	-85.157	-126.825
Aðrar inntøkur	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	44.041
Operationelt EBIT	**268.222**	**407.893**	**168.288**	**230.509**	**267.704**	**338.764**	**303.381**	**415.251**	**248.083**	**181.897**	**102.663**	**88.515**
Dagsvirðisjavning av lívfrøðiligari ogn	107.131	34.777	293.459	-239.548	17.871	-65.536	-69.804	-103.098	-410.711	426.650	124.429	-22.365
Avseting móti tapi uppá sáttmálar	0	-6.109	-10.968	17.076	0	0	0	0	0	0	0	0
Inntøkur frá atknýttum feløgum	2.419	-1.695	-2.459	11.104	6.947	-4.408	7.620	3.653	0	0	0	5.546
Umsetningsskattur - FO	-26.327	-31.411	-14.092	-24.036	-31.994	-32.031	-20.616	-14.487	-19.132	-22.633	-9.353	-2.466
Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt (EBIT)	**351.445**	**403.455**	**434.228**	**-4.895**	**260.528**	**236.789**	**220.581**	**301.319**	**-181.760**	**585.914**	**217.739**	**69.230**
Fíggjarinntøkur	1.001	621	467	562	111	638	850	3.397	803	344	101	151
Netto fíggjarkostnaður	-4.925	-3.019	-2.271	-2.262	-1.865	-2.534	-3.011	-9.704	-9.527	-10.057	-6.446	-10.287
Netto gjaldoyrabroytingar	-13.159	12.347	1.938	293	1.425	-4.760	5.165	-14.500	15.448	-2.554	-12.284	-13.706
Aðrir fíggjarkostnaðir	-1.627	-815	-799	-519	-864	-974	-935	-9.740	-6.015	-2.355	-3.919	-4.836
Úrslit áðrenn skatt (EBT)	**332.735**	**412.589**	**433.563**	**-6.821**	**259.335**	**229.159**	**222.650**	**270.772**	**-181.051**	**571.292**	**195.191**	**40.552**
Skattur	-60.434	-73.833	-77.708	201	-46.499	-40.557	-41.715	-51.260	33.070	-99.611	-18.369	-78.229
Úrslit	**272.301**	**338.756**	**355.855**	**-6.620**	**212.836**	**188.602**	**180.935**	**219.512**	**-147.981**	**471.681**	**176.822**	**-37.677**
Vinningur fyri hvørt partabræv (kr.)	5,60	6,96	7,32	-0,14	4,37	3,88	3,67	4,25	-2,50	7,98	2,99	-0,64
Útvatnaður vinningur fyri hvørt partabræv (kr.)	5,60	6,96	7,32	-0,14	4,37	3,88	3,67	4,25	-2,50	7,98	2,99	-0,64

*Operationelt EBIT er EBIT áðrenn virðisjavnan av biomassanum, tapsgevandi sáttmálum og inntøkum frá atknýttum feløgum og umsetningsskatti FO.

KR. 1.000	1	2	3	4	1	2	3	4	1	2	3	4
	2018	2018	2018	2018	2019	2019	2019	2019	2020	2020	2020	2020
OGN												
Støðisogn												
Immateriell støðisogn	376.675	376.675	388.934	389.745	391.042	390.456	390.456	4.395.687	4.386.056	4.377.948	4.491.387	4.493.395
Materiell støðisogn	2.636.126	2.714.633	2.788.753	2.884.325	3.004.587	3.112.331	3.215.676	3.780.499	3.762.740	3.894.070	3.977.620	4.220.599
Ognir við nýtslurætti	0	0	0	0	0	0	0	332.824	480.085	431.525	380.121	353.192
Fíggjarlig støðisogn	79.121	79.310	101.864	112.766	115.725	111.268	494.006	119.084	119.116	116.712	116.702	122.459
Langfreistað áogn	9.200	9.200	9.200	9.200	7.688	3.446	3.446	4.422	4.422	4.422	8.737	8.101
Útsett skattaáogn	0	0	0	0	0	0	0	37.593	37.840	35.718	58.238	26.934
Materiell støðisogn tilsamans	**3.101.122**	**3.179.818**	**3.288.751**	**3.396.036**	**3.519.042**	**3.617.501**	**4.103.584**	**8.670.109**	**8.790.259**	**8.860.395**	**9.032.805**	**9.224.680**
Ogn í umferð												
Svimjandi fiskur (biomassi)	1.114.678	1.107.275	1.562.940	1.358.462	1.290.944	1.231.495	1.268.948	1.901.729	1.492.337	1.903.359	2.146.338	2.117.024
Aðrar vørugoymslur	428.639	478.872	330.851	438.847	562.817	697.073	534.057	548.508	523.833	720.764	613.505	776.032
Vørugoymslur tilsamans	**1.543.317**	**1.586.147**	**1.893.791**	**1.797.309**	**1.853.761**	**1.928.568**	**1.803.005**	**2.450.237**	**2.016.170**	**2.624.123**	**2.759.843**	**2.893.056**
Avleidd fíggjaramboð	0	0	0	0	0	0	575	0	0	0	0	0
Vøru- og tænastuáogn	244.231	352.437	247.657	269.348	429.608	371.960	356.026	625.993	629.372	563.364	524.943	490.075
Onnur áogn	75.008	67.591	54.365	22.936	22.444	28.884	35.970	45.520	22.780	11.236	57.546	133.574
Áogn tilsamans	**319.239**	**420.028**	**302.022**	**292.284**	**452.052**	**400.844**	**392.571**	**671.513**	**652.152**	**574.600**	**582.489**	**623.649**
Tøkur peningur	668.361	284.329	306.167	316.894	341.574	322.694	2.611.554	1.309.546	801.079	454.389	445.929	466.939
Ogn í umferð tilsamans	**2.530.917**	**2.290.504**	**2.501.980**	**2.406.487**	**2.647.387**	**2.652.106**	**4.807.130**	**4.431.296**	**3.469.401**	**3.653.112**	**3.788.261**	**3.983.644**
OGN TILSAMANS	**5.632.039**	**5.470.322**	**5.790.731**	**5.802.523**	**6.166.429**	**6.269.608**	**8.910.714**	**13.101.405**	**12.259.660**	**12.513.507**	**12.821.066**	**13.208.324**

KR. 1.000	1	2	3	4	1	2	3	4	1	2	3	4
	2018	2018	2018	2018	2019	2019	2019	2019	2020	2020	2020	2020
EGINOGN OG SKYLDUR												
Eginogn												
Felags kapitalur	48.858	48.858	48.858	48.858	48.858	48.859	53.658	59.143	59.143	59.143	59.143	59.143
Framflytingar	3.842.919	3.676.540	4.033.116	4.028.171	4.240.869	4.035.000	5.984.391	8.270.112	8.070.356	8.522.287	8.702.346	8.670.344
Minnilutaáhugamál	0	0	0	0	0	0	0	167.620	0	0	0	0
Eginogn tilsamans	**3.891.777**	**3.725.398**	**4.081.974**	**4.077.029**	**4.289.727**	**4.083.859**	**6.038.049**	**8.496.875**	**8.129.499**	**8.581.430**	**8.761.489**	**8.729.487**
Langfreistað skuld												
Útsettur skattur og annar skattur	538.840	613.025	690.629	534.430	581.371	622.500	672.628	1.123.796	1.097.117	1.181.972	1.218.379	1.222.222
Langfreistað rentuberandi skuld	770.383	727.474	591.956	812.053	862.944	1.066.266	1.340.073	2.328.231	1.789.537	1.570.512	1.702.579	2.219.690
Langfreistað leasingskuld	0	0	0	0	60.816	71.445	71.109	225.585	261.105	249.178	287.937	265.235
Avleidd fíggjaramboð	0	0	0	0	0	0	0	1.966	1.966	1.282	-1.077	1.480
Langfreistað skuld tilsamans	**1.309.223**	**1.340.678**	**1.282.585**	**1.346.483**	**1.505.131**	**1.760.211**	**2.083.810**	**3.679.578**	**3.149.725**	**3.002.944**	**3.207.818**	**3.708.627**
Stuttfreistað skuld												
Avleidd fíggjaramboð	0	0	630	320	613	0	0	13.493	13.158	18.042	17.371	9.710
Stuttfreistað leasingskuld	0	0	0	0	0	0	0	107.808	201.047	195.140	130.043	131.336
Ognarar og onnur skuld	431.039	404.246	425.542	378.691	370.958	425.538	788.855	803.651	766.231	715.951	704.345	629.164
Stuttfreistað skuld tilsamans	**431.039**	**404.246**	**426.172**	**379.011**	**371.571**	**425.538**	**788.855**	**924.952**	**980.436**	**929.133**	**851.759**	**770.210**
Skuld tilsamans	**1.740.262**	**1.744.924**	**1.708.757**	**1.725.494**	**1.876.702**	**2.185.749**	**2.872.665**	**4.604.530**	**4.130.161**	**3.932.077**	**4.059.577**	**4.478.837**
EGINPENINGUR OG SKULD TILSAMANS	**5.632.039**	**5.470.322**	**5.790.731**	**5.802.523**	**6.166.429**	**6.269.608**	**8.910.714**	**13.101.405**	**12.259.660**	**12.513.507**	**12.821.066**	**13.208.324**

Fráboðanir til marknaðin kunngjørdar í 2020

Innbjóðingar og fráboðanir um handlar hjá leiðslu, nevnd og stórum partaeigarum og fráboðanir um handlar viðvíkjandi partabrævaskipanini hjá Bakkafrost eru ikki við.

1. ársfjórðingur 2020
03. januar 2020: 4. ársfjórðingur - Dagføring um vinnuna
25. februar 2020: Fíggjarlig úrslit fyri 4. ársfjórðing og alt árið 2019
27. februar 2020: Høvuðskunning viðvíkjandi útgjaldi av vinningsbýti hjá Bakkafrost
08. mars 2020: Ógvusligt ódnarveður rakar Føroyar og ger skaða á tvey alibrúk. Fellið er 1 millión laksar
10. mars 2020: Innkalling til ársaðalfund
10. mars 2020: Ársfrásøgn 2019 og frásøgn um burðardygd 2019

2. ársfjórðingur 2020
02. apríl 2020: 1. ársfjórðingur 2020 – Dagføring um vinnuna
03. apríl 2020: Frágreiðing frá ársaðalfundi
05. mai 2020: 1. ársfjórðingur 2020 – Fíggjarlig úrslit fyri ársfjórðingin

3. ársfjórðingur 2020
02. juli 2020: 2. ársfjórðingur 2020 – Dagføring um vinnuna
25. august 2020: 2. ársfjórðingur 2020 – Fíggjarlig úrslit fyri ársfjórðingin

4. ársfjórðingur 2020
02. oktober 2020: 3. ársfjórðingur 2020 – Dagføring um vinnuna
07. oktober 2020: Fíggjarligur álmanakki
10. november 2020: 3. ársfjórðingur 2020 – Fíggjarlig úrslit fyri ársfjórðingin

Allar fráboðanir til marknaðin eru tøkar á www.bakkafrost.com og www.newsweb.no.

Fíggjarligur álmanakki fyri 2021

09. apríl 2021	Ársaðalfundur
11. mai 2021	Framløga av 1. ársfjórðingi 2021
24. august 2021	Framløga av 2. ársfjórðingi 2021
14. september 2021	Íleggjaradagur 2021
09. november 2021	Framløga av 3. ársfjórðingi 2021

Ársaðalfundurin verður hildin á Bakkavegi 9 á Glyvrum.

Vinaliga gevið gætur, at fíggjarligi álmanakkin kann verða fyri broytingum.

Allar broytingar verða kunngjørdar um Oslo Børs, og heimasíðan hjá samtakinum, www.bakkafrost.com, verður dagførd samsvarandi.

Styttingar

AGM:	Annual General Meeting / Ársaðalfundur
ASC:	Aquaculture Stewardship Council
CGU:	Cash-generating Unit / Peningaskapandi eind
EBT:	Earnings Before Tax / Úrslit áðrenn skatt
EBIT:	Earnings Before Interest and Tax / Úrslit áðrenn rentu og skatt
EBITA:	Earnings Before Interest, Amortization and Tax / Úrslit áðrenn rentu, amortisering og skatt
EBITDA:	Earnings Before Interest, Tax, Depreciation and Amortization / Úrslit áðrenn rentu, skatt, avskriving og amortisering
EPS:	Earnings Per Share / Vinningur fyri hvørt partabræv
FSV:	Farming Service Vessel / Tænastuskip til aling
HACCP:	Hazard Analyses Critical Control Point
HORECA:	Hotell, resturatiónir og kaffistovur
IAS:	International Accounting Standards / Altjóða roknskapar standardar
IFRS:	International Financial Reporting Standards / Altjóða fíggjarfrásagnar standardar
ISO:	International Organization for Standardization/ Altjóða felagsskapur fyri standaragerð
LV:	Livandi vekt (umroknað til livandi vekt)
MIÓ:	Millión (mió kr.)
NIBD:	Net Interesting Bearing Debt / Netto rentuberandi skuld
R&D:	Research and Development Costs / Granskingar- og menningarkostnaður
TKV:	Tons kruvd vekt (kv – kruvd vekt)
WACC:	Weighted Average Cost of Capital / Vektaður miðalkostnaður av kapitali

Bakkafrost P/F • Bakkavegur 9 • PO Box 221 • FO-625 Glyvrar
Tel +298 40 50 00 • Fax +298 40 50 09 • bakkafrost@bakkafrost.com • www.bakkafrost.com